# LANDSGRANNSKOÐANIN

## Fíggjarárið 2023

Ársfrágreiðing

latin
løgtingsgrannskoðarunum

sambært § 12 í Ll. nr. 25/1999
“um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.”

August 2024

# Innihaldsyvirlit


0. FRAMLØGA 7

1. INNGANGUR 9

1.1 LANDSROKNSKAPURIN 2023 9
1.2 GRANNSKOÐAN AV ROKNSKAPINUM 9

2. LØGMANSFYRISITINGIN 13

2.1 LØGMANSSKRIVSTOVAN (LG 2023/202-111) 13
2.2 LØNIR TIL AÐALSTJÓRAR (LG 2022/202-111) 14
2.3 STUDN. TIL POLITISKT VIRKSEMI OG UPPLÝSING(LG 2023/202-141) 15

3. FÍGGJARMÁL 17

3.1 LANDSROKNSKAPURIN IKKI FULLFÍGGJAÐUR (LG 2014/100-001) 17
3.2 FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ (LG 2023/203-111) 18
3.3 VEÐHALDS- OG EFTIRLØNARSKYLDUR (LG 2023/203-151) 19
3.4 DAGFØRING AV ROKNSKAPARRUNDSKRIVI (LG 2016/203-151) 20
3.5 TAKS (LG 2020/203-151) 21
3.6 KERVISGRANNSKOÐAN (LG 2023/203-151) 22
3.6.1 KERVISGRANNSKOÐAN HJÁ TAKS 22
3.6.2 KERVISGRANNSKOÐAN HJÁ GJALDSTOVUNI 22
3.6.3 KERVISGRANNSKOÐAN HJÁ KT LANDSINS 23
3.6.4 KERVISGRANNSKOÐAN HJÁ TALGILDU FØROYUM 24
3.7 EFTIRLØNIR HJÁ FÓLKASKÚLALÆRARUM (LG 2023/203-181) 25
3.8 KAPITALVINNINGSSKATTUR (LG 2023/220-521) 26
3.9 FAS-SKIPANIN (LG 2021/220-521) 32
3.10 ONNUR GJØLD/AVGJØLD (LG 2023/220-522) 33

4. FISKIVINNU- OG SAMFERÐSLUMÁL 35

4.1 FISKIVINNU- OG SAMFERÐSLUMÁLARÁÐIÐ (LG 2023/205-111) 35
4.2 UMVÆLING AV ALMENNUM BYGNINGUM (LG 2023/205-111) 36
4.3 VØRN, VEÐURSTOVA FØROYA (LG 2023/205-311) 40
4.4 TYRLUTÆNASTAN (LG 2023/205-311) 42
4.5 HVALAGRANSKING OG HVALATELJING (LG 2023/205-341) 44
4.6 VØRN, FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ (LG 2023/205-342) 46
4.7 HAVRANNSÓKNARSKIP (LG 2023/205-343) 49

4.8 HAVSTOVAN, VERKÆTLANIR (LG 2023/205-343) 52
4.9 LANDSVERK (LG 2023/205-381) 58
4.9.1 ROYNDARVERKÆTLAN VIÐ ORKUSPARING Í LANDSINS BYGNINGUM 64
4.10 ASFALT- OG SKERVVERK, LØGUJÁTTAN (LG 2021/203-381) 65
4.11 STUÐUL TIL ÚTOYGGJAR (LG 2023/205-382) 66
4.12 AKSTOVAN (LG 2023/205-384) 67

5. UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁL 71

5.1 UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ (LG 2023/206-111) 71
5.2 JARÐFEINGI (LG 2023/206-321) 72
5.3 BÚNAÐARSTOVAN (LG 2023/206-332) 77
5.4 BÚNAÐARSTOVAN, LØGUJÁTTAN (LG 2021/206-332) 79
5.5 ALMENN JØRÐ, SØLA (LG 2021/206-332) 80
5.6 ÁTØK TIL AT MENNA NÝSKAPAN OG FRAMLEIÐSLU AV FØROYSKUM MATVØRUM (LG 2023/206-332) 81
5.7 SJÓVINNUSTÝRIÐ, BYGNINGUR (LG 2015/206-351) 82
5.8 VINNUSTOVNURIN (LG 2017/206-371) 82
5.9 HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN (LG 2023/206-375) 83
5.10 FØROYA ALTJÓÐA SKIPASKRÁ, FAS (LG 2021/220-521) 89

6. BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁL 91

6.1 BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ (LG 2023/207-111) 91
6.2 BARNAVERNDARSTOVNAR (LG 2023/207-213) 92
6.3 STUDNI (LG 2023/207-231) 94
6.4 KT-SKIPANIR TIL SKÚLAVERKIÐ, RAKSTUR (LG 2023/207-231) 96
6.5 KT-SKIPAN TIL SKÚLAVERKIÐ (LG 2023/207-231) 96
6.6 FÓLKASKÚLIN (LG 2023/207-232) 102
6.7 RÁSIN (LG 2020/207-232) 102
6.8 GLASIR (LG 2023/207-233) 103
6.9 TEKNISKI SKÚLI Í KLAKSVÍK, LØGUJÁTTAN (LG 2018/207-233) 109
6.10 HÚSARHALDSSKÚLIN Í KLAKSVÍK, LØGUSTUÐUL (LG 2023/207-235) 109
6.11 FRÍTÍÐARUNDIRVÍSING (LG 2019/207-235) 113
6.12 MUSIKKSKÚLAR (LG 2021/207-235) 113
6.13 VINNUHÁSKÚLIN (LG 2018/207-236) 114
6.14 FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA (LG 2021/207-236) 115
6.15 LESTRARSTUÐUL OG LESTRARLÁN (LG 2023/207-237) 116

7. HEILSUMÁL 123

7.1 HEILSUMÁLARÁÐIÐ (LG 2023/211-111) 123
7.2 FÓLKAHEILSUSTÝRIÐ (LG 2023/211-201) 124

8. ALMANNA- OG MENTAMÁL 129

8.1 ALMANNA- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ (LG 2023/212-111) 129
8.2 ALMANNAVERKIÐ (LG 2021/212-211) 129
8.3 BARNAPENINGUR VEITTUR Í FORSKOTI (LG 2015/212-213) 130

8.4 EINKJUBARNASTYRKUR (LG 2014/212-213) 130
8.5 BARNAÍSKOYTI (LG 2015/212-213) 131
8.6 FAMILJUÍSKOYTI (LG 2023/212-213) 131
8.7 ALMANNAVERKIÐ, TRIVNAÐARTÆNASTUR (LG 2023/212-216) 133
8.8 KASSAEFTIRLIT VERKSTØÐ (LG 2022/212-216) 136
8.9 ALMANNATRYGD (LG 2023/212-217) 137
8.10 ARBEIÐSFREMJANDI TILTØK, TILLAGAÐ STARV (LG 2023/212-217) 139
8.11 FYRITÍÐARPENSJÓN (LG 2023/212-218) 140
8.12 TJÓÐSAVNIÐ (LG 2019/207-243) 141
8.13 LANDSBÓKASAVNIÐ (LG 2020/207-243) 142
8.14 KIRKJUGRUNNURIN OG TILTAKSGRUNNURIN (LG 2018/207-245) 142

9. LÓGARMÁL 145

9.1 LØGMÁLARÁÐIÐ (LG 2023/214-111) 145
9.2 NEYÐHJÁLP OG MENNINGARSAMSTARV (LG 2023/214-133) 145
9.3 FØROYA KÆRUSTOVNUR (LG 2023/214-141) 147
9.4 ÚTLENDINGASTOVAN (LG 2023/214-141) 149
9.5 DÁTUEFTIRLITIÐ (LG 2022/202-142) 151
9.6 RÚSDREKKASØLA LANDSINS (LG 2023/214-373) 152

10. UMHVØRVISMÁL 155

10.1 UMHVØRVISMÁLARÁÐIÐ (LG 2023/218-111) 155
10.2 UMHVØRVISSTOVAN (LG 2021/206-374) 156

11. FÍGGJARSTØÐA 157

11.1 FÍGGJARSTØÐA LANDSKASSANS (LG 2023/300-000) 157
11.1.1 KAPITALINNSKOT (LG 2022/300-102) 157
11.1.2 KEYPSSKÁLA-SKRÁSETT VIRÐISBRØV 158
11.1.3 VIRÐISBRØV 158
11.1.4 ÚTLÁN 160
11.1.5 ÁOGN O.A. 161
11.1.6 TØKUR PENINGUR 162
11.1.7 SKULD 164
11.2 ÚTJAVNINGARKONTA (LG 2023/300-203) 164
11.3 FYRISITING AV GJALDFØRI OG SKULD (LG 2023/300-104 OG 202) 165
11.3.1 PORTEFØLJUSKIPANIN 165
11.3.2 GJALDFØRIÐ HJÁ LANDINUM 165
11.3.3 LANDSKASSASKULD - BRÆVALÁN 167

12. ORÐALISTI 173

# 0. Framløga

Sambært § 12, stk. 2, í Ll. nr. 25 frá 21. apríl 1999 “um grannskoðan av landsrokn-skapinum v.m.”, skal roknskapargrannskoðanin innan 8 mánaðir eftir fíggjarárslok lata løgtingsgrannskoðarunum frágreiðing um úrslitið av grannskoðanini. Løgtingsgrann-skoðararnir kunnu leingja freistina.

Við hesum letur Landsgrannskoðanin løgtingsgrannskoðarunum ársfrágreiðing sína í sambandi við, at løgtingsgrannskoðararnir skulu leggja landsroknskapin 2023 fyri Løgtingið til samtyktar.

Frágreiðingin er løgd fyri tey landsstýrisfólk til viðmerkingar, sum umsita málsøkini. Møguligar viðmerkingar og fráboðanir frá landsstýrisfólkum um tiltøk og ætlanir, frágreiðingin hevur elvt til, eru tiknar við.

Landsgrannskoðanin roknar grannskoðanina av landsroknskapinum 2023 sum lidna. Kortini kann Landsgrannskoðanin seinni fara at kanna mál og spurningar, sum viðvíkja bæði 2023 og eldri árum. Upplýsingar kunnu koma fram, sum elva til, at tey mál, sum eru umrødd í hesari frágreiðing, verða mett og viðgjørd av nýggjum.

Argir, 31. august 2024

Beinta Dam
landsgrannskoðari

# 1. Inngangur

## 1.1 Landsroknskapurin 2023

*Landsstýrið skal leggja fram samlaðan landsroknskap innan 1. juni.*

§ 45, stk. 1, í stýrisskipanarlógini ásetir, at landskassaroknskapurin skal verða lagdur fyri Løgtingið í seinasta lagi seks mánaðir eftir fíggjarárslok. Sambært § 1, stk. 1, í Ll. nr. 33 frá 23. mars 1994 “um landsins almenna roknskaparhald v.m.” skal Landsstýrið, innan mai mánaður er liðin, leggja samlaða landsroknskapin fyri undanfarna fíggjarár fyri Løgtingið.

Landsroknskapurin fyri fíggjarárið 2023 var latin Løgtinginum 30. mai 2024.

Tað er eisini ásett í § 11, stk. 1, í Ll. nr. 25 frá 21. apríl 1999 “um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.”, at landsstýrismaðurin í seinasta lagi fimm mánaðir eftir fíggjarárslok skal lata løgtingsgrannskoðarunum og Landsgrannskoðanini árliga landsroknskapin fyri undanfarna fíggjarár.

*Roknskapurin skal verða gjørdur í Búskaparskipan landsins.*

Neyvari reglur um roknskaparhaldið eru ásettar í K. nr. 22 frá 14. mars 2007 “um roknskaparverk landsins o.t.”[1] Aðalráðini og teir stovnar, sum hoyra undir aðalráðini, skulu leggja fram ársroknskap, sum er gjørdur í Búskaparskipan landsins, og sum gevur eina rætta mynd av inntøkum og útreiðslum í fíggjarárinum og av ognum og skuld við fíggjarárslok.

Aðalráðini og stovnar teirra skulu eisini støðugt hava tað innanhýsis eftirlit, ið skal til, fyri at ársroknskapur kann verða gjørdur, sum gevur eina rættvísandi mynd uttan týðandi skeivleikar.

*Gjaldstovan setir landsroknskapin upp.*

Sambært § 10 í roknskaparkunngerðini verða roknskaparupplýsingar samsvarandi góðkendum ársroknskapum tiknar við í landsroknskapin, sum Gjaldstovan setir upp.

## 1.2 Grannskoðan av roknskapinum

Yvirskipaðu reglurnar um grannskoðan av almennum roknskapum eru í § 45 í stýrisskipanarlógini. Neyvari reglur eru ásettar í Ll. nr. 25/1999 “um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.”

*Endamálið við grannskoðanini.*

Sambært grannskoðanarlógini er endamálið við grannskoðanini at ansa eftir,

- *at* allar inntøkur landsins eru settar í roknskapin,
- *at* eingin útreiðsla er goldin uttan við heimild í fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg,
- *at* roknskapurin er rættur, og at tær avgerðir, roknskapurin fevnir um, eru samsvarandi veittum játtanum, galdandi lógum og fyriskipanum, verandi avtalum og vanligum siði,

[1] Broytt við K. nr. 110 frá 14. juli 2017.

*at* hóskandi er atborið fíggjarliga í sambandi við umsiting av ognum og viðvíkjandi rakstri av teimum stovnum og tí virksemi, roknskapurin fevnir um, og
*at* roknskapar- og eftirlitsskipanir eru tryggar.

### Landsgrannskoðanin

***Ábyrgd grannskoðarans.***

Landsgrannskoðanin er stovnur undir Løgtinginum og er óheft í virki sínum. Landsgrannskoðanin skal grannskoða árliga landsroknskapin, t.e. samlaða roknskapin fyri landsumsitingina og allar landsstovnar.[2]

Grannskoðanin skal fevna um fíggjarliga grannskoðan, løgfrøðiliga-kritiska grannskoðan og fyrisitingargrannskoðan. Harafturat skal grannskoðanin regluliga kanna, um roknskapar- og eftirlitsskipanir eru tryggar.

Landsgrannskoðanin ger sjálv av, hvussu grannskoðanin verður útint. Grannskoðanin verður løgd soleiðis til rættis, at øki og stovnar verða grannskoðað við jøvnum millumbili. Landsgrannskoðanin fer út á stovnar og deildir at kanna t.d. roknskapar- og lønarviðurskifti ella at kanna mannagongdir fyri umsiting av lóggávu og játtanum. Aðrar uppgávur eru t.d. játtanareftirlit, gjøgnumgongd av fíggjarstøðu og avstemman.

### Privatir grannskoðarar

Hjá nøkrum landsstovnum og grunnum er tað við lóg, kunngerð ella viðtøkum ásett, at grannskoðanin skal verða útint av løggildum ella skrásettum grannskoðara. Í øðrum førum verður grannskoðanin útint sambært avtalu ella siðvenju.

Grannskoðararnir lata løgtingsgrannskoðarunum frágreiðingar um úrslitini av grannskoðanunum. Løgtingsgrannskoðararnir gera ein samandrátt av frágreiðingunum frá privatu grannskoðarunum, sum verður latin Løgtinginum saman við uppskoti til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin.

### Frágreiðingar, umbidnar av løgtingsgrannskoðarunum

Løgtingsgrannskoðararnir kunnu áleggja Landsgrannskoðanini at gera frágreiðingar um viðurskifti, sum teir vilja hava lýst. Løgtingsgrannskoðararnir kunnu eisini áleggja Landsgrannskoðanini at gera víðkaða fyrisitingargrannskoðan á ávísum økjum ella at gera tvørgangandi fyrisitingargrannskoðan, sum fevnir um fleiri játtanir, stovnar o.a.

Dømi um slíka frágreiðing er frágreiðingin “um nýtsluna til byggiverkætlanina Landssjúkrahúsið, útbygging”, sum Landsgrannskoðanin lat løgtingsgrannskoðarunum í apríl 2023 og “Frágreiðing um Húsalánsgrunnin”, sum Landsgrannskoðanin lat løgtingsgrannskoðarunum í mars 2024.

### Aðrar frágreiðingar

Umframt ársfrágreiðingina ger Landsgrannskoðanin eisini frágreiðingar um ávís útvald evni ella øki. Dømi um tílíkar frágreiðingar eru frágreiðing “um grannskoðan av lønum til leiðarar, settir seinastu árini”, frá desember 2021 og “frágreiðing um bygging av Sambýlinum á Mýrini”, frá august 2024.

### Viðmerkingar og fráboðanir frá landsstýrisfólkum

Í § 12, stk. 1, í grannskoðanarlógini er ásett, at landsstýrismaðurin skal hava eina skrivliga fráboðan um úrslitið av grannskoðanini. Vanligt er, at stovnsleiðslan frammanundan fær høvi at gera sínar viðmerkingar til frágreiðingina. Tað er fyri at tryggja, at ongar misskiljingar eru, og at tey skriv, sum verða send landsstýrisfólkinum, eru so røtt sum gjørligt, og at allir partar fáa høvi at lýsa síni sjónarmið.

***Landsstýrisfólkið skal hava frágreiðingar til viðmerkingar.***

Í § 12, stk. 3, er ásett, at áðrenn frágreiðing um úrslitið av einari grannskoðan verður latin løgtingsgrannskoðarunum, skal hon verða løgd fyri viðkomandi landsstýrisfólk til viðmerkingar. Møguligar viðmerkingar og fráboðanir frá landsstýrisfólkinum um tiltøk

[2] Tó ikki roknskapirnar hjá teimum, har tað í lóg, kunngerð, viðtøkum, siðvenju e.l. er ásett, at grannskoðanin verður útint av løggildum ella skrásettum grannskoðarum.

og ætlanir, sum frágreiðingin hevur elvt til, skulu takast við í frágreiðingina til løgtingsgrannskoðararnar.

Frágreiðingin skal sendast landsstýrisfólkinum til viðmerkingar til tess at tryggja, at tað tilfar, sum verður latið løgtingsgrannskoðarunum, verður so objektivt rætt sum gjørligt, og at landsstýrisfólkið eisini fær høvi at lýsa síni sjónarmið.

### Millumlanda samstørv

Landsgrannskoðanin er við í norðurlendskum samstarvi ímillum ríkisgrannskoðanirnar í Danmark, Finnlandi, Íslandi, Norra, Svøríki og Føroyum.

Sum skrivari hjá løgtingsgrannskoðarunum er landsgrannskoðarin við á fundum ímillum skrivararnar hjá parlamentarisku grannskoðarunum í Norðurlondum.

Landsgrannskoðanin hevur umboð í grannskoðaranevndini, ið grannskoðar ES-stuðul frá Northern Periphery and Arctic Programme[3].

[3] Samstarv millum Finnland, Føroyar, Grønland, Írland, Norra og Svøríki.

# 2. Løgmansfyrisitingin

## 2.1 Løgmansskrivstovan (LG 2023/202-111)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Løgmansskrivstovuni á høvuðskontu 2.11.1.02. Í 2023 eru játtaðar 12,5 mió.kr., sum er 2,8 mió.kr. minni enn í 2022, av tí at starvsfólkahópurin er lagaður til nýggja málsøkjabýtið.

**Roknskaparviðurskifti o.a.**

*Roknskaparreglu-gerðin er ikki dagførd.*

Roknskaparreglugerðin er seinast dagførd í 2017, og sambært Løgmansskrivstovuni verður í løtuni ikki arbeitt við at dagføra hana, vegna vantandi starvsfólkaorku.

Størsti parturin av útreiðslunum er lønir. Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað lønarmál, um lýsingar, umsóknir, setanarskriv o.a. vóru í málunum. Einki var at finnast at.

Sambært Løgmansskrivstovuni fylgja tey reglunum í rundskrivinum um skráseting av arbeiðstíð. Meginreglan er, at plusstímar skulu avspákast. 30. november 2023 vóru allar tímasaldur innan fyri góðkend mørk.

*Ferðaútreiðslur*

Í 2023 hevur Løgmansskrivstovan brúkt 843 t.kr. til ferðing og flutning innan- og uttanlands.

Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum, um endurgjøld fyri ferðing innanlands eru sambært reglunum. Við stakroyndum kannaðu vit eisini uppgerðir fyri ferðing uttanlands, um uppgerðirnar fylgja rundskrivinum um tænastuferðir uttanlands. Einki var at finnast at.

Serstakar reglur eru ásettar fyri løgmann og landsstýrisfólk í K. nr. 120/2021 "um ferðing í embætisørindum og um samskiftisútreiðslur hjá landsstýrismonnum".

*Keyp av vørum og tænastum v.m.*

Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum keyp av vørum og tænastum hjá Løgmansskrivstovuni. Einki var at finnast at.

Nøkur starvsfólk, ið ikki longur vóru knýtt at Løgmansskrivstovuni, vóru á listanum yvir telefonrokningar. Løgmansskrivstovan hevur greitt frá, at vanliga rinda tey telefonhald í ein mánað eftir, at fólk eru farin úr starvi, soleiðis at boð kunnu leggjast á sjálvvirkandi svarara um, at viðkomandi ikki longur er í starvi. Løgmansskrivstovan hevur biðið veitaran strika rokningarnar afturvirkandi.

*Inntøkur*

Løgmansskrivstovan hevur inntøku av leigu av hølunum Undir Bryggjubakka. Av samlaðu leiguni rindar Løgtingsins Umboðsmaður 41%, Granskingarráðið 27% og NORA 32%.

Løgmansskrivstovan hevur matarskipan saman við hinum stjórnarráðunum, ið húsast í Tinganesi. Matveitingin verður bjóðað út annað hvørt ár. Løgmansskrivstovan rindar útreiðslurnar, og hini stjórnarráðini endurrinda sín part.

### Heiðurstekin

500 t.kr. eru játtaðar til at fyrireika leiðreglur fyri eitt alment heiðurstekin at lata persónum fyri merkisvert arbeiði ella gerning, ið gagnar landi og fólki og tænir Føroyum.

Løgmansskrivstovan hevur kunnað um, at nevndin, ið skal gera uppskot til reglur, er mannað, og at arbeitt verður við at menna og sniðgeva heiðurstekinið.

Sambært Løgmansskrivstovuni er nógv minni brúkt í 2023, enn ætlað, tí arbeiðið kom ikki í gongd fyrr enn seint í árinum.

### Grøn orkuloysn

Løgmansskrivstovan hevur ábyrgd av fyrisitingini í Tinganesi, sum fevnir um øll praktisk viðurskifti, t.d. viðlíkahald, olju og el.

***Endalig avgerð ikki tikin til grønu orkuloysnina til upphiting í Tinganesi.***

Í fíggjarlógini er við átekning játtaður peningur til at gera grøna orkuloysn til upphiting av bygningunum í Tinganesi saman við øðrum pørtum í økinum. Játtanin er til at gera felags avtalu ella aðra fyriskipan við partarnar um býtið av útreiðslunum av íløgu og rakstri umframt saman at áseta, hvørjar treytir skulu galda fyri aðrar partar, sum seinni koma upp í felags orkuloysnina.

Spurd, hvussu arbeiðið við at fáa grøna orkuloysn gongur, svaraði Løgmansskrivstovan, at fleiri fundir hava verið við ymiskar partar, og fleiri møguleikar eru havdir á lofti, tó er endalig avgerð ikki tikin.

## 2.2 Lønir til aðalstjórar (LG 2022/202-111)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin lønir til aðalstjórar. Sambært almenna setanarpolitikkinum eiga øll størv at verða lýst leys, og sambært K. nr. 84/2011 "um rakstrarjáttan" skal Fíggjarmálaráðið góðkenna øll tænastumannastørv og øll onnur størv, ið eru lønt í 37. lønarflokki í tænastumannasáttmálanum ella hægri, áðrenn tey verða skipað.

Aðalstjórarnir í Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum, Umhvørvismálaráðnum og Løgmálaráðnum høvdu verið fyribilssettir síðani januar 2023. Lønin var tann sama sum hjá teimum í føstum starvi t.e. í 39. lønarflokki í tænastumannasáttmálanum, umframt aðalstjóraviðbót.

Í august 2023 greiddi løgmaður frá, at avtalur vóru gjørdar við fyribilssettu aðalstjórarnar um at røkja størvini, til tey vórðu lýst leys. Fyribilssettu aðalstjórarnir høvdu fingið skriv, sum vóru at rokna sum setanarskriv. Avtalurnar vóru meinlíkar teimum, sum høvdu verið brúktar áður, tá ið aðalstjórar vóru fyribilssettir, og Fíggjarmálaráðið hevði góðkent avtalurnar. Upprunaliga var avtalað at lýsa størvini leys sum skjótast, og at størvini væntandi kundu verið sett á sumri 2023, men løgmaður setti nevnd at endurskoða lønar- og setanarviðurskifti hjá aðalstjórum. Bíðað var við at lýsa størvini leys, til nevndin var liðug við sítt arbeiði.

Í desember 2023 var nevndin liðug við arbeiðið og lat tilmæli til løgmann.

Í apríl 2024 hevur Løgmansskrivstovan lýst aðalstjórastørvini í Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum, Umhvørvismálaráðnum og Løgmálaráðnum leys. Sambært lýsingini eru aðalstjórastørvini flokkað í 39. lønarflokki sambært sáttmála millum

Tænastumannafelag Landsins og Fíggjarmálaráðið, tó uttan at vera tænastumannastørv. Størvini eru áramálssett til 7 ár. Umframt mánaðarliga viðbót á 6.380 kr. fyri aðalstjóraleiklutin, verður veitt ein mánaðarlig viðbót á 20% av grundlønini fyri áramálssetan. Eftirlønin er 15% av samlaðu lønini.

*Nýggju aðalstjórastørvini eru áramálssett til 7 ár.*

Áramálssetan í 7 ár við 20% viðbót er í samsvari við tilmælið frá nevndini.

## 2.3 Studn. til politiskt virksemi og upplýsing(LG 2023/202-141)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað studningin til politiskt virksemi og upplýsing á høvuðskontu 2.14.10.2, undirkontu 01. Játtanin hevur síðani 2016 verið 4,8 mió.kr. um árið.

Stuðulin verður veittur sambært Ll. nr. 31/2003 "um fíggjarligan stuðul til politiskt virksemi og politiska upplýsing". Stuðulin verður sambært § 3, stk. 1, í lógini veittur soleiðis, at 30% verða býtt javnt millum flokkarnar, og 70% verða býtt millum flokkar og uttanflokkatingmenn eftir atkvøðutali á seinasta løgtingsvali.

Móttakari av stuðli skal í seinasta lagi 1. apríl á hvørjum ári senda landsstýrisfólkinum fráboðan um, at stuðulin er brúktur til endamálini, sum eru nevnd í lógini. Skrásettur grannskoðari skal hava grannskoðað roknskapin við átekning um, hvørt roknskapurin er í samsvari við góðan roknskaparsið.

Eftir løgtingsval fær Løgmansskrivstovan umsóknir frá flokkunum um stuðul. Løgmansskrivstovan avgreiðir stuðulin sambært býtinum eftir § 3 í lógini. Tey fylgjandi árini verður stuðulin útgoldin uttan umsókn, tó við krøvum um, at grannskoðaður roknskapur við átekning frá grannskoðara um nýtsluna er Løgmansskrivstovuni í hendi innan 1. apríl.

Løgmansskrivstovan hyggur at roknskapunum, um tað eru viðmerkingar frá grannskoðarunum, og rindar stuðulin út, um roknskapirnir frá undanfarna ári eru komnir inn.

Í 2023 komu tveir roknskapir ikki rættstundis. Annar kom í mai, og annar var ikki komin í juni, tí steðgaði Løgmansskrivstovan útgjaldinum. Roknskapurin kom í juli, og eftir tað er goldið út.

*Ikki allir roknskapir komu inn rættstundis.*

Tað hendir seg, at landsfundur hjá onkrum flokki ikki hevur verið, og roknskapurin tí ikki er góðkendur. Roknskapurin kemur kortini inn til tíðina við átekningini frá grannskoðaranum og verður eftirsíðan góðkendur av landsfundinum.

Landsgrannskoðanin hevur kannað, um útgjøldini eru í samsvari við atkvøðutøl, um grundarlagið fyri útgjøldunum er rætt, um roknskapirnir fyri 2022 eru komnir inn áðrenn evsta mark, og at teir eru í samsvari við lógina. Samanumtikið vísti grannskoðanin, at einki verður útgoldið, um krøvini í lógini ikki eru fylgd, og at mannagongdirnar liggja í fastari legu.

# 3. Fíggjarmál

## 3.1 Landsroknskapurin ikki fullfíggjaður (LG 2014/100-001)

Landsgrannskoðanin og løgtingsgrannskoðararnir hava seinastu 25-30 árini javnan gjørt vart við, at fleiri stovnar og grunnar hava ikki verið við í fíggjarlógini og í landsroknskapinum, og at ivasamt er, um grundleggjandi ásetingar í stýrisskipanarlógini um fíggjarlóg, roknskap og grannskoðan hava verið hildnar.

Í serstakari frágreiðing "um ávísar stovnar og grunnar og tilknýti teirra til fíggjarlóg og landsroknskap", latin løgtingsgrannskoðarunum í oktober 2007, vísti Landsgrannskoðanin á, at fleiri landsstovnar vóru ikki við í fíggjarstøðuni.

***Landsgrannskoðanin vísti á, at fleiri landsstovnar vóru ikki við í fíggjarstøðuni.***

Árini eftir tað hildu løgtingsgrannskoðararnir fram við at vísa á týdningin av, at allir stovnar, grunnar, feløg o.o., sum ikki eru í fíggjarlógini og sum koma undir § 2, stk. 2, í lógini um landsins almenna roknskaparhald, verða tikin við í landsroknskapin.

Í svari til løgmann í sambandi við Lm. nr. 37/2016 kunnaði landsstýrisfólkið um, at tað *"framhaldandi og áhaldandi verður arbeitt fram ímóti einum fullfíggjaðum landsroknskapi. Bústaðir og Búnaðargrunnurin vóru aftur tiknir við í landsroknskapin fyri 2016. Arbeitt verður við nýggjum lógaruppskoti fyri Realin, har støða eisini verður tikin til tilknýti til landsroknskapin."*

Grunnarnir eru tiknir við sum notur til landsroknskapin undir "Eksternir grunnar". Ætlanin var at taka eginpeningin í Bústøðum, Búnaðargrunninum, Granskingargrunninum, Mentanargrunninum og Vinnuframa við í landsroknskapin undir "Innistandandi í landsfyritøkum, grunnum o.t." Sambært landsstýrisfólkinum var eftir at fáa greiði á, hvussu Arbeiðsloysisskipanin, Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin, Framtaksgrunnurin og Realurin kundu verða tikin við í landsroknskapin.

Seinastu árini er alsamt meira virksemi hjá landinum lagt í virkiseindir, sum eru skildar frá landsfyrisitingini, t.d. í partafeløg. Landsroknskapurin avspeglar tí í minni mun veruliga virksemið, váðar o.a. hjá landinum.

Í 2016 segði Fíggjarmálaráðið seg vera samt við Landsgrannskoðanina um vandan, ið kann standast av, at ov nógv virksemi verður lagt í almenn partafeløg uttan fyri fíggjarlóg, har ikki sama gjøgnumskygni, almenn stýring og almennar reglur eru galdandi. Fíggjarmálaráðið arbeiddi fram ímóti, at eginpeningurin í eksternu grunnunum fór at verða tikin við í landsroknskapin fyri 2017 undir "Innistandandi í landsfyritøkum, grunnum o.t." Arbeitt var við nýggjum lógaruppskoti fyri Realin, har støða eisini fór at verða tikin til tilknýtið til landsroknskapin.

Landsstýrisfólkið greiddi í 2018 og aftur í 2019 frá, at tað var framhaldandi arbeitt ímóti at fáa ein fullfíggjaðan landsroknskap. Í 2018 var miðað ímóti, at í landsroknskapinum fyri 2018 skuldi eginpeningurin í eksternu grunnunum takast við undir "Innistandandi í landsfyritøkum, grunnum o.t." Tað bleiv ikki gjørt kortini.

Í 2021 segði landsstýrisfólkið, at *"sitandi samgonga og landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hava sett sær fyri at fáa ein meira fullfíggjaðan almennan roknskap."*

Í 2023 kunnaði landsstýrisfólkið um, at fyri summarfrítíðina var fundur við Landsbankan, Hagstovuna og Gjaldstovuna um krøv og leist fyri innlating av roknskapartølum frá feløgum og grunnum. Arbeitt varð við at gera avtalu við eitt felag um, hvat og hvussu upplýsingar skuldu latast inn, ábyrgdarbýti o.a. Avtaluleisturin skuldi síðani eftir ætlan brúkast til hini feløgini og grunnarnar.

***Gjaldstovan og Fíggjarmálaráðið hava lagt orku í at fáa landsroknskapin fullfíggjaðan.***

Í august 2024 hevur landsstýrisfólkið greitt frá, at í samsvari við § 45 í stýrisskipanarlógini og reglurnar í almennu roknskaparlóggávuni fevnir landsroknskapurin um virksemi, sum hevur rakstrarætlan við í fíggjarlógini, og annars sjálvstøðugar stovnar og grunnar hjá landinum. Tað samsvarar væl við tilmælini í greining, sum OECD í 2020 gjørdi av føroyska almenna roknskapinum. Gjaldstovan og Fíggjarmálaráðið hava síðani lagt orku í at fáa landsroknskapin í samsvari við tilmælið.

Føroya Realkreditstovnur er tikin við í landsroknskapin fyri 2023. Arbeiðsloysisskipanin letur roknskaparligar upplýsingar til Búskaparskipan landsins, og Samhaldsfasti arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin hevur bókhaldið í Búskaparskipan landsins. Hesir báðir roknskapir verða eftir ætlan tiknir við í landsroknskapin fyri 2024. Allir stovnar og grunnar hjá landinum eru tá við í einum fullfíggjaðum landsroknskapi.

## 3.2 Fíggjarmálaráðið (LG 2023/203-111)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Fíggjarmálaráðnum á høvuðskontu 3.11.1.03.

Í 2023 eru játtaðar 12,3 mió.kr., sum eru 2,3 mió.kr. minni enn í 2022, av tí at starvsfólkahópurin er lagaður til nýggja málsøkjabýtið. Tvey starvsfólk eru flutt til onnur stjórnarráð, m.a. eru samferðslumál flutt til annað ráð.

### Roknskaparviðurskifti o.a.

Roknskaparreglugerðin er dagførd í november 2023.

Størsti parturin av útreiðslunum er til lønir, 10,4 mió.kr. Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað lønarmál, um lýsingar, umsóknir, setanarskriv o.a. eru í málunum. Einki var at finnast at.

Fulltíðarsett starvsfólk kunnu vegleiðandi í mesta lagi eiga 40 tímar á ella skylda 30 tímar. Í desember 2023 vóru flest allar tímasaldurnar innan fyri góðkend mørk.

Meginreglan er, at plusstímar skulu avspákast. Í einstøkum førum hevur ráðið goldið uppspardar tímar til vanliga tímaløn fyri tímar, sum starvsfólk áttu á í 2021 og 2023.

Í januar 2024 hevur Fíggjarmálaráðið kunnað um, at ráðið fer at taka stig til, at kalendaraavtalur ikki longur sjálvvirkandi gerast arbeiðstíð í Totalview. Eisini fer ráðið at taka skráseting av arbeiðstíð við í roknskaparreglugerðina.

*Ferðing uttanlands*

Við stakroyndum hava vit kannað ferðauppgerðir, um uppgerðirnar eru sambært rundskrivinum, t.e. um ferðaloyvi er givið, um dagpeningur og útreiðslur til hotell eru innan fyri loyvdar upphæddir, og um fríar máltíðir eru drignar frá dagpeninginum.

***Hotellkostnaður hægri enn loyvda markið.***

Í fleiri førum var hotellkostnaðurin hægri enn loyvda markið. Landsgrannskoðanin hevur víst á, at í serligum føri kann tænastustaðið góðkenna hægri útreiðslur til hotell,

og tá skal frágreiðing um orsøkina leggjast við ferðauppgerðini. Í einstøkum føri er ikki drigið frá fyri kost.

*Gjaldkort*
Fíggjarmálaráðið hevur eitt gjaldkort av slagnum Eurocard til at rinda ferðaseðlar og gisting fyri starvsfólk, sum ferðast uttanlands fyri ráðið, og til annað virksemi, har tað ikki ber til at bíleggja uttan kort. Vit kannaðu kortnýtsluna, einki var at finnast at.

## 3.3 Veðhalds- og eftirlønarskyldur (LG 2023/203-151)

### Eftirlønarskyldur landskassans[4]
Gjaldstovan hevur seinastu árini skrásett allar tænastumannaeftirlønarskyldurnar, og fekk fyri nøkrum árum síðani ein aktuar at meta um, hvat tað hevði kostað, hevði landið keypt seg leyst frá skyldunum. Skyldan hjá landskassanum verður roknað av nýggjum 3. hvørt ár. Eftirlønarskyldan var roknað seinast til roknskapin 2022. Sambært landsroknskapinum 2022 er samlaða eftirlønarskyldan hjá landskassanum 4.163 mió.kr.

***Í 2022 var samlaða eftirlønarskyldan hjá landskassanum 4,2 mia.kr.***

### Veðhaldsskylda vegna tryggingaravtalur hjá Føroya Lívstrygging
Sambært § 3 í Ll. nr. 105/1999 “um umskipan av Føroya Lívstrygging” er landskassaábyrgdin framvegis galdandi fyri tær tryggingaravtalur, sum Føroya Lívstrygging hevði, tá ið lógin kom í gildi. Roknskaparreglurnar vóru broyttar við virknaði fyri roknskaparárið 2012, so heimild ikki longur er at innrokna landskassaveðhaldið í roknskapin.

Avleiðingin av broyttu roknskaparmeginreglunum var, at eginognin hjá P/f Lív lívs- og pensiónstryggingarfelag, hvørs skyldur landskassin veðheldur fyri, gjørdist negativ. Sambært ársfrásøgnini fyri 2023 er eginognin negativ við 606 mió.kr. Roknaðu skyldurnar eru umleið 2.493 mió.kr., og íløguognirnar eru 1.847 mió.kr.

Sambært § 3, stk. 2, í Ll. nr. 53/2015 “um P/f Lív lívs- og pensiónstryggingarfelag” hevur landsstýrismaðurin heimild til at rinda til felagið, tá ið felagnum tørvar pening at halda verandi tryggingaravtalur.

### Veðhaldsskylda vegna P/f Eystur- og Sandoyartunlar
P/f Eystur- og Sandoyartunlar hevur 2.645 mió.kr. í láni frá peningastovnum, harav 198 mió.kr. falla til gjaldingar í 2024[5]. Lánið verður fast rentað við 2,73% fram til 2040, tá ið tað skal vera goldið aftur. Í 2022 tók felagið 80 mió.kr. í láni til broytiliga rentu, og í 2023 er lánið hækkað til 100 mió.kr. Pr. 31. desember 2023 var tunnilsverkætlanin gjørd upp til 3.026 mió.kr. Í 2023 var tilgongdin 194 mió.kr.

Sambært § 5 í Ll. nr. 30/2014 “um at stovna partafelag og at byggja og reka undirsjóvartunlar millum Streymoy og Eysturoy og millum Streymoy og Sandoy” setir landið 400 mió.kr. í partapeningi í felagið, tíðarskeiðið fram til 2024. Til og við 2023 eru 350 mió.kr. goldnar felagnum.

Sambært lógini hevur landsstýrisfólkið heimild at hækka partapeningin ella at veita felagnum trygd fyri minstuferðslu í Eysturoyartunlinum og Sandoyartunlinum. Felagið kann tiltransportera hesa játtan og trygd fyri minstuferðslu sum trygd í sambandi við fígging av verkætlanum felagsins. Harafturat kann felagið tiltransportera í mesta lagi 10 mió.kr. um árið í møguligum rakstrarstuðli, sum landsstýrisfólkið eftir umsókn kann veita felagnum, tá ið Sandoyartunnilin er tikin alment í nýtslu.

[4] Kelda: s. 276 í Landsroknskapinum 2023.
[5] Kelda: s. 277 í Landsroknskapinum 2023.

**Rættarmál mótvegis Føroya landsstýri**

*Føroya Reiðarafelag*

Føroya Reiðarafelag hevur stevnt Føroya landsstýri í sambandi við lógaráseting fyri skipan av sølu av veiðirættindum á uppboði í 2016. Úrskurður er gjørdur í Føroya Rætti, men Føroya landsstýri skeyt úrskurðin inn fyri Landsrættin. Landsrætturin fríkendi Føroya landsstýri. Málið hevur eisini verið fyri í Hægsta Rætti, sum somuleiðis fríkendi Føroya landsstýri. Málið er ikki endaliga avgreitt, tí Føroya Reiðarafelag hevur alment nevnt møguleikan at leggja málið fram fyri Europeiska Mannarættinda-dómstólin.

*Northwest Pelagic*

P/f Northwest Pelagic hevur sent Fiskimálaráðnum eitt endurgjaldskrav upp á umleið 81 mió.kr. í sambandi við úrskurð í Føroya Rætti um afturtøku av veiðiloyvi. Málið er ikki liðugt viðgjørt, og eingin endalig niðurstøða er.

**Afturgjald av heilsutrygdargjaldi, sum er goldið av órøttum**

Í nøkur ár hevur ivamál verið um, um m.a. sonevndir útisiglarar skulu gjalda heilsu-trygdargjald í Føroyum ella ikki. Málið endaði í Føroya Rætti á heysti 2021. Niður-støðan hjá Rættinum var, at Heilsutrygd ikki kann krevja heilsutrygdargjald frá persónum, ið eru fevndir av Nordisk Konvention om social sikring.

Dómurin tekur ikki støðu til, hvussu nógv skal gjaldast aftur til teir persónar, sum av órøttum hava goldið heilsutrygdargjald. Enn er óvist, hvussu stórt afturgjaldið verður. Sambært meting hjá Heilsutrygd verður endurgjaldskravið helst í mesta lagi 30 mió.kr.

## 3.4 Dagføring av roknskaparrundskrivi (LG 2016/203-151)

Í undanfarnum frágreiðingum hevur Landsgrannskoðanin umrøtt, at Gjaldstovan hevði gjørt uppskot til nýggja roknskaparreglugerð eftir nýggjum leisti, sum Gjaldstovan sjálv hevði gjørt. Ætlanin var, at nýggi leisturin skuldi gerast til eitt roknskaparrundskriv fyri landsumsitingina.

Í 2017 segði Fíggjarmálaráðið, at ráðið fór at gjøgnumganga uppskot til dagført roknskaparrundskriv saman við Gjaldstovuni, soleiðis at tað kundi setast í gildi og góðkennast á heysti 2017.

Í 2019 kunnaði landsstýrisfólkið um, at arbeiðið hjá Gjaldstovuni og Fíggjarmála-ráðnum at dagføra roknskaparrundskrivið var komið so mikið áleiðis, at tað væntandi kundi verða lýst tíðliga á heysti 2019.

Í 2021 vísti landsstýrisfólkið á, at sambært § 4, stk. 2, í roknskaparkunngerðini skuldi Fíggjarmálaráðið senda út rundskriv um roknskaparreglugerðir saman við vegleiðing um, hvussu reglurnar skuldu verða gjørdar. Ráðið hevði í samstarvi við Gjaldstovuna gjørt eitt uppskot til dagført rundskriv um roknskaparreglugerðir o.a. Arbeitt var nú við einari vegleiðing. So skjótt tað arbeiðið varð liðugt, skuldi uppskotið sendast til hoyringar.

Í 2022 kunnaði landsstýrisfólkið um, at arbeiðið at gera vegleiðingina til roknskapar-rundskrivið var enn ikki komið á mál. Ætlanin var, at vegleiðingin skuldi verða partur av einari fyrimynd at gera roknskaparreglugerð, sum í mest møguligan mun skuldi koyra talgilt saman við Búskaparskipan landsins, undir hesum atgongdarstýring, stovnsleiðarar og stovnsnummur. Eyðvitað fór tílíkt arbeiði at taka tíð, men Fíggjarmálaráðið vónaði, at roknskaparrundskrivið og fyribilsútgáva av vegleiðingini fóru at verða sett í gildi um ársskiftið (2022).

Í 2023 kunnaði landsstýrisfólkið um, at arbeiðið at gera vegleiðingina til roknskapar-rundskrivið enn ikki var komið á mál. Fíggjarmálaráðið fór saman við Gjaldstovuni at menna eina talgilda skipan til endamálið. Arbeiðið var sett í gongd, og væntaðist tað at verða liðugt seint í fyrra hálvári 2024.

Í august 2024 ásannar Fíggjarmálaráðið, at tað hevur tikið longri tíð enn ætlað at fáa ment eina talgilda skipan til vegleiðingina til roknskaparreglugerðir. Ætlanin við tílíkari skipan er, at stovnar skulu hava lætt við at gera roknskaparreglugerð, sum er sett upp eftir føstum leisti, men tillagað einstaka stovnin, m.a. grundað á eina váðameting, sum stovnurin skal gera. Skipanin verður knýtt at Búskaparskipan landsins, soleiðis at dátur verða gagnnýttar og dagførdar sjálvvirkandi.

***Komið er ikki á mál at dagføra roknskapar-rundskrivið.***

Sambært landsstýrisfólkinum er ein høvuðsorsøk til, at skipanin ikki er komin á mál, at deildin fyri Búskaparskipan landsins hevur havt aðrar átrokandi uppgávur. Ætlanin er at fáa arbeiðið við skipanini í gongd aftur í heyst, soleiðis at rundskrivið kann fara til hoyringar og setast í gildi í 2025.

## 3.5 TAKS (LG 2020/203-151)

Í seinastu frágreiðingum umrøddi Landsgrannskoðanin inntøkur fyri reinførisváttanir. Á øllum fakturunum var viðmerkt, at rokning var skrivað við loyvi í K. nr. 14/2010 “um tænastugjøld uttan fyri arbeiðstíð”. Landsgrannskoðanin helt, at tilvísingin var misvísandi, tí tær 1.800 kr., sum TAKS kravdi fyri reinførisváttanir, vóru ikki ásettar í K. nr. 14/2010.

TAKS vísti á, at upphæddin var ásett við heimild í § 22 í Bek. nr. 515/2012 “for Færøerne om foranstaltninger mod smitsomme og andre overførbare sygdomme”. Har stendur, at Heilsumálaráðið ásetir prís- og lønarreguleringar. Upphæddin var ikki broytt, síðani uppgávan var løgd til TAKS at umsita.

Landsgrannskoðanin mælti til at rætta tilvísingarnar í fakturunum, soleiðis at samsvar var ímillum gjald og heimild.

Í 2021 greiddi landsstýrisfólkið frá, at sambært TAKS fór tilvísingin á fakturunum at verða rættað. TAKS hevði ikki funnið nakað skjalatilfar um, hvussu tær 1.800 kr. vóru ásettar. TAKS fór at venda sær til Heilsumálaráðið um at eftirmeta kostnaðin.

Í 2022 kunnaði landsstýrisfólkið um, at arbeiðið at rætta tilvísingina á fakturum var sett á skrá. Fak-skipanin, har rokningar verða upprættaðar og útskrivaðar í, skuldi tillagast. KT-deildin skuldi avgreiða uppgávuna í mun arbeiðsorku og raðfesting.

Í august 2024 hevur landsstýrisfólkið greitt frá, at TAKS hevur arbeitt við at broyta mannagongdir fyri rokningar, samstundis sum stovnurin er farin undir at nútímansgera KT-skipanirnar.

Av tí at pláss ikki er fyri fullum teksti í núverandi forriti, er teksturin á rokningunum fyribils broyttur. Frá september 2024 verður teksturin soljóðandi:

*"Rokning skrivað við heimild í kunngerð nr. 51 frá 19. apríl 2023 um tænastugjøld uttanfyri avgreiðslutíð (for service outside normal office hours). Reinførisváttan er skrivað við heimild í Bek. nr. 515/2012 fyri Føroyar”.*

## 3.6 Kervisgrannskoðan (LG 2023/203-151)

Kervisgrannskoðari grannskoðar hvørt ár skipanir og kervi hjá TAKS, Gjaldstovuni, KT Landsins, Talgildu Føroyum og ávísum veitarum hjá KT Landsins. Um viðurskifti eru, sum ikki eru nøktandi, gevur kervisgrannskoðarin ítøkilig tilmæli, sum eru raðfest soleiðis:

- Høg: týðandi veikleiki, sum eigur at fáast í rættlag sum skjótast.
- Miðal: týðandi veikleiki, sum eigur at fáast í rættlag innan 6 mánaðir.
- Lág: týðandi veikleiki, sum eigur at fáast í rættlag innan 12 mánaðir.

### 3.6.1 Kervisgrannskoðan hjá TAKS

Kervisgrannskoðarin hevur gjørt frágreiðing um KT-viðurskiftini hjá TAKS:

- TAKS, ISAE 3000-váttan við avmarkaðari vissu frá óheftum grannskoðara um trygdarskoðan eftir trygdarrundskrivinum pr. 5. juli 2024.

TAKS er stovnur, sum hevur dátur, ið eru serliga týðandi fyri føroyska samfelagið, og tí er fevndur av punkti 7 í rundskrivinum um KT-trygd frá Fíggjarmálaráðnum. KT-viðurskiftini hjá stovnum sum TAKS skulu skoðast árliga av KT-grannskoðara við viðkomandi royndum og útbúgving, og sum Fíggjarmálaráðið hevur góðkent.

Sambært skoðanarfrágreiðingini er endamálið við skoðanini at meta um, hvørt trygdarfyriskipanir á KT-økinum kunnu roknast at vera hóskandi fyri virksemi stovnsins og í mun til ásetingarnar í rundskrivinum. Niðurstøðan hjá KT-grannskoðaranum er, at KT-grannskoðarin ikki hevur fingið kunnleika til viðurskifti, sum geva orsøk til at halda, at TAKS ikki í høvuðsheitum heldur ásetingarnar í trygdarrundskrivinum. Grannskoðanin staðfesti 9 veikleikar, allir við miðal raðfesting.

### 3.6.2 Kervisgrannskoðan hjá Gjaldstovuni

Kervisgrannskoðarin hevur gjørt avtalu við leiðsluna á Gjaldstovuni um at grannskoða innanhýsis KT-viðurskifti og KT-stýring hjá stovninum. Grannskoðanin skal gerast í mun til tænastuveitingar til teir stovnar, sum nýta skipanirnar hjá Gjaldstovuni (Búskaparskipan landsins), eins og grannskoðanin verður gjørd fyri Elektron, sum er høvuðsveitari hjá Gjaldstovuni. Fyri árið 2023 hevur kervisgrannskoðarin gjørt fýra frágreiðingar um KT-viðurskifti hjá Gjaldstovuni:

***Kervisgrannskoðarin hevur gjørt fýra frágreiðingar um KT-viðurskiftini hjá Gjaldstovuni.***

- Føroya Gjaldstova, Ársfrágreiðing 2023, grannskoðan í árinum,
- Føroya Gjaldstova, Frágreiðing 2023, grannskoðan av almennum KT-stýringum,
- ISAE 3000-váttan um almennar KT-stýringar og viðgerð av persónupplýsingum hjá Føroya Gjaldstovu í veitingini av Búskaparskipan landsins (BSL) fyri tíðarskeiðið 1. januar til 31. desember 2023, og
- ISAE 3000-váttan um almennar KT-stýringar hjá Elektron fyri tíðarskeiðið 1. januar til 31. desember 2023.

#### KT-stýringar á Gjaldstovuni

Niðurstøðan hjá kervisgrannskoðaranum er, at Gjaldstovan á flestu økjum framvegis hevur gjølliga og nøktandi stýring av KT-umhvørvi sínum, og at tað støðugt verður arbeitt við at bøta um trygdarviðurskiftini.

Fýra tilmæli vóru opin við árslok 2023, trý við miðal raðfesting og eitt við lágari raðfesting. Grannskoðanin gav eitt nýtt tilmæli, og eitt er lokað í árinum.

Sum heild er fatanin hjá kervisgrannskoðaranum, at trygdar- og eftirlitsstigið, ið er sett í verk innan almennu KT-stýringarnar hjá Gjaldstovuni, er trygdargott við atliti at veitingini av Búskaparskipan landsins, undantikið veikleikarnar, sum eru nevndir í frágreiðingini.

**KT-stýringar á Elektron fyri Gjaldstovuna**
Í ISAE 3000-váttanini er niðurstøðan hjá kervisgrannskoðaranum:

*at* lýsingin av almennu KT-stýringunum, ið viðvíkja skipanar-, dátu og rakstrartrygdini hjá Gjaldstovuni, soleiðis sum tær vóru tilevnaðar og settar í verk í tíðarskeiðnum 1. januar til 31. desember 2023, í øllum týðandi lutum er rættvísandi,
*at* stýringarnar, sum eru knýttar til tey stýringarmál, ið eru tilskilað í lýsingini, í øllum týðandi lutum vóru tilevnaðar á hóskandi hátt í øllum tíðarskeiðnum, og
*at* nároyndu stýringarnar, sum vóru tær stýringar, ið vóru neyðugar, til tess at geva høga trygd fyri, at stýringarmálini í lýsingini í øllum týðandi lutum vóru rokkin, hava virkað munadygt í øllum tíðarskeiðnum.

### 3.6.3 Kervisgrannskoðan hjá KT Landsins

*Kervisgrannskoðarar hava grannskoðað KT-kontrollarnar.*

Kervisgrannskoðarar hava í 2023 grannskoðað almennu KT-kontrollarnar í sambandi við, at Elektron veitir tænastur til KT Landsins og kundar stovnsins. Kervisgrannskoðararnir hava eisini grannskoðað KT-kontrollarnar v.m. í sambandi við KT-tænastur, sum Formula og Nema veita KT Landsins.

**P/f Elektron**
Fyri 2023 hevur kervisgrannskoðarin gjørt eina frágreiðing um KT-viðurskiftini ímillum KT Landsins og Elektron:

- ISAE 3000-váttan um almennar KT-stýringar hjá P/f Elektron fyri tíðarskeiðið 1. januar til 31. desember 2023 í mun til SLA-avtalu við KT Landsins.

Niðurstøðan hjá kervisgrannskoðaranum er,
*at* lýsingin[6] av almennu KT-stýringunum, ið viðvíkja skipanar-, dátu- og rakstrartrygdini hjá KT Landsins, soleiðis sum tær vóru tilevnaðar og settar í verk í tíðarskeiðnum 1. januar til 31. desember 2023, í øllum týðandi lutum eru rættvísandi,
*at* stýringarnar, sum eru knýttar til tey stýringarmál, ið eru tilskilað í lýsingini, í øllum týðandi lutum vóru tilevnaðar á hóskandi hátt í øllum tíðarskeiðnum, og
*at* nároyndu stýringarnar, sum vóru tær stýringar, ið vóru neyðugar, til tess at geva høga trygd fyri, at stýringarmálini í lýsingini í øllum týðandi lutum vóru rokkin, hava virkað munadygt í øllum tíðarskeiðnum.

**P/f Formula**
P/f Formula og KT Landsins hava gjørt SLA-avtalu, sum ásetir tænastustigið fyri veitingina. Fyri 2023 hevur kervisgrannskoðarin gjørt eina frágreiðing um KT-viðurskiftini millum KT Landsins og P/f Formula:

- ISAE 3000-váttan frá óheftum grannskoðara um almennar KT-stýringar í tænastuveiting hjá P/f Formula mótvegis KT Landsins fyri árið 2023.

Niðurstøðan hjá kervisgrannskoðaranum er,
*at* lýsingin av almennu KT-tænastuveitingini hjá P/f Formula mótvegis KT Landsins, soleiðis sum skipanin var tilevnað og verksett í tíðarskeiðnum 1. januar til 31. desember 2023, í øllum týðandi lutum er rættvísandi,
*at* stýringarnar, sum eru knýttar til tey stýringarmál, ið eru tilskilað í lýsingini, í øllum týðandi lutum vóru tilevnaðar á hóskandi hátt í øllum tíðarskeiðnum, og
*at* tær nároyndu stýringarnar, sum eru tær stýringarnar, ið vóru neyðugar, til tess at geva høga trygd fyri, at stýringarmálini í lýsingini í øllum týðandi lutum, hava virkað munadygt í øllum tíðarskeiðnum.

[6] Í ISAE 3000-váttanini er lýsing av almennum KT-stýringum, váðastýring, skipan av trygd, v.m.

### P/f Nema

P/f Nema og KT Landsins hava gjørt sáttmála um veiting til Skúlanet. Í 2023 hevði P/f Nema tænastusáttmála við P/f Elektron um hýsing av ambætarum í veitingini. Nema hevur í 2024 endað samstarvið við P/f Elektron og gjørt avtalu við P/f Net um samhýsing av ambætarum. Fyri 2023 hevur kervisgrannskoðarin gjørt eina frágreiðing um KT-viðurskiftini millum KT Landsins og P/f Nema:

- ISAE 3000-váttan við avmarkaðari vissu um KT-trygdarkrøv í fylgiskjali 4b í sáttmálanum millum Gjaldstovuna-KT landsins og P/f Nema um veitingar í sambandi við Skúlanet í tíðarskeiðnum 1. februar til 31. desember 2023.

Niðurstøðan hjá kervisgrannskoðaranum er, at við støði í arbeiðinum, framdum royndum og teimum upplýsingum og prógvum, grannskoðarin hevur fingið, hevur hann ikki fingið kunnleika til viðurskifti ella trygdarveikleikar, sum geva orsøk til at meta, um P/f Nema ikki í øllum týðandi lutum hevur lagt til rættis og fylgt KT-trygdarkrøvunum í fylgiskjali 4b í sáttmálanum millum Gjaldstovuna-KT Landsins og P/f Nema, um veitingar í sambandi við Skúlanet, í tíðarskeiðnum 1. februar til 31. desember 2023.

### KT-eftirlitsskipanir á KT Landsins

Kervisgrannskoðarin og leiðslan á Gjaldstovuni hava avtalað, at kervisgrannskoðarin skal grannskoða innanhýsis KT-viðurskifti og KT-stýringar hjá KT Landsins í mun til tænastuveitingarnar til stovnarnar, sum nýta Landsnet, Skúlanet og Skjalhald.

Endamálið við grannskoðanini er at tryggja, at grundleggjandi og týðandi viðurskifti viðvíkjandi almennum KT-stýringum eru í samsvari við trygdarásetingarnar hjá KT Landsins, umframt at meta um, hvørt nøktandi trygdar- og eftirlitsstig eru sett í verk.

Fyri 2023 hevur kervisgrannskoðarin gjørt fýra frágreiðingar um KT-viðurskiftini á KT Landsins:

- Ársfrágreiðing 2023, grannskoðan í árinum,
- Frágreiðing 2023, grannskoðan av almennum KT-stýringum,
- ISAE 3000-váttan um almennar KT-stýringar hjá KT Landsins í veitingini av Landsneti fyri árið 2023, og
- ISAE 3000-váttan um almennar KT-stýringar hjá KT Landsins í veitingini av Skúlaneti tann 1. mai 2024.

Niðurstøðan hjá grannskoðaranum er m.a., at KT Landsins á flestu økjum framvegis hevur gjølliga og nøktandi stýring av sínum KT-umhvørvi á flestu økjum, og at tað støðugt verður arbeitt við at bøta um trygdarviðurskiftini.

Veitingarnar frá Elektron, Formula og Nema, sum Landsnet í týðandi mun byggir á, eru somuleiðis grannskoðaðar fyri árið 2023. Niðurstøðan er, at veitingarnar sum heild eru í samsvari við avtalaða trygdarstøðið, og við ta lýsing av trygdarstøðinum, sum veitararnir hava givið KT Landsins. Einstakir veikleikar eru tó staðfestir og umrøddir í váttanunum og frágreiðingunum.

Sum heild er fatanin hjá grannskoðaranum, at trygdar- og eftirlitsstigið, ið er sett í verk innan almennu KT-stýringarnar hjá KT Landsins, við atliti at veitingini av Skjalhaldi, Skúlaneti og Landsneti, er trygdargott, við undantaki av viðmerktu veikleikunum í frágreiðingini.

Við árslok 2023 vóru seks tilmæli opin, trý við miðal raðfesting og trý við lágari. Grannskoðanin gav tvey nýggj tilmæli, bæði við lágari raðfesting.

## 3.6.4 Kervisgrannskoðan hjá Talgildu Føroyum

Kervisgrannskoðarin hevur gjørt avtalu við leiðsluna á Gjaldstovuni um at grannskoða innanhýsis KT-viðurskifti og KT-stýring hjá Talgildu Føroyum í mun til tænastuveitingar til stovnar og fyritøkur, sum nýta Samleikan, Vangan, Mínboks, Heldina og Skjáttuna.

Fyri árið 2023 hevur kervisgrannskoðarin gjørt tríggjar frágreiðingar um KT-viðurskiftini hjá Talgildu Føroyum:

- Ársfrágreiðing 2023, grannskoðan í árinum,
- Frágreiðing 2023, grannskoðan av almennum KT-stýringum, og
- ISAE 3000-váttan um viðgerð av persónupplýsingum hjá Talgildu Føroyum í veitingini av Samleikanum, Vanganum, Mínboks, Heldini og Skjáttuni fyri tíðarskeiðið 1. januar til 31. desember 2023.

Niðurstøðan hjá grannskoðaranum er, at Talgildu Føroyar hava trygdargóða og nøktandi stýring á flestu økjum í KT-umhvørvi sínum, tá ið ræður um veitingar, Samleikan, Vangan, Heldina, Mínboks og Skjáttuna.

Gjaldstovan og Talgildu Føroyar hava arbeitt við grannskoðaratilmælunum, sum vórðu givin í sambandi við grannskoðanina seinasta ár. Við árslok 2023 vóru fýra tilmæli opin, trý við miðal raðfesting og eitt við lágari raðfesting. Grannskoðanin gav eitt nýtt tilmæli, og tvey vóru lokað í árinum.

Umframt oman fyri nevndu frágreiðingar, hevur kervisgrannskoðarin eisini gjørt:

- ISAE 3000-váttan frá óheftum grannskoðara um almennar KT-stýringar í tænastuveiting hjá Í/f Samtakið Klintra og Føroya Tele mótvegis Gjaldstovuni tann 24. mai 2024.

Niðurstøðan hjá grannskoðaranum er,
*at* lýsingin av KT-veitingini í KT-tænastuveitingini hjá Í/f Samtakið Klintra og Føroya Tele mótvegis Gjaldstovuni, soleiðis sum skipanin var tilevnað og verksett tann 24. mai 2024, í øllum týðandi lutum er rættvísandi, og
*at* stýringarnar, sum eru knýttar til tey stýringarmál, ið eru tilskilað í lýsingini, í øllum týðandi lutum vóru tilevnaðar á hóskandi hátt tann 24. mai 2024.

## 3.7 Eftirlønir hjá fólkaskúlalærarum (LG 2023/203-181)

### Endurrindan frá statinum 2023

Tænastumenn, sum hava verið settir í føroyska skúlaverkinum, og tey, sum hava verið sett við eftirlønarrætti sum tænastumenn í fólkaskúlanum, koma undir skipanina við læraraeftirlønum.

Eftirlønirnar verða veittar eftir somu reglum, sum hjá teimum, ið fáa tænastumanna-eftirløn. Ll. nr. 32/1971 “um tænastumannaeftirlønir” er galdandi fyri tænastumenn, sum eru eftirløntir eftir 30. juni 1997. Teir, sum eru eftirløntir fyri 30. juni 1997, fáa eftirløn eftir danskari lóg.

Staturin endurrindar landinum 80% av útreiðslunum til tænastumenn v.fl. í fólka-skúlanum, sum eru farnir frá áðrenn 1. januar 1988, herundir eftirsitandi, sum hava rætt til eftirlønina. Harafturat endurrindar staturin 80% av tí parti av eftirlønunum, sum rættur var vunnin til inntil 31. desember 1987.

Gjaldstovan sendir krav eina ferð um mánaðin til Økonomistyrelsen um endurgjald fyri læraraeftirlønir. Eina ferð um árið ger Gjaldstovan upp, hvat staturin skal endurrinda. Í uppgerðini fyri 2023 eru upphæddirnar:

*kr.*

| Ár | Endurgjaldskrav frá Gjaldstovuni | Endurgjaldskrav smb. eftirlønarlistunum | Munur |
|---|---|---|---|
| 2023 | 31.538.285 | 31.551.264 | 12.999 |

Landsgrannskoðanin hevur kannað nøkur eftirlønarmál.

Við støði í lógum, avtalum og grannskoðanarleiðbeining kannaðu vit, um:

- eftirlønarmóttakararnir á báðum yvirlitunum lúka ásetingarnar,
- útgoldnu eftirlønarupphæddirnar geva rætt til endurgjald, og
- um endurgjaldskrøvini eru rætt roknað.

Niðurstøðan er, at eftirlønarmóttakararnir høvdu rætt til eftirløn, og at Landsstýrið hevði rætt til endurgjald frá statinum fyri útgoldnu eftirlønarupphæddirnar.

## 3.8 Kapitalvinningsskattur (LG 2023/220-521)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað mannagongdir og innaneftirlit í sambandi við álíkning og innkrevjing av kapitalvinningsskatti, herundir eisini rentuskatti. Eisini hava vit kannað, um TAKS hevur sett í verk eitt nøktandi og virkið innaneftirlit, sum tryggjar rættan roknskap. Vit hava við stakroyndum kannað, um kapitalvinningsskattur er rætt roknaður.

Lógargrundarlagið er Ll. nr. 164/2001 "um skatting av kapitalvinningi" (Kapitalvinnings-skattalógin). Harumframt eru hesar reglur:

- K. nr. 131/2006 "um virðisásetan av ognum"
- K. nr. 39/2020 "um samskatting av kapitalvinningi"
- Rundskriv nr. 1/2007 frá TAKS "um goodwill virðisáseting"
- Rundskriv nr. 2/2007 frá TAKS "um virðisáseting av partabrøvum v.m."

Kapitalvinningsinntøka er vinningur av kapitali, ið stavar frá at eiga, útvega og avhenda fíggjarligar ognir. Sum kapitalvinningsinntøka verður roknað:

1. vinningur og tap við avhending av partabrøvum og íløguprógvum,
2. vinningur og tap við avhending av lánsbrøvum,
3. vinningur og tap í sambandi við eftirgeving av skuld,
4. vinningsbýti hjá persónum, og
5. rentuinntøkur hjá persónum.

### Roknskaparviðurskifti o.a.

Roknskapartøl 2019 til 2023 sambært Búskaparskipan landsins fyri høvuðskontu 20.52.11.1 Kapitalvinningsskattur:

*t.kr.*

| Standardkontur | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|
| Skattur og avgjøld | -269.481 | -153.640 | -266.936 | -257.815 | -399.824 |
| Kravd gjøld, bøtur o.a. | 0 | 0 | 0 | -196 | -480 |
| Rentuinnt. og vinningsbýti | -3.350 | -3.639 | -4.233 | 10.092 | -959 |
| **Tilsamans** | **-272.831** | **-157.279** | **-271.169** | **-247.919** | **-401.263** |
| *Játtan* | *-295.000* | *-270.000* | *-205.000* | *-290.000* | *-350.000* |

Standardkonta 61, býtt á endamál:

*t.kr.*

| Endamál | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|
| Ógreinað | 1.242 | -171 | 225 | 152 | 557 |
| Vinningsbýtisskattur | -223.850 | -107.479 | -217.909 | -229.170 | -328.443 |
| Rentuskattur | -3.682 | -1.484 | -814 | -1.959 | -19.346 |
| Annar kap.vinningsskattur | -47.823 | -50.388 | -52.002 | -71.465 | -60.648 |
| Afturr. kapitalvinningssk. | 4.632 | 5.882 | 3.563 | 44.627 | 8.056 |
| **Tilsamans** | **-269.481** | **-153.640** | **-266.936** | **-257.815** | **-399.824** |

Kapitalvinningsskattainntøkurnar hjá landskassanum hava verið skiftandi frá ári til ár. Serliga eru tað inntøkurnar av vinningsbýtisskatti, sum sveiggja nógv.

Nakrir fíggjarstøðupostar 2019 til 2023:

*t.kr.*

| Standardroknskaparkontur | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|
| Tollkredittur, MVG o.a. | 33.449 | 29.687 | 22.313 | -12.507 | -3.336 |
| Avseting, virðisleys krøv | -587 | -467 | -6.659 | -7.120 | -7.626 |
| Onnur áogn | 1.426 | 218 | 184 | 631 | 14.201 |
| Skuld, greidd til útgjaldingar | -121 | 0 | 0 | -9 | 0 |

*Tollkredittur, MVG, lønhæddaravgjald v.m.*

Við árslok 2022 vísir fíggjarstøðan negativa áogn 12,5 mió.kr., og í 2023 vísti fíggjarstøðan 3,3 mió.kr. í negativari áogn. Sambært TAKS er orsøkin til negativu salduna, at persónar hava goldið skattin í árinum, men av tí at kapitalvinningsuppgerðin ikki skal latast inn fyrr enn árið eftir, verður einki krav skrásett fyrr enn tá.

*Avseting av virðisleysum krøvum*

Sambært TAKS verður sett av móti skuldarum eftir ítøkiligari meting av hvørjum einstøkum skuldara. Í 2021 stóðst hækkaða avsetingin av, at TAKS setti tilsamans 7,7 mió.kr. av móti skuld hjá tveimum persónum.

*Onnur áogn*

Áognin stavar frá rentuskatti, sum peningastovnar hava kravt inn vegna landskassan. Ein orsøk, til at upphæddin er hækkað munandi í 2023, er, at rentustøðið er hækkað í árinum.

*Roknskaparreglugerð*

Roknskaparreglugerðin hjá TAKS er dagførd í mars 2018. Reglugerðin er fyri alt virkisøkið hjá stovninum, eisini fyri játtanina “Kapitalvinningsskattur”.

Sambært roknskaparreglugerðini hevur stjórin býtt uppgávuna at góðkenna innanhýsis roknskapirnar út til deildarleiðararnar, sum hvønn mánað góðkenna kekklistar og mánaðarroknskapir fyri síni ábyrgdarøki. Stjórin góðkennir endaligu mánaðarroknskapirnar fyri øll ábyrgdarøki mótvegis Fíggjarmálaráðnum. Landsgrannskoðanin hevur kannað, um mánaðarroknskapirnir fyri 2023 eru góðkendir. Einki var at finnast at.

Landsgrannskoðanin mælti til at skjalfesta eftirlit í sambandi við góðkenningar av mánaðarroknskapum.

### Átøk og útgangandi eftirlit

Spurt, um stovnurin hevur gjørt almenn átøk at fáa fólk at geva upp kapitalvinning, svaraði TAKS, at átøk blivu gjørd fyri nøkrum árum síðani. Í vár hevur TAKS gjørt átak at minna fólk á at lesa postin, sum TAKS sendir í Mínboks. TAKS sendir skattauppgerðir v.m. og boð um at lata inn kapitalvinningssjálvuppgávur í Mínboks. TAKS hevur eisini við lýsingum mint fólk á at lata sjálvuppgávu inn innan 1. mai.

Sambært § 21, stk. 1, í kapitalvinningsskattalógini hava øll, sum eru fevnd av lógini, skyldu at geva TAKS øll viðkomandi skjøl, tá ið TAKS biður um tey. Í stk. 2 er ásett, at TAKS hevur heimild at koma á staðið at fremja eftirlit og útvega upplýsingar, fyri at fremja eftirlit.

TAKS hevur ikki gjørt nógv av at brúka heimildina at fara á staðið at gera eftirlit. TAKS vísti á, at roknskapir hjá feløgum eru grannskoðaðir, og harvið er kapitalinntøkan eisini grannskoðað.

### Innlating og skráseting av kapitalvinningssjálvuppgávum

Fyrst í mars fáa flestu persónar, feløg, v.fl. framskundaða kapitalvinningsuppgerð frá TAKS.

Nøkur hava skyldu at lata kapitalvinningssjálvuppgávu inn, t.e. um uppgerðin er skeiv, um okkurt manglar, ella tey ikki hava fingið framskundaða kapitalvinningsuppgerð. Seinasta freist hjá persónum og feløgum at lata TAKS sjálvuppgávur er ávikavist 1. mai og 30. juni árið eftir skattaárið. Kapitalvinningssjálvuppgávur skulu latast inn um Borgara- ella Vinnugluggan. Tó loyvir TAKS, at tær verða latnar inn á annan hátt eisini.

Í skrivligum mannagongdum, sum seinast eru dagførdar í 2023, greiðir TAKS frá málsviðgerðini av ymiskum viðurskiftum um kapitalvinningsskatt.

Er sjálvuppgávan í lagi, verður kapitalvinningsuppgerð gjørd. Um manglar ella feilir eru, kannar TAKS sjálvuppgávuna nærri, m.a. við at seta seg í samband við avvarðandi persón ella felag. Heldur TAKS, at sjálvuppgáva skal broytast, sendir stovnurin persóni ella felagi ætlanarskriv og seinni møgulig broytingarskriv.

Um sjálvuppgáva, sum skal latast inn, ikki verður latin inn, metir TAKS kapitalvinningin, gevur bókhaldinum boð um tað, og sekt verður ásett, sum verður roknað sjálvvirkandi.

### Kapitalvinningur

Niðanfyri eru ymisku sløgini av kapitalvinningi umrødd, umframt onnur viðurskifti, sum ávirka kapitalvinningsinntøkur.

#### *Vinningur/tap við avhending av partabrøvum*

Frá føroysku peningastovnunum fær TAKS hvørt ár sjálvvirkandi fráboðanir um partabrævagoymslur, sum eru skrásettar hjá teimum og um keyp og sølu av partabrøvum í árinum. Søla av partabrøvum kemur sjálvvirkandi á kapitalvinningssjálvuppgávurnar.

Persónar skulu sjálvir geva upp óskrásett partabrøv, og tað er upp til hvønn einstakan at geva rætt upp. TAKS fær ikki altíð boð um, at partabrøv eru seld. Sambært TAKS fáa tey viðhvørt kunning um partabrævasølur aðrar vegir, enn við sjálvuppgávum.

TAKS hevur samstørv við onnur lond um at fáa og lata upplýsingar, t.d. við Global Forum, OECD og norðurlendsk forum. Um føroyingar hava útvegað partabrøv í útlendskum feløgum, og ikki umvegis føroyskan peningastovn, fær TAKS javnan upplýsingar um kontuhavarar, salduvirði, vinningsbýti og rentur.

***Viðgerð av upplýsingunum um kapitalvinning er handlig.***

Upplýsingarnar krevja handliga viðgerð, og neyðugt er hjá TAKS at seta seg í samband við persónarnar um nærri upplýsingar um partabrøvini. Sambært TAKS noyðist stovnurin at raðfesta, nær tey viðgera upplýsingarnar, og hvussu nógv tey gera við tær. Fyrningarfreistin er trý ár.

TAKS kannar ikki allar upplýsingar um sølu av partabrøvum, stovnurin fær. Vavið er stórt, og TAKS raðfestir, hvat skal kannast nærri, m.a. tá ið talan er um størri upphæddir. TAKS hevur fult álit á upplýsingunum frá føroysku peningastovnunum. TAKS hevur kunnað um, at stovnurin ger ávís eftirlit at tryggja, at samlaðu upplýsingarnar frá peningastovnunum eru rættar.

#### *Fíggjarkrøv og skuld*

§§ 6-7 í lógini snúgva seg um fíggjarkrøv og skuld. Sambært TAKS snúgva reglurnar seg mest um lánsbrøv og íløguvirðisbrøv.

TAKS hevur víst á, at tað eru somu mannagongdir og eftirlit við fíggjarkrøvum og skuld, sum fyri vinning ella tap við avhending av partabrøvum.

#### *Keyps- og sølurættindi*

§ 8 í lógini hevur ásetingar um rætt til at keypa ella selja virðisbrøv ella fíggjarkrøv. Vinningur ella tap av keyps- og sølurættindum skulu roknast við í kapitalvinningssjálvuppgávuna tað árið, vinningurin ella tapið eru realiserað.

Tá ið rættur at keypa verður seldur, er altíð talan um vinning. TAKS fær ikki sjálvvirkandi fráboðanir um keyps- og sølurættindi, og persónar skulu sjálvir geva upp møguligan vinning ella tap. Tá ið skrásett virðisbrøv verða seld gjøgnum peningastovnar, fær TAKS fráboðan frá peningastovnunum. TAKS kann ikki tryggja, at alt verður givið upp, ella at tað, sum er givið upp, er rætt.

### *Vinningsbýti*

Sambært § 9 í lógini skal vinningsbýti frá føroyskum felag, ið verður útlutað til føroyskar persónar, útlendskar persónar ella til útlendsk feløg, roknast við í kapitalvinningssjálvuppgávuna.

Sambært § 15 hevur útlutandi felagið skyldu at afturhalda og avrokna vinningsbýtisskattin til TAKS innan 14 dagar, frá tí at avgerðin um útlutan er tikin. Hevur felag ikki goldið afturhildna skattin, tá ið freistin er úti, skulu 0,7% roknast í rentu fyri hvønn byrjaðan mánað.

Feløg og grunnar, sum eru fult skattskyldug í Føroyum, skulu ikki rinda vinningsbýtisskatt, men inntøka av vinningsbýti verður tikin við í vanligu skattauppgerðina.

Um útlendskir persónar ella útlendsk feløg eru fevnd av tvískattasáttmála við Føroyar, kunnu tey í ávísum førum søkja um at fáa vinningsbýtisskattin heilt ella partvís afturgoldnan frá TAKS.

Hjá persónum skal vinningsbýti frá útlendskum feløgum roknast sum kapitalvinningur. Um skattur er goldin av vinningsbýtinum í útlandinum, kann hann dragast frá í kapitalvinningsskattinum í Føroyum. Hjá føroyskum feløgum kann útlendskur vinningsbýtisskattur ikki mótroknast í føroyskum kapitalvinningsskatti.

Feløgini boða TAKS frá, innan 14 dagar eftir aðalfundarsamtykt, hvør hevur fingið vinningsbýti, og hvussu nógv. Í flestu førum rinda feløgini skattin av vinningsbýtinum til tíðina.

TAKS heldur, at stovnurin fær allan vinningsbýtisskattin inn, hóast tey ikki kanna allar roknskapirnar, sum koma inn, fyri at vita, um feløgini hava avsett til vinningsbýti. Feløgini hava grannskoðara, sum váttar roknskapirnar. Trupult er at snúgva sær undan at rinda. Um feløg ikki rinda skattin, kemur tað fyrr ella seinni fyri ein dag, m.a. tí tveir partar eru, tann sum rindar vinningsbýti, og tann sum tekur ímóti.

Tá ið føroyingar fáa vinningsbýti frá útlendskum feløgum, har partabrøvini ikki eru handlað um føroyskan peningastovn, fær TAKS upplýsingarnar umvegis samstarvið við OECD og onnur, sum lata upplýsingar millum lond.

TAKS skrásetir kapitalvinningssjálvuppgávur í skipanina hjá stovninum, og renta verður roknað sjálvvirkandi, um feløgini rinda skattin ov seint.

### *Rentuinntøkur*

Rentuinntøkur hjá persónum skulu roknast við í kapitalvinningssjálvuppgávuna og skattast við 35%. Rentur av eftirlønarskipanum skulu ikki takast við í uppgerðina.

Sambært §16 í lógini skulu peningastovnarnir, vegna kontuhavararnar, uppkrevja og avrokna rentuskattin. Peningastovnarnir skulu í seinasta lagi 15. í mánaðinum eftir rentutilskrivingina avrokna skattin til TAKS. Er skatturin ikki goldin, áðrenn freistin er úti, skal TAKS rokna 0,7% í rentu fyri hvønn byrjaðan mánað.

Hjá feløgum eru allar rentuinntøkur vanlig skattskyldug inntøka.

Skrásetingarnar í skipanum hjá TAKS gera av, um skattur verður roknaður av rentunum. Skipanirnar hjá peningastovnunum koyra upp móti skattaskipanini hjá TAKS, tá ið renta skal tilskrivast. Hjá teimum, ið skulu rinda rentuskatt av innlánskontum í peningastovnunum, verður rentuskatturin sjálvvirkandi drigin frá tilskrivaðu rentuinntøkunum. Á flestu innlánskontum eru rentutilskrivingar tvær ferðir um árið, ultimo juni og ultimo desember, men á onkrum kontum verða rentur tilskrivaðar oftari.

***Avrokning av rentuskatti er ikki altíð sambært reglunum.***

Sambært TAKS avrokna peningastovnarnir rentuskatt tvær ferðir um árið, sjálvt um renta kann verða tilskrivað oftari. Tann mannagongdin er ikki í samsvari við § 16 í lógini. Sambært TAKS hava tey gjørt soleiðis í nógv ár.

Landsstýrisfólkið hevur greitt frá, at sambært TAKS er enn mest vanligt, at renta verður tilskrivað 2 ferðir um árið – í juni og í desember. Tó eru tað einstakar peningastovnskontur, sum hava fleiri rentutilskrivingar. Sjálvt um tað ikki er í samsvari við lógina, so heldur TAKS ikki, at tað er ein stórur trupulleiki.

Sambært landsstýrisfólkinum fer Fíggjarmálaráðið at taka málið upp við TAKS, um til ber at fáa peningastovnarnar at avrokna rentuskattin, tá ið renta verður tilskrivað.

Tá ið skatturin er drigin frá rentuinntøkuni, skal peningastovnurin, innan 15. í mánaðinum eftir rentutilskrivingina, rinda TAKS peningin. TAKS fær ikki nakran lista ella aðra fráboðan frá peningastovnunum, sum kann sanna, at samlaði rentuskatturin, teir rinda TAKS, er rættur.

Seinast í árinum lata peningastovnarnir TAKS talgildar upplýsingar um øll, ið hava fingið rentuinntøkur, rindað rentuskatt í árinum, og hvussu nógv. Hjá persónum verða upplýsingarnar sjálvvirkandi settar á kapitalvinningssjálvuppgávuna.

Upplýsingar um tilskrivaðar rentur og rentuskatt síggjast í skattaskipanini. Sambært TAKS kanna tey við stakroyndum, um rentuskattur hjá persónum er rættur. Kanningarnar eru ikki skjalfestar.

Um peningastovnarnir rinda afturhildnan rentuskatt ov seint, roknar TAKS rentu handliga. Sambært TAKS rinda peningastovnarnir aloftast rættstundis, og TAKS sendir vanliga ikki rykkjara, um tað kemur fyri at onkur rindar ov seint.

Landsgrannskoðanin fekk yvirlit yvir inngjøldini frá peningastovnunum fyri 2022 og 2023. Yvirlitið vísti, at ein peningastovnur hevði rindað rentuskattin fyri seinna hálvár 2022 tveir dagar ov seint. Sambært yvirlitinum hevur TAKS skuldskrivað rentu av ov seint goldna rentuskattinum fyri seinna hálvár 2022.

Um føroyingar fáa rentuinntøkur frá útlendskum peningastovnum, fær TAKS upplýsingar um tær umvegis samstarvið við OECD og onnur, sum lata upplýsingar millum lond.

***Mælt til at umhugsa grannskoðaraváttan.***

Landsgrannskoðanin hevur áður mælt til at umhugsa eina skipan, har grannskoðarar hjá peningastovnunum árliga vátta, at tær uppgerðir, ið latnar eru TAKS viðvíkjandi rentuskatti, eru rættar. Tilmælið stendur við. Grannskoðarin kennir roknskaparmannagongdirnar og kann meta um, hvørt mannagongdir og bókhald eru hóskandi skipað við atliti at útrokningum og avrokningum av rentuskatti. Sambært TAKS hava tey ført fram ynski um grannskoðanarváttan fyri Fíggjarmálaráðnum, hvørja ferð broytingar eru gjørdar í viðkomandi lógum, men mugu sanna, at politisk undirtøka ikki er fyri tí.

Sambært landsstýrisfólkinum fer Fíggjarmálaráðið at taka málið upp við TAKS, hvussu ein skipan við grannskoðanarváttan kann fremjast viðvíkjandi uppgerðum av rentuskatti og øðrum avgjøldum.

*Frá- og tilflyting*
Ásetingar, um hvussu kapitalvinningur skal viðgerast, tá ið persónar skattliga flyta frá Føroyum ella til Føroyar, eru í §§ 2a-e í lógini.

TAKS hevur skrivligar mannagongdir um frá- og tilflyting.

TAKS fær fráboðanir frá Landsfólkayvirlitinum, tá ið persónar flyta. Viðgerðin av skattingini av fíggjarligu ognunum er handlig, t.v.s. at TAKS fær ikki sjálvvirkandi fráboðanir um fíggjarligar ognir hjá teimum persónunum. Tey, sum flyta, skulu sjálv boða TAKS frá, og gera tey ikki tað, fær TAKS vitan um flytingina, tá ið árliga álíkningin verður gjørd. TAKS heldur, at tað er trupult at tryggja, at stovnurin fær fráboðanir um virðisbrøv hjá øllum, sum flyta.

### Brúkararættindi
Yvirlit yvir, hvør hevur loyvi at broyta og/ella stovna í fakskipanini hjá TAKS, vísir, at 8 starvsfólk hava loyvi at gera broytingar í skipanini, harav 6 eisini kunnu stovna. Fýra av teimum sum hava loyvi at stovna, hava rættindi til allar stovningarskermmyndir, meðan tvey hava færri rættindi. Sambært TAKS kannar deildarstjórin árliga, at bert starvsfólk, sum hava brúk fyri tí, hava atgongd, og at tey bert hava neyðuga atgongd.

### Stakroyndir
Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað nakrar kapitalvinningsuppgerðir fyri 2022, 25 fyri persónar og 10 fyri feløg o.l.

Landsgrannskoðanin kann ikki sanna, at persónar og feløg o.l. hava givið alt upp, sum tey skulu, og tí heldur ikki um uppgerðirnar eru rættar. Vit hugdu um uppgerðirnar vóru rætt skrásettar í skipanini hjá TAKS, og um kapitalvinningsskatturin var rætt roknaður. Einki var at finnast at skrásetingunum og útrokningunum.

### Niðurstøða um eftirlit
Um upplýsingar, sum TAKS fær frá persónum, feløgum, peningastovnum og útlendskum samstarvsfeløgum, sum lata upplýsingar millum lond, ikki eru rættar ella eru ófullfíggjaðar, verður álíknaði skatturin ikki rættur. Landsgrannskoðanin skal tí vísa á, at tað er sera týdningarmikið, at munadygg og málrættað eftirlit eru við, at upplýsingarnar eru rættar.

TAKS hevur skrivligar mannagongdir, sum skulu tryggja dygdargóða og skipaða málsviðgerð, soleiðis at skatturin verður rættur, út frá teimum upplýsingum stovnurin hevur.

Føroysku peningastovnarnir lata upplýsingar um rentur og virðisbrøv, sum teir varða av, talgilt. TAKS fær onga váttan frá peningastovnunum um, at upplýsingarnar eru rættar, og ger einans avmarkaðar kanningar av upplýsingunum.

TAKS kannar ikki allar upplýsingarnar um sølu av virðisbrøvum, ið stovnurin fær. Sambært TAKS er vavið somikið stórt, at TAKS noyðist at raðfesta, hvat tey kanna nærri. TAKS hevur fult álit á upplýsingunum, tey fáa frá peningastovnunum.

Landsgrannskoðanin hevur staðfest, at við verandi mannagongdum, hevur TAKS avmarkaðar møguleikar at hava eftirlit við, at alt, sum ikki fer um føroyskar peningastovnar, og sum skal gevast upp til skattingar, verður givið upp. M.a. er sannlíkt, at nógvir virðisbrævahandlar fara fram um alnetið umvegis útlendskar veitarar, har vinningur eigur at verða givin upp til TAKS.

***Við verandi mannagongdum hevur TAKS avmarkaðar møguleikar til eftirlit.***

Samanumtikið heldur Landsgrannskoðanin, at spurningurin um at kapitalvinningsuppgerðir eru rættar, fyri tað mesta byggir á at TAKS hevur álit á, at upplýsingarnar, TAKS fær, eru rættar og fullfíggjaðar, heldur enn á verulig eftirlit.

Landsgrannskoðanin mælti til, at TAKS styrkir eftirlitið við kapitalvinningi, m.a. við at gera meira við at kanna upplýsingarnar frá peningastovnunum, og/ella at stovnurin fær váttanir frá grannskoðarunum hjá peningastovnunum um, at upplýsingarnar eru rættar.

Eisini mæltu vit til, at TAKS leggur størri orku í at viðgera upplýsingarnar, sum koma frá útlendsku samstarvsfeløgunum, soleiðis at kapitalvinningur av ognum í útlandinum, sum skal gevast upp í Føroyum, verður givin upp.

*Fíggjarmálaráðið er samt í, at neyðugt er at styrkja eftirlitið.*

Í august 2024 hevur landsstýrisfólkið greitt frá, at TAKS hevur víst á, at stovnurin hevur ávísa og avmarkaða orku til eftirlit, og eftirlitsorkan verður raðfest soleiðis, at hon verður brúkt best í breiðari merking. Kapitalvinningur er nakað, sum vindur upp á seg, og TAKS miðar tí eftir at styrkja eftirlitið eftir førimuni. Fíggjarmálaráðið er samt í, at neyðugt er at styrkja eftirlitið, og fer at umrøða við TAKS, í hvønn mun tað ber til, at eftirlit verða framd sjálvvirkin í skipanunum hjá TAKS.

## 3.9 FAS-skipanin (LG 2021/220-521)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av FAS-skipanini.

Feløg, ið eru skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskránni (FAS), kunnu fáa skattin av hýrunum hjá manningunum afturbornan frá TAKS. Reglurnar um afturbering eru í i § 63a, stk. 1, nr. 1 í skattalógini.

Skipanin hjá TAKS við ávísing av lønum um FAS V-tøl og afturbering av skatti er samanumtikið einføld og sjálvvirkandi. Tí er tað av avgerandi týdningi, at TAKS hevur viðkomandi innaneftirlit at forða fyri, at svik verður framt, og at feilir verða funnir og rættaðir.

Í Vinnuskránni eru skip ikki skrásett, men feløg, ið eiga skip. Eingin skipanarlig forðing er fyri, at feløg ávísa lønir til eitt og hvørt aktivt p-tal, tí kunnu tey ávísa lønir vegna skip, sum ikki eru í FAS, og soleiðis fáa afturbering av órøttum.

Feløg, ið høvdu útlendska manning, høvdu fingið bæði skattaafturbering og netto-hýruna til manningina flutta á egna peningastovnskontu. Eisini vísti tað seg, at útlendsk manning, ið var úr øðrum londum enn Norðurlondum, fekk hvørki kontuavrit ella skatta-uppgerðir sendandi frá TAKS.

Landsgrannskoðanin vísti á, at ávísur váði kundi vera í mannagongdini, og at tað hevði týdning, at eftirlitini hjá TAKS vóru virkin.

TAKS fær roknskapir frá feløgum, sum vísa virksemið og eru amboð, ið kundu tryggja rætta afturbering.

*TAKS raðfesti ikki eftirlit við FAS.*

Stakroyndir vístu m.a., at TAKS raðfesti ikki eftirlit við FAS. Eingin neyv skjalfesting var av framdu eftirlitunum, og tey vóru øll heldur ikki liðugt viðgjørd.

Samsvar var ikki millum skrásetingarnar í Føroya Altjóða Skipaskrá og skrásetingarnar hjá TAKS.

Tað er ikki vist, at samsvar átti at vera, men TAKS hevði kunnað samstarva við Føroya Altjóða Skráseting um FAS-skip og skrásetingar.

Nettoúrslitini á játtanini høvdu bæði verið undirskot og yvirskot, tó at talan var um 0 kr. í nettojáttanum, tí var tað av alstórum týdningi, at TAKS áhaldandi stemmaði av ímillum inntøkur og útreiðslur.

Í 2022 greiddi TAKS frá, at stovnurin saman við Elektron fór at taka dátur viðvíkjandi inn- og útgjøldum av FAS-skatti úr lønar- og skattaskipanini, og skuldu dáturnar verða grundarlag undir afturvendandi avstemman av FAS-skatti og afturbering.

Í 2023 kunnaði landsstýrisfólkið um, at arbeiðið við avstemmanini var komið væl áleiðis, men var ikki heilt liðugt fyri persónar, sum høvdu blandaðar inntøkur (FAS + aðrar inntøkur).

Í august 2024 hevur landsstýrisfólkið kunnað um, at sambært TAKS eru inn- og útgjøld av FAS-skatti tikin úr lønar- og skattaskipanini, men avstemmanin er ikki sjálvvirkandi. Feilir koma í, tá ið persónar hava blandaðar inntøkur og í sambandi við tíðar-avmarkingar, tá ið rættingar verða gjørdar. TAKS veit ikki nær stovnurin kemur á mál við hesum.

## 3.10 Onnur gjøld/avgjøld (LG 2023/220-522)

Landsgrannskoðanin hevur áður umrøtt spurningin, um at fáa eftirlønarveitarar og ferðaflutningsfeløg at útvega grannskoðanarváttan frá sínum grannskoðarum um, at avroknaðu gjøldini eru røtt. TAKS kunnaði um, at stovnurin hevði latið Fíggjarmála-ráðnum málið um grannskoðanarváttan at seta á løglista.

Í 2021 kunnaði landsstýrisfólkið um, at sambært TAKS var eftirlitsøkið styrkt við einum starvsfólki. Fíggjarmálaráðið ætlaði, at frameftir skuldi kunning um eftirlit verða fastur partur av skránni á regluligu stovnsfundunum við TAKS. Ongar broytingar vóru gjørdar í ávikavist rentutryggingarlógini, lógini um serligt avgjald um brenniolju, lógini um avgjald á framleiðslu og innflutningi, og ferðaavgjaldslógini.

Í 2022 vísti Fíggjarmálaráðið á, at tað var týdningarmikið, at eftirlitið gjørdi sannlíkt, at avroknaðu ferðaavgjøldini vóru røtt. TAKS hevði greitt frá, at stovnurin gjørdi stakroyndir eftir orku og raðfesting.

Í 2023 kunnaði landsstýrisfólkið um, at Fíggjarmálaráðið hevði gjørt av, at á stovnsfundum við TAKS skuldi verða kunnað um framd eftirlit, og um eftirlit, sum ætlanir eru um, undir hesum um raðfestingar og arbeiðsorku.

Í august 2024 hevur landsstýrisfólkið greitt frá, at Fíggjarmálaráðið fer at taka málið upp við TAKS, hvussu ein skipan við grannskoðanarváttan kann fremjast viðvíkjandi uppgerðum av avgjøldum.

# 4. Fiskivinnu- og samferðslumál

## 4.1 Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið (LG 2023/205-111)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum á høvuðskontu 5.11.1.05. Játtaðar eru 18 mió.kr. Játtanin er hækkað góðar 2 mió.kr. samanborið við 2022, m.a. tí at starvsfólkahópurin er lagaður til nýggja málsøkjabýtið.

**Roknskaparviðurskifti**
Sambært Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum eru tey í holt við at dagføra roknskaparreglugerðina, sum er frá 2021, og tey væntaðu at verða liðug við tað í februar 2024.

*Lønir*
Lønirnar eru størsti parturin av útreiðslunum. Í 2023 vóru 15,5 ársverk í ráðnum. Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað lønarmál. Einki var at finnast at.

Starvsfólkini í Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum kunnu eiga upp til 40 tímar á ella skylda upp til 30 tímar.

Tíðarskrásetingarnar vóru ikki í samsvari við reglurnar. Í januar 2024 vóru saldurnar fyri vanliga tíð frá 1.517 tímum til -47 tímar. Eitt fyrrverandi starvsfólk skyldar 249 tímar. Eitt starvsfólk eigur 17 serstakar frívikur á.

***Tíðarskrásetingar vóru ikki í samsvari við reglurnar.***

Í apríl 2024 hevur ráðið kunnað um, at tey gera avtalur um gamlar serstakar frívikur við telduposti í hvørjum einstøkum føri. Onkrir feilir vóru av skeivum stemplingum, av sjúku og tí at stemplingar verða nullstillaðar við feriuárslok. Nettosaldurnar halda seg innan fyri loyvdu mørkini.

*Ferðaútreiðslur uttanlands*
Ferðaútreiðslurnar uttanlands eru týðandi upphæddir í roknskapinum 2023, t.e. 1,4 mió.kr.

***Ferðaútreiðslur eru týðandi upphæddir í roknskapinum.***

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað nakrar ferðauppgerðir, um uppgerðirnar lúka treytirnar í rundskrivinum um tænastuferðir uttanlands, t.e. um ferðaloyvi eru fingin, áðrenn tænastuferðir byrja, um dagpeningur og útreiðslur til hotell eru innan ásettar upphæddir, og um drigið er frá fyri fríar máltíðir.

Umsitingin bíleggur sum oftast ferðaseðlar og gistingar. Sambært ráðnum eru fundir o.a. ikki altíð løgd til rættis frammanundan og ofta eru broytingar. Tí verða prísirnir hareftir.

Í øllum stakroyndunum vóru hotellkostnaðirnir hægri, enn ásett í rundskrivinum. Tænastustaðið kann í serligum føri góðkenna hægri útreiðslur til hotell, og tá skal frágreiðing um orsøkina leggjast við í ferðauppgerðina.

***Í øllum stakroyndum vóru prísir fyri gisting hægri enn ásett.***

Landsgrannskoðanini kundi ikki staðfesta, um fríar máltíðir áttu at verðið drignar frá dagpeninginum, tí eingin ferðaskrá, fundarskrá e.l. lógu við uppgerðunum. Landsgrannskoðanin mælti til halda almennu reglurnar.

*Keyp av vørum og tænastum v.m.*
Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið hevur í fleiri ár bókað starvsfólkaútreiðslur o.a. sum "Matur og drykkjuvørur"[7], tó at útreiðslurnar heldur eiga at verða bókaðar á "Umboðan o.t."

Í fleiri førum bar ikki til at staðfesta, hvat endamálið við útreiðslunum til umboðan var. Landsgrannskoðanin mælti til at fylgja reglunum í roknskaparreglugerðini um, at allar rokningar skulu greitt tilskila, hvørja vøru ella tænastu talan er um, ella í hvørjum sambandi útreiðsla er hildin.

Eisini mæltu vit til at bóka neyvari. Søla av innbúgvi, teldum o.l. eigur at verða bókað sum "Søla av brúktum skrivstovuútbúnaði" og ikki mótbókast á útreiðslukontur.

*Ognaryvirlit*
Sambært Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum dagføra tey ognaryvirlitið hvørt ár, og skráseta størri ognir, so sum stólar og fundarborð o.l.

*Peningastovnskonta og gjaldkort*
Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið hevur peningastovnskontu við gjaldkorti knýttum at. Ráðið brúkar netbanka til at gjalda rokningar og til at stemma av. Í apríl 2024 hevur ráðið kunnað um, at heimildarváttan nú er gjørd til gjaldkortið.

***Inngjøld eiga at fara á kontu hjá Gjaldstovuni, og rokningar skulu rindast um RVG.***

Landsgrannskoðanin vísti á, at inngjøld eiga at fara á kontu hjá Gjaldstovuni, og ikki sum higartil á egna peningastovnskontu. Eisini mæltu vit til, at Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið, alt tað ber til, rindar rokningar um Rokningaverkgongdarskipanina hjá Gjaldstovuni.

## 4.2 Umvæling av almennum bygningum (LG 2023/205-111)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin fyri Umvæling av almennum bygningum, høvuðskonta 5.11.1.56.

***Landsverk hevur mett, at eftirsleipið er 470 mió.kr.***

Játtanin verður brúkt til at umvæla, viðlíkahalda og bjálva landsins bygningar. Landsverk samstarvar við stjórnarráðini um, hvussu játtanin skal brúkast. Eisini verður í viðmerkingunum til fíggjarlógina víst á, at Landsverk áður hevur mett, at eftirsleipið við at umvæla og viðlíkahalda landsins bygningar er umleið 470 mió.kr.

### Roknskapar- og játtanarviðurskifti o.a.
Roknskapartøl 2018 til 2023:

*t.kr.*

| Heiti | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Ymsar rakstrarútreiðslur | -4.571 | -4.439 | -3.955 | -3.433 | -3.593 | -3.756 |
| Bygging og løguframleiðsla | 21.045 | 20.925 | 21.428 | 22.657 | 22.578 | 31.581 |
| Innanh. flyt. ml. alm. stovn.útr. | 4.566 | 4.432 | 3.955 | 3.418 | 3.645 | 3.767 |
| Innanh. flyt. ml. alm. stovn. innt. | 0 | 0 | 0 | 0 | -20 | -11 |
| **Tilsamans** | **21.040** | **20.918** | **21.428** | **22.642** | **22.610** | **31.581** |
| *Játtan* | *21.000* | *20.925* | *21.075* | *22.000* | *22.000* | *32.000* |

[7] Kontan "matur og drykkjuvørur" er ætlað til útreiðslur til mat til sjúklingar á sjúkrahúsunum, proviant o.a.

Í 2023 eru játtaðar 32 mió.kr. á tveimum undirkontum. Á undirkontu 10 “Umvæling av almennum bygningum” eru játtaðar 27 mió.kr. Á undirkontu 11 “Grønar orkuloysnir í almennum bygningum” eru játtaðar 5 mió.kr. og 4,4 mió.kr. eru brúktar.

Landsverk gjørdi í februar 2022 leiðreglur fyri markamót og viðlíkahaldsbýti millum Landsverk og landsins stovnar. Endamálið við leiðreglunum er at geva ráðum og stovnum yvirlit yvir, hvørjar skyldur Landsverk og stovnar hava í sambandi við bygningar hjá landinum.

Roknskapurin fyri “Umvæling av almennum bygningum” er býttur í verkætlanir við verkætlanarnummari fyri hvønn bygning, sum er umvældur.

Í 2023 eru 27,2 mió.kr. brúktar til umvælingar av almennum bygningum býttar á 88 verkætlanir.

## Stakroyndir

Landsgrannskoðanin valdi at gjøgnumganga 11 verkætlanir, har vit kannaðu, um reglurnar um at bjóða uppgávurnar út eru hildnar, um kostnaðurin svarar til tilboð ella avtalur, um landið eigur bygningarnar, ið eru umvældir, og um bókingarnar eru rættar.

### *Eirargarður 14 og 16*

Í 2023 eru 2,1 mió.kr. brúktar til umvælingar av Eirargarði 14 og 16.

Í 2022 bjóðaði Landsverk málaraarbeiðið út sum undirhondsarbeiðstøku ímillum tveir arbeiðstakarar. Tilboðið var 490 t.kr. fyri at mála allan bygningin, men av tí, at komið var so langt út á árið, bleiv bara helvtin gjørd í 2022, og restin í 2023.

***Arbeiðstøkur vóru ikki bodnar út.***

Aðrar arbeiðstøkur vóru, sum ikki vóru bodnar út, og heldur ikki var biðið um tilboð frá fleiri veitarum. Landsverk hevur greitt frá, at arbeiðstakararnir vóru á Eirargarði 14 og 16 í sambandi við aðrar verkætlanir, sum vóru bodnar út. Landsverk metti tað vera mest skynsamt at biðja arbeiðstakararnar, ið vóru á staðnum, fyri at fáa avtalaða arbeiðið avgreitt í verandi ári.

Spurt, um Landsverk hevur brúkt møguleikan fyri undantaki fyri útbjóðing, svaraði stovnurin, við at vísa á, at undantøk eru fyri løgu- og byggiverkætlanir, har lisitatións-lógin er galdandi.

Umvælingar av Eirargarði eru eisini goldnar av játtanini á høvuðskontu 12.21.6.02 “Bústovnar o.a.” Í tíðarskeiðnum 2019 til 2023 eru 10,9 mió.kr. brúktar av tí høvuðs-kontuni til at umvæla Eirargarð 14 og 16.

### *Mentamálaráðið høvuðsbygningur*

Í 2023 eru um 1,8 mió.kr. brúktar til Mentamálaráðið, høvuðsbygningin. Landsverk fekk tilboð frá tveimum veitarum, um at skifta 18 vindeygu í 2022. Landsverk tók av lægra tilboðnum, sum var 286 t.kr.

Í 2023 skuldi sama slag av arbeiði gerast, og 18 vindeygu skuldu skiftast. Veitarin gav tilboð á sama prís sum árið fyri, tó við 15 t.kr. í príshækking. Landsverk bjóðaði ikki arbeiðið út, men spurdi eisini ein annan veitara, men hann hevði ikki hug at bjóða.

Landsverk bjóðaði ikki uppgávuna at montera úthurðar og vindeygu út, men tók av tilboði frá sama veitara, sum hevði skift vindeyguni. Sambært Landsverki var orsøkin m.a., at arbeiðstakarin var á staðnum, og at Landsverk helt prísin vera rímiligan.

Sambært Landsverki, var arbeiðið at skifta tekjuna bjóðað út, og tvey boð komu. Landsverk tók av lægra tilboðnum, sum var 515 t.kr.

*Klaksvíkar Sjúkrahús, høvuðsbygningur*
Í 2023 eru um 2 mió.kr. brúktar til Klaksvíkar Sjúkrahús, høvuðsbygningin.

Arbeiðið at gera nýggja ventilatións- og køliskipan til rannsóknarøkið og hølini hjá læknaskrivarunum var boðið út sum undirhondsútboð ímillum tveir veitarar. Lægra boðið var 1,3 mió.kr. Í 2022 og 2023 eru 1,5 mió.kr. goldnar fyritøkuni.

Landsverk hevur kunnað um, at uppgávurnar, sum onnur fyritøka hevur gjørt eru eykaveitingar, ið eru knýttar at arbeiðstøkuni at gera nýggja ventilatións- og køliskipan, og eru ikki bodnar út. Avtalur eru gjørdar á byggifundum, so hvørt sum umstøðurnar fyri at gera arbeiðini hava verið viðkomandi. Fyritøkan hevur málað loftskassar, gjørt eyka loftsarmatur fyri at fáa gott ljós v.m. fyri 699 t.kr.

*Fiskivinnuskúlin í Vestmanna*
Til Fiskivinnuskúlan í Vestmanna eru 109 t.kr. brúktar. Á einari rokning fyri 52 t.kr. stóð: viðvíkjandi "hugskotskatalog" til sambýlið við Sundsvegin 22. Landsverk hevur greitt frá, at talan var um feilbóking, sum nú er rættað.

*Skúlin á Trøðni*
Í 2023 eru 858 t.kr. brúktar til Skúlan á Trøðni. Sambært Landsverki er arbeiðið at leggja nýtt reinsiverk við skúlan á Trøðni boðið út sum undirhondsboð millum tveir arbeiðstakarar. Sáttmálaupphæddin var 632 t.kr.

***Bjóðaði ikki arbeiðið út.***

Landsverk bjóðaði ikki arbeiðið at veita vindeygu út, tí sami veitari hevði framleitt og veitt øll vindeyguni seinastu árini, og tey vildu hava vindeygu í sama sniði og skapi.

*Sambýlið á Blikagøtu 75*
Í 2023 eru 39 t.kr. brúktar til Sambýlið á Blikagøtu 75. Sambært tingbókini eru ognarheimildir bert tinglýstar til Runavíkar kommunu. Landsverk hevur kunnað um, at sambýlið er landsogn og stendur á leigugrund. Eingin leigusáttmáli er.

*Søvn Landsins, Brekkutún 6*
Í 2023 er 1,1 mió.kr. brúkt til Søvn Landsins, Brekkutún 6. Sambært Landsverki var høvuðsarbeiðstøkan fyri 480 t.kr. boðin út, meðan timbur- og framsíðuarbeiðið vóru ikki boðin út, av tí at talan var um átrokandi arbeiði vegna vanda fyri vatnskaða.

*Sjálvsognarstovnar*
Frá 2019 til 2023 eru 206 t.kr. brúktar til Sjóndepilin og 902 t.kr. til Heilbrigdi.

Sambært leiðreglunum hjá Landsverki, hevur Landsverk ikki skyldu at halda ognir, hvørs eigaraviðurskifti ikki eru tinglýst ogn landsins, t.d. ognir hjá sjálvsognarstovnum.

***Sjálvsognarstovnar eru ikki longur partur av viðlíkahalds-skylduni.***

Landsverk hevur greitt frá, at fyrr vóru flest allir sjálvsognarstovnar á viðlíkahalds-játtanini hjá Landsverki. Sjálvsognarstovnar eru ikki partur av viðlíkahaldsskylduni longur, uttan so, at ávísar orðingar eru í viðtøkunum. Frá 2021 hevur Sjóndepilin ikki verið partur av viðlíkahaldsskylduni. Heilbrigdi er framvegis partur av viðlíkahalds-skylduni, tí bygningurin, sambært viðtøkunum, er at meta sum landsogn, um virksemið á stovninum skuldi hildið uppat.

*BASK*[8]
Í 2023 eru um 2,2 mió.kr. brúktar til umvælingar av bygninginum á Klaksvíksvegi 78.

Landsverk hevur kunnað um, at arbeiðstøkan at skifta vindeygu, klædningsplátur og eina hurð, var boðin út. Sambært Landsverki er talan um tilboðsfyrispurningar til tveir veitarar. Sáttmálaupphæddin var 2,07 mió.kr. Arbeiðið var liðugt um ársskiftið.

---
[8] Bygningur til almennar stovnar í Klaksvík.

*Økisdepil fyri sinnisveik í Suðuroy*
Í 2023 eru 565 t.kr. brúktar til Økisdepilin fyri sinnisveik í Suðuroy. Sambært Landsverki bjóðaðu tey arbeiðið at umvæla hurðar og vindeygu í Eiðisgarði og Hamragarði út sum undirhondsútboð í 2022. Fyritøkan, sum vann útboðið, gjørdi eisini meirveitingar í 2023.

Eigaraviðurskiftini viðvíkjandi Hamragarði og Eiðisgarði eru ikki endaliga avklárað. Landsverk hevur víst á, at málið millum landið og kommunurnar í sunnaru helvt av Suðuroynni gongur aftur til 2007. Formliga er Hamragarður ikki avhendaður til kommunurnar, men tær hava brúkt bygningin síðani 2011.

***Málið um Hamragarð gongur aftur til 2007, men enn eru ognar-viðurskiftini ikki avgreidd.***

Long tilgongd hevur verið við sýni og meting og gerðarættarmáli, har úrskurður kom á sumri 2022. Síðani tá hevur verið arbeitt, bæði innanhýsis í landsfyrisitingini og yvir fyri kommununum, viðvíkjandi endaligari avtalu um byggimálið og viðvíkjandi skipan av økinum v.m. Kommunurnar hava 11. januar 2024 fingið uppskot um avtalu umframt uppskot um brúksavtalu viðvíkjandi niðastu hædd á Hamragarði.

Landsverk hevur tikið sær av tí mest neyðturviliga viðlíkahaldinum á Hamragarði. Ætlandi verður viðlíkahaldsbýtið ímillum landið og kommunurnar avgreitt frameftir í avtaluni, ið er ávegis.

*Fróðskaparsetur Føroya*
Í 2023 eru 351 t.kr. brúktar til Fróðskaparsetur Føroya. 236 t.kr. eru goldnar fyri asfalt-arbeiði. Landsverk hevur kunnað um, at arbeiðið at asfaltera økið, var ikki boðið út, orsakað av, at veitarin hevði tíð at gera arbeiðið. Frá royndum av útboði í 2021 um at asfaltera økið við Vinnuháskúlan við Krákugjógv kendi Landsverk prísirnar.

*Sambýlið í Torfinsgøtu*
Í 2023 eru 24,4 t.kr. goldnar fyri plantur og planting. Sambært leiðreglunum hjá Landsverki er røkt av grønum økjum ábyrgd hjá stovnunum sjálvum.

Landsverk hevur kunnað um, at umfatandi skaðar vóru gjørdir á verandi urtagarð og útiøki í sambandi við størri dreningsarbeiði runt bygningin í Torfinsgøtu 41, og at tað tí var neyðugt at endurskapa urtagarðin.

## Samanumtikið
Reglurnar um at bjóða arbeiðsuppgávur út ímillum fleiri arbeiðstakarar eru ikki altíð fylgdar. Heldur ikki eru ásetingarnar um, at alment útboð skal verða nýtt sum keypsháttur fyri keyp oman fyri 500 t.kr. u/MVG, hildnar.

***Reglurnar um útboð eru ikki altíð fylgdar.***

Í § 7 í roknskaparkunngerðini er m.a. ásett, at roknskaparskrásetingin skal leggjast soleiðis til rættis, at tað í hóskandi mun kann gerast innanvirkis roknskapur við upplýsingum um, hvussu útreiðslur, inntøkur og kostnaðir eru liðað út á endamál, stað, framleiðslu, virksemi o.t. Innanvirkis roknskapurin skal geva grundarlag fyri at lýsa, hvat einstaka virksemið og ymsu veitingarnar kosta ella væntandi koma at kosta, og eisini hvørji viðurskifti eru avgerandi fyri, hvussu tilfeingið verður nýtt.

Landsverk hevur liðað roknskapin út á verkætlanir, og tað átti at havt við sær, at neyvt ber til at fylgja við, hvussu nógv umvæling ella umbygging hevur kostað. Í sambandi við grannskoðanina hevur Landsgrannskoðanin tó staðfest, at útreiðslur til umvælingar og viðlíkahald eru bæði hildnar á játtanini til umvæling av almennum bygningum og á t.d. løgujáttanini til Bústovnar o.a.

Landsgrannskoðanin skal tí vísa á, at tað gruggar landsroknskapin, tá ið útreiðslur viðvíkjandi somu verkætlan, verða spjaddar á ymiskar játtanir.

***Tað gruggar roknskapin, tá ið útreiðslur til eina verkætlan eru á ymiskum játtanum.***

Í juni 2020 var Fíggjarmálaráðið samt við Landsgrannskoðanina, at tað gruggar landsroknskapin, at útreiðslur viðvíkjandi einari og somu verkætlan eru spjaddar á

ymiskar játtanir. Fíggjarmálaráðið hevði tikið tílík mál upp við Landsverk, og semja var um, at útreiðslur sum meginregla ikki skulu haldast á fleiri játtanum. Ráðið fór at meta um, hvussu reglur kunnu ásetast, tá ið tað snýr seg um viðlíkahald og játtanir.

Í verkætlanunum, sum Landsgrannskoðanin hevur kannað, eru fleiri dømir um, at upphæddir eru bókaðar á skeivar verkætlanir. Fyri at roknskapir skulu vera rættir og nýtiligir, er avgerandi at alt, sum hoyrir til eina verkætlan og einans tað, verður bókað á verkætlanina.

Í august 2024 hevur Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið kunnað um, at reglur eru ikki gjørdar um viðlíkahald og játtanir. Ráðið er samt við Landsgrannskoðanina, at útreiðslur til ávísa verkætlan eiga, sum meginregla at verða bókaðar á einstøku verkætlanina, fyri at fáa rætta mynd av kostnaðinum.

Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið samskiftir við Landsverk um málið. Í sambandi við at roknskaparreglugerðin hjá Landsverki verður dagførd, fer Landsverk at hava onkrar leiðreglur við um bókingar á verkætlanir.

## 4.3 VØRN, Veðurstova Føroya (LG 2023/205-311)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Veðurstovuni á høvuðskontu 5.31.1.07.

Uppgávurnar hjá Veðurstovuni eru at menna føroyska veðurtænastu, gera veðurforsagnir, kunna um veðrið og standa fyri viðkomandi veðurmátingum kring landið. Í 2021 fór Veðurstovan undir at víðka virksemið. Stovnurin hevur yvirtikið partar av uppgávum frá DMI, og ætlanin er at yvirtaka fleiri uppgávur.

### Roknskaparviðurskifti o.a.

Roknskapartøl 2019 til 2023:

*t.kr.*

| Heiti | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 670 | 670 | 1.547 | 2.937 | 3.762 |
| Keyp av vørum og tænastum | 3.866 | 3.287 | 3.675 | 3.224 | 3.353 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 61 | 488 | 1.897 | 1.591 | 1.518 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 13 | 26 | 18 | 55 | 86 |
| Søla av vørum og tænastum | 0 | -127 | -240 | 0 | 0 |
| Innanh. flyt. millum almennar stovn. útr. | 113 | 170 | 127 | 126 | 113 |
| Innanh. flyt. millum almennar stovn. innt. | 0 | 0 | 0 | -13 | 0 |
| **Tilsamans** | **4.724** | **4.510** | **7.014** | **7.921** | **8.831** |
| *Játtan* | *4.953* | *4.986* | *7.186* | *7.986* | *8.812* |

Roknskaparreglugerðin er í góðsku- og trygdarhandbókini hjá Vørn. Í 2021 góðkendi Fiskimálaráðið ásetingarnar um roknskaparreglur í góðsku- og trygdarhandbókini. Reglugerðin er ikki dagførd síðani 2021.

*Lønir*

Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum, um setanirnar eru sambært almenna setanarpolitikkinum, og um lønirnar eru sambært galdandi sáttmálum. Einki var at finnast at.

Arbeiðstíðin verður skrásett í Totalview. Starvsfólk kunnu eiga í mesta lagi 30 tímar á, men ongar reglur eru fyri, um tey kunnu skylda arbeiðstíð. Landsgrannskoðanin mælti til at gera skrivligar reglur fyri flekstíð.

Við árslok 2023 áttu nøkur starvsfólk ímillum 66 og 170 tímar á. Veðurstovan hevur ikki tíðaravmarkað tímasaldur, ið vóru yvir 40 tímar. Landsgrannskoðanin mælti til at halda reglurnar um tíðaravmarkingar av lønum.

*Keyp av vørum og tænastuveitingum*

Stjórin góðkennir størri keyp, og stovnurin biður um tilboð frá fleiri veitarum, tá ið keypt verður fyri meira enn 50 t.kr., um tað er gjørligt.

Landsgrannskoðanin tók nakrar stakroyndir av rokningum. Veðurstovan hevur afturvendandi keyp frá tveimum størri veitarum, uttan at biðja um tilboð frá øðrum.

Í 2023 hevur Veðurstovan goldið 353 t.kr. fyri radiosondur og ein sondusendara. Keypið var ikki bjóðað út. Veðurstovan sendi fyrispurning til Keypsportalin um undantak, sum bleiv játtað. Veðurstovan kannaði prísir fyri sondusendara hjá tveimum veitarum í Evropa.

Veðurstovan hevur fingið ballónbingju og sondur í 2022 fyri tilsamans 1,45 mió.kr. Stovnurin keypti bingjuna í 2021 og gjørdi avtalu við veitaran um at rinda í avdráttum í trý ár, tí játtan var eftir við ársenda í 2021.

Landsgrannskoðanin vísti á, at lán ella borgan, ið skuldbinda Løgting, landsstýri ella stovnar undir landinum, kunnu ikki verða tikin ella veitt uttan við heimild í lóg. Í lógini um landsins játtanarskipan eru neyvar ásetingar um, hvussu farast skal fram í sambandi við játtanir. Høvuðsreglan er, at stovnar hava játtan fyri eitt fíggjarár í senn og kunnu ikki binda landið í komandi fíggjarárum. Tó kunnu vanligar avtalur gerast, t.d. starvsfólkasetanir ella avmarkað leigumál, sum ganga longur enn verandi fíggjarár.

Landsgrannskoðanin heldur, at avtala um at gjalda í avdráttum yvir 3 ár kann ikki gerast uttan heimild í løgtingslóg. Tá ið avtalan var gjørd, hevði leiðslan fingið tilmæli frá øðrum veðurstovum, um at afturhalda part av gjaldinum til alt riggaði, sum tað skuldi.

Stovnurin hevur bókað 745 t.kr. av keypsprísinum í 2021, 352 t.kr. í 2022 og 353 t.kr. í 2023.

Roknskapar- og játtanartøl 2021 til 2023:

*t.kr.*

| **Veðurstova Føroya** | **2021** | **2022** | **2023** |
|---|---|---|---|
| Smb. landsroknskapinum | 7.014 | 7.921 | 8.831 |
| *Játtan* | *7.186* | *7.986* | *8.812* |
| **Meir/minninýtsla** | **172** | **65** | **-19** |

***Útreiðslur, skrásettar á skeivt ár, gera, at roknskapurin er ikki rættur.***

Útreiðslurnar til ballónbingjuna áttu sambært almennu roknskaparreglunum at verið bókaðar í 2022. Skeivu bókingarnar gera, at roknskapirnir eru ikki rættir.

Hevði keypið av ballónbingjuni verið útreiðsluført í 2022, sóu roknskapar- og játtanartølini fyri 2021 til 2023 soleiðis út:

*t.kr.*

| **Veðurstova Føroya** | **2021** | **2022** | **2023** |
|---|---|---|---|
| Rættaði roknskapartøl | 6.269 | 9.019 | 8.478 |
| *Játtan* | *7.186* | *7.986* | *8.812* |
| **Meir/minninýtsla** | **917** | **-1.033** | **334** |

Landsgrannskoðanin vísti á grundleggjandi meginregluna í almenna roknskaparhaldinum um, at útreiðslur skulu verða tiknar við í tí roknskaparári, tær viðvíkja.

Landsstýrisfólkið hevur greitt frá, at Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið hevur mint Veðurstovuna á, at keyp, sum fer fram yvir fleiri ár, ikki er í samsvari við ásetingarnar í stýrisskipanarlógini um keyp.

Veðurstovan tekur tað til eftirtektar í arbeiðinum frameftir, so tað ikki endurtekur seg.

*Ferðaútreiðslur*
Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum nakrar ferðauppgerðir.

Landsgrannskoðanin mælti til, at skrá fyri fundir e.a. verður lagt við sum skjalprógv fyri útgoldnan dagpening, soleiðis at til ber at sanna, at útgjøldini fyri dagpengar eru røtt. Eisini mæltu vit til at halda reglurnar um mest loyvdu upphædd fyri gisting.

*Húsaleiga*
Veðurstovan hevur høvuðsdeild við Hoyvíksvegin í Havn og leigar høli frá Sjónámi í Klaksvík til deildina har. Í 2022 og 2023 hevur stovnurin goldið Sjónámi 7 t.kr. um mánaðin. Leigusáttmálin er ikki avgreiddur, men sambært leiðsluni liggur málið hjá Landsverki og er við at koma upp á pláss.

*Fíggjarstøða*
Veðurstovan hevur skrásett skrivstovubygningin á Hoyvíksvegnum í ognarskránni. Upprunavirðið var 2 mió.kr. og restvirðið er 0.

Veðurstovan hevur kostnaðarmikla útgerð/útbúnað, m.a. ballónbingjuna, servarar og mátitól, sum sambært § 21 í roknskaparkunngerðini áttu at verið skrásett í ognarskránni.

Stovnurin hevur ikki yvirlit yvir smærri ognir, eitt nú telefonir, innbúgv og teldur. Landsgrannskoðanin vísti á, at umráðandi er at hava eitt rætt og dagført yvirlit yvir ognir, sum stovnurin eigur.

Veðurstovan umsitur eisini útgerð, sum ein útlendsk veðurstøð eigur.

Sambært roknskaparkunngerðini mugu landsstovnar ikki fyrisita ogn og skuld hjá øðrum enn hjá landinum, uttan so at heimild er fyri tí, ella avtala er gjørd um tað við stjórnarráð stovnsins ella javnsettan myndugleika. Tílíkar ognir og skuld verða ikki taldar við í ogn og skuld hjá stovninum, men skulu skrásetast samsvarandi Kontuskipan Landsins. Leiðarin hevði sett seg í samband við stjórnarráðið, fyri at fáa heimildina í rættlag.

Landsstýrisfólkið hevur kunnað um, at stjórnarráðið hevur givið munnligt loyvi til at Veðurstova Føroya í ítøkiliga málinum kann umsita útgerðina, sum er partur av granskingarsamstarvi við veðurmyndugleikarnar í Noregi. Formlig áheitan verður send til Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið um loyvi at umsita ognina hjá norska samstarvsfelaganum.

## 4.4 Tyrlutænastan (LG 2023/205-311)

Landsgrannskoðanin hevur hugt at sáttmálanum um Tyrlutænastuna, eftir hagtølum frá Vørn og Strandfaraskipum landsins, og kannað, um útgjøldini eru sambært sáttmálanum. Játtanirnar eru á høvuðskontu 5.31.1.08 “Tyrlutænasta” sum er til tilbúgving, og 5.38.2.04 “Tyrlutænastan”, sum er til at røkja tyrluflúgving millum oyggjarnar.

*Sáttmáli*
Í 2015 gjørdu Fiskimálaráðið og Vinnumálaráðið sáttmála við Atlantic Airways um tyrlutænastu. Sáttmálin er galdandi frá 1. januar 2016 til 31. desember 2025. MRCC umsitur sáttmálan vegna Fiskimálaráðið, og Strandfaraskip Landsins umsita sáttmálan vegna Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið (fyrr Fíggjarmálaráðið).

Í sáttmálanum er avtalað, at Atlantic Airways hevur tvær tyrlur tøkar, sum hava støð í Føroyum, og at tær støðugt eru í operativum standi. Tænasturnar snúgva seg um bygdaflúgving, leiting og bjarging, sjúkraflutning, venjing og aðra flúgving fyri Strandfaraskip Landsins. Til leiting, bjarging og tilbúgving eru avtalaðir 8.760 tímar við tveimum tyrlum, sum hava støð í Føroyum.

***Avtalan heldur fram eitt ár í senn.***

Avtalað er, at sáttmálin heldur fram óbroyttur í eitt ár í senn, og partarnir skulu boða frá broytingum í minsta lagi 9 mánaðir fyri sáttmálaenda.

Árliga samsýningin til Atlantic Airways er 44,4 mió.kr. u/MVG, harav 30,1 mió.kr. eru fyri tilbúgvingina og 14,3 mió.kr. fyri tyrlutænastuna (oyggjaflúgving).

Roknskapar- og játtanartøl:

*t.kr.*

| Høvuðskonta | Heiti | R 2023 | *J 2023* |
|---|---|---|---|
| 5.31.1.08 | Keyp av vørum og tænastum | 30.215 | *30.100* |
| 5.38.2.04 | Keyp av vørum og tænastum | 14.355 | *14.300* |
| | **Tilsamans** | **44.570** | ***44.400*** |

Í sáttmálanum er avtalað, at Atlantic Airways hevur rætt til samsýning fyri hækking av prísum á brennievni, og at Fiskimálaráðið ber útreiðslur til eykakostnað fyri brennievni.

Í 2023 fingu MRCC og Strandferðslan krøv um at rinda 170 t.kr. fyri eykakostnað av brennievni. Parturin hjá MRCC var 115 t.kr., og parturin hjá Strandferðsluni var 55 t.kr. Upphæddirnar eru bókaðar sum eykaútreiðslur fyri brennievni í roknskapunum hjá stovnunum.

Sambært ársuppgerð frá Atlantic Airways hava samlaðu flúgvitímarnir verið 824,49 í 2022 og 765,27 í 2023.

Tímanýtsla hjá ávikavist Strandfaraskipum Landsins og Fiskimálaráðnum hevur verið:

| | **2023** | | **2022** | |
|---|---|---|---|---|
| | **SSL** | **Fisk** | **SSL** | **Fisk** |
| Januar | 33:56 | 14:38 | 33:34 | 7:22 |
| Februar | 33:50 | 5:19 | 32:19 | 5:37 |
| Mars | 39:56 | 7:48 | 38:20 | 11:21 |
| Apríl | 39:07 | 15:56 | 40:05 | 17:06 |
| Mai | 34:54 | 7:26 | 37:38 | 20:45 |
| Juni | 48:21 | 12:08 | 41:33 | 23:47 |
| Juli | 50:25 | 19:39 | 50:57 | 19:16 |
| August | 42:46 | 17:27 | 55:28 | 33:20 |
| September | 39:03 | 15:30 | 38:52 | 19:36 |
| Oktober | 46:04 | 21:38 | 44:54 | 15:49 |
| November | 37:24 | 12:58 | 41:26 | 13:51 |
| Desember | 39:43 | 10:30 | 36:41 | 12:21 |
| **Tilsamans** | **485:29** | **160:57** | **491:47** | **200:11** |

Sambært sáttmálanum eru 200 blokktímar[9] roknaðir til leiting, bjarging, venjing og sjúkraflutning. 500 tímar eru til bygdaflúgving og afturat tí upp til 50 eykatímar uttan kostnað.

Í sáttmálanum er ásett, at um so er, at skiftandi útreiðslurnar til tyrluflúgvingina hava verið lægri enn 10,5 mió.kr., skal keyparin góðskrivast fyri 50% av upphæddini, sum skiftandi útreiðslurnar hava verið lægri. Sambært Búskaparskipan landsins er tað

[9] Blokktímar eru flogtíð í minuttum frá tí, at rotorurin byrjar at snara, til hann stendur stillur aftur.

ongantíð komið fyri. Veitarin hevur rætt til allar inntøkur frá øðrum enn sáttmálapørtunum í sambandi við veitingarnar við tyrlunum.

*44 útkall í 2023.*

Í 2023 hava verið tilsamans 44 útkall; harav sjey til skip, eitt til oljudálking, og restin hevur verið til sjúkraflutning o.a.

*Viðlíkahald o.a.*

Sambært stk. 6 í sáttmálanum skulu tvær tyrlur av slagnum AW139, sum hava støð í Føroyum og eru útgjørdar til SAR[10], vera tøkar til leiting og bjarging. Somu tyrlur skulu eisini kunna reka ferðafólkaflúgving sambært EASA[11]-krøvum og krøvum frá flogferðslumyndugleika.

Viðlíkahaldsreglurnar fyri tyrlurnar seta krøv um eftirlit. Eftirlitini eru sambært tímum, døgum og árum, har tyrlurnar eru settar, meðan arbeiðið verður gjørt. Størru eftirlitini kunnu taka upp í tríggjar mánaðir, og tá er bert ein tyrla tøk. Leiðslan greiddi frá, at Atlantic Airways raðfestir altíð SAR, og at tað hevur hent seg, at ferðafólk eru sett av, tí tyrlan í skundi mátti brúkast til SAR.

Í fylgiskjali 3 í sáttmálanum er yvirlit yvir skipaðu viðlíkahaldini, sum vísir, at tað eru ímillum 9 og 40 dagar um árið, at onnur tyrlan ikki kann vera tøk, harumframt koma ófyrireikaðar hendingar, sum krevja eftirlit.

Spurd, hvat tey gera, um okkurt er við tyrluni, sum er í flúgving, meðan hin er til eftirlit, svaraði leiðslan á Vørn, at í tílíkum føri er bert ein tyrla. Vørn kunnaði um, at danska sjóverjan er onkuntíð til reiðar at traðka til, men tað er ikki so einfalt, tí tað tekur langa tíð at gera tyrluna hjá sjóverjuni klára til flúgving. Tað er tí ikki nøkur loysn, sum kann brúkast í einari skjótari vending.

Vørn vísti eisini á, at tað eru nógvar umstøður, sum kunnu gera tyrlubjargingina ógjørliga, eitt nú veður og fjarstøða. Tá eru tað skip á leiðunum og tilbúgvingin í grannalondunum, sum traðka til.

Tølini hjá Vørn vísa, at eingin tyrla var tøk í 13 tímar. Óreglusemi sambært sáttmálanum byrjar við 2,25% svarandi til umleið 197 tímar. Eisini vísti Vørn á, at um veðrið var til vildar, kundu skjóttgangandi bjargingarbátar brúkast og kundu sendast langt, um okkurt var áfatt.

*Ikki havt regluligar fundir.*

*Regluligir fundir*

Sáttmálin ásetir, at samstarvsbólkur skal setast, sum skal hava regluligar fundir ella hava fundir eftir tørvi. Sambært Vørn hevur ikki verið neyðugt at havt fleiri fundir um árið hesi seinnu árini, og tí hevur bert verið ein árligur fundur í 2023 og 2024.

Landsgrannskoðanin hevur samanborið avtalaða tímatalið í sáttmálanum við flúgvingina sambært frágreiðingini frá Atlantic Airways. Einki var at finnast at viðvíkjandi flogtímunum.

## 4.5 Hvalagransking og hvalateljing (LG 2023/205-341)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað játtanina til Hvalagransking og hvalateljing v.m., sum Havstovan umsitur. Játtanin er á høvuðskontu 5.34.1.05.

[10] Search and Rescue.
[11] European Union Aviation Safety Agency.

## Roknskaparviðurskifti v.m.

Roknskapar- og játtanartøl 2019 til 2023:

*t.kr.*

| Heiti | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 1.127 | 661 | 1.079 | 1.143 | 1.261 |
| Keyp vørur, tæn., útb. og leiga | 134 | 656 | 281 | 151 | 144 |
| Vanligar flytingarinntøkur | 0 | 0 | 0 | -60 | -110 |
| Innanh. flyt. m. alm. stovn. | 49 | 54 | 22 | 53 | 46 |
| **Tilsamans** | **1.310** | **1.372** | **1.383** | **1.287** | **1.341** |
| *Játtan* | *1.306* | *1.338* | *1.361* | *1.261* | *1.303* |

*Lønir*

Í 2023 eru 1.758 t.kr. goldnar í lønum, men sambært roknskapinum eru útreiðslurnar 1.261 t.kr. Hvalagranskingin hevur mótbókað 464 t.kr., ið útlendskur stovnur hevur rindað fyri løn o.a. hjá PhD-lesandi.

*Tíðaravmarkan av keypi av útbúnaði*

Stovnurin hevur bókað bilkeyp fyri 280 t.kr. í 2020, tó at bilurin er skrásettur í mars 2021. Landsgrannskoðanin vísti á, at upphæddin átti at verið tíðaravmarkað sambært roknskaparreglunum.

*Inntøkur*

Í 2022 sendi stovnurin rokning fyri 235 t.kr. til SEV fyri kópamerkingar frá 2020 til 2022. Upphæddin er ikki inntøkuførd, men bókað í fíggjarstøðuna sum "ikki inntøkuførdur granskingarstyrkur".

Landsgrannskoðanin vísti á, at tað er ikki í samsvari við roknskaparreglurnar, tá ið útreiðslur og inntøkur, sum stava frá vørum og tænastuveitingum, ikki eru skrásettar, tá ið tær eru latnar. Havstovan var ikki samd við Landsgrannskoðanina, og vísti á, at avtala var gjørd við SEV, at rokning skuldi ikki sendast fyri hvørt ár, men heldur tá ið verkætlanin var um at vera liðug.

*Fremmant fíggjað virksemi*

31. desember 2022 var saldan á "Ikki inntøkuført – granskingarstyrkur, gávur o.t." í fíggjarstøðuni -58 t.kr. Upphæddin stavar frá, at Miljøstyrelsen í 2001 hevur goldið 715 t.kr. til: Fortsatte undersøgelser af grindehvalernes vandring i Nordatlanten.

Landsgrannskoðanin hevur víst á, at fyri at kunna bóka stuðul, gávur e.a. í fíggjarstøðuni, skal stovnurin hava loyvi frá Fíggjarmálaráðnum at hava stuðulsfíggjað virksemi. Hvalagranskingin hevur ikki játtan til stuðulsfíggjað virksemi.

31. desember 2023 standa -178 t.kr. sum ikki inntøkuførdur granskingarstyrkur, eftir at Havstovan hevur bókað 235 t.kr. frá SEV í fíggjarstøðuna. Í mars 2024 eru 110 t.kr. fluttar til raksturin.

Havstovan hevur kunnað um, at upphæddin er eitt slag av buffara, tá ið peningur vantar til raksturin, og at peningurin er brúktur til merking og arbeiði av havsúgdjórum, sum hann var játtaður til.

Landsgrannskoðanin vísti á, at merking av havsúgdjórum á innaru leiðum er partur av stovnsrakstrinum. Havstovan tekur undir við tí sjónarmiðinum, men vísir samstundis á, at tað er nógv meira umfatandi og útreiðslukrevjandi, enn játtan er til, tá ið hugsað verður um útgerð, merking, arbeiðstíð og tøkni.

*Samanumtikið*

Landsgrannskoðanin kann ikki sanna, at roknskapirnir fyri Hvalagranskingina eru rættir, tá ið avtala um endurrindan av lønum ikki er skrásett, inntøka ikki er skrásett rættstundis, og keyp av flutningstóli ikki er tíðaravmarkað.

***Ber ikki til at sanna, at roknskapirnir eru rættir.***

Um almennur stovnur skal kunna hava stuðulsfíggjað virksemi, skal landsstýrisfólkið í fíggjarmálum geva loyvi, greitt skal verða frá tí í viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið, og virksemið setast á serstaka undirkontu í fíggjarlógini og í landsroknskapinum.

Landsstýrisfólkið tekur undir við Landsgrannskoðanini, at játtan krevst til stuðulsfíggjað virksemi, fyri at kunna fáa endurrindan av løn til Phd-lesandi, at inntøkurnar skulu skrásetast, so hvørt sum arbeiðið er gjørt, og at keyp skulu skrásetast, tá ið vøran verður latin.

Sambært landsstýrisfólkinum ætlaði Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið at taka viðmerkingarnar frá Landsgrannskoðanini upp við Havstovuna og samskifta við Fíggjarmálaráðið um broytingar í játtanini, so møguleiki verður fyri stuðulsfíggjaðum virksemi á kontuni.

## 4.6 VØRN, Fiskiveiðieftirlitið (LG 2023/205-342)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Fiskiveiðieftirlitinum. Játtanin er á høvuðskontu 5.34.2.01.

Stovnurin virkar eftir Ll. nr. 152/2019 "um sjófeingi", har m.a. er ásett, at Fiskiveiðieftirlitið hevur dagliga eftirlitið við føroyskum fiskiførum, sum royna undir Føroyum ella aðrastaðni, og við útlendskum fiskiførum, ið royna undir Føroyum.

Fiskiveiðieftirlitið hevur m.a. eftirlit við veittum fiskiloyvum, avhendaðum og brúktum fiskidøgum og kvotum og veiðidagbókaskipanum. Harafturat hevur stovnurin eftirlit við upp- og umskiping av frystum fiski og avreiðingum hjá føroyskum skipum í útlendskum havnum.

### Roknskaparviðurskifti o.a.

Roknskapartøl 2019 til 2023:

*t.kr.*

| Heiti | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---:|---:|---:|---:|---:|
| Lønir v.m. | 27.465 | 29.020 | 29.674 | 29.908 | 30.895 |
| Keyp av vørum og tænastum | 17.456 | 18.903 | 19.981 | 23.418 | 26.763 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 2.559 | 6.351 | 775 | 950 | 4.145 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 1.153 | 1.271 | 1.275 | 1.149 | 1.323 |
| Avskr. + Ymsar rakstrarútr. | 0 | 299 | -8 | 0 | 0 |
| Søla av vørum og tænastum | -2.380 | -5.419 | -3.133 | -2.534 | -5.308 |
| Skattur og avgj.+gjøld, bøtur o.a. | -1.117 | -147 | -1.237 | 0 | -6 |
| Innanh. flyt. ml. alm. stovn. | 0 | 0 | -86 | 0 | 0 |
| **Tilsamans** | **45.135** | **50.276** | **47.242** | **52.891** | **57.812** |
| *Játtan* | *46.058* | *51.427* | *47.298* | *53.522* | *59.051* |

Roknskaparreglugerðin er í góðsku- og trygdarhandbókini hjá stovninum, sum eisini fatar um roknskaparmannagongdir. Í 2021 góðkendi stjórnarráðið ásetingarnar um roknskaparreglugerð.

*Lønir*

Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum um lønirnar eru rættar, og at setanirnar eru farnar rætt fram sambært almenna setanarpolitikkinum. Einki var at finnast at.

Fiskiveiðieftirlitið brúkar Totalview til at skráseta arbeiðstíðirnar. Starvsfólk kunnu í mesta lagi eiga 30 tímar á, men ongar reglur eru sambært leiðsluni fyri, hvussu nógv tey kunnu skylda. Landsgrannskoðanin mælti til at gera skrivligar reglur fyri flekstíð.

Stovnurin hevur tíðaravmarkað væntaðar lønarhækkingar, men ikki pluss- og minustímar, tó at nøkur starvsfólk skyldaðu yvir 30 tímar og nøkur áttu meira enn 40 tímar á. Landsgrannskoðanin mælti til at halda reglurnar um tíðaravmarking av lønum.

*Ferðaútreiðslur*
Landsgrannskoðanin mælti til at leggja viðkomandi upplýsingar, sum t.d. tilmelding, fundarskrá ella frágreiðing um endamál, saman við ferðauppgerðum, soleiðis at til ber at sanna, at útgoldin dagpeningur er rættur.

*Húsaleiga*
Í 2023 var húsaleigan tilsamans 1,2 mió.kr. Fiskiveiðieftirlitið hevur tveir leigusáttmálar við P/f Eystaravág um hølini Yviri við Strond og goymsluhøllina á Hjalla. Afturat tí hevur stovnurin leigusáttmála við Runarvíkar kommunu um høli á Havnarskrivstovuni í Runavík og ein leigusáttmála við Sp/f Sandskip um skrivstovu í Fuglafirði. Vit hava samanborið leigusáttmálarnar við leiguútreiðslurnar. Einki var at finnast at.

*Keyp av vørum og tænastum*
Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað nøkur keyp. Fiskiveiðieftirlitið hevur samstarvssáttmála við veitara um rakstur av skipanum o.a. Sáttmálin er ikki endurnýggjaður síðani 2007. Fiskiveiðieftirlitið hevur ikki boðið uppgávurnar út ella biðið um tilboð frá fleiri veitarum.

***Keyp eru ikki boðin út.***

Fiskiveiðieftirlitið hevur goldið fyritøku 259 t.kr. fyri reingerð. Sambært leiðsluni bað stovnurin um tilboð frá fleiri og tók av lægsta tilboðnum. Fiskiveiðieftirlitið hevur ikki boðið keyp av kamera til Brimil fyri 1,5 mió.kr. út á Keypsportalinum og heldur ikki biðið um undantak.

Landsgrannskoðanin vísti á reglurnar um keyp av vørum og tænastum, um at bjóða keyp út, og at sáttmálar skulu vara í mesta lagi 3 ár. Fiskiveiðieftirlitið kunnaði um, at tey fara at endurskoða sáttmálan um KT-tænastur. Eisini vístu tey á, at størri keyp skulu góðkennast av stjóranum, og at stovnurin biður um tilboð frá tveimum ella fleiri veitarum, tá ið tað er gjørligt.

Landsstýrisfólkið hevur greitt frá, at Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið tekur undir við, at Fiskiveiðieftirlitið fylgir rundskrivinum “um keyp av vørum og tænastum” og eisini biður um undantøk frá hesum í samsvari við rundskrivið, um víkjast skal frá reglunum. Sama ger seg galdandi fyri burturbeining av KT-útbúnaði.

*Konteringar og tíðaravmarkingar av keypi*
Viðlíkahaldsútreiðslurnar av Brimli og Tjaldrinum eru bókaðar á standardkontu 14, sum sambært Kontuskipan landsins er til at skráseta keyp, sum fara til nýtslu ella framleiðslu í einum 1-árs skeiði. Landsgrannskoðanin vísti á, at viðlíkahaldsútreiðslurnar helst áttu at verið hildnar á standardkontu 16, sum “umvælingar- og viðlíkahaldsútreiðslur av flutningsbúnaði”. Fiskiveiðieftirlitið tekur undir við Landsgrannskoðanini.

Fiskiveiðieftirlitið hevur goldið 740 t.kr. fyri eina stýriskipan. Sambært rokningini frá 29. desember 2023 er talan um eitt ávegisgjald á 60%. Spurt, um stovnurin hevði fingið veitingina innan 15. februar 2024, svaraði Fiskiveiðieftirlitið, at eftir ætlan skuldi arbeiðið gerast í mai 2024, men av ávísum orsøkum bleiv tað broytt til at verða frá juli til oktober 2024.

Vísandi til § 13, stk. 2, í roknskaparkunngerðini átti upphæddin at verið tíðaravmarkað, og tær 740 t.kr. áttu ikki at verið útreiðsluførdar í 2023.

*Inntøkur*
Í góðsku- og trygdarhandbókini hevur Fiskiveiðieftirlitið ásett prísir fyri sleip av skipum, sigling við næmingum, veiðidagbøkur, umbýti av fiskidøgum, fiskiloyvir, árligt gjald frá Tryggingarfelag Føroyar, fiskatilfeingi og fyri sektir.

Søla av vørum og tænastum 2019 til 2023:

*t.kr.*

| Heiti | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|
| Vørusøla til privat | -680 | -3.719 | -1.433 | -835 | -3.608 |
| Onnur søla av tænastum, leigu, privat | -1.700 | -1.700 | -1.700 | -1.700 | -1.700 |
| **Tilsamans** | **-2.380** | **-5.419** | **-3.133** | **-2.534** | **-5.308** |

Inntøkurnar 2023 eru munandi hægri enn árini frammanundan, tí Fiskiveiðieftirlitið hevur gjørt ymisk arbeiðir fyri P/f NET fyri tilsamans 2,8 mió.kr.

Í góðsku- og trygdarhandbókini er eingin frágreiðing um prísáseting o.a. fyri uppgávurnar, sum t.d. eru gjørdar fyri P/f NET. Fiskiveiðieftirlitið tekur undir við tilmælinum frá Landsgrannskoðanini um at taka reglurnar við, tá ið roknskaparreglugerðin verður dagførd.

## Fíggjarstøða

*Ognarskráin*
Brimil og Tjaldrið eru skrásett í ognarskránni við 112 mió.kr. í upprunavirði, og restvirðið er 6,6 mió.kr. Eisini hevur Fiskiveiðieftirlitið skrásett 9 bilar.

Fiskiveiðieftirlitið hevur ikki yvirlit yvir útbúnað, telefonir, innbúgv, teldur o.a. Størri keyp til vaktarskipini verða heldur ikki førd í yvirlit ella ognarskránni. Landsgrannskoðanin mælti til, at stovnurin hevur yvirlit yvir ognir.

*Peningastovnskonta og gjaldkort*
Fiskiveiðieftirlitið hevur peningastovnskontu við gjaldkorti knýttum at. Bókhaldarin ger upp og stemmar kontuna av eina ferð um mánaðin. Kontan verður brúkt til inntøkur fyri avgreiðslu av fiskiloyvum og váttanir um avhending av fiskidøgum og kvotum. Harumframt eru útgjøld til m.a. keyp yvir alnetið, endurgjald fyri útlegg av bláubók, televarpi o.a.

Sambært roknskaparkunngerðini skulu allar útgjaldingar fara fram um Búskaparskipan landsins. Kontur, ið stovnar hava fingið loyvi at hava, kunnu bert verða nýttar til ásetingarnar sambært § 3, stk. 6 í kunngerðini.

***Mæltu til at avgreiða inntøkur og útreiðslur um BSL.***

Peningastovnskontan verður eisini brúkt til annað enn útreiðslur, sum ikki kunnu gjaldast um Búskaparskipan landsins, herundir tænastur frá Akstovuni og keyp frá handlum. Landsgrannskoðanin mælti til, at allar inntøkur og útreiðslur, sum kunnu, verða avgreiddar um Búskaparskipan landsins. Fiskiveiðieftirlitið tók tilmælið til eftirtektar.

Spurd, um heimildarváttan til gjaldkortið, svaraði leiðslan, at tey vóru vís í, at tey høvdu loyvi frá Gjaldstovuni, men av tí at long tíð er gingin, síðani loyvið var givið, funnu tey tað ikki. Landsgrannskoðanin mælti til at fylgja reglunum um gjaldkort. Fiskiveiðieftirlitið tók tilmælið til eftirtektar.

## KT-viðurskifti

Vørn hevur skipað eitt KT-trygdarráð við umboðum frá MRCC, Veðurstovuni og Fiskiveiðieftirlitinum. Trygdarráðið hevur ábyrgd av KT-rakstri, KT-trygd og KT-keypi.

*KT-skoðan*
Fiskiveiðieftirlitið brúkar Búskaparskipan landsins, men nýtir eisini aðrar fakskipanir, sum liggja uttan fyri KT-landsins, eitt nú Høgguslokkin og Torvuna[12]. Formula er veitari av flestu skipanunum. Stovnurin hevur skrivligu avtalu við Formula frá 2007 viðvíkjandi uppseting, rakstri av KT og support.

Fiskiveiðieftirlitið hevur gjørt avtalu við grannskoðanarvirki um skoðan. Seinasta skoðanin var gjørd í 2022. Samanumtikið var niðurstøðan av skoðanini, at trygdarviðurskiftini hjá Vørn ikki til fulnar samsvara við krøvini í trygdarrundskrivinum, men at Vørn í ávísan mun fylgir krøvunum. Grannskoðanin staðfesti 12 veikleikar, harav 3 eru raðfestir høgt, 8 miðal og 1 lágt.

Fiskiveiðieftirlitið greiddi frá, at tey arbeiddu við tilmælunum, og at stovnurin skal grannskoðast av nýggjum í juni 2024.

*Onnur KT-viðurskifti*
Í rundskrivinum "um keyp av vørum og tænastum" er m.a. ásett, at á teimum økjum rammusáttmálar o.l. eru galdandi, skulu allir stovnar fylgja teimum. Gjaldstovan hevur gjørt rammusáttmála við veitara um keyp av telduútgerð. Landins stovnar eru tí bundnir til bert at keypa telduútgerð, sum er fevnd av sáttmálanum.

***Keypa telduútgerð uttan um rammusáttmála.***

Í 2023 hevur Fiskiveiðieftirlitið keypt telduútgerð frá øðrum veitara. Fiskiveiðieftirlitið vísti á, at tá ið tey keypa frá veitaranum, sum Gjaldstovan hevur gjørt avtalu við, skulu tey sjálvi heinta vøruna og seta hana upp, og at tey hava eyka útreiðslur av tí.

KT-útgerð, sum Fiskiveiðieftirlitið skiftir út, verður burturbeind sambært rundskrivinum frá Fíggjarmálaráðnum um burturbeining av KT-útbúnaði.

## 4.7 Havrannsóknarskip (LG 2023/205-343)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað játtanina til Havrannsóknarskip, ið er á høvuðskontu 5.34.3.04.

**Roknskaparviðurskifti**
Havstovan hevur dagført roknskaparreglugerðina í 2023, men hon er ikki góðkend.

Roknskapartøl fyri Magnus Heinason og Jákup Sverra:

*t.kr.*

| Heiti | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|
| Magnus Heinason | 11.982 | 11.367 | 1.489 | 0 | 0 |
| Jákup Sverri | 0 | 0 | 16.566 | 21.821 | 21.550 |
| **Tilsamans** | **11.982** | **11.367** | **18.055** | **21.821** | **21.550** |

Roknskapar- og játtanartøl, Jákup Sverri:

*t.kr.*

| Heiti | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 9.881 | 10.420 | 11.074 |
| Keyp av vørum og tænastum | 7.210 | 11.879 | 10.020 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 502 | 1.584 | 263 |
| Leiga, viðlíkah. og skattur+ymiskt | 941 | 1.599 | 6.220 |
| Søla av vørum og tænastum | -1.968 | -3.660 | -6.027 |
| **Tilsamans** | **16.566** | **21.821** | **21.550** |
| *Játtan* | *16.556* | *21.895* | *21.661* |

[12] KT-skipan hjá Vørn til at avgreiða fiskiloyvir.

## Lønir

***Skjøl til lønarmál mangla.***

Landsgrannskoðanin fekk ikki kannað lønarmál, tí Havstovan hevur ikki umsóknir, prógv o.a., tí bar ikki til at sanna, at lønirnar eru rættar.

Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið tekur undir við tilmælinum um at goyma viðkomandi skjøl, soleiðis at lønarmál kunnu grannskoðast.

*Tíðarskráseting*

Manningarnar sigla eftir vaktætlan í 161,5 dagar um árið. Manningin arbeiðir 12 tímar um samdøgrið, tá ið tey eru umborð. Skipið siglir frá februar til november, og restina av tíðini kann manningin avspáka. Tá ið árið er av, ger Havstovan upp, um fólk hava siglt teir dagarnar, tey skulu. Starvsfólkini á landi brúka klokkuskipan til at halda skil á flekstímum og feriu.

Havstovan heldur seg hava nøktandi skráseting av arbeiðstíð, og at lønarútgjaldingarnar eru rættar. Tímaskrásetingin verður ikki nýtt til lønarútgjaldingar, men bert til skráseting av arbeiðstíð, og leiðslan spyr hvørt ár starvsfólk, um tey vilja hava serstøku frívikuna goldna út ella ikki. Feriudagarnir verða endaliga skrásettir í tímaskrásetingarskipanina í apríl, soleiðis at arbeiddir tímar, feria og serstaka frívikan eru dagførd.

Í mars 2024 hevur Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið boðað frá, at ráðið hevur onga orsøk til at halda, at lønarútgjaldingarnar hjá manningini ikki eru rættar, hóast eingin av skipanunum, sum víst verður á í rundskrivinum, verða brúktar. Ráðið tekur undir við, at Havstovan skal fylgja § 5, stk. 4 í roknskaparkunngerðini, og ætlar at heita á stovnin um at brúka tíðarskrásetingarskipan.

Havrannsóknarskipið hevur rindað 1,2 mió.kr. í siglingarpengum til starvsfólk á Havstovuni og Hvalagranskingini. Siglingarpengar eru ásettir eftir sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Starvsfelagið.

Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum, um siglingarpengarnir vóru rættir. Í einari stakroynd var feilur, sum Havstovan eftirsíðan hevur rættað.

## Keyp

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað keyp, herundir um almennu reglurnar um útbjóðing eru hildnar.

*Proviantur*

Í 2023 hevur játtanin til havrannsóknarskipið goldið 947 t.kr. fyri proviant, sum nærum bert er keyptur frá sama veitara.

Sambært Havstovuni keypir havrannsóknarskipið mest frá sama veitara. Tey biðja ikki um tilboð ella um prísir frá fleiri, tí ofta skal keypast her og nú, og ikki ber til at kanna prísir hvørja viku.

*Keyp av útgerð o.ø.*

***Hava ikki bjóðað keyp út, ella biðið um prís frá fleiri.***

Havstovan hevur ikki bjóðað keyp av útgerð o.ø. til havrannsóknarskipið út á Keypsportalinum, heldur ikki hava tey biðið um prís frá fleiri.

Í 2022 hevur skipið keypt innbúgv, maskinur og útgerð fyri 833 t.kr. Sambært Havstovuni kundu tey ikki bjóða keypini út, tí talan var um serútgerð. KT-útgerðin fyri 394 t.kr. hevði ikki kunnað verið boðin út, tí talan er um serútgerð.

Sambært Havstovuni er keyp av vørum og útgerð til skip ikki tað sama, sum at keypa til skrivstovu á landi. Tá ið stovnurin valdi veitarar í sambandi við byggingina av Jákup Sverra, er skipið bundið av at keypa eykaútgerð o.a. frá sama veitara, um útgerðin skal brúkast saman við verandi útgerð.

Landsgrannskoðanin vísti á reglurnar um útbjóðing sambært rundskrivinum “um keyp av vørum og tænastum”, og til § 7 í lógini um landsins játtanarskipan, har ásett er, at neyðug búskaparatlit skulu verða tikin, tá ið veitt játtan verður nýtt.

Í mars 2024 hevur landsstýrisfólkið víst á, at Havstovan skal fylgja ásetingunum í rundskrivinum um keyp av vørum og tænastum. Stjórnarráðið hevur onga orsøk til at halda, at Havstovan ikki sýnir búskaparlig atlit sambært rundskrivinum.

### Inntøkur

Inntøkurnar eru í høvuðsheitum frá avreiðingum av fiski, sum var 2,3 mió.kr., og afturat tí eru 3,2 mió.kr. frá GEUS[13]. Inntøkurnar eru goldnar á peningastovnskontuna hjá havrannsóknarskipinum, og í fleiri førum bókaðar eftir kontuavriti frá peningastovni uttan annað skjalprógv.

Landsgrannskoðanin vísti á, at skjalprógv skulu leggjast við øllum bókingum í Búskaparskipan landsins, og mælti til eisini at skjalprógva inntøkurnar.

### Fíggjarstøða

*Peningastovnskonta og gjaldkort v.m.*

Síðani 2009 hevur Havstovan havt peningastovnskontu, ið er knýtt at játtanini til Havrannsóknarskipið. Kontan hevur verið brúkt til at taka ímóti inntøkum, bæði avreiðingum og inntøkum frá stuðulslatarum, umframt til at rinda útreiðslur.

Allar útreiðslur skulu sambært almennu reglunum rindast um Búskaparskipan landsins. Landsgrannskoðanin mælti til at halda reglurnar.

Í desember 2023 hevur Havstovan kunnað um, at tey hava biðið keyparar og stuðulslatarar um at flyta øll útgjøld á peningastovnskontu hjá Gjaldstovuni. Hereftir skal gjaldkortið einans brúkast til smærri útgjøld.

*Skip*

Havrannsóknarskipið, Jákup Sverri, var formliga handað Fiskimálaráðnum í desember 2020. Í desember 2023 er skipið skrásett í ognarskránni í Búskaparskipan landsins.

*Bilar o.a.*

Sambært ognarskránni eigur Havstovan 4 bilar, sum eru keyptir í 2020 og 2021. Bilarnir eru goldnir av ymiskum játtanum, ein av játtanini til Hvalagransking, ein av rakstrarjáttanina hjá Magnusi Heinason, og tveir bilar fyri tilsamans 561 t.kr. eru goldnir av løgujáttanini “Nýtt havrannsóknarskip”.

***Bilar goldnir av løgujáttanini til havrannsóknarskip.***

Havstovan hevur greitt frá, at ein sokallaður “buffari” var á løgujáttanini, sum kundi vera til útgerð, amboð v.m. Havstovan raðfesti bilar, tí hinir vóru útslitnir, og tí at bilar eru stórur partur av havrannsóknarskipinum. Millum túrarnar skal nógv útgerð flytast til og frá skipinum, og somuleiðis er tørvur á at flyta fólk í sambandi við viðlíkahald ella fráferð og komu. Sambært Havstovuni var onnur útgerð eisini keypt.

Landsgrannskoðanin heldur, at tær 561 t.kr. eru at rokna sum rakstrarútreiðslur og ikki sum partur av skipabyggingini.

Í mars 2024 hevur Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið kunnað um, at ráðið tekur undir við Landsgrannskoðanini um, at bókaðu bilarnir á løgujáttanini hjá Jákup Sverra hoyra heima í rakstrinum.

*Aðrar ognir*

Havstovan hevur ikki havt yvirlit yvir smærri ognir ella ognir, sum eru partur av skipinum.

[13] Geological Survey of Denmark and Greenland.

Havstovan hevur nú gjørt yvirlit yvir tól og útgerð, ið eru keypt frá 2021 til 2023 til havrannsóknarskipið. Virðið á einstøku ognunum er ímillum 55 t.kr. og 393 t.kr. Samlaða virðið er 2,1 mió.kr.

Landsgrannskoðanin hevur víst á, at ognir og útbúnaður, hvørs keypsvirði er oman fyri 50 t.kr. skulu skrásetast í Búskaparskipan landsins, um ikki stovnur hevur fingið loyvi til at nýta egna búskaparskipan.

Í mars 2024 hevur Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið kunnað um, at ognir yvir 50 t.kr. verða skrásettar í Búskaparskipan Landsins.

### Sølan av Magnusi Heinason

*Magnus Heinason bleiv seldur fyri 1,1 mió.kr.*

Í fíggjarlógini 2021 játtaði Løgtingið 3,5 mió.kr. á høvuðskontu 5.34.3.02 "Søla av havrannsóknarskipi". Skipið bleiv selt í oktober 2021 fyri 1.104 t.kr.

Sambært frágreiðing um frávik ímillum játtan og nýtslu 2021 greiddi landsstýrisfólkið frá, at minniinntøkan var 2,6 mió.kr., tí hóast Magnus Heinason stóð til sølu í 6 mánaðir, eydnaðist ikki skipsmeklaranum at fáa meira fyri skipið.

Søluupphæddin er flutt til peningastovnskontuna hjá Havrannsóknarskipinum.

Inntøkurnar eru bókaðar á tvær høvuðskontur:

*t.kr.*

| Høvuðskontur | Heiti | Innt. | Útr. | Tils. |
|---|---|---|---|---|
| 5.34.3.02 | Søla av havrannsóknarskipi, inntøkur | -907 | 0 | -907 |
| 5.34.3.04 | Havrannsóknarskip, rakstrarjáttan | -197 | 197 | 0 |
| **Tilsamans** | | **-1.104** | **197** | **-907** |

Útreiðslur í sambandi við søluna eru bókaðar á høvuðskontu 5.34.3.04 "Havrannsóknarskip, rakstrarjáttan", og har eru eisini 197 t.kr. bókaðar sum inntøka av søluni.

*Einans nettoupphædd bókað fyri sølu av skipinum.*

Landsgrannskoðanin vísti á, at tað gruggar roknskapin at bóka nettoupphædd fyri sølu av skipinum.

Í mars 2024 hevur Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið greitt frá, at ráðið tekur undir við Landsgrannskoðanini, at tað gruggar roknskapin við einans at bóka nettoupphæddina, men at stovnurin ístaðin skuldi havt greinaðan roknskap fyri søluna. Landsstýrisfólkið ætlaði at taka atfinningarnar hjá Landsgrannskoðanini upp við leiðsluna á Havstovuni og biðja um, at tillagingar verða gjørdar.

## 4.8 Havstovan, verkætlanir (LG 2023/205-343)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað játtanina til stuðulsfíggjað virksemi hjá Havstovuni. Játtanin er á høvuðskontu 5.34.3.01, undirkontu 45, og fevnir um verkætlanir, sum verða fíggjaðar av Fiskivinnuroyndum o.ø. granskingargrunnum.

### Reglur

Landsstýrisfólkið í fíggjarmálum kann loyva stuðulsfíggjaðum virksemi við ávísum treytum.

Í K. nr. 84/2011 "um rakstrarjáttan" eru reglur um stuðulsfíggjað virksemi, og Gjaldstovan hevur ásett nærri reglur í rundskrivi um fremmanda fígging av almennum virksemi og íløgum. Virksemið skal umsitast eftir somu reglum, sum eru álagdar stovninum sambært játtanini í fíggjarlógini.

Játtað stuðulsupphædd skal bókast í fíggjarstøðuni sum áogn. Frammanundan goldin stuðul skal bókast í fíggjarstøðuni sum "Ikki inntøkuført - granskingarstyrkir, gávur o.a.", og peningurin skal flytast til raksturin, so hvørt hann verður brúktur.

Kontan, "Ikki inntøkuført - granskingarstyrkir, gávur o.a." skal gerast upp uttan drál, eftir at verkætlanin formliga er lokin. Avlopspeningur skal annaðhvørt rindast aftur ella takast við sum rakstrarinntøka hjá stovninum, tó treytað av avtaluni við stuðulslataran.

*Konta skal gerast upp, tá ið verkætlan er lokin.*

Verður stuðul rindaður afturút, skal krav sendast gevaranum, tá ið peningurin er nýttur til ætlaða endamálið.

Lønir til starvsfólk, sum arbeiða í stuðulsfíggjaða virkseminum og vanliga virkseminum skulu skrásetast alt eftir, hvussu stóran part starvsfólkini hava arbeitt í hvørjum virksemi sær.

## Roknskaparviðurskifti v.m.

Roknskapartøl, býtt eftir kontuslagi:

*t.kr.*

| Heiti | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslur | 3.190 | 3.555 | 2.310 | 4.666 | 4.420 |
| Inntøka | -2.454 | -2.349 | -1.233 | -3.265 | -3.360 |
| Konsern eliminering | -737 | -1.212 | -1.072 | -1.400 | -1.060 |
| **Tilsamans** | **0** | **-7** | **5** | **1** | **0** |

Seinastu árini er størsti parturin av útreiðslunum lønir; í 2022 vóru tær 2,8 mió.kr. og í 2023 2,4 mió.kr., meðan restin er keyp av vørum og tænastum, herundir eisini umsitingargjald til Havstovuna, sum í 2022 var 700 t.kr. og í 2023 góðar 300 t.kr.

Havstovan hevur víst á, at starvsfólk, ið arbeiða við verkætlanum, ikki altíð kunnu brúka tímaskrásetingarskipanina, og stovnurin brúkar upphæddina, sum er nevnd í stuðulsavtaluni, til lønir.

*Starvsfólk, sum arbeiða við verkætlanum, brúka ikki altíð tímaskrásetingarskipanina.*

Í mars 2024 hevur landsstýrisfólkið víst á, at skrásetingin av arbeiðstíð viðvíkjandi stuðulsfíggjaðum virksemi skal fylgja tí veruligu starvstíðini.

Konsern eliminering eru flytingar frá øðrum almennum stovnum til Havstovuna, t.d. frá Fiskivinnuroyndum.

Stuðul, ið er játtaður, men ikki goldin:

*t.kr.*

| Heiti | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|
| Tíðaravmarkingar og onnur áogn | 2.624 | 2.624 | 20 | 20 | 3.176 |

Havstovan tekur undir við tilmælinum frá Landsgrannskoðanini um, at stuðulin skal rindast á kontu hjá Gjaldstovuni, og at skjalprógv skulu leggjast við.

Í yvirliti yvir ognir, goldnar av verkætlanum frá 2018 til 2022, eru fleiri ognir, sum eru keyptar fyri meira enn 50 t.kr., og tí áttu av verið skrásettar í ognarskránni í Búskaparskipan landsins.

Stuðul, sum er goldin Havstovuni, men ikki brúktur:

*t.kr.*

| Heiti | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|
| Ikki inntøkuf. - granskingarstyrkir, gávur o.t. | -6.648 | -6.131 | -3.105 | -6.876 | -7.286 |

Upphæddirnar í talvuni omanfyri eru ikki rættar, av tí at einstøku verkætlanarroknskapirnir eru ikki altíð gjørdir upp, tá ið verkætlanir eru lidnar, t.v.s. at møguligt avlop hevur verið standandi.

Í 2024 hevur Gjaldstovan ruddað upp í verkætlanunum, soleiðis at fíggjarstøðan er 0 kr., tá ið verkætlan er liðug.

### Verkætlanarroknskapir

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað nakrar verkætlanir.

*Blue Action*

Talan er um ES-verkætlan, sum DMI[14] samskipaði. Havstovan var ein av 40 pørtum, og parturin hjá Havstovuni er 218.275 evrur. Samlaði stuðulin frá ES var í mesta lagi 1.393 t.kr. Verkætlanin var liðug í desember 2021, og Havstovan sendi endaliga frágreiðing, men tá var ikki greitt, um meira hendi við verkætlanini.

Roknskapartøl:

*t.kr.*

| Blue Action, rakstur | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 0 | 0 | 0 | 0 | 1.049 | 0 | 0 | 0 |
| Keyp av vørum og tænast. | 17 | 93 | -11 | 36 | 243 | 26 | 0 | 5 |
| Vanligar flytingarinntøkur | -17 | -93 | 11 | -36 | -1.292 | -26 | 0 | -5 |
| **Tilsamans** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** |

Í 2020 hevur verkætlanin goldið Havstovuni tilsamans 1.292 t.kr. fyri lønir og umsitingargjald. DMI hevur goldið tilsamans 2.108 t.kr., t.e. 667 t.kr. meira, enn verkætlanin hevur kostað. Samlaðu útreiðslurnar eru 1.462 t.kr.

Sambært almennu reglunum skal "Ikki inntøkuført – granskingarstyrkir, gávur o.t." gerast upp, tá ið verkætlanin er liðug, og tær 667 t.kr., sum ikki eru brúktar, áttu at verið inntøkuførdar hjá Havstovuni.

*Gjaldstovan hevur ruddað upp í lidnum verkætlanum.*

Havstovan hevur víst á, at upphæddin er til Havstovuna at ráða yvir, og at stovnurin brúkar upphæddina sum buffara til aðrar verkætlanir. Í februar 2024 hevur Havstovan flutt tær 667 t.kr., til "tiltakspening" hjá Havstovuni. 31. desember 2023 stóðu tilsamans 1.861 t.kr. á tí kontuni, eftir at Gjaldstovan hevur ruddað upp í lidnum verkætlanum, sum høvdu saldu í fíggjarstøðuni 31. desember 2023.

*Bank-e-DNA*

Fiskivinnuroyndir hava játtað tilsamans 447,5 t.kr. til verkætlanina Bank-e-DNA.

Roknskapartøl:

*t.kr.*

| Bank-e-DNA | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 100 | 50 | 0 | 0 | 0 |
| Keyp av vørum og tænastum | 25 | 132 | 122 | 0 | 5 |
| Vanligar flytingarinntøkur | 260 | -119 | -122 | 0 | -5 |
| Innanh. flyt. millum almennar stovn. (innt) | -385 | -62 | 0 | 0 | 0 |
| **Tilsamans** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** |

Í desember 2023 var niðurstøðan hjá Havstovuni, at stovnurin mátti tillaga verkætlanina, av tí at tey ikki fingu allar 540,5 t.kr., tey søktu um.

Úr fíggjarstøðuni:

*t.kr.*

| Ikki inntøkuført - granskingarstyrkir, gávur o.t. | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|
| Primosalda | 0 | -260 | -141 | -19 | -19 |
| Flytast frá rakstri | -260 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Flytast til rakstur | 0 | 119 | 122 | 0 | 5 |
| **Salda ultimo** | **-260** | **-141** | **-19** | **-19** | **-14** |

[14] Danmarks Meterologiske Institut.

Sambært fíggjarstøðuni 31. desember 2023 er verkætlanin ikki gjørd upp sambært reglunum.

*Toskalarvur*
Í 2019 gjørdi Havstovan avtalu við Granskingarráðið um stuðul til verkætlanina "Seasonal variation in survival of pelagic fish larvae and juveniles on the Faroe shelf".

Granskingarráðið játtaði 398 t.kr. Verkætlanin skuldi kosta 1.020 t.kr. og skuldi fíggjast við 298 t.kr. frá Aarhus Universiteti, 398 t.kr. frá Granskingarráðnum og 324 t.kr. frá Havstovuni.

Roknskapartøl:

*t.kr.*

| Toskalarvur | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 0 | 0 | 266 | 0 | 0 |
| Keyp av vørum og tænastum | 2 | 5 | 67 | 40 | 0 |
| Vanligar flytingarinntøkur | -2 | -5 | -333 | -40 | 0 |
| **Tilsamans** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** |

Allar inntøkurnar eru frá Granskingarráðnum. 1.020 t.kr. skuldu brúkast til verkætlanina. Í roknskapinum sæst ikki, at Havstovan hevur latið 323,6 t.kr., soleiðis sum greitt er frá í umsóknini. Eingin stuðul fekst frá Aarhus Universiteti.

Úr fíggjarstøðuni:

*t.kr.*

| Ikki inntøkuført - granskingarstyrkir, gávur o.t. | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|
| Primosalda | 0 | -333 | -328 | -59 | -18 |
| Flytast frá rakstri | -333 | 0 | -59 | 0 | 0 |
| Flytast til rakstur | 0 | 5 | 328 | 40 | 0 |
| **Salda ultimo** | **-333** | **-328** | **-59** | **-18** | |
| *Flutt til stað nr. 8230 Tiltakspening*[15] | | | | | *18* |
| ***Salda ultimo 2023*** | | | | | **0** |

Havstovan gjørdi endaliga frágreiðing til Granskingarráðið í september 2021. Sambært Havstovuni fær stovnurin sjáldan alla upphæddina, ið søkt er um, og tað ger, at tey mugu tillaga verkætlanir.

Roknskapurin er ikki gjørdur upp sambært reglunum, og samanumtikið ber ikki til at samanbera roknskapin við fíggjarætlanina. Verkætlanin var mett at kosta eina góða mió.kr., og endaligi kostnaðurin bleiv 380 t.kr.

***Tað ber ikki til at samanbera roknskapin við fíggjarætlanina.***

*Toska u-DNA, stað 8188/Fameos, stað 8199*
Talan er um tvær verkætlanir, sum tykjast at vera blandaðar saman. Havstovan hevur greitt frá, at tríggjar verkætlanir um e-DNA líkjast nógv, t.e. Toska u-DNA, Toska e-DNA og, Stock-e-DNA. Afturat tí hevur sami granskari verkætlanina, FAMEOS. Tvær tær fyrst nevndu verkætlanirnar vóru lidnar, og hinar báðar vóru seinkaðar vegna koronu-farsóttina, men vóru um at vera lidnar. Sambært Havstovuni hava Fiskivinnuroyndir og Granskingarráðið góðtikið seinkingarnar.

Í 2016 søkti Havstovan Fiskivinnuroyndir um 1.030 t.kr. í stuðli til verkætlanina Toska-u-DNA fyri 2017 og 2018.

Í umsóknini vísti Havstovan á, at søkt var um tilsamans 2.361 t.kr.: 1.093 t.kr frá Granskingarráðnum, 405 t.kr. frá Fiskivinnuroyndum, 669 t.kr. frá UPMC (France) og Havstovan skuldi sjálv fíggja 190 t.kr. Eisini roknaði Havstovan við eginavriki, t.e. 600

[15] Stað, sum er gjørt til at bóka restupphæddir á verkætlanum, og soleiðis "nullstilla" verkætlanirnar í roknskapinum.

t.kr. til M/S Magnus Heinason. Rakstrargjaldið til Havstovuna skuldi vera 25% av lønunum. Sambært umsóknini vóru øll neyðugt starvsstovutól á iNOVA.

Roknskapartøl 2017 til 2021:

t.kr.

| Toska u-DNA | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 25 | 421 | 57 | 0 | 0 |
| Keyp av vørum og tænastum, útbúnað | 156 | 168 | 39 | 83 | 0 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 50 | 50 | -15 | 0 | 0 |
| Vanligar flytingarinntøkur | 334 | -175 | -81 | -83 | -1.043 |
| Innanh. flyt. millum almennar stovn. (innt) | -565 | -464 | 0 | 0 | 1.043 |
| **Tilsamans** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** |

***Roknskapurin er ikki nóg gjøgnumskygdur.***

Samanumtikið heldur Landsgrannskoðanin, at roknskapurin er ikki nóg gjøgnum-skygdur. Tað sæst ikki greitt, hvussu nógv Fiskivinnuroyndir hava rindað; umbøn vísir tó, at 565 t.kr. skuldu rindast í 2017 og 464 t.kr. í 2018.

Uppgerð er gjørd, og øll játtanin er frá Granskingarráðnum og Fiskivinnuroyndum. Havstovan fekk tilsamans 2.122 t.kr., og útreiðslurnar hava verið 2.076 t.kr.

***Tað sæst ikki, hvussu nógv er komið í inntøkum, og hvussu nógv er brúkt.***

Tað er ikki í samsvari við almennu reglurnar, tá ið tað ikki sæst av roknskapinum, hvussu nógv er komið í inntøkum, og hvussu nógv er brúkt. Gjaldstovan hevur eisini ruddað upp í hesari verkætlanini í 2024.

*FAMEOS, stað 8199*

Verkætlanin fekk stuðul frá Granskingarráðnum.

Roknskapartøl:

t.kr.

| FAMEOS | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 200 | 200 | 0 | 0 | 32 |
| Keyp av vørum og tænastum, útbún. og leiga | 87 | 64 | 104 | 37 | 203 |
| Vanligar flytingarinntøkur | -287 | -264 | 938 | -37 | -234 |
| Innanh. flyt. m. almennar stovn. (innt) | 0 | 0 | -1.043 | 0 | 0 |
| **Tilsamans** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** |

Úr fíggjarstøðuni:

t.kr.

| Ikki inntøkuført - granskingarstyrkir, gávur o.t. | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|
| Primosalda | 0 | 287 | 551 | -387 | -350 |
| Flytast frá rakstri | 0 | 0 | -938 | 0 | 0 |
| Flytast til rakstur | 287 | 264 | 0 | 37 | 234 |
| **Salda ultimo** | **287** | **551** | **-387** | **-350** | **-116** |

Í 2019 og 2020 var játtaði stuðulin ikki bókaður sum ágóði hjá Havstovuni. 31. desember 2023 standa 116 t.kr. sum “Ikki inntøkuført”. Tann upphæddin skal sambært reglunum inntøkuførast ella latast Granskingarráðnum aftur.

*Yvirflot Íslandsryggur, stað 8201*

Havstovan søkti Jens Smeds Oceanografiske Fond um stuðul fyri 2020-2021 til verkætlanina “Vandudveksling over Island-Færøryggen”. Sambært fíggjarætlanini skuldi verkætlanin kosta 1.307 t.kr.

Havstovan skuldi lata mátiútgerð, ið hevði virði 1 mió.kr., vera tøka, og leigu av havrannsóknarskipi, 160 t.kr.

Roknskapartøl:

*t.kr*

| Yvirflot Íslandsryggur | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 0 | 0 | 217 | 291 | 303 |
| Keyp av vørum og tænastum og leiga | 0 | 105 | 17 | 371 | 55 |
| Vanligar flytingarinntøkur | 0 | -105 | -234 | -660 | -358 |
| **Tilsamans** | **0** | **0** | **0** | **2** | **0** |

Frá 2021 til 2023 eru goldnar 811 t.kr. í lønum til Havstovuna. Í 2022 eru 303 t.kr. goldnar til DMI.

Úr fíggjarstøðuni:

*t.kr.*

| Ikki inntøkuført-granskingarstyrkir, gávur o.t. | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|
| Primosalda | 0 | -500 | -395 | -161 | -306 |
| Inngjald | -500 | 0 | 0 | -805 | 0 |
| Flytast frá rakstri | 0 | 0 | 0 | 0 | -2 |
| Flytast til rakstur | 0 | 105 | 0 | 660 | 360 |
| Umbóking | 0 | 0 | 234 | 0 | 0 |
| **Salda ultimo** | **-500** | **395** | **-161** | **-306** | **52** |

Havstovan hevur tilsamans fingið 1.305 t.kr. frá Jens Smeds Ocean Fond. 31. desember 2023 er saldan í fíggjarstøðuni 52 t.kr., sum merkir, at útreiðslurnar hava verið størri enn inntøkurnar. Sambært Havstovuni er verkætlanin ikki liðug, og er uppgerð tí heldur ikki gjørd.

*Jelling Found Ation, stað 8223*

Í desember 2022 hevur Jelling Fond Ation goldið 1.217 t.kr. í stuðli til at byggja bát til fuglakanningar.

Havstovan hevur ikki sent skrivliga umsókn um stuðul. Í 2022 hevði deildarleiðari á Havstovuni samskifti við Jelling Fond Ation um stuðul til bát og "feltstation" til fuglakanningar, har umboðið frá Jelling Fond Ation m.a. vísti á, at grunnurin væntaði at fáa umsókn frá Havstovuni.

Sáttmáli um fremmanda fígging skal sambært reglunum gerast millum stuðulslatara og stovnin. Stovnsleiðarin hevur ábyrgd av, at øll formlig og avtalurættarlig viðurskifti eru í lagi, og at tey eru avgreidd, áðrenn farið verður undir virksemið, ið fíggjað verður á henda hátt.

Í 2022 boðaði Jelling Fond Ation frá, at grunnurin hevði samtykt at lata 1.142 t.kr. í stuðli.

Í november 2022 gjørdi Havstovan sáttmála við fyritøku um bygging av báti fyri 1.192 t.kr. Byggingin skuldi taka upp til 16 vikur. Í februar 2023 rindaði Havstovan fyritøkuni 750 t.kr., og 250 t.kr. í januar 2024. Báturin er ikki handaður, hann var nakað seinkaður vegna koronufarsóttina, arbeiðsumstøður v.m.

Havstovan bað ikki um tilboð um at byggja bátin, av tí at báturin var valdur vegna tilfarið í bátinum, sum er serliga væl egnað til harðan rakstur.

***Ikki í samsvari við almennu reglurnar um útboð.***

Í mars 2024 hevur landsstýrisfólkið kunnað um, at í sambandi við umsókn um stuðul frá Jelling Found Ation átti Havstovan sjálv at staðið sum umsøkjari. Landsstýrisfólkið vísti eisini á, at stuðulin skal bókast sum áogn, og at báturin átti at verið boðin út eftir almennu reglunum.

*Landsgrannskoðanin kann ikki siga, at roknskapirnir eru rættir.*

### Samanumtikið um fremmant fíggjað virksemi

Samanumtikið kann Landsgrannskoðanin ikki siga, at roknskapirnir fyri verkætlanirnar eru rættir.

Verkætlanirnar eru ikki gjørdar upp, so skjótt tær eru lidnar, og konteringarnar eru ikki í samsvari við vegleiðingina.

Í flestu verkætlanunum er lønarparturin bókaður eftir "ætlaðari upphædd". Nógvar flytingar eru gjørdar um peningastovnskontuna hjá Havrannsóknarskipinum, tó at allar skrásetingar skulu vera um Búskaparskipan landsins, og inn- og útgjaldingar skulu vera um kontu hjá Gjaldstovuni.

Landsgrannskoðanin mælti staðiliga til, at roknskaparreglurnar viðvíkjandi stuðulsfíggjaðum virksemi og fremmandari fígging verða fylgdar.

Havstovan hevur kunnað um, at stovnurin hevði fingið boð frá Gjaldstovuni um, hvussu verkætlanir skulu gerast upp, og at Gjaldstovan skuldi hjálpa stovninum við uppgerðunum við ársenda.

Landsstýrisfólkið tekur undir við Landsgrannskoðanini, at fleiri viðurskifti hjá Havstovuni fylgja ikki ásetingunum í roknskaparreglunum. Samanumtikið skulu roknskaparreglur og vegleiðing viðvíkjandi fremmandari fígging verða fylgdar, og fer ráðið at taka frágreiðingina upp við Havstovuna.

## 4.9 Landsverk (LG 2023/205-381)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað Landsverk á høvuðskontu 5.38.1.02, við denti á roknskapirnar hjá Landsverksskrivstovuni, undirkontu 20, og Byggi- og bygningsumsiting landsins, undirkontu 22.

*Landsverk heldur, at reglugerðin er ikki galdandi longur.*

Sambært viðmerkingunum í fíggjarlógini virkar Landsverk sambært reglugerð frá 22. apríl 1998 fyri Landsverkfrøðingin. Sambært Landsverki er reglugerðin farin úr gildi við "desvetudo", sum er, tá ið regla fellur burtur, tí hon gjøgnum longri tíð ikki verður brúkt, og at onnur siðvenja er galdandi.

Teksturin í fíggjarlógini vísir til, at Landsverk virkar sambært reglugerðini. Landsgrannskoðanin undrast tí á, at reglugerðin sambært Landsverki ikki er galdandi longur.

*Sambært landsstýrisfólkinum er reglugerðin frá 1998 enn galdandi.*

Í august 2024 hevur landsstýrisfólkið í fiskivinnu- og samferðslumálum greitt frá, at reglugerðin frá 1998 er galdandi, tó at einstøk málsøki eru flutt til onnur stjórnarráð og stovnar, t.d. brunamál. Bygningsfyrisitingin er meira miðsavnað, og samstarvið millum Landsverk og kommunur er sum heild greiðari.

### Roknskaparviðurskifti v.m.

Roknskaparreglugerðin er frá 2022. Sambært Landsverki eru tey í holt við at dagføra reglugerðina.

Landsverk hevur egna búskaparskipan til m.a. inntøkur, skuldarar og byggiverkætlanir. Í fíggjarstýringsskipanini skráseta verkfrøðingar o.o. arbeiðstíð á verkætlanir, og skrásetingin verður m.a. brúkt til at býta lønarútreiðslur út á løgujáttanir. Tey skráseta eisini arbeiðstíð í Totalview.

31. desember 2023 hevði Landsverk stemmað saldurnar í fíggjarstýringsskipanini av við Búskaparskipan landsins. Vit kannaðu nakrar saldur, og einki var at finnast at.

***Hava enn ikki fingið loyvi til egna búskaparskipan.***

Sambært roknskaparkunngerðini kann Fíggjarmálaráðið geva loyvi til, at stovnar hava egna búskaparskipan. Landsgrannskoðanin hevur í fleiri ár spurt, um Landsverk hevur neyðugt loyvi til at brúka egna búskaparskipan, og í august 2023 kunnaði landsstýrisfólkið um, at Landsverk hevði samskift við Gjaldstovuna um nýggja umsókn til góðkenning av egnari búskaparskipan.

Spurt, hvussu gekst við arbeiðinum, og nær tey kundu vænta at hava loyvi til skipanina, svaraði Landsverk, at Gjaldstovan hevur gjørt uppskot til avtalu um loyvir og treytir. Í januar 2024 hevur Landsverk sent upplýsingar til Gjaldstovuna, og vóna tey at hava tíð til ein fund um avtaluna eftir summarfrítíðina.

Í august 2024 hevur landsstýrisfólkið greitt frá, at Landsverk heldur fram við arbeiðinum at dagføra roknskaparreglugerðina, og Landsverk og Gjaldstovan hava fund í næstum um búskaparskipanina.

Roknskapartøl 2019 til 2023:

*t.kr.*

| Heiti | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|
| ***20. Landsverksskrivstovan*** | ***7.764*** | ***8.406*** | ***9.188*** | ***10.135*** | ***10.587*** |
| ***22. Byggi- og bygningsums. Landsins*** | ***7.430*** | ***13.866*** | ***2.871*** | ***3.771*** | ***4.223*** |
| 23. Royndarv. við orkusp. í lands. bygning. | 30 | -150 | 8 | 11 | -179 |
| 30. Landsvegahald | 44.704 | 45.154 | 52.120 | 52.027 | 53.451 |
| 35. Havnir | 5.365 | 5.513 | 3.968 | 4.339 | 5.099 |
| 38. Flogferðsla | 1.472 | 1.037 | 2.104 | 1.121 | 1.308 |
| 40. Inntøkufíggjað virksemi | -6.525 | -5.468 | -10.039 | 1.267 | -10.869 |
| **Tilsamans** | **60.241** | **68.358** | **60.221** | **72.671** | **63.620** |

Roknskapartølini omanfyri eru nettotøl. Niðanfyri eru bruttoroknskapartølini 2023 fyri undirkontur 20 og 22:

*t.kr.*

| Heiti | Undirkonta 20 | Undirkonta 22 | Tilsamans |
|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 9.112 | 12.181 | 21.293 |
| Keyp av vørum og tænastum | 7.067 | 2.432 | 9.499 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 1.124 | 318 | 1.442 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 3.252 | 4 | 3.256 |
| Søla av vørum og tænastum | -341 | -238 | -579 |
| Kravd gjøld, bøtur o.a. | 0 | 3 | 3 |
| Flytingarinntøkur úr útlandinum | 0 | -33 | -33 |
| Innanh. flyt. millum alm. stovn. (útr.) | 56 | 3.850 | 3.906 |
| Innanh. flyt. millum alm. stovn. (innt.) | -9.683 | -14.294 | -23.977 |
| **Tilsamans** | **10.587** | **4.223** | **14.810** |

### *Lønir v.m.*

Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum útgoldnu lønina í desember 2023, og samanhelt setanirnar við almenna setanarpolitikkin. Einki var at finnast at.

Sambært almennu roknskaparreglunum skal stovnsleiðari skipa fyri, at hóskandi skráseting av arbeiðstíð, fráveru, frítíð o.t. er á stovninum, so lønarútgjaldingarnar eru rættar. Skrásetingin skal gerast í tíðarskrásetingarskipan, og stovnsleiðarin skal í roknskaparreglugerðini lýsa, hvussu skráseting av arbeiðstíð o.t. verður fyriskipað.

Í roknskaparreglugerðini frá 2022 er eingin áseting um tíðarskráseting, ella um hvørja skipan stovnurin brúkar. Landsgrannskoðanin mælti til at dagføra reglugerðina, so hon samsvarar við rundskrivið um skráseting av arbeiðstíð o.a.

Landsverk brúkar tíðarskrásetingarskipanina Totalview. Vegleiðingin til tíðarskrásetingina er einans stílað til fastlønt starvsfólk. Tey hava flekstíð og kunnu skylda 16 tímar og eiga 32 tímar á.

***Eiga fleiri tímar á, enn rundskrivið loyvir.***

31. desember 2023 áttu fleiri starvsfólk fleiri tímar á, enn rundskrivið og vegleiðingin hjá Landsverki áseta, og fleiri skyldaðu eisini meira, enn loyvt er. Landsgrannskoðanin mælti til at fylgja ásetingunum í rundskrivinum og innanhýsis vegleiðingini.

Í 2023 hevur Landsverk tíðaravmarkað lønir, og Landsgrannskoðanin samanhelt skjølini, ið liggja við tíðaravmarkingini við útskrift úr Totalview. Vit komu fram á fleiri munir, størri og smærri, og at uppspardar serstakar frívikur ikki vóru tíðaravmarkaðar. Út frá tí, kunnu vit ikki sanna, at tíðaravmarkingin av lønum í 2023 er røtt.

*Keyp av vørum og tænastum*

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað keyp av vørum og tænastum við m.a., at samanhalda útreiðslurnar við undanfarin ár, kanna um tær hoyra til árið, eru konteraðar sambært Kontuskipan landsins, og stílaðar til Landsverk.

Samanborið við 2022 eru útreiðslurnar minkaðar, og er orsøkin serliga, at í 2022 hevði Byggi- og bygningsumsitingin útreiðslur til gerðarrættarmál, til arkitekt í sambandi við innrætting av nýggjum hølum v.m.

Í 2022 og 2023 hevur Landsverk goldið fyri at fáa gjørt tekningar av hølum, rýmingarleiðum v.m. Landsverk hevur greitt frá, at tey rindaðu ráðgeva fyri at greina, hvussu Landsverk kundi húsast mest skynsamt á nýggju høvðusskrivstovuni, og stuðla undir strategiska ætlan við toymisarbeiði og at kunna arbeiða tvørtur um deildir.

*Ferðing og flutningur uttanlands*

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað nakrar ferðauppgerðir.

Í fleiri førum hevur Landsverk rindað meira fyri gisting, enn rundskrivið um tænastuferðir uttanlands ásetir sum mestuupphædd. Landsgrannskoðanin mælti til at halda reglurnar og at leggja frágreiðing við, um útreiðslurnar til hotell, av givnum orsøkum, eru størri, enn rundskrivið ásetir. Landsverk vísti á, at í summum førum er trupult at halda kostnaðin, tí prísir eru hækkaðir. Serliga er kostnaðurin fyri gisting í Keypmannahavn dýrkaður.

Fyri at kunna sanna, um goldnu dagpengarnir eru rættir, og at útreiðslurnar hoyra til stovnin, mælti Landsgrannskoðanin til at leggja ferðaskrá e.l. við ferðauppgerðum, sum vísir innihald og endamál við ferðini, og um matur er við í t.d. skeiðsgjaldi.

*Leiga, viðlíkahald og skattur*

Í februar 2023 flutti Landsverksskrivstovan í onnur høli Yviri við Strond. Nýggja leigumálið kann sigast upp við 12 mánaða freist til fyrsta í einum mánað, tó er ikki møguligt at siga leigumálið upp, fyrr enn 10 ár eru liðin frá tí, at tað byrjaði. Sáttmálin er góðkendur av Fíggjarmálaráðnum.

Kostnaðurin av umvælingini av nýggju hølunum hækkar húsaleiguna við upphædd, ið svarar til eitt 10 ára javngjaldslán, tilsamans 6,5 mió.kr. Húsaleigan verður prístalsviðgjørd árliga, fyrstu ferð 1. januar 2023. Gjaldið fyri umvælingina, sum verður lagt oman á leiguna, skal ikki prístalsviðgerast.

Sambært roknskapinum 2023 hjá Landsverksskrivstovuni eru húsaleiguútreiðslurnar 2.219 t.kr. Útreiðslurnar til “Umvælingar- og viðlíkahaldsútr., bygningar” eru 937 t.kr., harav 595 t.kr. eru til javngjaldslánið.

***Umvæling og viðlíkahald bókað skeivt.***

Landsgrannskoðanin vísti á, at sambært Kontuskipan landsins skulu útreiðslur til umvæling og viðlíkahald skrásetast sum húsaleiga, um tær eru partur av húsaleiguni. Sambært leigusáttmálanum hækkar húsaleigan við kostnaðinum av umvælingini av hølunum. Útreiðslan til javngjaldslánið er tí partur av húsaleiguni, og hon skal skrásetast sum húsaleiga. Í veruleikanum er húsaleigan 2023 hjá Landsverksskrivstovuni tí 2.814 t.kr.

Leiðslan á Landsverki er samd. Sambært Landsverki var tað skrásett hvørt fyri seg fyri at varðveita gjøgnumskygni, og fyri at skilja sundur áseting av reinari húsaleigu og hvat sertillagingar høvdu kostað. Landsverk fer frameftir at skráseta javngjaldslánið sum húsaleigu.

*Endamálsroknskapur - "Húsið"*

***Kenna ikki endaliga kostnaðin av flytingini.***

Spurt, hvat flytingin í onnur høli hevði kostað, svaraði Landsverk, at stovnurin hevði ikki fullfíggjað yvirlit yvir kostnaðin, og at útreiðslurnar vóru spjaddar yvir ár. Tó mettu tey, at kostnaðurin var meira enn 2 mió.kr. tilsamans. Fyrireikingin byrjaði í 2022, og tey fluttu inn í 2023, men enn vóru tey ikki komin heilt upp á pláss. Nakrar útreiðslur fara tí helst at koma afturat, so hvørt rúm fór at verða í rakstrarjáttanini.

Sambært roknskaparreglugerðini er høvuðsreglan, at stovnurin fylgir konteringavegleiðingini hjá Gjaldstovuni, men harafturat hevur Landsverk innanhýsis konteringavegleiðing, sum hevur til endamáls at útvega stovninum best møguliga kunning um nýtsluna. Innanhýsis roknskapurin er skipaður á endamáls- og staðatættir.

Roknskapartøl fyri "húsið" er á undirkontuni, Landsverksskrivstovan:

*t.kr.*

| Heiti | 2021 | 2022 | 2023 | 08-2024 |
|---|---|---|---|---|
| Keyp av vørum og tænastum | 698 | 807 | 1.494 | 375 |
| Skrivstovuútbúnaður v.m. | 61 | 0 | 30 | 92 |
| Innbúgv, maskinur og útbúnaður annars | 48 | 301 | 903 | 27 |
| Húsaleiga, langtíðarl. og leiga annars | 3.090 | 3.090 | 2.219 | 1.751 |
| Umvæl.- og viðlíkahaldsútreiðslur | 51 | 227 | 976 | 268 |
| Vørusøla til privat | 0 | 0 | -20 | 0 |
| Vørusøla til almennar stovnar, virksemi og verkætlanir | 0 | 0 | -100 | 0 |
| Onnur søla av tænastum, leigu og langtíðarleigu, alment | -1.161 | -1.218 | -68 | 0 |
| **Tilsamans** | **2.787** | **3.207** | **5.434** | **2.513** |

***Veruliga húsaleigan var væl hægri.***

Sambært roknskapartølunum er húsaleigan í 2023 minkað til 2,2 mió.kr.; í 2022 var hon 3 mió.kr. Landsverk leigaði part av gamla leigumálinum víðari og inntøkuførdi upphæddina, heldur enn at mótrokna hana í húsaleiguni. Í 2022 var veruliga húsaleigan tí nærri 2 mió.kr. Harafturat hevur Landsverk skrásett javngjaldslánið sum umvæling og ikki sum húsaleigu. Húsaleigan í 2023 var tí um 2,8 mió.kr.

Í 2022 og 2023 hevur Landsverk rindað arkitektafyritøku tilsamans 510 t.kr. fyri innrætting av hølunum Yviri við Strond. Sjálv flytingin í 2023 kostaði um 260 t.kr.

Landsverk hevur eisini goldið teknistovu fyri at tekna rýmingarleið. Sambært Landsverki var tað ein sertillaging, sum gjørdi, at eyka rýmingarleið var kravd. Ráðgevin gjørdi ikki bara tekningar, men eisini verkstovur fyri starvsfólk, uppskot til flow í bygninginum, innbúgv o.t. Endamálið var at betra um góðsku og stýring við at fleiri persónar samstarva um verkætlanir. Aðrar tekningar til myndugleikagóðkenning o.t. hevur útleigarin goldið.

Landsgrannskoðanin vísti á, at sambært Kontuskipan landsins skulu útreiðslur til keyp av vørum og tænastum o.ø., ið fara til nýtslu í einum 1-árs tíðarskeiði skrásetast á standardkontu 14. Útreiðslur til umvæling ella viðlíkahald skulu skrásetast sum húsaleiga á standardkontu 16, um umvælingin er partur av húsaleiguni. Arkitektaútreiðslur til innrætting av hølum eru ikki rakstrarútreiðslur, ið fara til nýtslu í einum 1-árs skeiði. Leiðslan á Landsverki er samd og hevur tikið tað til eftirtektar.

Ikki rættar konteringar broyta ikki roknskaparúrslitið fyri "Húsið", men roknskapurin hjá Landsverksskrivstovuni verður ikki rættur, og gevur ikki rættvísandi mynd. Roknskapurin vísir ikki veruligu húsaleiguna í 2023, og heldur ikki undanfarin ár.

Sambært roknskapinum hevur Landsverksskrivstovan havt leiguinntøku, tó at stovnurin ikki eigur hølir at leiga út.

Tá ið stovnar ikki kontera á rætta standardkontu, gevur landsroknskapurin ikki eina rættvísandi mynd, og tá ið stovnur inntøkuførir framleigu til annan stovn, kann leiguútreiðslan koma fyri tvær ferðir í landsroknskapinum.

Landsverk er ikki samt við Landsgrannskoðanina, at roknskapurin hjá Landsverks-skrivstovuni er ikki rættur, men tekur undir við, at húsaleigan skuldi verið konterað øðrvísi.

Landsverk hevur víst á, at leigumálið á Tinghúsvegnum, sum var 2.640 $m^2$, kostaði 3.060 t.kr., og Uttanríkis- og mentamálaráðið framleigaði 587 $m^2$ fyri 734 t.kr. Netto kostaði leigumálið 2.326 t.kr. Afturat framleigu rindaði Uttanríkis- og mentamálaráðið fyri part av felags rakstri. Leigan Yviri við Strond er 1.969 t.kr. fyri skrivstovuhølir, sum eru 1558 $m^2$ og fyri parkeringsøki og part av parkeringskjallara um 350 $m^2$. Húsaleigan er prístalsviðgjørd fyrstu ferð í 2023.

Sambært Landsverki er stórur munur á rakstrinum av nýggja og gamla leigumálinum. Eigarin rindaði fyri at uppstiga bygningin Yviri við Strond sambært treytunum í BK 17, og er útreiðslan til el og hita tí munandi minni, 150 t.kr. um árið. Útreiðslur til reingerð og kantinurakstur eru um 150 t.kr. minni. Samanumtikið eru útreiðslurnar til rakstur av bygninginum minkaðar.

Landsverk vísti á, at tey høvdu eisini rindað fyri sertillagingar, um tey vóru verandi á Tinghúsvegnum. Í 2020/21 fór Landsverk undir at leggja nýggja strategi fyri komandi ár. Ein týðandi partur av tí var at skipa arbeiðið í verkætlanartoymir og í størri mun at arbeiða tvørtur um deildir. Høvuðsendamálið var at betra góðskuna og stýringina av verkætlanum. Farið var frá, at ein verkætlanarleiðari umsat eina verkætlan, til at fleiri persónar samstarva um verkætlanir, sum ofta komu frá ymiskum deildum.

***Leigumálið var illa egnað til verandi bygnað hjá stovninum.***

Leigumálið á Tinghúsvegnum við verandi innrætting vísti seg at vera illa egnað, og Landsverk arbeiddi tí við nøkrum hugskotum um at broyta innrættingina. Torført var at finna eina loysn, sum stuðlaði nóg væl upp undir nýggja arbeiðsháttin uttan at gera umfatandi umbyggingar.

Í 2021 fór Landsverk tí at leita eftir hølum, har tað bar til at hava hóskandi samanseting av stórrúmum, skrivstovum, verkætlanarhølum og fundarhølum, og sum ikki minst stuðlaðu upp undir tvørfakligheitina á stovninum. Útreiðslurnar til sertillagingar eru tí ikki beinleiðis tongdar at flytingini, men høvdu eisini heilt ella partvís verið neyðugar í gamla leigumálinum.

### *Søla av vørum og tænastum*

Inntøkurnar stava fyri tað mesta frá húsinum, húsaleigu og sølu av innbúgvi, kantinu-sølu, luttøku á Byggiharrasamtaki Føroya og virksemi á byggifundum v.m.

Sølan hjá Landsverksskrivstovuni og Byggi- og bygningsumsitingini, býtt á St.Rk:

*kr.*

| Heiti | 2022 | 2023 |
|---|---:|---:|
| Søla av vørum og tænastuveitingum til kommunur | 0 | -54.000 |
| Vørusøla til privat | -142.707 | -287.988 |
| Vørusøla til almennar stovnar, virksemi og verkætlanir | -2.540 | -199.025 |
| Onnur søla av tænastum, leigu og langtíðarleigu, alment | -1.217.841 | -38.629 |
| **Tilsamans** | **-1.363.088** | **-579.642** |

Í 2022 var leiguinntøkan 1.218 t.kr. Landsgrannskoðanin hevur víst á, at talan er ikki um sølu hjá Landsverki, tí stovnurin veitir ikki nakra tænastu, men letur høli víðari, og minkar harvið um húsaleiguútreiðslurnar hjá Landsverki.

Í gjøgnumgongdini av keypi av útbúnaði hevur Landsgrannskoðanin eisini víst á, at søla av brúktum útbúnaði, skrivstovumøblum v.m. sambært Kontuskipan landsins ikki skal skrásetast sum inntøka, men sum søla av brúktum útbúnaði. Í 2023 var tann inntøkan 100.400 kr.

### *Innanhýsis flytingar millum almennar stovnar*

Í 2023 rindaði Landsverksskrivstovan 56 t.kr. til almennar stovnar, t.e. útreiðslur til m.a. Arbeiðs- og brunaeftirlitið fyri rakstur av Vanlukkutryggingarráðnum.

Í 2023 hevur Landsverksskrivstovan bókað 9.683 t.kr. í inntøkum sum "Innanhýsis flyting millum almennar stovnar". Av tí eru 8.943 t.kr. endurgoldnar frá Infrakervi, Byggideildini og Framleiðsludeildini fyri felagsútreiðslur eftir einum býtislykli. Landsverk hevur greitt frá, at býtið verður avgjørt á leiðslufundi og reguleráð í august mánað.

Í 2023 vóru felagsútreiðslurnar hjá Byggi- og bygningsumsitingini 3.850 t.kr. Inntøkurnar hjá deildini vóru 14.294 t.kr.

## Fíggjarstøða

Landsgrannskoðanin hevur gjøgnumgingið upphæddirnar í fíggjarstøðuni fyri høvuðskontu 5.38.1.02. Saman við leiðsluni hava vit gjøgnumgingið saldur og spurt um mannagongdir fyri at stemma av og gera upp. Vit hava fingið avstemmaðar saldulistar millum egnu búskaparskipanina hjá Landsverki og Búskaparskipan landsins. Fleiri av roknskaparpostunum stava frá Inntøkufíggjaða virkseminum, og hava vit ikki grannskoðað upphæddirnar nærri, enn greitt er frá niðanfyri.

Roknskapartøl fyri fíggjarstøðuna:

*t.kr.*

| Heiti | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---:|---:|---:|
| Maskinur | 14.569 | 14.569 | 14.569 |
| Samantaldar avskrivingar - útbúnaður o.t. | -14.569 | -14.569 | -14.569 |
| Goymslur | 9.797 | 10.063 | 4.144 |
| Tænastu-, vøruskuldarar o.t., landskassadømi | 32 | 0 | 0 |
| Tænastu- og vøruskuldarar o.t. | 13.943 | 18.713 | 18.406 |
| Avseting móti tapi | 0 | 0 | -150 |
| Útlegg, almennir stovnar og grunnar | 340 | 0 | 0 |
| Tøknilig millumrokning (balancing segment) | -1.561.434 | -1.640.069 | -1.692.531 |
| Onnur áogn | 1.351 | 0 | 0 |
| Tíðaravmarking | 2 | 3 | 1 |
| Banka- og girokontur | 3.075 | 6.112 | 1.998 |
| Salda primo | 1.473.244 | 1.533.465 | 1.606.135 |
| Inngangandi MVG-rakstur (keyps-MVG-rakstur) | 285 | 668 | 616 |
| Inngangandi MVG-íløgur (keyps-íløgur) | -824 | 0 | 0 |
| Útgangandi MVG (sølu-MVG) | 117 | -3 | -1.024 |
| Skuld, annað | 0 | -1.473 | -916 |
| Skyldur, ið ikki eru endaligar | -150 | -150 | -299 |
| **Tilsamans** | **-60.221** | **-72.671** | **-63.620** |

### *Goymslur*

Goymslan hjá Inntøkufíggjaða virkseminum verður tald upp eina ferð um mánaðin. Landsgrannskoðanin hevur ikki verið á goymslueftirliti.

### *Tænastu- og vøruskuldarar o.t.*

Áognin, tænastu- og vøruskuldarar, hoyrir til Inntøkufíggjaða virksemið. Søla og skuldarar verða skrásett í egnari búskaparskipan. Landsgrannskoðanin hevur fingið saldulista pr. 31. desember 2023.

Saldulistin á 18,4 mió.kr. er aldursbýttur og vísir, at 52,2% er ikki fallin skuld, og 4,7% er eldri enn 3 mánaðir. Í 2023 hevur Landsverk sett 150 t.kr. av móti tapi.

At síggja til eru bæði privatir og vinnuligir skuldarar á listanum, og fleiri áttu pening á. Tá ið vit greinaðu skuld og áogn sundur, bleiv áognin hjá Landsverki 19.013 t.kr., og upphæddin, sum kundar áttu á, er 607 t.kr. Av teimum 19 mió.kr. er meira enn helvtin ikki fallin, og bert ein lítil partur eldri enn 3 mánaðir.

*Ognarar*

Í fíggjarstøðuni á høvuðskontu 5.38.1.02 er eingin kreditorskuld. Hon er í samlaðu kreditorskuldini í landsroknskapinum. Sambært Landsverki stemma tey regluliga salduna í kreditorskipanini av við kontuavrit frá veitarum.

Landsgrannskoðanin gjøgnumgekk saldurnar hjá veitarunum í kreditorskipanini fyri stovnsnummurini hjá Landsverksskrivstovuni og Byggi- og bygningsumsiting landsins. Einki var at finnast at.

*Peningastovnskontur*

Landsverk hevur peningastovnskontur í trimum bankum. Konturnar verða regluliga stemmaðar av og tømdar í landskassan. Upphæddirnar í roknskapinum samsvaraðu við ársyvirlitini.

Sambært roknskaparreglugerðini kunnu konturnar í undantaksførum verða brúktar til at rinda rokningar við, serliga tá ið skjót avgreiðsla er neyðug. Landsverk kann flyta av bankakontum gjøgnum heimagreiðslu, har tvey skulu góðkenna flytingar.

Í 2023 vóru fleiri flytingar av kontunum, bæði størri og smærri. Landsverk hevur sambært roknskaparreglugerðini bæði VISA- og Masterkort, sum fyrst og fremst kunnu brúkast til at keypa ferðaseðlar og onnur smákeyp á netinum.

***Gjaldkort kunnu ikki vera partur av rakstrarkontu.***

Landsgrannskoðanin vísti á, at gjaldkort skal stovnast á serstaka gjaldkortkontu, og kann ikki vera partur av rakstrarkontu.

*Skuld annað*

Onnur skuld, 916 t.kr., kann sundurgreinast í tveir postar. Annar er avseting fyri væntaðar lønarhækkanir, 506 t.kr, ið verða avsettar av Gjaldstovuni. Hin er onnur skuld, 410 t.kr., skrásett sum ógreinað. Sambært Landsverki eru tað rokningar, har ósemja er íkomin. Annaðhvørt ósemja um arbeiði er liðugt, ella um upphæddir á rokningunum. Landsverk viðger javnan avsettar rokningar.

*Skyldur, ið ikki eru endaligar*

Skyldur, ið ikki eru endaligar, eru 299 t.kr. Harav eru 199 t.kr. tíðaravmarkan av lønum fyri alla høvuðskontuna.

### 4.9.1 Royndarverkætlan við orkusparing í landsins bygningum

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Landsverki, undirkontu 23 “Royndarverkætlan við orkusparing í landsins bygningum”.

Roknskapartøl 2018 til 2023:

*t.kr.*

| Undirkonta 23 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 0 | 590 | 619 | 340 | 375 | 270 |
| Keyp av vørum og tænastum | -1.109 | -1.132 | -1.318 | -913 | -1.003 | 187 |
| Keyp av útbúnaði, netto | -35 | 348 | 481 | 535 | 632 | 657 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 1.063 | 312 | 69 | 46 | 3 | 11 |
| Søla av vørum og tænastum | 0 | -134 | 0 | 0 | 0 | -1.134 |
| Bygging og løguframleiðsla | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | -172 |
| Innanh. flyt. millum almennar stovn. (útr) | 107 | 47 | 0 | 0 | 4 | 0 |
| **Tilsamans** | **26** | **30** | **-150** | **8** | **11** | **-179** |

Landsgrannskoðanin vísti enn eina ferð á, at tað var ikki í samsvari við roknskaparreglurnar at bóka inntøkur á útreiðslukontu. Landsverk hevði sett fyrispurning til Gjaldstovuna um málið, og um mannagongdin var skeiv, fór hon at verða rættað.

Útreiðslurnar vóru spjaddar til t.d. Suðuroyar Sjúkrahús, Umhvørvisstovuna, Kringvarpið og Maskinmiðstøðina hjá Landsverki. Landsgrannskoðanin vísti enn eina ferð á, at tað er ein óskikkur at spjaða útreiðslur hjá einum stovni á fleiri játtanir. Tað ger, at gjøgnumskygni í roknskapinum hvørvur, og at einki yvirlit er yvir, hvat umvæling av einum bygningi kostar. Hevur Løgtingið játtað stovnum meira til olju og el, enn stovnarnir brúka, eigur tað at síggjast aftur í nýtsluni hjá einstaka stovninum.

***Hægri játtan til olju og el eigur at síggjast aftur í nýtsluni hjá stovninum.***

Í 2019 kunnaði Landsverk um, at tey umhugsaðu at flyta sparingina í oljukeypinum til "Viðlíkahald av almennum bygningum". Eingin broyting var gjørd. Landsverk vísti á, at stovnurin kundi ikki gera av, hvar sparingin skuldi bókast, og at málið skuldi setast á skrá til fund við Fíggjarmálaráðið og seinni við Gjaldstovuna.

Landsgrannskoðanin hevur áður mælt til at rinda avsláttурin fyri oljukeyp á kontu hjá Gjaldstovuni, og at skjøl vóru løgd við øllum bókingunum. Landsverk tók undir við tilmælinum, men mannagongdin var enn ikki broytt.

Í 2021 kunnaði landsstýrisfólkið um, at Fíggjarmálaráðið fór at taka málið upp við Landsverk og Gjaldstovuna, herundir um royndarverkætlanin skuldi halda fram, hvussu hon skuldi skipast, hvussu orkusparingin bókingartøkniliga skuldi umsitast, hvussu orkusparingin verður nýtt til ætlaða endamálið, og hvussu tað skuldi fremjast játtanarliga.

Í 2022 kunnaði landsstýrisfólkið í fíggjarmálum um, at komið var ikki á mál. Landsverk fór at royna at fáa avklárað viðurskiftini við Gjaldstovuna.

Í 2023 kunnaði landsstýrisfólkið í fiskivinnu- og samferðslumálum um, at málið var óavgreitt. Landsverk segði seg arbeiða við at fáa bókað inntøkur og útreiðslur á hvør sína kontu í 2023.

***Ikki komin á mál við at bóka inntøkur og útreiðslur á hvør sína kontu.***

Í august 2024 hevur Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið kunnað um, at Landsverk enn arbeiðir við málinum.

## 4.10 Asfalt- og skervverk, løgujáttan (LG 2021/203-381)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av høvuðskontu 3.38.1.22 "Asfalt- og skervverk, løgujáttan".

29. apríl 2022 samtykti Løgtingið Ll. nr. 56/2022 "um at endurnýggja asfaltverk og skervverk hjá Landsverki", har játtanin í mesta lagi kann vera 34,5 mió.kr. Lógin fer úr gildi 1. januar 2025. Í viðmerkingunum til lógaruppskotið stendur m.a., at asfalt- og skervverk eru samansett av fleiri eindum (modulum), sum kunnu skiftast út hvør sær, og at bert fyri eina av eindunum er kostnaðurin meira enn 10 mió.kr.

Í álitinum frá Fíggjarnevndini stendur m.a., at løguætlanin frá 2021 til 2023 er 34,5 mió.kr., og at 16 mió.kr. eru brúktar, soleiðis at samlaði kostnaðurin verður 50,5 mió.kr.

Spurdur, hvat kostnaðurin fyri asfalt- og skervverk higartil hevur verið, hevur landsstýrisfólkið í fiskivinnu- og samferðslumálum svarað, at kostnaðurin fyri asfaltverkið á Sundi og mobila skervverkið hevur í tíðarskeiðnum 2018 til juli 2023 verið góðar 61,2 mió.kr.

Roknskapar- og játtanartøl 2018 til 2023:

*t.kr.*

| Heiti | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | Tilsam. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Asfaltverkið á Sundi | 8.782 | 1.169 | 8.286 | 6.415 | 16.218 | 9.902 | 50.772 |
| Skervverk | 0 | 0 | 0 | 3.502 | 6.941 | 0 | 10.443 |
| **Tilsamans** | **8.782** | **1.169** | **8.286** | **9.917** | **23.159** | **9.902** | **61.215** |
| *Játtan* | *0* | *7.500* | *6.331* | *10.000* | *18.000* | *8.000* | - |

### Leiga av grundøkinum á Sundi

Sáttmálin um leigu av grundøkinum á Sundi, ið er ímillum P/f Asfaltverkið og Tórshavnar kommunu, er frá juli 2004. Leigan er 78 t.kr. um hálvárið fyri 7.797 $m^2$. Upprunaliga var sáttmálin galdandi til 1. juli 2009, og kundi sigast upp av báðum pørtum við 6 mánaða freist til at halda uppat 1. í einum mánað.

Landsverk leigar eisini 4.276 $m^2$ á Sundi fyri 85,5 t.kr. um árið sambært sáttmála frá mars 2011, sum er galdandi til 1. juli 2024, og kann tá sigast upp av báðum pørtum við 6 mánaða freist til at halda uppat 1. í einum mánað.

Í august 2024 hevur landsstýrisfólkið kunnað um, at leigusáttmáli millum Landsverk og Tórshavnar kommunu var undirskrivaður 23. apríl 2024. Sáttmálin er galdandi til 1. juli 2049.

## 4.11 Stuðul til útoyggjar (LG 2023/205-382)

Stuðul til útoyggjar er á høvuðskontu 5.38.2.21. Útjavningarstuðulin kann gjaldast sambært Ll. nr. 86/1998 "um útjavningarstuðul til útjaðaraøki". Játtanin í 2023 er 1,5 mió.kr.

Atlantsflog hevur fingið 426 t.kr. og Posta 69 t.kr. Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað partin, sum Strandferðslan hevur fingið, sum er 750 t.kr.

Vit kannaðu við stakroyndum, um skrásetingarnar av stuðlinum lúka treytirnar sambært reglugerð frá 7. februar 2006, broytt 26. mai 2016, t.e. um:

- Útjavningarstuðul bert verður latin til fastbúgvandi á oyggj/bygd sambært §§ 1, 2 og 5.
- Vørubólkur og stødd/vekt eru sambært § 3.
- Farmatúrar eftir tørvi eru sambært § 3, stk. 2.

Strandferðslan hevur bókað stuðulin sum inntøku fyri farm, býtt á oyggjarnar, sum hava fingið stuðul:

*kr.*

| Øki | Ikki leigutúrar | Leigutúrar | Tilsamans |
|---|---|---|---|
| Fugloy/Svínoy | 139.393 | 237.813 | 377.206 |
| Kallsoy | 118.646 | | 118.646 |
| Mykines | 126.020 | | 126.020 |
| Nólsoy | 90.340 | | 90.340 |
| Hestur | 9.695 | | 9.695 |
| Skúvoy | 27.316 | | 27.316 |
| Stóra Dímun | 820 | | 820 |
| **Tilsamans** | **512.230** | **237.813** | **750.043** |

***Síðan 2011 er stuðul farin til oljuflutning hjá ikki fastbúgvandi.***

Strandferðslan hevur í 2023 skrásett 7.470 kr. fyri flutning av olju til fólk, ið ikki eru fastbúgvandi á útoyggj. Síðani 2011 hevur Strandferðslan brúkt vegleiðing frá Innlendismálaráðnum um at loyva stuðul til at flyta oljutunnur hjá ikki fastbúgvandi, um samlaða upphæddin ikki fer upp um 20 t.kr.

Landsgrannskoðanin hevur í undanfarnum grannskoðanarváttanum víst á, at vit ikki taka undir við tulkingini hjá táverandi Innlendismálaráðnum, og at heimild er ikki í Ll. nr. 86/1998 fyri stuðli til ikki fastbúgvandi.

Í januar 2024 hevur Landsgrannskoðanin spurt Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið um ráðið heldur, at heimild er í lógini at rinda fyri flutning hjá "ikki fastbúgvandi".

Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið hevur svarað, at ráðið er samt við Landsgrannskoðanina, at tað eftir lógini bert eru fastbúgvandi í útjaðaraøkjum, sum kunnu fáa stuðul.

***Einans fastbúgvandi hava rætt til flutningsstuðul.***

Niðurstøðan hjá Landsgrannskoðanini er, at skrásetingarnar í 2023 á debitorkontu 23 í fíggjarskipanini hjá Strandferðsluni eru samsvarandi Ll. nr. 86/1998 "um útjavningarstuðul til útjaðaraøki", tó burtursæð frá, at heimild er ikki at rinda fyri flyting hjá "ikki fastbúgvandi".

## 4.12 Akstovan (LG 2023/205-384)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað játtanina til Akstovuna á høvuðskontu 5.38.4.01. Nettojáttanin til Akstovuna er 0 kr.

### Roknskaparviðurskifti v.m.

Roknskapartøl seinastu 5 árini:

*t.kr.*

| Heiti | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 9.040 | 9.394 | 9.647 | 9.998 | 10.318 |
| Keyp av vørum og tænastum | 4.817 | 5.477 | 6.895 | 6.678 | 6.708 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 1.090 | 1.204 | 556 | 276 | 285 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur+ymiskt | 1.580 | 1.339 | 1.092 | 945 | 852 |
| Inntøkur | -202 | -245 | -194 | -137 | -141 |
| Kravd gjøld, bøtur o.a. | -16.959 | -17.078 | -17.992 | -18.324 | -18.270 |
| Innanh. flyt. m. almennar stovn. (útr) | 0 | 0 | 0 | 254 | 305 |
| **Tilsamans** | **-635** | **90** | **3** | **-309** | **57** |

*Lønir*

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað, um lønirnar eru rættar, og at setanirnar eru sambært almenna setanarpolitikkinum. Einki var at finnast at.

*Keyp av vørum og tænastum*

Í 2023 eru útreiðslurnar til keyp av KT-tænastum 2.034 t.kr. Í 2022 vóru tær 1.644 t.kr. Sambært Akstovuni eru gjøldini hækkað, og stovnurin hevur keypt tveir lisensir afturat frá Oracle. Eisini eru útreiðslur í.s.v. at KT verður flutt til Elektron. Seinastu nógvu árini hevur Akstovan keypt KT-tænastur frá einstøkum veitara fyri um 700 t.kr. um árið.

Síðani 2020 hevur Akstovan goldið 272 t.kr. um árið fyri reingerð, men ætlar at skipa fyri nýggjum útboði í 2024.

*Flutningsútbúnaður*

Akstovan hevur biðið um tilboð frá fleiri, tá ið stovnurin keypti bil í desember 2022 fyri 268 t.kr., og sambært Akstovuni eru allir stovnsbilarnir merktir við búmerkinum.

*Skrivstovuútbúnaður*

Seinastu árini hevur Akstovan keypt nýggjar fartelefonir fyri millum 170 t.kr. og 190 t.kr. til øll starvsfólkini annað ella triðja hvørt ár. Tað hevur sambært stovninum verið siðvenja, og starvsfólk brúka telefonirnar til at lesa arbeiðsteldupost, og sýnsfólkini brúka tær til taka myndir fyri at skjalfesta brek o.a.

Landsgrannskoðanin vísti á reglurnar í rundskrivi frá Fíggjarmálaráðnum frá 2011 um at vísa sparsemi, og um at tilfeingið verður brúkt á skynsaman hátt. Akstovan heldur seg hava hildið reglurnar í rundskrivinum, og hevur víst á, at leiðslan viðger øll størri keyp á fundi, um keypini eru neyðug, og um peningur er tøkur. Stovnurin hevði ikki fastnettelefonir, men brúkar einans fartelefonir, eisini til at skráseta arbeiðstíð v.m.

Sambært Akstovuni hava starvsfólkini ikki farteldur, tí er umráðandi fyri stovnin, at arbeiðsamboðini altíð eru tíðarhóskandi og dagførd, og hava eina livitíð, sum er umleið 5 ár. Tá ið tað var Akstovuni greitt, at stovnurin ikki fór at hava pening til at skifta tøknina út í 2024, og útlitini fyri 2025 vóru ógreið, helt leiðslan, at tíðin var búgvin at skifta tøknina út, soleiðis at hon er framtíðartryggjað næstu 5 árini.

Í juli 2024 hevur landsstýrisfólkið kunnað um, at Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið heldur, at Akstovan heldur seg til rundskrivið frá Fíggjarmálaráðnum um KT-útbúnað, har avskrivingartíðarskeiðið fyri fartelefonir og teldur er ásett, og at avskrivingartíðarskeiðið er at meta við livialdurin hjá útgerðini, tá ið um trygd ræður.

### *Leiga og umvælingar*

Akstovan leigar høli í Saltangará, á Sandi og í Sørvági, umframt goymsluhøli í Tórshavn, fyri tilsamans 493.800 kr. um árið.

Akstovan bað um tilboð frá tveimum latarum upp á lásaskipan og tók av lægra tilboðnum fyri 198 t.kr. Hin tilboðsgevarin kærdi til stjórnarráðið. Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið hevur kunnað um, at ráðið viðger kæruna.

### *Inntøkur*

***Egin búskaparskipan.***

Akstovan brúkar egna skipan, nevnd Vegskattaskipanin, at skráseta inntøkurnar í.

Virksemið hjá Akstovuni verður fíggjað við tænastugjøldum, sum eru ásett í ferðslulógini. Í 2023 eru inntøkurnar 18.270 t.kr., t.e. 460 t.kr. minni enn játtanin.

Í 2023 eru inntøkurnar av sýnsgjøldum 9,3 mió.kr. Í 2019 vóru tær 8,5 mió.kr. Inntøkurnar fyri "Umsýn" hava verið 700-800 t.kr. um árið. Í 2023 eru inntøkurnar fyri skrásetingarsýn 850 t.kr. Í 2019 vóru tær 1,2 mió.kr.

Vegskatturin er ikki broyttur síðani 2019. Inntøkurnar seinastu árini eru vaksnar, av tí at fleiri bilar eru skrásettir. Í 2023 sær tó út til, at inntøkurnar eru fallandi.

Í august 2024 hevur landsstýrisfólkið í fiskivinnu- og samferðslumálum greitt frá, at sølan av persónbilum við el sum drívmegi vaks frá 506 bilum í 2022 til 545 í 2023. Tað var ávikavist 28% av samlaðu persónbilasøluni í 2022 og 33% í 2023. Persónbilar við el sum drívmegi gjalda lægri veg- og umhvørvisgjøld enn akfør við fossilari drívmegi. Afturat tí er samlaða bilparkin minkað frá 42.040 til 42.002. Tað er fyrstu ferð í sera nógv ár, at færri skrásetingarskyldug akfør eru skrásett, enn árið frammanundan.

***Minni inntøkur, tí sølan av bilum minkar.***

Sambært landsstýrisfólkinum merkir tað samanlagt minni inntøkur frá vega- og umhvørvisgjøldum.

Tænastugjøldini hava verið óbroytt í fleiri ár, nøkur vóru ikki broytt síðani 1992, og gjøldini hava ikki samsvara við veruliga kostnaðin av at veita tænasturnar. Av tí at tænastugjøldini eru ásett í lóg, hevur verið torført at broyta tey.

Í juli 2024 hevur Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið víst á, at gjøldini eru tillagað við broyting av ferðslulógini í vár.

Í 2023 er sølan av nummarpláturammum og koblingsváttanum 122 t.kr. Í 2020 var sølan 203 t.kr., síðani er hon minkað hvørt ár.

## Skuldarar

Sýnsgjøldini verða goldin saman við vektgjaldinum (vegskattinum), og parturin, sum er til sýnsgjald, verður bókaður í roknskapinum hjá Akstovuni. Vektgjaldið verður inntøkuført á § 20 í landsroknskapinum, t.e. á høvuðskontu 20.52.2.22.

***Ógoldin krøv síggjast ikki í roknskapinum.***

Akstovan skrásetir ikki inntøkurnar av sýnsgjøldum, fyrr enn tey eru goldin. Um bileigarar ikki rinda, sæst tað ikki aftur í roknskapinum hjá Akstovuni.

Um bileigarar ikki rinda vegskatt til ásetta tíð, sendir Akstovan rykkjarar. Eru krøv ikki goldin eftir tveir rykkjarar, sendir Akstovan málini til Sorinskrivaran. Krøvini, sum ikki verða goldin, eftir at tey eru send Sorinskrivaranum, verða latin Fútarættinum til innheinting.

Tá ið mál eru send til Sorinskrivaran, verða tey avskrivað/avsett í roknskapinum á § 20, t.v.s. at inntøkurnar á høvuðskontu 20.52.2.22 “Vegskattur (Vektgjald)” minka við upphæddini. Í 2023 eru 378 t.kr. avskrivaðar.

***Hava ikki fullkomið yvirlit yvir skuldarar.***

Skuldararnir eru ikki skrásettir í roknskapinum hjá Akstovuni. Akstovan visti tí ikki at siga, hvussu stór upphæddin var 31. desember 2023. Sambært yvirliti, sum bókhaldarin førir við hond, var eftirstøðan um 400 t.kr. pr. 8. november 2023, men tað sæst ikki, hvussu gomul skuldin er, og saldan broytist, tá ið nýggj krøv verða send út. Stovnurin hevur útskriftir av skermmyndum liggjandi við upplýsingum um ávísa bilin, nær kravið er skuldskrivað, og nær upphæddin er avskrivað. Sambært Akstovuni rykkja tey skuldarar av og á.

Sambært Akstovuni ber ikki til at skráseta skuldarar í Vegskattaskipanini. Akstovan krevur peningin inn, men sjálv skipanin er ogn hjá Gjaldstovuni. Tað ber heldur ikki til at fáa útskriftir afturvirkandi, men einans eina løtumynd.

Í juli 2024 hevur landsstýrisfólkið greitt frá, at *“skipanin er transaktiónsbaserað, har hvør transaktión er stemplað við transaktionstíðspunkti og tíðarskeiði, og tí ber eisini til at fáa útskriftir afturvirkandi – einki verður burtur. Tó hevur man tikið valið at brúka avskrivingarlistan sum arbeiðsgrundarlag.”*

### *Innheinting hjá Sorinskrivaranum*

Rindar skuldari ikki, eftir at krav er sent Sorinskrivaranum, verður kravið latið Fútarættinum til innheinting. Verður ikki goldið tá, lýsir Akstovan veð í ogn hjá skuldaranum.

Í 2019 hevur Fútarætturin sambært Akstovuni boðað frá, vísandi til landsrættaravgerðir, at minstamark er fyri støðd á krøvum, sum kunnu føra við sær framstilling. Sum høvuðsregla fyri avgerð um politiframstilling hevur Fútarætturin gjørt av, at krav við rentum, skal vera oman fyri 2.500 kr. umframt rættargjald, vísandi til rættargangslógina viðvíkjandi møtiskyldu fyri rekvirentin[16].

Fútarætturin hevur somuleiðis boðað frá, at um rekvirentur velur at biðja um útkoyrandi fútamál, skal hann rokna við, at Fútarætturin fer at áleggja rekvirentinum at møta. Fútarætturin hevur kravt, at Akstovan luttekur í útkoyrandi fútamálum, og leggur Akstovan sjálv orku í at innheinta upphæddir, sum eru millum 1.000 kr. og 2.500 kr. í útkoyrandi málum. Restin verður avskrivað.

***Landsstýrisfólkið heldur, at innheintingin er væl grundfest í mannagongdunum.***

Í juli 2024 hevur landsstýrisfólkið greitt frá, at Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið heldur, at arbeiðið, ið verður gjørt at heinta peningin inn umvegis Fútarættin, er væl grundfest, at tað er gjøgnumskygni í grundfestu mannagongdunum, og eingin skuldari fellur burtur.

[16] Rekvirentur: Ein, sum biður um at fáa gjørt úttøku, tvingsilssølu, konkurs e.l.

*Avskrivingar*
Mál, sum eru send til Sorinskrivaran, verða avskrivað/avsett í roknskapinum. Spurd, eftir hvørjari heimild krøvini verða avskrivað, og hví sýnsgjøldini ikki eru avskrivað ella avsett í roknskapinum hjá Akstovuni á høvuðskontu 5.38.4.01, svaraði Akstovan, at avskrivingarmannagongdin er framhald av mannagongdini, sum var galdandi, tá ið Akstovan tók yvir uppgávuna frá Gjaldstovuni í 2001.

Tá ið bileigarar rinda, eftir at hava fingið boð frá Sorinskrivaranum, skrásetir Akstovan upphæddina sum inntøku á høvuðskontu 20.52.2.22, og parturin fyri pantigjald verður góðskrivaður á útreiðslukontu á høvuðskontuni hjá Akstovuni.

Seinastu 5 árini hava avskrivingarnar á høvuðskontu 20.52.2.22 “Vegskattur (Vektgjald)” verið:

*t.kr.*

| Heiti | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|
| Ógreinað. | -189 | -250 | -228 | -228 | -246 |
| Avskriving | 354 | 364 | 434 | 397 | 378 |
| **Tilsamans** | **164** | **114** | **206** | **169** | **132** |

***Hava tørv á munandi broytingum í skipanini.***

Í juli 2024 hevur landsstýrisfólkið kunnað um, at semja er millum Gjaldstovuna og Akstovuna um, at betri er at gera munandi broytingar enn at royna at gera smærri broytingar í Vegskattaskipanini.

Landsstýrisfólkið hevur víst á, at tá ið eitt krav, sum er avskrivað, verður goldið, so má tað uppskrivast aftur, fyri at saldan hjá skuldaranum kann vera røtt. Akstovan hevur eina væl skipaða mannagongd, tá ið stovnurin bókar avrokningar frá Sorinskrivaranum, og tí er eingin vandi fyri at skuldari hevur negativa saldu. Ráðið er kunnað um, at Akstovan og Gjaldstovan hava havt fund, har hugt var eftir, hvussu serliga debitorskipanin kann gerast smidligari og meira gjøgnumskygd við serligum atliti at innkassomálum, og hvussu hesi mál frameftir skulu umsitast og handfarast.

## Peningastovnskontur
Akstovan hevur fleiri peningastovnskontur. Allar konturnar eru stemmaðar av við uttanhýsis kontuavrit pr. 31. desember 2023.

## Ognarskráin og yvirlit yvir smærri ognir
Akstovan eigur tríggjar bygningar, sum eru skrásettir í Búskaparskipan landsins, ein er í Øravík, ein í Klaksvík og ein í Tórshavn. Grundøki í Øravík er eisini skrásett. 5 bilar og ein trukkur eru í skránni.

## KT-viðurskifti
Ein grannskoðanarfyritøka var í holt við KT-skoðan. Seinasta skoðanin hevði fleiri álvarslig tilmæli. Sambært Akstovuni arbeiða tey við at loysa veikleikarnar í tilmælunum, m.a. er stovnurin í holt við at flyta skipanina til KT Landsins. Tað er stórarbeiði, og fer at taka nakað av tíð. Eisini verður skipanin uppstigað til Oracle Apex. M.a. er endamálið við at flyta skipanina, at Akstovan verður minni heft av einum persóni. Stovnurin vísti á, at tað eru fá, ið duga at arbeiða við Oracle longur, men umleggingin skal gera, at fleiri duga skipanina.

***KT-skipan skal uppstigast.***

Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið tekur undir við, at Akstovan uppstigar KT-trygdina, fylgir tilmælunum hjá KT-skoðaranum, leggur skipanina undir KT Landsins og uppstigar til Oracle Apex.

Akstovan hevur KT-váðameting frá januar 2020. Í váðametingini eru 56 váðar eyðmerktir, nógvir vóru ov høgir. Sambært seinastu KT-skoðan, sum er frá 2022, hevur Akstovan bøtt um nøkur viðurskifti, og er í holt við at bøta um onnur. Landsgrannskoðanin mælti til, at Akstovan arbeiðir við at minka um váðarnar, ið eru ov høgir.

# 5. Uttanríkis- og vinnumál

## 5.1 Uttanríkis- og vinnumálaráðið (LG 2023/206-111)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum á høvuðskontu 6.11.1.06.

Í 2023 eru játtaðar 22,3 mió.kr., sum eru 7,3 mió.kr. meira enn í 2022. Umframt lønarframskriving er játtanin hækkað, tí at starvsfólkahópurin er tillagaður broytta málsøkjabýtinum, tá ið nýtt landsstýri var skipað.

### Roknskaparviðurskifti v.m.

Roknskapar- og játtanartøl 2023, greinað á undirkontur:

*t.kr.*

| Undirkonta | *Játtan* | Roknskapur |
|---|---:|---:|
| 20. Vanligt virksemi | *9.624* | 8.433 |
| 22. Marknaðarføring | *310* | 114 |
| 26. Maritimur tænastudepil | *400* | 0 |
| 28. Uttanríkistænastan | *11.738* | 11.368 |
| 29. Yvirtøka av loftrúmi og loftferðslu | *200* | 0 |
| **Tilsamans** | ***22.272*** | **19.914** |

Roknskaparreglugerðin, ið fevnir um Vinnudeildina og Uttanríkistænastuna, er góðkend í november 2023.

*Lønir o.a.*

Í 2023 eru lønarútreiðslurnar 15,6 mió.kr. Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað nøkur lønarmál, um lýsingar, umsóknir, setanarskriv o.a. eru í málunum, og um størvini eru rætt flokkað. Einki var at finnast at.

Sambært roknskaparreglugerðini kunnu starvsfólk eiga 80 tímar á ella skylda 30 tímar. 1. november 2023 áttu nøkur starvsfólk fleiri tímar á, enn loyvt er sambært reglugerðini.

*Gjaldkort*

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur eitt gjaldkort, ið sambært heimildarváttanini kann nýtast til keyp um alnetið, t.d. flogferðaseðlar, hotell o.a.

Uttanríkistænastan kann lata gjaldkort til starvsfólk, sum javnan ferðast uttanlands í ørindum fyri stovnin. 6 starvsfólk hava gjaldkort frá ráðnum. Bókhaldið flytir pengar á heildarkontuna, har teir síðani verða fluttir á einstøku gjaldkortkonturnar.

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað um skjalprógv eru fyri útreiðslur, goldnar við gjaldkortum, og um útreiðslurnar sannlíkt hoyra til virksemi stovnsins. Einki var at finnast at.

*Keyp av vørum og tænastum*
Tilsamans eru brúktar 3.361 t.kr. til keyp av vørum og tænastum, harav 1.549 t.kr. til ferðing og flutning, 1.380 t.kr. av Uttanríkistænastuni, og 189 t.kr. av Vinnudeildini. Partur av útreiðslunum eru til ferðing innanlands, m.a. endurgjøld fyri koyring í egnum bili.

Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum, um skjalprógv eru fyri tunnilsgjøld, og um endurgjøld fyri koyring við egnum bili eru sambært galdandi reglum. Einki var at finnast at.

***Kostnaðurin fyri hotell hægri enn ásetta markið.***

Landsgrannskoðanin kannaði eisini við stakroyndum, um útreiðslur til ferðing uttanlands eru sambært rundskrivinum um tænastuferðir uttanlands. Í onkrum førum var kostnaðurin fyri hotell hægri enn loyvda markið.

***Ráðið fer at viðmerkja, um kostnaðurin fer upp um ásetta markið.***

Í januar 2024 hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið ásannað, at tað kemur fyri at hotellkostnaðurin er hægri enn upphæddirnar, sum eru ásettar í rundskrivinum. Tað skyldast sum oftast, at tað ikki hevur borið til at fingið hotellkamar, ið er innan fyri ásettu upphæddirnar. Í tílíkum førum skal viðmerkjast, hví kostnaðurin er hægri. Ásannandi, at tað ikki altíð er gjørt, fer ráðið frameftir at leggja dent á at skriva frágreiðingar til bókingar, tá ið kostnaðurin er hægri enn upphæddin í rundskrivinum.

*Umboðan*
Útreiðslur til starvsfólkaútferðir eru bókaðar sum keyp av vørum og tænastum. Vísandi til Kontuskipan landsins mælti Landsgrannskoðanin til at bóka tílíkar útreiðslur á umboðan. Uttanríkis- og vinnumálaráðið tekur tilmælið til eftirtektar.

## 5.2 Jarðfeingi (LG 2023/206-321)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað játtanina til Jarðfeingi á høvuðskontu 6.32.1.03, undirkonturnar Vanligt virksemi og Verkætlanir.

Jarðfeingi fyrisitur kolvetnismál og jarðfrøði, og luttekur í granskingarverkætlanum, ið partvís verða fíggjaðar uttanhýsis. Granskingarsamstarv er við ymiskar útlendskar stovnar og við vinnulívið. 15 ársverk eru á stovninum. Stórur partur av rakstrinum er fíggjaður við stuðulspengum og inntøkum frá ráðgevingarvirksemi.

### Roknskaparviðurskifti o.a.
Roknskaparreglugerðin er í august 2024 góðkend av stjórnarráðnum.

Roknskapartøl seinastu 5 árini fyri vanliga virksemið (undirkonta 20):

*t.kr.*

| Heiti | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 7.072 | 8.464 | 8.300 | 8.295 | 8.592 |
| Keyp av vørum og tænastum | 1.881 | 1.565 | 1.303 | 1.899 | 1.631 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 205 | 263 | 231 | 133 | 100 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 1.234 | 1.238 | 1.246 | 1.291 | 1.312 |
| Søla av vørum og tænastum | -2.247 | -3.566 | -3.399 | -3.401 | -3.596 |
| Stuðul til annað virksemi | 25 | 25 | 25 | 25 | 25 |
| Flytingarinntøkur | -40 | 0 | 0 | 0 | -356 |
| Innanh. flyt. millum almennar stovn. (útr.) | 29 | 287 | 292 | 744 | 1.081 |
| Innanh. flyt. millum almennar stovn. (innt.) | 0 | 0 | 0 | -1.039 | -830 |
| Flyting frá kommununum til landið | 0 | 0 | 0 | -250 | 0 |
| **Tilsamans** | **8.159** | **8.275** | **7.998** | **7.698** | **7.959** |

Í 2022 og 2023 eru 2,5 mió.kr. játtaðar til inntøkur. Stórur partur av inntøkunum stavar frá sølu av jarðfrøðiligum kanningum til Landsverk, P/f Suðuroyartunnil og til P/f Eysturoyar- og Sandoyartunlar.

*Lønir*
Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað nøkur lønarmál. Einki var at finnast at.

Jarðfeingi brúkar Totalview til skráseting av arbeiðstíð. Í rundskrivinum “um skráseting av arbeiðstíð o.a.” er m.a. ásett, at fulltíðarsett starvsfólk við fleksarbeiðstíð kunnu vegleiðandi í mesta lagi eiga 40 tímar á ella skylda í mesta lagi 30 tímar.

Tvey starvsfólk hjá Jarðfeingi áttu ávikavist 195 og 255 tímar á, og ein skyldaði 264 tímar. Spurt, svaraði Jarðfeingi, at tey høvdu ikki kannað tímasaldurnar regluliga, men ætla at gera tað hereftir.

***Jarðfeingi hevur ikki kannað tímasaldur regluliga, men fer at gera tað***

Eitt dømi var sjálvvirkandi skrásetingar í tíðarskrásetingarskipanini, har tímar, skrásettir sum “avspáking”, vóru ikki drignir frá salduni.

Jarðfeingi hevur greitt frá, at skrásetingarnar koma frá einari skipan, sum sjálvvirkandi setir avtalur í kalendaran, grundað á arbeiðsmynstur hjá starvsfólkum, og at avtalurnar síðani sjálvvirkandi eru skrásettar í Totalview.

Eingin hevði varnast feilin, sum sambært Jarðfeingi er rættaður.

*Útreiðslur*
Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað útreiðslur til keyp av vørum og tænastum.

Í einum føri var sama rokning goldin tvær ferðir. Orsøkin var, at skeivt skrásetingar-nummar hjá peningastovni var brúkt. Tað gjørdi, at persónur, við sama kontunummari í einum øðrum peningastovni, fekk upphæddina. Jarðfeingi mátti tí ávísa upphæddina aftur, fyri at rætti móttakarin skuldi fáa peningin.

Landsgrannskoðanin mælti til at skráseta ágóðan sum áogn í fíggjarstøðuni hjá stovninum. Jarðfeingi tók undir við tilmælinum.

Spurd, um Jarðfeingi heldur seg til takstirnar fyri endurrindan fyri hotell uttanlands, svaraði leiðslan, at tað gera tey. Tað kann tó koma fyri, at tey ikki fáa hotell fyri tann prísin, ella at hotell liggur so langt frá, har skeið, fundir o.a. eru, at tað loysir seg ikki at taka av einum bíligari hotelli. Landsgrannskoðanin mælti til at greiða frá á rokning-unum, tá ið goldið verður meira, enn reglurnar áseta.

*Ognaryvirlit*
Jarðfeingi eigur tríggjar bilar sambært ognarskránni. Í 2019 keypti stovnurin útgerð fyri 592 t.kr., og í 2020 fyri 191 t.kr. Jarðfeingi er samt við Landsgrannskoðanina, at tólini skulu skrásetast í ognarskránna.

Jarðfeingi hevur innanhýsis yvirlit yvir smærru ognirnar og yvir málningar, sum eru læntir frá Listasavninum.

### KT-trygd
Jarðfeingi er við í Trygdarpakkanum hjá Landsneti, sum m.a. fatar um KT-grann-skoðan. Ein skoðan hevur verið í 2022, sum hevði nøkur tilmæli, ið Jarðfeingi eigur at fylgja.

***KT-skoðan hevði tilmæli, sum Jarðfeingi eigur at fylgja.***

### Nærhitaskipanir
Í desember 2022 hevur Jarðfeingi goldið 387 t.kr. fyri 4 borihol á Glyvrum og í Klaksvík. Niðanfyri eru yvirlit yvir kostnað og stuðul viðvíkjandi boriholunum.

*Glyvrar*

Í juli 2022 játtaði Uttanríkis- og vinnumálaráðið 634,4 t.kr. av høvuðskontu 6.37.4.07 “Orkumál” í stuðli til at vinna út orku úr undirgrundini á Glyvrum, tó í mesta lagi 50% av kostnaðinum. Í játtanarskrivinum vísti ráðið á, at Runavíkar kommuna saman við Jarðfeingi hevði søkt um 803.832 kr. í stuðli til verkætlanina.

Roknskapartøl fyri verkætlanina, Nærhitaskipan – Glyvrar:

*t.kr.*

| Heiti | 2022 | 2023 | Tilsamans |
|---|---|---|---|
| Grannskoðan | 0 | 19 | 19 |
| Keyp av tænastuveitingum annars | 250 | 0 | 250 |
| Vanligar flytingarinntøkur | 0 | -251 | -251 |
| Innanh. flyt. millum almennar stovn. - útr. | 300 | 729 | 1.029 |
| Innanh. flyt. millum alm. stovn. - innt. (UVMR) | -383 | 0 | -383 |
| Útbúgving, gransking og mentan (Runav.kommuna) | -167 | 0 | -167 |
| **Tilsamans** | **0** | **496** | **496** |

***Grannskoðanarvirki sett upp roknskap fyri verkætlan.***

Eitt grannskoðanarvirki hevur sett upp roknskapir fyri 2022 og 2023 fyri verkætlanina. Sambært faktura frá 2023 eru 9,5 t.kr. fyri uppseting av roknskapinum og 9,5 t.kr. fyri ráðgeving, samskifti og fundir við leiðslu, stjórn og verkætlanarleiðara. Í váttanini sigur grannskoðarin m.a., at hann ger onga niðurstøðu um grannskoðan ella gjøgnumgongd, hvørt verkætlanarroknskapurin er gjørdur samsvarandi roknskaparreglunum.

Sambært roknskapinum kostaði verkætlanin tilsamans 1.297,6 t.kr. fyri 2022 og 2023. Stuðulin var 634,4 t.kr., og frá Runavíkar kommunu komu 167 t.kr. Nettokostnaðurin hjá Jarðfeingi var tí 496,2 t.kr.

Kostnaðurin fyri at bora 3 hol var 250,1 t.kr. Í 2022 fekk Jarðfeingi 300 t.kr. frá verkætlanini fyri fyrireiking, eftirlit, uppmáting, greining av dátum v.m. Í 2023 vóru útreiðslurnar til Jarðfeingi 728,5 t.kr.

*Klaksvík*

Í juli 2022 játtaði Uttanríkis- og vinnumálaráðið 165,6 t.kr. av høvuðskontu 6.37.4.07 “Orkumál” í stuðli til útvinning av orku úr undirgrundini á Fossum í Klaksvík, tó í mesta lagi 50% av kostnaðinum. Í játtanarskrivinum vísir ráðið á, at Klaksvíkar kommuna saman við Jarðfeingi hevði søkt um 165,6 t.kr.

Roknskapartøl fyri verkætlanina, Nærhitaskipan – Klaksvík:

*t.kr.*

| Heiti | 2022 | 2023 | Tilsamans |
|---|---|---|---|
| Grannskoðan | 0 | 19 | 19 |
| Keyp av tænastuveitingum annars | 137 | 0 | 137 |
| Vanligar flytingarinntøkur | 0 | -51 | -51 |
| Innanh. flyt. millum almennar stovn. - útr. | 150 | 42 | 192 |
| Innanh. flyt. millum almennar stovn. - innt. (UVMR) | -115 | 0 | -115 |
| Útbúgving, gransking og mentan (Klaksvíkar kommuna) | -83 | 0 | -83 |
| **Tilsamans** | **89** | **10** | **99** |

Sama grannskoðanarvirkið, sum setti upp roknskapir fyri nærhitaskipan á Glyvrum, hevur sett roknskapir fyri 2022 og 2023 upp fyri hesa verkætlanina.

Sambært roknskapinum kostaði verkætlanin tilsamans 347,5 t.kr. Útreiðslurnar til Jarðfeingi eru 191,5 t.kr., fyri at bora 137 t.kr. og til uppseting av roknskapi 19 t.kr.

Stuðulin frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum var 165,6 t.kr., og frá Klaksvíkar kommunu komu 82,8 t.kr. Nettokostnaðurin hjá Jarðfeingi var 99,1 t.kr.

*Samanumtikið um roknskapirnar fyri Nærhitaskipanirnar*

Roknskapirnir fyri verkætlanirnar eru skrásettir á vanligu játtanina hjá Jarðfeingi. Spurd, hví Jarðfeingið bað annan grannskoðara seta roknskapirnar upp, svaraði

leiðslan, at í játtanarskrivinum hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið m.a. sett sum treyt, at verkætlanarroknskapurin skal lúka ásetingarnar í §§ 21-22 í K. nr. 125/2011 "um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan". Jarðfeingi skilti tað soleiðis, at tey tí skuldu hava góðkendan grannskoðara at grannskoða roknskapin.

*Landsgrannskoðanin grannskoðar stovnin, herundir eisini verkætlanirnar.*

Landsgrannskoðanin vísti á, at sambært § 8, stk. 2, í Ll. nr. 25/1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m." útinnir Landsgrannskoðanin grannskoðanina av roknskapum, sum koma undir § 7, um annað ikki er ásett í løgtingslóg, kunngerð e.l. hjá landinum.

Í januar 2024 hevur Jarðfeingi kunnað um, at verkætlanirnar skuldu havt verið grannskoðaðar av Landsgrannskoðanini. Uttanríkis- og vinnumálaráðið er av somu áskoðan.

Landsgrannskoðanin vísti á, at roknskapurin vísir ikki rætta mynd, tá ið stuðulin frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum er bókaður á tvey ymisk høvuðssløg, t.e. partvís sum flytingarinntøka og partvís sum flytingar millum almennar stovnar, inntøkur.

Rokningarnar frá Jarðfeingi til verkætlanini eru sambært fylgiseðlum, har viðmerkt er, at tær eru fyri "Fyrireiking, staðseting og eftirlit av boringum". Sambært Jarðfeingi hava tey fakturerað útreiðslurnar sambært metingum um, hvussu nógva tíð starvsfólk hava brúkt til arbeiðið.

*Lønarútreiðslur til verkætlanir ikki skrásettar sambært kunngerðini.*

Sambært § 34 í K. nr. 84/2011 skulu lønarútreiðslur til starvsfólk, sum arbeiða bæði í stuðulsfíggjaða virkseminum og vanliga virkseminum, verða skrásettar alt eftir, hvussu stóran part starvsfólkini hava arbeitt ávikavist í stuðulsfíggjaða virkseminum og vanliga virkseminum. Jarðfeingi ásannar, at lønarútreiðslurnar áttu at verið skrásettar sum stuðulsfíggjað virksemi.

*Kommunurnar eiga rættindi til jarðhita-holini.*

Spurt, hvør hevur rættindi til boraðu holini, svaraði Jarðfeingi, at kommunurnar skulu brúka holini, og tey eru ogn hjá kommununum.

### Stuðulsfíggjað virksemi

Reglur um stuðulsfíggjað virksemi eru í K. nr. 84/2011 "um rakstrarjáttan" og í vegleiðing 15. desember 2023 frá Gjaldstovuni um "Fremmanda fígging av almennum virksemi". Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum kann loyva stuðulsfíggjaðum virksemi, m.a. treytað av, at stovnurin skal kunna skilja stuðulsfíggjað virksemi frá øðrum uppgávum stovnsins.

Stovnar skulu umsita stuðulin eftir somu reglum, sum eru álagdar stovninum sambært játtanini í fíggjarlógini. Stuðulin skal støðlast í fíggjarstøðuni, og síðan flytast á raksturin so hvørt peningurin verður nýttur til endamálið. Um fíggingin verður rindað afturút, skal krav verða sent gevaranum, tá ið peningurin er nýttur til ætlaða endamálið. Kontan "Ikki inntøkuført - granskingarstyrkir, gávur o.a." skal verða gjørd upp, so skjótt sum verkætlanin er liðug.

Roknskapartøl fyri stuðulsfíggjaða virksemið (undirkonta 40):

*t.kr.*

| Heiti | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---:|---:|---:|---:|---:|
| Lønir v.m. | 1.615 | 1.096 | 1.499 | 1.471 | 1.640 |
| Keyp av vørum og tænastum | 2.136 | 1.625 | 848 | 1.340 | 1.694 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 818 | 31 | 3 | 17 | 4 |
| Leiga, viðlíkah., skattur o.a. | -10 | 0 | 0 | 7 | 13 |
| Søla av vørum og tænastum | -351 | 0 | 0 | 0 | 1 |
| Vanligar flytingarinntøkur | -70 | -40 | -30 | -475 | -730 |
| Flytingarinnt. úr útlandinum | -4.123 | -2.712 | -2.320 | -2.359 | -2.661 |
| Innanh. flyt. m. alm. stovn. (útr.) | 0 | 0 | 0 | 0 | 40 |
| Innanh. flyt. m. alm. stovn. (innt.) | -14 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Tilsamans** | **0** | **1** | **0** | **0** | **0** |

Tøl úr fíggjarstøðuni:

*t.kr.*

| | 2022 | 2023 |
|---|---|---|
| Skuldarar | 40 | -10 |
| Onnur áogn | 86 | 151 |
| Ikki inntøkuført – granskingarstyrkir, gávur o.t. | -5.673 | -5.249 |

## Stakroyndir av verkætlanarroknskapum

Landsgrannskoðanin hevur kannað tvær verkætlanir.

### *Nautilus Petroskills o.o. skeið*

Í 2015 søkti Jarðfeingi oljufeløg um stuðul til menning av starvsfólkunum fyri at kunna styrkja føroyska økið í mun til oljuleiting. Statoil Føroyar og Føroya Kolvetni stuðlaðu við 725 t.kr. hvørt, tilsamans 1.450 t.kr.

Roknskapartøl:

*t.kr.*

| Heiti | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Keyp av vørum og tæn. | 183 | 0 | 267 | 98 | 19 | 2 | 13 | 35 | 108 |
| Flytingarinnt., útland. | -183 | 0 | -267 | -98 | -19 | -2 | -13 | -35 | -108 |
| **Tilsamans** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** | **0** |

Í 2023 eru 725 t.kr. eftir av stuðulsupphæddunum. T.v.s. at í 9 ár eru 725 t.kr. av teimum 1.450 t.kr. brúktar. Í 2022 eru nærum allar útreiðslurnar til ferðaseðlar og gisting uttanlands. Sambært Jarðfeingi er tað tí, at starvsfólk hava verið á ráðstevnum uttanlands.

Tøl úr fíggjarstøðuni:

*t.kr.*

| St.Rk. 0881 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Primo | 0 | -1.267 | -1.267 | -1.000 | -902 | -883 | -880 | -868 | -833 |
| VÆ nullstillað | -1.267 | 0 | -1.000 | -902 | -882 | 0 | -868 | -833 | 725 |
| Inntøkuført | 0 | 0 | 1.267 | 1.000 | 902 | 2 | 880 | 868 | 833 |
| **Ultimo** | **-1.267** | **-1.267** | **-1.000** | **-902** | **-883** | **-880** | **-868** | **-833** | **725** |

### *Jarðfrøðilig kort*

Í fíggjarstøðuni hava 832 t.kr. verið støðlaðar til verkætlanina síðani 2014. Upphæddin var tá flutt frá rakstrinum hjá Jarðfeingi til stuðulsfíggjaða virksemið. Sambært Jarðfeingi hevur játtanin verið til síðani 2004, tá ið oljufeløg í fyrstu útbjóðingar-umførunum bundu seg til at førleikamenna føroyingar og føroysk virkir. Sambært roknskapunum hevur einki virksemi verið frá 2014 til 2022.

Jarðfeingi hevur greitt frá, at tey søktu um stuðul til at geva út bók um føroysku jarðfrøðina. Arbeiðið steðgaði upp, av tí at vitanin um evnið var blivin ov gomul. Í 2023 hevur Jarðfeingi gjørt av at byrja av nýggjum, og væntar at bókin kemur út í 2025.

### *Aðrar verkætlanarútreiðslur*

Jarðfeingi hevur goldið 156.266 kr. til útlendskan veitara og bókað upphæddina sum keyp av tænastuveitingum. Á rokningini er viðmerkt: Prospect Definition and Volume Generation Training, 3. til 23. apríl 2023. Tilsamans 17 dagar fyri £ 17.850 = 156,3 t.kr.

***Um arbeiði er gjørt í Føroyum, eigur MVG at vera á rokningini.***

Landsgrannskoðanin vísti á, at um talan var um arbeiði, sum var gjørt í Føroyum, átti meirvirðisgjald at verið á rokningini. Er talan um persónligt arbeiði í Føroyum, átti upphæddin møguliga at verið goldin um lønarskipanina hjá Gjaldstovuni.

## 5.3 Búnaðarstovan (LG 2023/206-332)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað høvuðskonturnar 6.33.2.01 "Landbúnaðarroyndir og -ráðgeving" og 6.33.2.03 "Búnaðarstovan.

### Roknskaparviðurskifti v.m.

Búnaðarstovan hevur ikki dagførda roknskaparreglugerð. Í 2022 sendi Búnaðarstovan uppskot til nýggja roknskaparreglugerð til stjórnarráðið.

Í 2022 vísti Landsgrannskoðanin á, at hjá stovnum, ið hava inntøkur, eiga søluprísir, avsláttrar o.a. at vera lýst í roknskaparreglugerðini. Eisini skulu stovnar hava skrivligar reglur um, hvussu nógvar tímar starvsfólk kunnu skylda ella eiga á.

Eftir at Búnaðarstovan tók yvir innkrevjingina av festileigugjøldum frá Búnaðargrunninum, hevur stovnurin arbeitt við at skipa innkrevjingina. Sambært stovninum eru tey komin á mál við tí og ætla at dagføra roknskaparreglugerðina samsvarandi.

***Búnaðarstovan komin á mál at skipa innkrevjingina.***

Roknskapar- og játtanartøl:

*t.kr.*

| Høvuðskonta | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|
| Landbúnaðarroyndir og -ráðgeving, vanligt virksemi | 3.642 | 3.638 | 3.759 | 4.628 |
| Búnaðarstovan, vanligt virksemi | 3.489 | 4.532 | 4.545 | 4.552 |
| **Tilsamans** | **7.131** | **8.170** | **8.304** | **9.180** |
| *Játtan* | *7.132* | *9.086* | *8.310* | *9.190* |

#### *Inntøkur*

Í 2023 hevur Búnaðarstovan selt seyðakjøt fyri 90 t.kr. Inntøkurnar eru minni enn í 2022, tá ið tær vóru óvanliga stórar, orsakað av rætting av skeivleika frá 2019, har rokningar av misgáum ikki vóru sendar. Minkingin í 2023 kemst eisini av, at alt kjøtið ikki var selt innan ársskiftið. Búnaðarstovan hevði fryst kjøtið, og vónaði at sleppa av við tað í summar.

Í seinastu frágreiðing vísti Landsgrannskoðanin á, at kontanta sølan var tøppað inn í kassan, og teir keypararnir høvdu ikki fingið rokningar. Nakrir keyparar høvdu rindað á peningastovnskontuna, og Búnaðarstovan hevði bókað ta søluna eftir kontuavritum. Landsgrannskoðanin mælti til at leggja fylgiseðlar við, har vekt og prísir stóðu á. Eisini vístu vit á, at tað kundi gera roknskapin misvísandi, at seyður, ið var latin sum fjallløn, ikki sást aftur í roknskapinum.

Í 2023 hevur Búnaðarstovan lagt talmerktar fylgiseðlar við bókingunum, har vekt og prísir standa á. Virðið á fjalllønini, tilsamans 111,4 t.kr., er bókað undir ymsar rakstrarinntøkur, og lønirnar eru hækkaðar við somu upphædd.

#### *Lønir*

Í 2021 hevði Búnaðarstovan ikki skrivligar reglur um, hvussu nógvar tímar starvsfólk kundu skylda ella eiga á, og stovnurin hevði ikki tíðaravmarkað lønir í roknskapinum. Landsgrannskoðanin mælti til at halda ásetingarnar um tíðarskrásetingar og tíðaravmarkingar.

Í august 2023 greiddi landsstýrisfólkið í uttanríkis- og vinnumálum frá, at Búnaðarstovan miðaði eftir at fylgja ásetingunum um tímasaldur. Búnaðarstovan hevði ikki tíðaravmarkað lønir í roknskapinum, tó at fleiri starvsfólk áttu meira enn 40 tímar á. Stjórin vísti á, at nøkur starvsfólk hava árstíðarbundnar arbeiðsuppgávur, ið gera, at tey til tíðir eiga nógvar tímar á, sum tey avspáka. Skylda starvsfólk ov nógvar tímar, verður tað avroknað í lønini.

Búnaðarstovan hevur í 2024 greitt frá, at viðurskiftini verða nágreinað í komandi dagføring av roknskaparreglugerðini.

***Lønir eru ikki tíðaravmarkaðar.***

Búnaðarstovan hevur ikki tíðaravmarkað lønir í roknskapinum 2023. Við árslok skyldaði eitt starvsfólk 42 tímar, og nøkur starvsfólk áttu meira enn 200 tímar á. Harafturat áttu fleiri starvsfólk gamlar serstakar frívikur.

***Tímasaldurnar ikki í samsvari við reglurnar í rundskrivinum.***

Í mars 2024 vóru nakrar tímasaldur minkaðar, tó at eitt starvsfólk skyldaði 70 tímar og tvey áttu meira enn 200 tímar. Tímasaldurnar eru ikki í samsvari við reglurnar í rundskrivinum um skráseting av arbeiðstíð.

Í juli 2024 hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið kunnað um, at tey fara at mæla Búnaðarstovuni til at áseta mørk fyri meir- og minnitímar í starvsfólkahandbókini.

### Útleigan av landsjørð

Í 2021 yvirtók Búnaðarstovan umsitingina av festileigu og leigu av traðum v.m. frá Búnaðargrunninum.

Í 2023 eru inntøkurnar av útleigan av landsjørð 1.050 t.kr., harav 28 t.kr. er festileiga.

Búnaðarstovan hevur greitt frá, at í verandi skipan fyri festileigu, sum helst er óbroytt síðan 1870-árini, er samlaða árliga festileigan um 25 t.kr. Hóast lógarbroytingina í Bk. 120/1938 “om Jordbrugets Fremme”, har ásett var, hvussu gjøldini skuldu dagførast frameftir, er tað ongantíð framt í verki, og verandi lóggáva hevur ongar ítøkiligar ásetingar um tað.

Búnaðarstovan leggur afturat, at um "Prísroknarin" hjá Hagstovuni verður nýttur fyri tíðarskeiðið aftur til 1940, høvdu prístalsviðgjørd og dagførd festileigugjøld svarað til 889 t.kr. Eisini er tørvur á at dagføra øll onnur leigugjøld (t.d. traðir, neystagrundir og vinnuøkir av ymiskum slagi).

Sambært § 11 í Ll. nr. 45/2007 “um landsjørð” ásetir landsstýrismaðurin í kunngerð nærri reglur um, hvussu jarðarprísir, prísir fyri bygningar á festum, gjøld fyri avloysing av biti, prísir fyri innistøðuna o.a. og gjøld fyri leigu av jørð verða ásett. Somuleiðis ásetir landsstýrismaðurin sakargjøld, sum Búnaðarstovan kann krevja.

Leigugjøldini eru ásett í K. nr. 95/2007 “um umsiting av landsjørð”, og sambært § 7 skulu prísirnir endurskoðast í minsta lagi triðja hvørt ár. Í 2019 heitti Búnaðarstovan á Fiskimálaráðið um at dagføra kunngerðina, sum hevur verið óbroytt síðani 2013.

***Kunngerð um umsiting av landsjørð er ikki dagførd.***

Kunngerðin er ikki dagførd, og sambært Búnaðarstovuni hevur stovnurin samskift við stjórnarráðið um uppskot um at broyta gjøldini í kunngerðini. Búnaðarstovan hevur ta fatan, at stjórnarráðið ætlar at gera kunngerðina av nýggjum, tá ið lógin um landsjørð er broytt.

***Nýggjur búnaðar-politikkur er evnaður til.***

Í juni 2024 hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið greitt frá, at nýggjur búnaðarpolitikkur er evnaður til, og landsstýrisfólkið hevur í juni 2024 kunnað umboð fyri allar flokkar á Tingi um høvuðstættirnar í komandi politikkinum. Ætlandi verða eisini gjørdar broytingar í løgtingslógini um landsjørð, og kunnu dagføringar av gjøldum eisini koma upp á tal.

#### *Skráseting av leigugjøldum*

Búnaðarstovan skrásetir leigugjøldini í debitorskipanina hjá Gjaldstovuni, og sendir rokningar út, soleiðis at leigararnir kunnu gjalda áðrenn 1. desember. Í sambandi við tað arbeiðið hevur Búnaðarstovan roynt at fingið betri GIS-skrásetingar[17] og at menna

[17] GIS data: Geographic Information System.

eina GIS-grundaða dátugrunnskipan, sum er mett at kosta 2 mió.kr. Búnaðarstovan hevur søkt Keypsportalin um undantaksloyvi at bjóða keypið út, og hevur fingið loyvi.

*Búnaðarstovan fingið undantak at bjóða keyp út.*

**Fíggjarstøða**
Búnaðarstovan hevur peningastovnskontu til inntøkur og ein kassa. Landsgrannskoðanin hevur kannað kassauppgerðirnar, og um kassin stemmar við Búskaparskipan landsins. Einki var at finnast at.

## 5.4 Búnaðarstovan, løgujáttan (LG 2021/206-332)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Búnaðarstovuni, løgujáttan, høvuðskontu 6.33.2.08.

Í 2023 vísti landsstýrisfólkið í uttanríkis- og vinnumálum á, at bygningarnir, sum vóru frá 80-unum, vóru nógv merktir av elli og sliti. Í 2020 vóru 5.148 t.kr. játtaðar, og Búnaðargrunnurin rindaði landskassanum ta upphæddina við heimild í § 6b í Ll. nr. 34/2013.

Fyrireikingarnar og prosjekteringin tóku nakað av tíð, og tørvur var á at kanna takplátur og sperrur, fyri at fáa staðfest standin, áðrenn farið var undir umvælingararbeiðið.

Í 2022 var farið undir arbeiðið, eftir at tað var boðið út. Bæði fjósið og løðan høvdu átrokandi tørv á viðlíkahaldi, tó hevði fjósið hægru raðfestingina.

*Fjós og løða átrokandi tørv á viðlíkahaldi.*

Arbeiðið var boðið út við valmøguleikanum at eisini umvæla tekjuna á løðuni. Tær 5,1 mió.kr. rukku ikki til at fáa umvælt alt liðugt, og tí blivu 2,7 mió.kr. játtaðar afturat við eykajáttanum í 2022 fyri at røkka á mál við báðum tekjunum. Búnaðargrunnurin endurrindaði landinum peningin.

Nýggju ventilatormotorarnir í fjósinum vóru ikki settir upp í 2023 ella 2024, tí játtanin hevði ikki átekning um at flyta óbrúkta játtan til komandi ár. Restin av løgujáttanini, ið Landsverk umsitur, fall tí burtur.

Í juli 2024 hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið greitt frá, at løgujáttanin hevði ikki átekning um at flytast kundi yvir um ár í fíggjarlógini 2023, tí verkætlanin skuldi verða liðug í 2023.

Ein misskiljing hevði við sær, at Landsverk ikki bílegði ventilatiónsskipanina í 2023, og komið var inn í 2024, áðrenn gáað var um mistakið. Skipanin er neyðug og tað var rúm fyri kostnaðinum í løgujáttanini.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur umrøtt málið við Fíggjarmálaráðið. Ventilatiónsskipanin verður keypt í 2024 og bókað á løgujáttanina og Búnaðargrunnurin endurrindar útreiðsluna av peningi, sum Búnaðarstovan hevur á kontu í Búnaðargrunninum.

Landsverk hevur í samstarvi við Búnaðarstovuna gjørt eina raðfesta verkætlan fyri umvæling, viðlíkahald og umbygging av bygningunum hjá stovninum.

Roknskapartøl seinastu 4 árini:

*t.kr.*

| Heiti | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|
| Búnaðarstovan, løgujáttan | 143 | 202 | 5.132 | 2.131 |

Í Ll. nr. 84/2022 “um at taka festið Heygsgarð úr festiskipanini” er m.a. ásett, at festið verður tikið úr festiskipanini, og innistandandi upphædd á festikontuni hjá garðinum í Búnaðargrunninum skal markast til ábøtur og nýgerð á Heygsgarði.

Vísandi til, at Búnaðarstovan hevði játtan í fíggjarlógini til "Stuðulsfíggjað virksemi", heitti leiðslan á stjórnarráðið um, at heimildin sambært Ll. nr. 84/2022 kundi verða gagnnýtt, uttan at málið fyrst skal umvegis fíggjarlógarviðgerð í hvørjum einstøkum føri.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur umrøtt málið við Búnaðarstovuna og hevur víst á, at tað ikki var heimild fyri tí í játtanarskipanini.

Sambært Búnaðarstovuni eru nógvir snøklar eftir, eitt nú ventilatiónskipanin, har tørvur er á at fáa umvælingararbeiðið avhendað. Í skúlastovuni standa tríggjar tunnur undir lekum.

*Umvælingar mettar at kosta 14 mió.kr.*

Í januar 2024 hevur Landsverk gjørt kostnaðarmeting av tiltrongdum umvælingararbeiði, ið er eftir at gera. Samlað er kostnaðurin mettur til 14 mió.kr., harav umvælingar av fjósinum 1,2 mió.kr. og umvælingar av løðuni 2,2 mió.kr.

Í juli 2024 hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið kunnað um, at ráðið er greitt yvir, at tað er tørvur á at gera umvælingar á bygningarnar hjá Búnaðarstovuni, og hevur heitt á Landsverk um at gera eina raðfesta meting av umvælingartørvinum.

*Umvælt verður, so hvørt peningur er til tess.*

Ætlanin er at fara undir eina miðvísa tilgongd at umvæla bygningarnar, so hvørt peningur er til tess. Ætlanin er at fíggja umvælingarnar við peningi, sum Búnaðarstovan hevur og fær inn á kontu í Búnaðargrunninum.

## 5.5 Almenn jørð, søla (LG 2021/206-332)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðanina av sølu av almennari jørð.

*Prísáseting*

Búnaðarstovan helt, at broytta mynstrið í undirstøðukervinum, og ávirkanin tað hevði á áhugan fyri útbyggingum og jarðarkeypi, hevði við sær, at flokkingin av ávísum bygdum í ávikavist Øki 1 til Øki 5 sambært fylgiskjali A í kunngerðini um umsiting av landsjørð, átti at verið dagførd.

Í 2023 vísti landsstýrisfólkið á, at galdandi prísir vóru ásettir í K. nr. 95/2007. Farið var undir at endurskoða kunngerðina í 2022, men arbeiðið steðgaði, tá ið val var útskrivað. Arbeitt var við at broyta lógina um landsjørð, og tá ið tær broytingarnar vóru samtyktar, var ætlanin at endurskoða kunngerðina.

Í august 2024 hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið kunnað um, at arbeitt verður enn við at broyta lógina. Arbeitt verður samstundis við at broyta kunngerðina.

*Mannagongd fyri sølu av jørð*

Búnaðarstovan vísti á, at jørð kundi í serligum førum seljast øðrum sambært § 9 í Ll. nr. 45/2007 "um landsjørð". Heimildin er víð, og tí sóknaðist Búnaðarstovan eftir greiðari reglum at arbeiða eftir.

Í § 9 í K. nr. 83/2011 "um løgujáttan" er ásett, at allar løgur, sum skulu seljast, skulu lýsast alment til sølu. Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur váttað fyri Búnaðarstovuni, at søla av landsjørð ikki er fevnd av tí ásetingini, orsakað av materiellu heimildini givnari sambært Ll. nr. 45/2007 "um landsjørð".

*Búnaðarstovan avvíst umsókn frá privatum um at keypa grundstykki.*

Búnaðarstovan hevur hinvegin avvíst umsóknum frá privatum persónum, sum høvdu søkt um at keypa eitt ítøkiligt grundstykki aðrastaðni, og víst til eitt notat frá 2006 frá Vinnumálaráðnum um, at jørð í slíkum førum bert skal seljast til kommunur.

*Tvístøða ímillum siðvenju og politiska viljan.*

Búnaðarstovan vísti á, at stovnurin var í einari tvístøðu ímillum politiska viljan og siðvenjuna um, at einans kommunur kundu keypa almenna jørð, tó at løgfrøðiliga var heimild til at selja til ein og hvønn.

Í 2023 greiddi landsstýrisfólkið frá, at eitt av endamálunum við oman fyri nevndu lógarbroytingum er at fáa til vega greiðar reglur um sølu av almennari jørð.

Í august 2024 hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið greitt frá, at arbeitt verður við at broyta reglurnar, soleiðis at reglur fyri sølu av almennari jørð gerast greiðari.

## 5.6 Átøk til at menna nýskapan og framleiðslu av føroyskum matvørum (LG 2023/206-332)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað játtanina á høvuðskontu 6.33.2.17, ið er flutt frá høvuðskontu 6.33.2.10 “Landbúnaðarstuðul”. Tvær undirkontur eru: 01 “Stuðul til menning og vøkstur á landbúnaðarøkinum”, og 02 “Stuðul til at økja um tilvitskuna um føroyska matframleiðslu”. Játtaðar eru 750 t.kr. til hvørja undirkontu, tilsamans 1,5 mió.kr.

Sambært kunngerðini um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan skal verða upplýst um neyvt endamál, móttakaraskara, útrokningarhátt, samantalda stuðulsupphædd, og nær útgoldið verður.

Sambært innanhýsis reglunum hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum verður stuðul til verkætlan ikki goldin út, fyrr enn ráðið hevur móttikið grannskoðaðan roknskap fyri verkætlanina ella roknskap og frágreiðing um verkætlanina.

Móttakarar av stuðli í 2023:

| | *t.kr.* |
|---|---:|
| **Undirkonta 01** | |
| Búnaðarstovan og Sp/f SERvitan | 725 |
| Forlagið Mallustova | 25 |
| **Undirkonta 02** | |
| Klaksvíkar kommuna | 300 |
| Serbreytin á Kambsdali | 50 |
| Húsarhaldsskúli Føroya og Matkovin | 400 |
| **Tilsamans** | **1.500** |
| *Játtan* | *1.500* |

### Stuðul til menning og vøkstur á landbúnaðarøkinum

Uttanríkis- og vinnumálaráðið lýsti eftir verkætlanum, og fýra umsóknir komu inn.

Treytin fyri at fáa stuðul er, at verkætlanir vísa á veruligar møguleikar fyri menning og vøkstri í landbúnaðinum. Kanningar, verkligar royndir ella verkætlanir skulu leggja nýggja vitan afturat verandi framleiðsluhættum, mannagongdum o.ø.

Í reglugerðini er m.a. ásett, at kanningar, verkligar royndir, skjalfestingar og verkætlanir skulu gerast í samstarvi við Búnaðarstovuna, sum skal tryggja, at úrslitini gerast atkomulig hjá almenninginum og tøk hjá øðrum at brúka.

Búnaðarstovan skal, saman við luttakandi pørtunum, gera skrivliga samstarvsavtalu, sum skal fevna um:

1) lýsing av verkætlanini og væntaða úrslitinum,
2) greining av samsvarinum millum endamálið við verkætlanini og endamálið við játtanini,

3) lýsing av luttakarunum, og
4) tíðar- og kostnaðarætlan fyri verkætlanina.

Landsgrannskoðanin hevur gjøgnumgingið umsóknirnar og kannað, um tær lúka ásettu treytirnar. Einki var at finnast at.

**Stuðul til at økja tilvitskuna um føroyska matframleiðslu**
Uttanríkis- og vinnumálaráðið lýsti eftir umsóknum við freist til 22. august 2023 at søkja. Tríggjar umsóknir komu inn, sum allar fingu stuðul játtaðan.

Treytin fyri at fáa stuðul er, at endamálið við verkætlan er at økja framleiðslu, nýtslu, virðing fyri og tilvitsku um stuttfluttar føroyskar dygdar- og heilsugóðar matvørur. Verkætlanir skulu hava við sær meirkostnað samanborið við tað, umsøkjarar annars brúka til sama endamál.

Skúlar, barnagarðar, bústovnar, ellis- og røktarheim o.o. hava framíhjárætt, og skulu umsóknir í minsta lagi fevna um:

1) lýsing av verkætlanini og væntaða úrslitinum,
2) greining av samsvarinum millum endamálið við verkætlanini og endamálið við játtanini,
3) lýsing av luttakarunum, og
4) tíðar- og kostnaðarætlan fyri verkætlanina.

Tá ið verkætlan er lokin, skal umsøkjarin lata inn frágreiðing, sum skal vera soleiðis háttað, at hon er egnað til almenna útbreiðslu, t.d. sum skrivlig frágreiðing, filmur, myndir, ljóðupptøka o.t.

Landsgrannskoðanin hevur gjøgnumgingið umsóknirnar og kannað, um tær lúka ásettu treytirnar. Einki var at finnast at.

## 5.7 Sjóvinnustýrið, bygningur (LG 2015/206-351)

Í 2018 kunnaði Uttanríkis- og vinnumálaráðið um, at ætlanin var at byggja Sjóvinnu-stýrinum nýggj skrivstovuhøli í Vágum. Verklagslóg var samtykt fyri 9,9 mió.kr. Landsverk stóð fyri byggiverkætlanini, og eftir ætlan skuldi bygningurin verða klárur at flyta inn í á heysti 2019.

Í desember 2023 var almenn móttøka á Giljanesi. Bygningurin er latin Sjóvinnu-stýrinum. Avhendingarskjal og nýtsluloyvi eru undirskrivað ávikavist 20. november 2023 og 22. februar 2024.

## 5.8 Vinnustovnurin (LG 2017/206-371)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin, at Vinnustovnurin hevði ikki formligt loyvi frá Fíggjarmálaráðnum at nýta egna búskaparskipan, men hevði í februar 2018 søkt um loyvi.

***Vinnustovnurin hevur ikki formligt loyvi til egna búskaparskipan.***

Í 2022 greiddi Umhvørvis- og vinnumálaráðið frá, at frá tí at Fjarskiftiseftirlitið, sum var fyrsti stovnur í nú samanlagda Vinnustovninum, var sett á stovn, hevði stovnurin havt egna búskaparskipan. Tað var gjørt í samráði við Gjaldstovuna, av tí at skipanin hjá Gjaldstovuni ikki var hóskandi til so nógvar skuldarar, sum Vinnustovnurin hevði.

Hóast formligt loyvi ikki fyrilá, var sambært Umhvørvis- og vinnumálaráðnum eingin ivi um, at loyvi til at hava egna búskaparskipan var avtalað. Fyri at fáa formligu viðurskiftini í rættlag, sendi ráðið fyri nøkrum árum síðani Fíggjarmálaráðnum umbøn um formliga

góðkenning. Enn var formliga loyvið ikki givið, og tað tyktist heldur ikki sum, at gongd var í málinum.

Í august 2024 hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið kunnað um, at einki nýtt er í málinum um formligt loyvi at nýta egna búskaparskipan. Ráðið leggur afturat, at núverandi skipan er fingin til vega og sett upp í samstarvi við Gjaldstovuna.

## 5.9 Heilsufrøðiliga starvsstovan (LG 2023/206-375)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Játtanin er á høvuðskontu 6.37.5.04. Stovnurin umsitur eisini rakstrarjáttanina til Djóralæknatænastuna, høvuðskontu 6.33.1.04. Sambært fíggjarlógini umsitur Heilsufrøðiliga starvsstovan lógir og kunngerðir viðvíkjandi matvørum, djórasjúkum, djóravernd, djóralæknavirksemi og alivinnu.

Virksemið hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni er býtt í fýra virkisøki:

- fyrisitingarøkið, sum fevnir um landsdjóralæknan, veterinerdeildina og matvørudeildina. Eisini er umsitingin av aliloyvum partur av fyrisitingarøkinum, eins og skrivstovan hjá stovninum,
- kanningarstovuøkið, sum fevnir um kemiska deild, mikrobiologiska deild og patologiska deild,
- umsiting av aliloyvum, sambært Ll. nr. 83/2009 um aling av fiski v.m., og
- granskingar- og menningarøkið. Verkætlanir verða framdar í teimum yrkisgreinum, sum Heilsufrøðiligu starvsstovan røkir sambært lóg.

Tey fýra virkisøkini eru í roknskapinum býtt á undirkontur:

*t.kr.*

| Heiti | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|
| Vanligt virksemi | 11.809 | 14.679 | 17.209 | 15.831 | 15.435 |
| Vanligt virksemi, kanningarstovur | 5.113 | 2.441 | -1.203 | 2.484 | 5.288 |
| Umsiting av aliloyvum | 56 | 121 | 201 | 128 | 409 |
| Inntøkufíggjað virksemi, verkætl. | 2 | -1 | 0 | 16 | 117 |
| **Tilsamans** | **16.980** | **17.240** | **16.207** | **18.458** | **21.249** |
| *Játtan* | *17.005* | *17.262* | *17.955* | *18.455* | *21.438* |

Kanningarstovan heldur til í hølum á Debesartrøð, ið landið eigur. Hinar deildirnar eru í leigaðum hølum á Smyrilsvegi 7.

Heilsufrøðiliga starvsstovan er akkrediterað[18] av DANAK[19] eftir ISO 17025 standardinum. DANAK er óheftur stovnur undir danska Sikkerhedsstyrelsen. Akkrediteringin merkir, at Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur skjalprógvaðar førleikar til at gera kanningar í samsvari við altjóða krøv. Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur fingið onkrar viðmerkingar frá DANAK um viðurskifti, sum skulu rættast.

***Nøkur viðurskifti skulu rættast.***

### Roknskaparviðurskifti o.a.

Virksemið verður fíggjað við játtan í fíggjarlóg, umframt inntøkum av ómaksgjøldum og fyri at veita tænastur.

[18] Góðkenning av fyritøku ella stovni fyri teirra førleika og óheftni.
[19] Den danske akkrediteringsfond.

Roknskapartøl frá 2019 til 2023:

*t.kr.*

| Heiti | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir | 28.105 | 31.654 | 36.470 | 32.843 | 32.788 |
| Keyp av vørum og tænastum | 12.087 | 16.154 | 19.561 | 14.495 | 11.332 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 1.976 | 4.047 | 6.062 | 1.719 | 1.213 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 1.188 | 1.250 | 1.267 | 1.442 | 1.401 |
| Avskrivingar o.a. | -170 | -46 | 4 | -86 | 55 |
| Ymsar rakstrarútreiðslur o.a. | 5 | -8 | 1 | -13 | -5 |
| Søla av vørum og tænastum | -13.063 | -24.102 | -35.523 | -21.104 | -13.326 |
| Eftirlits- og umsjónaravgjøld | -12.345 | -11.560 | -11.470 | -10.934 | -10.391 |
| Vanligar flytingarinntøkur | -410 | -157 | -172 | 0 | -1.373 |
| Innanh. flyt. ml. alm. stovn.útr. | 8 | 8 | 8 | 669 | 118 |
| Innanh. flyt. ml. alm. stovn.innt. | -400 | 0 | 0 | -573 | -565 |
| **Tilsamans** | **16.980** | **17.240** | **16.207** | **18.458** | **21.249** |
| *Játtan* | *17.005* | *17.262* | *17.955* | *18.455* | *21.438* |

Roknskaparreglugerðin er seinast dagførd í 2018 og góðkend av stjórnarráðnum. Í 2022 og 2023 eru mánaðarroknskapirnir góðkendir rættstundis. Stjórin kunnaði um, at bæði hann og roknskaparleiðarin gera ymisk eftirlit í sambandi við, at mánaðar-roknskapirnir skulu góðkennast. Landsgrannskoðanin mælti til at skjalfesta eftirlitini.

### *Lønir*

Í november 2023 starvaðust 64 fólk hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, svarandi til 55,5 ársverk.

Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum, um lønirnar í november 2023 vóru rættar. Ein tíðaravmarkað setan, sum skuldi at enda í januar 2023, er longd til 31. desember 2024, men nýggja setanarbrævið var ikki undirskrivað. Landsgrannskoðanin hevði ikki aðrar viðmerkingar.

***Fleiri starvsfólk áttu nógvar tímar á, og onnur skyldaðu nógvar tímar.***

Arbeiðstíðin verður skrásett í Totalview. Sambært innanhýsis reglum kunnu starvsfólk eiga í mesta lagi 100 tímar á og skylda í mesta lagi 20 tímar. 3. desember 2023 áttu 6 starvsfólk millum 112 og 909 tímar á, og 10 starvsfólk skyldaðu millum 21 og 200 tímar. Harumframt stóðu 10 starvsfólk at skylda millum 4 og 118 feriutímar.

***Tíðaravmarking av lønum ikki røtt.***

Sambært rundskrivinum um at tíðaravmarka lønir, skulu tímar tíðaravmarkast, um starvsfólk eigur meira enn 40 tímar ella skyldar meira enn 30 tímar. Við árslok 2022 hevur Heilsufrøðiligu starvsstovan bert tíðaravmarkað tímar hjá starvsfólkum, sum eiga meira enn 40 tímar og ikki tímar hjá teimum, sum skylda meira enn 30 tímar. Sambært stjóranum er orsøkin, at tey høvdu ikki givið sær far um ásetingarnar í reglunum.

### *Ferðaútreiðslur*

Heilsufrøðiligu starvsstovan brúkar ferðaavrokningarskipanina hjá Gjaldstovuni. Vit kannaðu nakrar ferðauppgerðir. Einki var at finnast at.

Heilsufrøðiligu starvsstovan hevur endurrindað starvsfólki 9.641 kr. fyri flogferðaseðlar í desember 2022 og mars 2023, sum eru í navninum hjá starvsfólkinum og einum barni. Ferðauppgerð var ikki gjørd.

Heilsufrøðiligu starvsstovan gjørdi av at rinda fyri flogferðaseðlarnar hjá barninum eisini, tí starvsfólkið hevur arbeiðsstað á heimaskrivstovu uttanlands.

Landsgrannskoðanin vísti á, at heimild er ikki at rinda privatar ferðaseðlar. Uttanríkis- og Vinnumálaráðið hevur kunnað um, at frameftir rindar Heilsufrøðiliga starvsstovan ferðaútreiðslur, dagpening v.m. hjá starvsfólkunum sambært almennu reglunum.

*Húsaleiga*
Heilsufrøðiliga starvsstovan húsast í tveimum bygningum í Tórshavn. Kanningarstovan er á Debesartrøð, og restin av stovninum er á Smyrilsvegi 7. Í 2023 var samlaða leigan fyri hølini á Smyrilsvegi 1.089 t.kr.

Stovnurin rindar 6.356 kr. um mánaðin til privata kanningarstovu fyri leigu av atgongd til kanningarstovuna. Kanningarstovan hevur tól, sum Heilsufrøðiliga starvsstovan ikki hevur.

*Keyp*
Sambært stjóranum fylgir stovnurin fyri tað mesta rundskrivinum frá Fíggjarmálaráðnum um keyp av vørum og tænastum, tó at onkur undantøk eru. Tey biðja um tilboð frá minst tveimum veitarum, ella bjóða út á Keypsportalinum.

Landsgrannskoðanin kannaði nakrar rokningar. Frá tveimum størri veitarum, sum eru afturvendandi, hevur stovnurin biðið um tilboð frá veitarunum sjálvum, og ikki biðið um tilboð frá øðrum.

## Aliskipanin
Aliskipanin er sera týdningarmikil fyri alifyrisitingina hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, tí allar framleiðsludátur viðvíkjandi alivinnuni liggja í skipanini. Alifyritøkurnar skráseta ymiskar dátur í skipanina, sum stovnurin brúkar m.a. sum grundarlag undir viðgerðar- og flutningsloyvum. Eisini framleiða tey hagtøl úr skipanini.

Útreiðslurnar til menning, 2019 til 2023:

*t.kr.*

| Heiti | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|
| Menning | 255 | 1.350 | 1.328 | 680 | 853 |

***Aliskipanin er ikki boðin út á Keypsportalinum.***

Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur ikki serstaka játtan til Aliskipanina og rindar útreiðslur til menning og rakstur av skipanini av vanliga rakstrinum hjá stovninum. Um alifeløgini hava brúk fyri support til skipanina, rinda tey fyri tað. Skipanin er ikki bjóðað út á Keypsportalinum.

Í 2018 vísti Uttanríkis- og vinnumálaráðið á, at Heilsufrøðiliga starvsstovan var bundin at veitaranum, sum hevði ment skipanina. Ráðið helt, at tað loysti seg ikki at skifta veitara. Uttanríkis- og vinnumálaráðið ætlaði at mæla stovninum til at biðja Fíggjarmálaráðið um undantak, og at samráðast við veitaran um lægri tímaprís.

Stjórin hevur kunnað um, at veitarin hevur boðið sær til at lækka tímaprísin, um bindandi avtala verður gjørd millum partarnar. Heilsufrøðiliga starvsstovan tók ikki av, tí stovnurin verður ov bundin, og KT-arbeiði verður bert gjørt, um peningur er tøkur í rakstrinum.

## Keyp av olju til kanningarstovuna
Landsgrannskoðanin hevur fyrr umrøtt keyp av olju til Heilsufrøðiligu starvsstovuna. Oljunýtslan hjá stovninum var við í útboði av oljulating til almennar stovnar. Avtalan við oljufelagið hevur við sær, at Landsverk stendur fyri oljukeypinum og fær avsláttururin av oljuni, meðan Heilsufrøðiliga starvsstovan rindar vanligan oljuprís.

***Sparingar í oljurokningum eiga at síggjast aftur sum minni útreiðsla hjá stovninum.***

Eins og við seinastu grannskoðan heldur Landsgrannskoðanin, at meginreglan, um at roknskapurin skal verða gjøgnumskygdur, og at inntøkur og útreiðslur skulu bókast, har tær verða havdar, er ikki fylgd. Landsgrannskoðanin skal vísa á, at sparingin eigur at síggjast sum minni útreiðsla hjá Heilsufrøðiliga starvsstovuni fyri olju.

Vit umrøddu eisini, at í 2017 var samstarvsavtala gjørd millum Heilsufrøðiliga starvsstovuna og Landsverk um Orkutøk. Landsverk hevur ábyrgd av at meta um og fremja

orkuátøk, og avtakarin fær ikki avsláttturin, ið Landsverk fær við at bjóða oljukeypið út. Sparingin fer til at menna onnur orkuátøk á landsins bygningar.

***Samstarvsavtalan um Orkutøk er ikki undirskrivað.***

Samstarvsavtalan millum Landsverk og Heilsufrøðiligu starvsstovuna er enn ikki undirskrivað. Sambært stjóranum er tað m.a. tí, at oljulatarin vildi ikki býta rokningina sundur millum Heilsufrøðiligu starvsstovuna og Landsbókasavnið, men sendir Heilsufrøðiligu starvsstovuni rokning fyri fulla upphædd. Ein onnur orsøk er, at Heilsufrøðiliga starvsstovan ivaðist í ætlanini hjá Landsverki at seta ventilatiónspumpu í bygningin.

Í dag fær Heilsufrøðiliga starvsstovan oljurokningar frá Landsverki. Sambært stovninum eru rokningarnar ikki nóg væl útgreinaðar.

## Inntøkur

Sambært roknskaparreglugerðini eru inntøkusløgini, sum Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur:

- Gjøld frá vinnu og borgarum fyri alment eftirlit, sum eru áløgd sambært lóg/kunngerð,
- inntøkur frá kanningarstovuvirksemi, og
- aðrar inntøkur, m.a. verkætlanarvirksemi.

Inntøkur 2019 til 2023:

*t.kr.*

| **Heiti** | **2019** | **2020** | **2021** | **2022** | **2023** |
|---|---|---|---|---|---|
| *Undirkonta 20, Vanligt virksemi:* | | | | | |
| Søla av vørum og tænastum | -284 | -388 | -186 | -196 | -111 |
| Eftirlits- og umsjónaravgjøld | -11.937 | -11.128 | -11.038 | -10.502 | -9.959 |
| *Undirkonta 21, Kanningarstovur:* | | | | | |
| Søla av vørum og tænastum | -12.779 | -23.714 | -35.337 | -20.909 | -13.214 |
| *Undirkonta 22, Umsiting av aliloyvum:* | | | | | |
| Eftirlits- og umsjónaravgjøld | -408 | -432 | -432 | -432 | -432 |
| **Tilsamans** | **-25.408** | **-35.662** | **-46.993** | **-32.039** | **-23.716** |

Samanborið við 2019 vuksu inntøkurnar munandi í 2020, 2021 og 2022. Í 2023 eru tær minkaðar aftur. Orsøkin er koronufarsóttin, har Heilsufrøðiliga starvsstovan kannaði koronuroyndir fyri Sjúkrahúsverkið.

Í rundskrivi um roknskaparreglugerðir er m.a. ásett, at stovnur, sum hevur inntøkur, skal greiða frá um heimildir, prísáseting, avsláttur og kredittir í reglugerðini. Eisini skal verða greitt frá, hvussu skrásetingin er løgd til rættis, og hvussu prísásetingin verður gjørd.

***Inntøkur ikki nóg væl lýstar í roknskaparreglugerðini.***

Í roknskaparreglugerðini hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni er eingin frágreiðing um hesi viðurskifti. Landsgrannskoðanin mælti til, at hædd verður tikin fyri ásetingunum, tá ið roknskaparreglugerðin verður dagførd.

Prísirnir fyri lógarásett eftirlit eru ásettir í lóg ella kunngerð. Sambært prísyvirliti á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni eru prísirnir seinast dagførdir 15. mars 2023.

Prísirnir fyri tænastur, sum kanningarstovan veitir, eru ásettir eftir tí, sum kanningarstovur í Danmark og aðrastaðni taka fyri líknandi veitingar. Stjórin kunnaði um, at stovnurin kann ikki seta prísin ov lágt, tí hann er í kapping við privata kanningarstovu.

## Fíggjarstøða

### *Ognaryvirlit*

***Støðisognin er ikki dagførd í Búskaparskipan landsins.***

Støðisognin í Búskaparskipan landsins er ikki dagførd, m.a. eru bilar, sum ikki eru skrásettir, og aðrir skulu strikast. Landsgrannskoðanin mælti til, at støðisognin í Búskaparskipan landsins verður dagførd samsvarandi § 20 í roknskaparkunngerðini.

Kanningarstovan hevur útgreinað yvirlit yvir útgerð, sum tey nýta til kanningar, og yvirlitið er seinast dagført í november 2023. KT-starvsfólk røkir yvirlit yvir teldur og annan KT-útbúnað. Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur ikki yvirlit yvir innbúgv, útbúnað og aðra útgerð.

Landsgrannskoðanin heldur, at tað kann vera fíggjarliga skynsamt at føra yvirlit yvir smærri ognir og mælti til at hava hóskandi yvirlit yvir innbúgv v.m., soleiðis at leiðslan veit, hvørjar ognir stovnurin hevur goldið fyri og eigur, og at tær eru til.

*Bilar*
Heilsufrøðiliga starvsstovan eigur 9 bilar, sum eru merktir við búmerkinum hjá stovninum. Stovnurin hevur skrivligar mannagongdir fyri nýtslu av bilunum, har tað er ásett, at bilarnir skulu bert nýtast í sambandi við arbeiði hjá stovninum, men stjórin kann loyva, at starvsfólk brúka bilarnir til privat ørindi eftir arbeiðstíð.

Sambært § 8 í rundskrivinum "um merking av akførum hjá landinum", er ikki loyvt at nýta akfør hjá landinum til privata nýtslu. Landsgrannskoðanin mælti til at halda ásetingarnar.

***Tað er ikki loyvt at brúka akfør hjá landinum til privata nýtslu.***

*Skuldarar*
Tænastu- og vøruskuldarar, frá 2019 til 2023:

*t.kr.*

| Heiti | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|
| Tænastu-, vøruskuldarar o.t. | 5.094 | 7.000 | 8.209 | 4.253 | 4.547 |
| Avseting móti tapi | -250 | -152 | -152 | -67 | -122 |
| **Tilsamans** | **4.844** | **6.848** | **8.057** | **4.186** | **4.425** |

Skuldararnir verða gjøgnumgingnir eina ferð um árið, og Heilsufrøðiliga starvsstovan metir, um setast skal av móti tapi. Øll skuld, eldri enn eitt ár, verður sett av.

Heilsufrøðiliga starvsstovan avskrivar ikki skuld uttan so, at felag er farið konkurs, ella at talan er um smáar upphæddir, sum eru eldri enn 5 ár. Hevur skuldari gjaldfalna skuld, fær viðkomandi ikki fleiri tænastur, fyrr enn gamla skuldin er goldin.

*MVG*
Kanningarstovan er MVG-skrásett. Landsgrannskoðanin hevur hugt at, um MVG-uppgerðirnar í 2022 og fyrra hálvár 2023 eru rættar samanborið við skrásetingarnar í Búskaparskipan landsins. Einki var at finnast at.

*Peningastovnskonta*
Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur peningastovnskontu, sum m.a. verður brúkt til inngjøld viðvíkjandi innflutningi av kelidjórum og til flutningsloyvi til kleyvdjór. Einastu útgjøld eru peningastovnskostnaðir og mánaðarlig tøming av kontuni til Gjaldstovuna. Landsgrannskoðanin hevur hugt at kontuavritunum fyri 2023. Einki var at finnast at.

## Verkætlanir
Heilsufrøðiliga starvsstovan luttekur í nøkrum verkætlanum. Landsgrannskoðanin hevur hugt at verkætlanini RASOPTA, ið snýr seg um at betra aling av fiski við resirkulerandi "aquakultur" tøkni, nevnd RAS . Verkætlanin er stuðlað av ES gjøgnum Horizon 2020 programmið, og Heilsufrøðiliga starvsstovan luttekur umvegis Københavns Universitet. Verkætlanin byrjaði í 2021 og skal enda í 2025. Roknskapurin er bókaður á undirkontu 45 "Inntøkufíggjað virksemi," stað 0105. Landsgrannskoðanin heldur, at verkætlanin eigur at bókast á stuðulsfíggjað virksemi.

***Verkætlan eigur at bókast á stuðulsfíggjað virksemi.***

Roknskapur frá 2021 til 2023:

*t.kr.*

| Heiti | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 0 | 167 | 511 |
| Keyp av vørum og tænastum | 0 | 120 | 238 |
| Vanligar flytingarinntøkur | 0 | 0 | -749 |
| Innanh. flyt. millum almennar stovnar (innt.) | 0 | -282 | 0 |
| **Tilsamans** | **0** | **5** | **0** |

*t.kr.*

| Heiti | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|
| Ikki inntøkuført-granskingarstyrkir, gávur o.t. | -1.536 | -1.536 | -935 |
| Skuld, annað | 0 | -5 | 0 |
| **Tilsamans** | **-1.536** | **-1.541** | **-935** |

Sambært Heilsufrøðiligu starvsstovuni hevur Københavns Universitet goldið forút fyri føroyska partin av verkætlanini. Í 2021 rindaði Københavns Universitet 1.536 t.kr., og peningurin er støðlaður í fíggjarstøðuni.

Flestu útreiðslurnar eru til lønir og ferðing. Í 2022 eru bókaðar 281.716 kr. sum inntøka í rakstrinum á standardkontu 76 "Innanh. flytingar millum almennar stovnar". Upphæddin er mótbókað á St.Rk. 0360 "Tøknilig millumrokning" í fíggjarstøðuni.

Stjórin hevur greitt frá, at stovnurin hevði pening tøkan í rakstrinum, av tí at hann hevði fingið inntøkur av virksemi í sambandi við koronufarsóttina. Stovnurin valdi tí sjálvur at gjalda útreiðslurnar av RASOPTA í 2022 fyri at vera vísur í, at peningurin frá ES røkkur til alla verkætlanina.

## Kunningartøkni

### *KT-skoðan*

Heilsufrøðiliga starvsstovan er stovnur, sum hevur dátur, ið eru týðandi fyri føroyska samfelagið. KT-viðurskiftini eru skoðað av grannskoðanarvirki, og frágreiðing um skoðanina er latin stovninum í januar 2022.

Heilsufrøðiliga starvsstovan nýtir skipanir frá KT Landsins og Gjaldstovuni, men hevur eisini fakskipanir, sum verða viðlíkahildnar av øðrum veitarum. Tær eru Aliskipanin og LabVantage.

***KT-skoðan vísti á nakrar veikleikar.***

Niðurstøðan hjá KT-grannskoðaranum er, at Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur raðfest trygdarviðurskiftini á leiðslustigi, og eitt ávíst arbeiði er gjørt fyri at hava eitt hóskandi trygdarstøði. Grannskoðanin staðfesti nakrar veikleikar.

Stjórin kunnaði um, at tilmælini frá KT-grannskoðaranum verða gjøgnumgingin. Okkurt tilmæli er loyst, men fleiri eru eftir at loysa.

Vísandi til skoðanarfrágreiðingina mælti Landsgrannskoðanin til at fáa KT-viðurskiftini í rættlag so skjótt til ber.

### *KT-váðameting*

***Nakrir KT-váðar eru ov høgir.***

Í desember 2022 hevur Heilsufrøðiliga starvsstovan saman við grannskoðanarvirki gjørt KT-váðameting. Í váðametingini eru KT-váðarnir eyðmerktir. Sambært váðametingini eru ávísir váðar ov høgir. Landsgrannskoðanin mælti til, at stovnurin arbeiðir við at minka um váðarnar.

## 5.10 Føroya Altjóða Skipaskrá, FAS (LG 2021/220-521)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Føroya Altjóða Skipaskráseting (FAS).

*Undantøk til 20 ára aldursmark*
Skip, sum eru 20 ár ella eldri, tá ið søkt verður, kunnu ikki skrásetast í FAS sambært § 4a í Ll. nr. 78/1992 "um Føroyska Altjóða Skipaskrá". Landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um, hvussu § 4a, stk. 1-3, í lógini skal umsitast.

Í 2022 kunnaði landsstýrisfólkið um, at Umhvørvis- og vinnumálaráðið fór saman við Sjóvinnustýrinum at áseta nærri reglur í kunngerð um, hvussu undantakið í § 4a, stk. 1-3, í lógini skal umsitast.

Í august 2024 hevur landsstýrisfólkið kunnað um, at einki nýtt er í málinum.

*Skattligur váði fyri landskassan*
Í 2022 vísti landsstýrisfólkið í umhvørvis- og vinnumálum á, at *"Skattalógin ásetur, hvat virksemi gevur rætt til skattaafturbering. Dupultskattaavtalur hava somuleiðis ávirkan á, hvar skattur skal gjaldast. Yvirskipað er at siga, at TAKS umsitur skattalóggávuna, og skal tryggja, at skattur ikki verður afturborin av órøttum. Tað hevur tó víst seg, at tað kann vera trupult hjá skattamyndugleikanum at hava eftirlit við, at virksemið hjá skipum í FAS veruliga hevur rætt til skattaafturbering sambært skattalógini og dupult-skattaavtalum. Tað er umráðandi, at skattamyndugleikarnir í hvørjum einstøkum máli ítøkiliga meta um og taka støðu til, hvørt reiðaríið hevur rætt til afturbering av skatti."*

***Trupult hjá TAKS at hava eftirlit við, um skip hava rætt til afturbering.***

Umhvørvis- og vinnumálaráðið og Fíggjarmálaráðið høvdu saman við ávikavist Sjóvinnustýrinum og TAKS sett gongd á eitt greiningar- og samstarvsátak. Endamálið var at fáa í lag eitt betri samstarv ímillum Sjóvinnustýrið og TAKS, ið skuldi hjálpa skattamyndugleikanum at tryggja, at afturbering av skatti ikki fór fram av órøttum.

Í august 2024 hevur Umhvørvis- og vinnumálaráðið kunnað um, at ávíst greiningar-arbeiði er gjørt, annars er einki nýtt í málinum.

*Samanumtikið*
Í 2022 greiddi landsstýrisfólkið frá, at Umhvørvis- og vinnumálaráðið og Sjóvinnustýrið vóru í holt við at endurskoða ásetingar í FAS-lógini. Ætlanin var at áseta í FAS-lógini meira ítøkilig og herd krøv til umboðsfólk hjá eigarum, sum vóru búsitandi uttanlands, soleiðis at umboðsfólk í størri mun kundu ábyrgdast, um viðurskifti mótvegis myndugleikum ikki fóru rætt fram. Um størri ábyrgd fór at hvíla á umboðsfólkum kundi væntast, at tey í størri mun fóru at tryggja sær, at tey ikki umboðaðu feløg, har vandi var fyri sambandi við ivasamt virksemi.

***Ráðið og Sjóvinnu-stýrið eru í holt við at endurskoða ásetingar í FAS-lógini.***

Í august 2024 hevur Umhvørvis- og vinnumálaráðið greitt frá, at ætlanin er framvegis at endurskoða reglurnar og herða krøvini til umboðsfólk v.m.

# 6. Barna- og útbúgvingarmál

## 6.1 Barna- og útbúgvingarmálaráðið (LG 2023/207-111)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum á høvuðskontu 7.11.1.09.

Í 2023 eru játtaðar 12,1 mió.kr., sum eru 17,3 mió.kr. minni, enn í 2022. Orsøkin til minnu játtanina er nýggja málsøkjabýtið, at starvsfólkahópurin er tillagaður, og at játtanin til Yrkisdepilin, ið var á undirkontu 21, er flutt til høvuðskontu 7.23.1.08.

**Roknskaparviðurskifti v.m.**

Roknskaparreglugerðin hjá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum er dagførd í januar 2024.

*Lønir*

16 fólk starvast í ráðnum, og lønarútreiðslurnar í 2023 eru 8,7 mió.kr. Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað nøkur lønarmál. Einki var at finnast at.

*Skráseting av arbeiðstíð*

Starvsfólk kunnu í mesta lagi eiga 40 tímar á ella skylda 30 tímar. Í januar 2024 vóru flestu tímasaldurnar innan fyri ásettu mørk, tó vóru tvær saldur hægri. Sambært ráðnum kemst tað av, at átrokandi uppgávur koma, har starvsfólk arbeiða nógv. Serliga tey, sum arbeiða niðursetta tíð, koma tá upp um ásetta markið. Tímarnir verða avspákaðir.

*Ferðaútreiðslur*

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað uppgerðir fyri ferðing uttanlands. Í fleiri førum var kostnaðurin fyri hotell hægri enn loyvt sambært almennu reglunum. Landsgrannskoðanin mælti til at halda reglurnar.

***Í fleiri førum var kostnaðurin fyri hotell hægri, enn loyvt.***

*Keyp av vørum og tænastum*

Tilsamans eru brúktar 3,1 mió.kr. til keyp av vørum og tænastum, harav 1 mió.kr. er til verkætlanina “Skipan av barnaøkinum”. Endamálið við verkætlanini er at endurskoða núverandi skipan og m.a. at kanna, um til ber at lofta útsettum børnum betur. Íblásturin er serliga komin frá íslendska modellinum.

Ráðið hevur sett eitt fólk í fast starv, og gjørt konsulentavtalu við ein annan. Ein útlendskur konsulentur er eisini við í verkætlanini.

Landsgrannskoðanin reisti spurningin, um tað er rætt, at útlendski konsulenturin ikki krevur MVG av tænastunum.

## 6.2 Barnaverndarstovnar (LG 2023/207-213)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað Barnaverndarstovnar á høvuðskontu 7.21.3.14. Játtanin er til stovnstilboð og Familjudepil. Á stovnunum arbeiða 103 starvsfólk, um 87 ársverk.

Lógargrundarlagið er Ll. nr. 18/2005 "um barnavernd". Sambært § 69 í lógini ber landið útreiðslurnar av at stovnseta og reka samdøgursstovnar, dagstovnar hjá landinum og av familjuviðgerð á samdøgursstovnum. Eisini ber landið útreiðslurnar, tá ið børn verða sett á annan góðkendan stovn, ella tá ið børn verða sett á stovn uttanlands. Afturat tí rindar landið fyri ókeypis umboðan, sambært § 57 í lógini.

Stovnstilboðið er skipað í deildum, sum eru ætlaðar børnum og ungum í aldrinum 0 til 18 ár, í serligum førum til 23 ár, sum hava serligan tørv á umsorgan og viðgerð vegna sosialar-, atferðar- ella tillagingartrupulleikar. Føroya Kærustovnur skrivar børn og ung inn á stovnarnar.

Sambært K. nr. 4/2007 "um brúkaragjald fyri børn á stovni hjá landinum", rindar avvarðandi barnaverndarøki part av útreiðslunum fyri stovnsuppihald. Brúkaragjaldið er 30.000 kr. um mánaðin, t.e. ájavnt samsýningina, kommunur rinda fosturforeldrum, sum hava óvanliga trupul børn til fosturs.

***Í 2024 eru 30 børn sett heiman.***

Í 2024 eru 30 børn sett heiman, í 2022 vóru 20.

### Roknskaparviðurskifti o.a.

Í 2023 var játtanin 42.893 t.kr., og brúktar eru 39.625 t.kr.; størsti parturin til lønir. Sambært leiðsluni stavar minninýtslan frá, at Familjudepilin var ikki virkin.

*t.kr.*

| Heiti | 2022 | 2023 |
|---|---|---|
| Lønir v.m. | 34.734 | 37.594 |
| Keyp av vørum og tænastum | 4.816 | 4.022 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 867 | 1.167 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 2.523 | 3.875 |
| Ymsar rakstrarútreiðslur | 187 | 275 |
| Ymsar rakstrarinntøkur | -138 | -144 |
| Innanh. flyt. millum almennar stovn. (útr.) | 1.961 | 2.353 |
| Flyting frá kommununum til landið | -6.769 | -9.517 |
| **Tilsamans** | **38.180** | **39.625** |

*Lønir*

Almannaverkið lýsir størv leys á heimasíðuni og á øðrum miðlum við í minsta lagi 14 daga freist at søkja. Av tí at Almannaverkinum støðugt vantar starvsfólk, liggja lýsingar eftir avloysarum uttan umsóknarfreist til m.a. Barnaverndarstovnar á heimasíðuni.

Sambært flestu sáttmálum skulu starvsfólk vita 4 vikur fram, hvussu tey skulu arbeiða, og tað halda leiðararnir seg til. Ymiskt er frá stovni til stovn, hvussu langt tíðarskeið uppgjørt verður fyri, tað er alt ímillum 1 og 12 vikur.

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað nøkur lønarmál, hvussu setanarpolitikkurin er hildin, og um útgoldnar lønir eru í samsvari við setanarskriv, starvssáttmálar og vaktætlan.

Í einum lønarmáli vóru ikki øll skjøl tøk. Persónurin fekk sambært Almannaverkinum starv í november 2022 sum tilkallivikarur. Skjøl eru tøk um broytingar í arbeiðsstaði, men ikki onnur skjøl, so sum umsókn. Sambært Almannaverkinum høvdu tey bráðfeingis tørv á fólki til serliga fyriskipan.

Almannaverkið hevur ikki barnaváttanir fyri starvsfólk, sum eru komin í starv, áðrenn Ll. nr. 80/2022 "um barnaváttanir" kom í gildi.

*Skráseting av ognum*
Akførini hjá Barnaverndarstovnunum eru skrásett í Búskaparskipan landsins. Einki av teimum 15 akførunum hevur frámerki at hoyra til Almannaverkið. Sambært leiðsluni hava tey undantak frá at merkja bilarnar.

*Samanumtikið*
Økið Barnaverndarstovnar tykist at virka í skipaðum kørmum, og umsitingin av stovnunum er skipað eftir felags leisti. Lønargrannskoðanin vísti, at starvssetanir og umsiting av lønum liggur í føstum rammum við teimum undantøkum, sum kunnu stinga seg upp av brádliga íkomnum støðum.

## Vitjan á stovnum
Landsgrannskoðanin hevur vitjað á bústøðunum, sum hoyra til Barnaverndarstovnarnar, fyri at kunna okkum um arbeiðið og at síggja hølisviðurskiftini. Felags fyri øll støðini er, at tey eru sethús ella íbúðarblokkar, sum eru innrættað sum heim.

Bústaður 1: Sethús, har eigarin hevur gjørt tillagingar, soleiðis at tað hóskar til endamálið. Ein bilur við lyft hoyrir til stovnin. Nakrar rættingar skuldu gerast við bilin, fyri at lyftin skal kunna brúkast.

Bústaður 2: Sethús, sum eru nýumvæld, og innan er alt nýtt og sær út til at vera væl hildið. Umhvørvið við húsini er serligt, tí tey liggja nær viðarlund. Starvsfólkini vístu á, at trivnaðurin er góður.

Bústaður 3: Stór íbúð, sum er øll ovara hæddin í einum bygningi. Hølini eru rúmlig og hava allar neyðugar hentleikar til endamálið umframt starvsfólkahøli.

Bústaður 4: Sethús, sum eru partvíst umvæld. Eigarin er í holt við at gera neyðugar broytingar. Tað er sami eigari á hesum fýra bústøðunum, og hann hevur gjørt tillagingar og hampað um innan og uttan í øllum bústøðunum.

Bústaður 5: Tvey nýggj sambygd hús, sum hýsa tveimum eindum. Sami eigari eigur báðar eindirnar.

Bústaður 6: Sethús, sum eru bygd í 2006 og eru merkt av aldri. Møguleiki er hjá búfólkunum at hava eina hædd fyri seg sjálv, men sambært starvsfólkunum dáma búfólkini betur at vera saman við starvsfólkunum í niðaru hæddini.

Móttøkudeildin er í stórum sethúsum, har pláss er til 5 børn. Í brádliga íkomnum støðum kunnu tey hýsa fleiri. Húsini eru fyribilsuppihald hjá børnum, sum skulu aðrastaðni. Fyribilsuppihaldið kann vera upp í hálvt ár, tó eitt sindur longur, um bíðað verður eftir røttu fyriskipanini. Húsini eru rúmlig, og væl ber til at skerma økir av, um tørvur er á tí.

*Felags fíggjarumsiting av reiðum peningi*
Felags leistur er fyri fíggjarligu umsitingina fyri stovnarnar. Hvør stovnur hevur ein kontantkassa. Eina ferð um vikuna fer skrivstovufólkið á allar stovnarnar við reiðum peningi. Neyðugt er at hava pening á staðnum til vanligan tørv hjá børnunum. Kontantkassarnir eru ætlaðir til vanligt undirhald hjá børnunum, so sum føðingardagsgávur, frítíðartilboð o.a. Ávís upphædd, sum er eftir tali av børnum og aldri, verður løgd í hvønn brævbjálva. Brævbjálvarnir eru merktir við endamálinum við upphæddini.

***Felags leistur er fyri fíggjarligu umsitingina.***

Einans starvsfólkini hava atgongd til kassan. Børnini fáa eisini lummapening eftir aldri. Eldru børnini kunnu fáa eyka lummapening fyri arbeiði, t.d. at vaska bilin ella sláa gras. Starvsfólkini eta saman við børnunum og rinda fasta upphædd hvønn mánað.

## 6.3 Studni (LG 2023/207-231)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað játtanina til Studna á høvuðskontu 7.23.1.02, undirkontu 21.

Undirvísingarstýrið hevur dagført roknskaparreglugerðina fyri stýrið og stovnarnar undir tí í januar 2024 og sent hana til góðkenningar. Landsgrannskoðanin spurdi Barna- og útbúgvingarmálaráðið, nær reglugerðin verður góðkend.

Sambært roknskaparreglugerðini hava stovnarnir ongar inntøkur, tó at Studni hevur rentuinntøkur. Sambært Undirvísingarstýrinum var ikki gjørt so nógv burtur úr partinum um Studna í reglugerðini.

Elektron hevur tænastueftirlit viðvíkjandi Útgjaldsskipanini hjá Studna. Stovnurin er KT-skoðaður fyri 2022, og nýggj skoðan var ikki liðug í juni 2024.

Roknskapartøl 2019 til 2023 fyri stovnsraksturin hjá Studna:

*t.kr.*

| Heiti | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 2.908 | 3.203 | 3.218 | 3.283 | 3.130 |
| Keyp av vørum og tænastum | 862 | 510 | 730 | 628 | 989 |
| Keyp útbún.+leiga,viðlíkah.,skattur | 251 | 653 | 537 | 90 | 144 |
| Søla av vørum og tænastum | -26 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Vanligar flytingarinntøkur | -69 | 0 | -179 | 0 | -148 |
| Innanh. flyt. m.alm. stovn. (útr.) | 12 | 0 | 0 | 7 | 1 |
| Innanh. flyt. m.alm. stovn. (innt.) | 0 | -15 | -15 | -15 | -15 |
| **Tilsamans** | **3.939** | **4.351** | **4.291** | **3.993** | **4.101** |

Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum nøkur lønarmál. Einki var at finnast at.

Í 2023 eru 989 t.kr. brúktar til keyp av vørum og tænastum, 458 t.kr. til KT-tænastur, harav størsti parturin til menning og viðlíkahald av Útgjaldsskipanini hjá Studna.

31. desember 2023 er áognin av tænastu- og vøruskuldarum 119 t.kr., harav 28 t.kr. eru vegna avrokning frá útlendskum universiteti í 2019, ið er goldin tvær ferðir. Sambært Undirvísingarstýrinum skuldi Gjaldstovan taka støðu til, hvat skuldi henda við upphæddini.

### Nordplus og Markleys útbúgving

Studni ger sjálvstøðugar roknskapir fyri Nordplus og Markleysa útbúgving, orsakað av at tey verða fíggjað av Nordisk Ministerråd og av privatum fyritøkum, og at raksturin skal ikki ávirka raksturin av Studna. Samskipari søkir privatar fyritøkur um stuðul til Markleysa útbúgving, og møguligt avlop av verkætlan verður standandi til árið eftir.

Roknskapartøl 2019 til 2023 fyri Nordplus:

*t.kr.*

| Rakstur | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 |
| Keyp av vørum og tænastum | 4 | -1 | 120 | 1 | 20 |
| Vanligar flytingarinntøkur | 0 | 0 | -39 | 0 | -37 |
| **Tilsamans** | **4** | **-1** | **80** | **1** | **-16** |

Rørslur á St.Rk. 0881 í fíggjarstøðuni:

*t.kr.*

| Ikki inntøkuf., granskingarst., gávur, o.t.: | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|
| Primo | 0 | -49 | -84 | -39 | -0 |
| Útr. fl frá Studna | 0 | 17 | 99 | 92 | 3 |
| Flutt til rakstur | 0 | 0 | 0 | 0 | 37 |
| Nordisk Ministerråd | -49 | -52 | -54 | -54 | -55 |
| **Ultimo** | **-49** | **-84** | **-39** | **-0** | **-18** |

Tá ið Nordplus í 2021 hevur 80 t.kr. í nettoútreiðslum og 16 t.kr. í nettoinntøkum í 2023, hava tølini ávirkað roknskapin hjá Studna.

Roknskapartøl 2019 til 2023, Markleys útbúgving:

*t.kr.*

| Rakstur | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|
| Keyp av vørum og tænastum | 95 | 0 | 99 | 0 | 166 |
| Søla av vørum og tænastum | -26 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Vanligar flytingarinntøkur | -54 | 0 | 0 | 0 | 9 |
| Innanh. flyt. m.alm. stovn. (innt.) | 0 | -15 | -15 | -15 | -15 |
| **Tilsamans** | **15** | **-15** | **84** | **-15** | **160** |

Rørslur á St.Rk. 0881 í fíggjarstøðuni:

*t.kr.*

| Ikki inntøkuf. granskingarst., gávur, o.t. | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|
| Primo | 0 | 19 | 0 | 36 | -5 |
| Umbóking MÚ | -27 | -70 | -45 | -113 | 97 |
| MÚ umbóking | 0 | 0 | 0 | 0 | -97 |
| Sjónám, Fróðskaparsetrið og Betri | 0 | 0 | 1 | 0 | -52 |
| Flutt frá rakstri | 46 | 54 | 80 | 73 | 29 |
| **Ultimo** | **19** | **3** | **36** | **-5** | **-28** |

Markleys útbúgving hevur nettoútreiðslur, ávikavist 84 t.kr. og 160 t.kr., í 2021 og 2023, og 15 t.kr. í nettoinntøkum í 2022. Saldurnar á “Ikki inntøkuført, granskingarstyrkur, gávur, o.t.” eru í debet í 2019, 2020 og 2021, harvið eru bókingarnar ikki rættar.

Undirvísingarstýrið hevur greitt frá, at *“orsøkin til at roknskapurin gevur so ymisk tøl í fíggjarlógini er, at virksemið koyrir yvir ár”.* Sambært Undirvísingarstýrinum átti Nordplus pening við ársbyrjan 2021, sum ikki var brúktur í 2019 og 2020, orsakað av koronu-farsóttini. Studni gjørdi tí avtalu við fyritøku um at gera eitt átak fyri Nordplus á heimasíðuni hjá Vegleiðingarstovuni, sum skuldi kosta 140 t.kr.

Undirvísingarstýrið helt, at virksemið er ikki stuðulsfíggjað virksemi, og at tað onga ávirkan hevur á virksemið hjá Studna, *“tí her er eitt virksemið, sum kemur inn í roknskapin hjá Studna og verður bókað útaftur. Eisini er avtalað við Gjaldstovuna, hvussu hesar bókingar skulu gerast og vísast í fíggjarstøðuni”.*

Sambært § 13, stk. 6, í roknskaparkunngerðini skal inntøka skrásetast so hvørt, sum peningur verður nýttur til ætlaða endamálið.

Landsgrannskoðanin ivast í, um tað er rætt atborið, at Studni bókar stuðul í fíggjarstøðuna, tá ið stovnurin ikki hevur loyvi til at hava stuðulsfíggjað virksemi. Reglurnar um fremmanda fígging áseta m.a., at inntøkuførda upphæddin skal samsvara við viðkomandi útreiðslur, soleiðis at raksturin av tí, sum fremmanda fíggingin verður brúkt til, gevur 0.

Í juli 2024 hevur Barna- og útbúgvingarmálaráðið kunnað um, at ráðið ætlaði at senda fyrispurning til Fíggjarmálaráðið um loyvi at taka ímóti peningi til Nordplus og Markleysa útbúgving. Eisini skuldi Studni tillaga roknskapirnar soleiðis, at teir ikki ávirkaðu raksturin hjá Studna.

## 6.4 KT-skipanir til skúlaverkið, rakstur (LG 2023/207-231)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað játtanina á høvuðskontu 7.23.1.02, undirkontu 22. Játtanin er til KT-eind, sum er skipað í Undirvísingarstýrinum til at fremja KT-heildarætlanina fyri undirvísingarverkið.

Játtanin er fyrstu ferð við í fíggjarlógini 2021, sum eykajáttanarlóg fyri apríl 2021. Fyri tað er raksturin goldin av játtanini "Felags fyri miðnámsskúlar" undir høvuðskontu 7.23.3.05.

*Lønir*
Við stakroyndum kannaði Landsgrannskoðanin lønarmál. Einki var at finnast at.

***Stovnurin hevur rindað meira fyri hotell, enn reglurnar áseta.***

*Ferðaútreiðslur*
KT-skipanin hevur goldið hægri upphæddir fyri gistingar uttanlands, enn ásett er í almennu reglunum. Landsgrannskoðanin mælti til at halda reglurnar um, hvat almennir stovnar kunnu rinda fyri hotell, og um stovnurin rindar meira, at leggja frágreiðing við um orsøkina til dýrari hotell.

Stovnurin hevði rindað flogferðir úr Danmark til Føroya fyri fýra persónar, uttan at tað sæst, hvørjir persónarnir eru, ella hví stovnurin hevur goldið útreiðslurnar. Sambært Undirvísingarstýrinum rindaði stovnurin fyri fólk, sum møguliga skuldu geva tilboð upp á arbeiðið at menna Skúlanet. Stovnurin leitaði sær ráðgeving hjá Uddannelsescenter Nord, sum júst hevði bygt og íverksett eina felags KT-umsitingarskipan til allar sínar stovnar.

*Innanhýsis flytingar millum almennar stovnar (innt.)*
Í 2022 og 2023 var roknað við 1 mió.kr. í inntøkum. Ongar inntøkur vóru í 2022, og í 2023 eru inntøkurnar 20,6 t.kr.

Undirvísingarstýrið hevur greitt frá, at tey roknaðu við umleggingum av KT-økinum hjá ymiskum stovnum í sambandi við verksetingina av KT-heildarætlanini. Eisini roknaðu tey við at taka yvir útreiðslur frá summum stovnum og harvið fáa inntøkur. Umleggingarnar hava tikið longri tíð, enn væntað, og aðrar loysnir eru funnar.

## 6.5 KT-skipan til skúlaverkið (LG 2023/207-231)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað játtanina á høvuðskontu 7.23.1.05 KT-skipan til skúlaverkið. Endamálið við grannskoðanini var at kanna, hvussu gongur við verkætlanini "KT-skipan til skúlaverkið". Vit hava m.a. spurt, hvussu langt verkætlanin er komin samanborið við tíðarætlanina, um kostnaðarætlanin heldur, og um týðandi broytingar eru gjørdar í verkætlanini, eftir at heildarætlanin var gjørd.

***Verandi skipanir liva ikki upp til krøvini um KT-trygd og persóndátuvernd.***

### Lýsing av verkætlanini
Í 2019 staðfesti Undirvísingarstýrið, at átrokandi tørvur var á nýggjum og betri KT-skipanum, og at verandi skipanir livdu ikki upp til krøvini um KT-trygd og persóndátuvernd.

Saman við Undirvísingarstýrinum og Námi tók Uttanríkis- og mentamálaráðið stig til at seta eina forkanning í verk, sum skuldi kanna støðuna í Føroyum og í Norðurlondum. Úrslitið var, at tørvur var á einari KT-heildarætlan til skúlaverkið. Í stuttum snýr verkætlanin seg um tvey høvuðsátøk:

1. at stovna eina felags rakstrar- og supportorganisatión "Skúlanet", svarandi til tað, sum Landsnet er fyri landsstovnar, og
2. at menna eina lestrarfyrisitingarskipan (Kervi+), sum er talgilding av skúlaumsiting, lærupallum og samskifti ímillum skúla, næmingar og foreldur.

Ein partur av ætlanini er at nýta undirstøðukervið hjá Talgildu Føroyum, soleiðis at møguleiki er fyri sjálvvirkandi dátudeiling millum skúlar, myndugleikar og sjálvgreiðsluloysnir.

### Verkætlanarbygnaður

Sambært heildarætlanini er bygnaðurin av verkætlanini:




Barna- og útbúgvingarmálaráðið eigur verkætlanina; aðalstjórin umboðar eigaran og vísir til landsstýrisfólkið.

Stýrisbólkurin hevur verið mannaður ymiskt, alt eftir hvar í tilgongdini verkætlanin hevur verið. Fastir limir í bólkinum hava alla tíðina verið: stjórin í Undirvísingarstýrinum, formaður, aðalstjórin í Barna- og útbúgvingarmálaráðnum sum umboð fyri eigara, stjórin á Gjaldstovuni umboðandi KT Landsins/Talgildu Føroyar og stjórin á Námi. Í ávísum tíðarskeiðum hevur ein "víðkaður" stýrisbólkur sitið, ið hevur havt umboð fyri fólkaskúlarnar, Miðnám og Fróðskaparsetrið.

Ein KT-eind við deildarleiðara og verkætlanarleiðaranum, sum er skipað undir stýrisbólkinum, hevur dagligu leiðsluna. Eindin hevur ábyrgd av at samskipa menning, verkseting, rakstur og support. Fyri hvønn verkætlanarpart er ein verkætlanarleiðari, sum vísir til deildarleiðaran í KT-eindini. Aðrir stuðlandi bólkar og funktiónir eru eisini knýttar at verkætlanini.

### Framtíðar bygnaður

Enn er ikki endaliga avgjørt, hvussu bygnaðurin verður skipaður, tá ið verkætlanin er liðug í 2025. Undirvísingarstýrið er í holt við at greina, hvussu tørvurin á rakstrinum fer at verða tá. Ein arbeiðsbólkur er settur at kanna, hvør tørvurin verður til rakstrareindina og til at víðarimenna virkisførið í Kervi+.

### Játtanir og roknskapir

Í 2021 samtykti Løgtingið verklagslóg, Ll. nr. 52/2021 "Um KT-heildarætlan fyri undirvísingarverkið", sum er galdandi til 31. desember 2027, og sum heimilar fígging til at menna og verkseta KT-heildarætlanina. Sambært verklagslógini kunnu útreiðslurnar í mesta lagi verða 40 mió.kr. Í viðmerkingunum til lógina var mett, at samlaði kostnaðurin til leiðslu, samskipan, menning, verkseting og rakstur frá 2021 til 2025 fór at verða 89 mió.kr.

***Útreiðslurnar kunnu í mesta lagi verða 40 mió.kr.***

Roknskapar- og játtanartøl 2021 til 2023, høvuðskonta 7.23.1.05:

*t.kr.*

| Heiti | 2021 | 2022 | 2023 | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|
| Lønir | 0 | 502 | 549 | 1.051 |
| Keyp av vørum og tænastum | 1.923 | 774 | 1.229 | 3.926 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 77 | 7.714 | 8.189 | 15.980 |
| Innanh. flyt. ml. alm. stovnar | 1.000 | 0 | 0 | 1.000 |
| **Tilsamans** | **3.000** | **8.990** | **9.966** | **21.957** |
| ***Játtan*** | ***3.000*** | ***10.000*** | ***10.000*** | ***23.000*** |

Í 2021 vórðu játtaðar 3 mió.kr. at seta sjøtul á. Sambært viðmerkingunum í fíggjarlógini vóru 37 mió.kr. ætlaðar til at menna og verkseta heildarætlanina frá 2022 til 2025.

Leiðslan greiddi frá, at meginparturin av fíggingini, sum verklagslógin heimilar, verður brúkt til at menna lestrarfyrisitingarskipanina. Skúlanetið verður fíggjað við umskipan av verandi rakstri hjá Undirvísingarstýrinum, Námi, kommunum og av KT-útreiðslum á útbúgvingarstovnunum.

Virkisgreinari var settur í tíðaravmarkað starv frá 1. august 2022 til 31. desember 2023. Starvstíðin er longd við loyvi frá Fíggjarmálaráðnum til at vera hálvtíðarstarv til ársenda 2024.

Í viðmerkingunum í fíggjarlógini eru ongar upplýsingar um lønarútreiðslur.

Undirvísingarstýrið hevur greitt frá, at tá ið heildarætlanin varð orðað, var ikki endaliga greitt, hvussu arbeiðið skuldi fara fram. Í høvuðsheitum eru uppgávur bodnar út, men tørvur hevur verið á at hava tíðaravmarkað størv innanhýsis til tess at fáa sett heildarætlanina í verk á nøktandi hátt.

***Útreiðslurnar eru hildnar á fleiri játtanum.***

## Útreiðslur á øðrum játtanum

Skúlanet er skipað sum samstarv millum KT landsins, Undirvísingarstýrið, Nám, kommunur, skúlar og útbúgvingarstovnar. Tó at serstøk játtan er til verkætlanina, eru útreiðslur til at fremja heildarætlanina eisini hildnar av høvuðskontunum 7.23.1.02 "Undirvísingarstýrið" og 3.38.3.19 KT Landsins (rakstrarjáttan).

### *Undirvísingarstýrið*

Roknskapartøl á høvuðskontu 7.23.1.02, Undirvísingarstýrið, undirkontu 22, KT-skipan til skúlaverkið:

*t.kr.*

| Heiti | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 2.299 | 2.682 | 2.800 |
| Keyp av vørum og tænastum | 736 | 358 | 299 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 10 | 96 | 36 |
| Søla av vørum og tænastum | 0 | -36 | -6 |
| Innanh. flyt. millum almennar stovn. (útr.) | 0 | 90 | 120 |
| Innanh. flyt. millum almennar stovn. (innt.) | 0 | 0 | -21 |
| **Tilsamans** | **3.045** | **3.189** | **3.229** |

Í 2021 stendur í viðmerkingunum í fíggjarlógini, at fyri 2021 hevði raksturin verið goldin av játtanini á undirkontu 28 "Felags fyri miðnámsskúlar" undir høvuðskontu 7.23.3.05 "Miðnámsútbúgvingar", men nú verkætlanin skuldi fremjast í verki, var raksturin lagdur á serstaka undirkontu undir Undirvísingarstýrinum.

### KT Landsins

Veitingarnar frá Skúlanetinum liggja hjá KT landsins, sum er skipað á Gjaldstovuni.

Roknskapartøl fyri Skúlanet, stað 5003 á høvuðskontu 3.38.3.19 “KT landsins”:

*t.kr.*

| Heiti | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 1.112 | 411 | -338 |
| Keyp av vørum og tænastum | 1.174 | 2.230 | 3.624 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 19 | 52 | 873 |
| Fakturering av tænastum frá KT Landsins | 0 | -281 | -3.027 |
| Innanh. flyt. millum almennar stovn. (innt.) | -1.700 | -650 | 0 |
| **Tilsamans** | **606** | **1.761** | **1.132** |

Í 2021 brúkti KT Landsins 2,3 mió.kr. til verkætlanina. Undirvísingarstýrið endurrindaði Gjaldstovuni 1,7 mió.kr. sambært avtalu, harav 1 mió.kr. av høvuðskontu 7.23.1.05 “KT-skipan til skúlaverkið” og 0,7 mió.kr. av høvuðskontu 7.23.3.05, undirkontu 28 “Felags fyri miðnámsskúlar”.

Í 2022 samdust Undirvísingarstýrið og Gjaldstovan um at flyta 650 t.kr. av høvuðskontu 7.23.3.05 “Miðnámsútbúgvingar” til KT Landsins, av tí at útreiðslurnar av verksetingini vóru størri enn væntað, fyri tað mesta orsakað av, at parturin hjá miðnámsskúlunum var so torgreiddur.

Við eykajáttanarlóg fyri september 2023 eru 2 mió.kr. játtaðar til KT Landsins, og í viðmerkingunum til Lm. nr. 20/2023 stendur m.a., at verksetingin av Skúlaneti hevur gingið seinni enn ætlað, og tí komu inntøkur ikki í sama tíðarskeiði, sum útreiðslurnar fullu.

***Kostnaðurin var mettur til 89 mió.kr.***

Undirvísingarstýrið hevur greitt frá, at í KT-heildarætlanini, ið var handað landsstýrisfólkinum 4. september 2020, verður sagt: “*Samlaði kostnaðurin...er mettur at verða 89 mió.kr. í 4 ár. Talan er í stóran mun um útreiðslur, sum longu standast av verandi virksemi hjá Undirvísingarstýrinum, hjá Námi, kommununum og KT-útreiðslur á skúlum og útbúgvingarstovnum.*”

Undirvísingarstýrið greiðir víðari frá, at tað liggja útrokningar til grund fyri metingini, ið var gjørd í 2020. Partvís er talan um nýggja játtan, ið var veitt við verklagslóg, og partvís við fíggjarligum umskipanum av KT-økinum í skúlaverkinum. Tað hevur alla tíðina verið greitt, at umskipanir og umraðfestingar skuldu gerast. Í 2020 var mett, at hetta ikki var neyðugt fyrr enn í 2025, men við broyttum fortreytum, serliga av verksetingini av Skúlaneti hevur tað verið avbjóðandi av fleiri orsøkum og tikið longri tíð, enn av fyrstantíð mett. Tí hevur verið neyðugt við umskipanum og umraðfestingum fyrr, serliga tí inntøkur ikki koma í sama tíðarskeiði, sum útreiðslurnar falla.

Undirvísingarstýrið hevur kunnað um, at tað er skúlaverkið, sum eigur “Skúlanet-konseptið”. Umskipanirnar og umraðfestingarnar raka tær sentralu høvuðskonturnar fyri miðnámsskúlar og fólkaskúlan. Í verksetingartíðarskeiðnum hevur Gjaldstovan eisini tikið sín part.

Undirvísingarstýrið hevur greitt frá, at í 2021 var avtala “Letter of Intent”, gjørd millum Undirvísingarstýrið og Gjaldstovuna. Avtalan hevði m.a. ásetingar um endurrindan av útreiðslum. “Letter of Intent” er avloyst av prístalvu fyri tænasturnar, sum Skúlanet skal veita.

### Samanumtikið um játtanir og roknskap

***Hóast serstøk játtan er, er peningur brúktur av fleiri høvuðskontum.***

Tó at serstøk játtan er til verkætlanina í verklagslóg og í fíggjarlóg, er peningur brúktur til verkætlanina av fleiri høvuðskontum. Tað ger, at roknskapurin er ikki gjøgnum-skygdur.

*Sambært landsstýrisfólkinum hevur ætlanin ikki verið at fíggja verkætlanina av einari kontu.*

Í august 2024 hevur landsstýrisfólkið greitt frá, at ætlanin hevur ikki verið at fíggja samlaðu KT-heildarætlanina av einari kontu. Raksturin av heildarætlanini liggur á KT-eindini, sum undirkonta hjá Undirvísingarstýrinum. Menningarparturin er játtaður á høvuðskontu 7.23.1.05 og í verklagslóg, Ll. nr. 52/2021 "um KT-heildarætlan fyri undirvísingarverkið". Skúlanetparturin av verkætlanini hevur frá byrjan verið ætlaður at verða fíggjaður av rakstrinum á øðrum kontum, tí at samlaða KT-virksemið verður umskipað og umraðfest. Tá ið verkætlanin er liðug, ber til at gera samlaða kostnaðin av heildarætlanini upp fyri verkætlanartíðarskeiðið. Eftir tað, verður talan um vanligan rakstur.

## Manning og avtalur við undirveitarar

Í verkætlanartíðarskeiðnum hevur talið av starvsfólkum verið skiftandi, alt eftir hvussu langt verkætlanin er komin. Í KT-eindini hava starvast bæði innan- og uttanhýsis starvsfólk, t.e. deildarleiðari, KT-arkitektur, verkætlanarleiðari fyri Skúlanet, verkætlanarleiðari fyri Kervi+, virkisgreinarar og ráðgevar, DevOps, KT-mennarar, UX-sniðgevi, testarar og KT-supportarar.

*Mennarar skulu samskapa við Undirvísingarstýrinum.*

Ístaðin fyri at bjóða uppgávurnar og váðan út til vinnuna, hevur stovnurin biðið mennarar frá vinnuni, fyri at samskapa við Undirvísingarstýrinum. Avtalur vóru gjørdar fyri allar partar av verkætlanini, men nakrar veitingar viðvíkjandi fyrireikandi arbeiðinum vóru ikki bodnar út.

Undirvísingarstýrið hevur valt mennarar frá fleiri veitarum, fyri at tryggja seg ímóti bundinskapi at einum veitara. Stýrið hevði, í sambandi við útbjóðing av uppgávunum sum KT-fólk, tilskilað sær rætt til at velja fleiri veitarar.

Útbjóðingarumfør:

1. Mars 2021: Útboð eftir KT-arkitekti og scrum-master
2. Oktober 2021: Útboð eftir trimum KT-mennarum
3. Oktober 2021: Útboð eftir UX-sniðgeva
4. Januar 2022: Útboð eftir sjey mennarum
5. Januar 2022: Útboð eftir UX-sniðgeva
6. Juni 2022: Útboð eftir tveimum fullstack KT-serfrøðingum
7. Mars 2024: Útboð eftir KT-arkitekti og scrum-master

Sambært Undirvísingarstýrinum var størra útboðið í 2022 gjørt í tøttum samstarvi við Styrelsen for IT og læring, sum hevur drúgvar royndir við líknandi verkætlanum.

*Undirvísingarstýrið fingið undantak at bjóða út sáttmálar við mennarar.*

Sáttmálarnir við mennararnar gekk út við ársenda 2023. Undirvísingarstýrið bað Keypsportalin um undantak fyri at lýsa alment útboð og ístaðin leingja verandi sáttmálar. Keypsportalurin játtaði, treytað av at sáttmálarnir blivu longdir við einum ári við møguleika fyri at leingja teir eitt ár afturat, at talan bert var um broytingar í verandi sáttmálum, og at príshækkingar í mesta lagi kundu verða sambært semju á almenna- og privata arbeiðsmarknaðinum. Somu mennarar og UX-sniðgevi hava verið síðani útboðið í 2022, tó var ein útskifting.

Umframt nevndu avtalur keypti Undirvísingarstýrið ráðgevingartænastur frá útlendskum fakligum ráðgeva. Í 2020 rindaði stovnurin 755 t.kr. fyri ta ráðgevingina av høvuðskontunum 7.23.3.05 og 7.23.1.02. Frá 2021 til 2023 rindaði Undirvísingarstýrið ráðgevanum 1,3 mió.kr.

*Veitingar eru ikki bodnar út á Keypsportalinum.*

Veitingarnar vóru ikki bodnar út á Keypsportalinum ella ímillum fleiri veitarar, og heldur ikki var biðið um undantak.

Sambært Undirvísingarstýrinum vóru fyrireikingarnar í stigum, ið hvørt sær kundi steðga, um tey mettu, at ikki skuldi haldast fram. Í fyrstuni vóru avtalur gjørdar við ráðgevan um stytri tíðarskeið, og sum frá leið og Undirvísingarstýrið kundi staðfesta, at grundarlag var fyri at gera heildarætlanina til veruleika, helt Undirvísingarstýrið, at

vitan og førleikar, ið tey saman við veitaranum høvdu fingið, vildu farið fyri skeyti, um veitarin bleiv skiftur út. Tí helt samstarvið fram.

### Umsiting og stýring av verkætlanini

Til at stýra verkætlanini brúkar KT-eindin stýringsamboðið Jira, sum m.a. verður brúkt til uppgávustýring, kravstýring og verkætlanarleiðslu. Heildarætlanin er býtt í fýra høvuðsspor, *kervi+, skúlanet, leiðsla & organisatiónsmenning og KT-didaktikkur.*

Tey fýra sporini eru síðani býtt sundur í virkisøkir. Til hvørt virkisøki brúkar KT-eindin/mennararnir 14 dagar, eitt “sprint”, til at planleggja, menna og testa eitt virkisøki. Hesin liðiligi háttur at menna verkætlanina gevur Undirvísingarstýrinum møguleika at beina hana, so hvørt tað er neyðugt.

Yvirskipaða stýringin er sett upp í eitt rokniark, har heildarætlanin er liðað sundur í virkisøkir, og øll krøvini eru samskipað. Hvønn ársfjórðing gevur KT-eindin stýrisbólkinum frágreiðing um, hvussu nógvir tímar eru brúktir til hvørt virkisøki, hvussu nógv er eftir at menna og frávik ímillum nýtslu og avrik.

***Fíggjar- og tíðarætlanin halda.***

Leiðarin á KT-eindini umsitur fíggjarætlanina, góðkennir mánaðarroknskapin og hevur heimild til at gera avtalur og góðkenna útreiðslur. Hann gjøgnumgongur roknskapartølini regluliga fyri at vita, um tølini eru, sum væntað. Sambært leiðaranum halda fíggjarætlanin og tíðarætlanin í mun til heildarætlanina og kravsetingarnar, sum eru til skipanina.

Til at fylgja verkætlanini upp, eru regluligir fundir í øllum bygnaðarløgum, so sum ráðleggingardagar, tekniskir fundir, greiningarfundir og verkstovur við brúkararnar.

Stýrisbólkafundir eru hvønn ársfjórðing, og fundirnir vóru oftari í byrjanini. Í fundarskránni hava nøkur punkt verið føst, og onnur punkt eru tikin upp, so hvørt tað hevur verið neyðugt.

Grundleggjandi avgerðir og broytingar skulu leggjast fyri stýrisbólkin, men smærri avgerðir verða tiknar í verkætlanartoymi. Leiðslan greiddi frá, at ongar størri broytingar vóru gjørdar í verkætlanini, síðani heildarætlanin var gjørd. Kravsetingar kunnu broytast, tí tíðin broytir tørvin, t.d. er kravsetingin til samskifti ímillum skúla og heim broytt, tí Microsoft hevur ment Teams, sum vísir seg at vera nøktandi til ta kravsetingina.

### Tíðarætlan

***Tíðarætlan.***

Forkanningar byrjaðu í 2019, og sambært heildarætlanini var málið, at lestrarfyrisitingarskipanin skuldi verða klár at verkseta við skúlaársbyrjan 2022, og at verandi lestrarfyrisitingarligu skipanirnar skuldu hvørva so líðandi í tíðarskeiðnum 2021 til 2024.

Í 2021 var løgtingslógin samtykt og farið var undir at menna nýggja lestrarfyrisitingarskipan. Fíggjarkarmurin býtti verkætlanina yvir árini 2021 til 2025, og hon var tillagað, soleiðis at samsvar var ímillum fíggjarkarm og virksemi. Nýggi setningurin var at seta í verk Skúlanet og nýggju lestrarfyrisitingarligu KT-skipanina í øllum undirvísingarverkinum í 2025 og at fíggja rakstur, viðlíkahald og víðarimenning innan verandi játtanarkarm.

Undirvísingarstýrið hevur greitt frá, at Skúlanet koyrir ikki eftir somu tíðarlinju sum lestrarfyrisitingarskipanin. Tað hevur tikið eitt sindur longri tíð, enn væntað, at fáa útbúgvingarstovnarnar í Skúlanetið. Í februar 2024 eru umleið 80% av øllum skúlum og undirvísingarstovnum limaðir í Skúlanetið.

Upprunaliga var ætlanin, at fólkaskúlin skuldi verða fyrstur at knýta í Kervi+, men Undirvísingarstýrið valdi heldur at byrja við Fróðskaparsetrinum. Raðfylgjan var

grundað á, hvussu torgreiddar uppgávurnar vóru, har Fróðskaparsetrið var minst torgreitt, og miðnámsútbúgvingarstovnarnir mest torgreiddir.

*Kervi+ er sett í verk á Fróðskaparsetrinum.*

Á heysti 2022 vóru allar grunddátur og flokkingarmeginreglur komnar í skipanina. Á heysti í 2023 var Kervi+ sett í verk á Fróðskaparsetrinum, sum var fyrsti undirvísingar-stovnurin at brúka nýggju lestrarfyrisitingarskipanina. Eftir ætlan verða fólkaskúlarnir knýttir í skipanina í 2024 og miðnámsskúlarnir, maritimu útbúgvingarstovnarnir og Heilsuskúlin í 2025. Møguliga koma nakrar funkur eftir 2025, men málið er, at skipanirnar, sum verða nýttar í dag, allar hvørva so líðandi seinast í 2025.

### Lógargrundarlag

*Lóg um Kervi+ er samtykt.*

Í mai 2024 er Ll. nr. 33/2024 "um Kervi+" samtykt. Sambært viðmerkingunum er endamálið við lógini at áseta yvirskipaðu rammurnar fyri nýtslu av upplýsingum úr Kervi+, og at áseta heimildir til at umsita Kervi+, samstundis sum Kervi+ við lógini verður viðurkent sum almenna talgilda lestrarfyrisitingarskipanin í Føroyum. Í lógini er ásett, at landsstýrismaðurin kann gera nærri reglur um brúkarar og atgongd til Kervi+, hvussu flutningur av upplýsingum skal fara fram, dátuábyrgd og heimildir til at umsita Kervi+.

## 6.6 Fólkaskúlin (LG 2023/207-232)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað læraralønir í fólkaskúlanum. Játtanin er á høvuðskontu 7.23.2.01 "Fólkaskúlin", og í 2023 er hon 436 mió.kr. Brúktar eru 439,8 mió.kr., harav 98,7% til lønir.

Til at grannskoða læraralønir í fólkaskúlanum 2023 valdi Landsgrannskoðanin Skopunar skúla og Stranda skúla, við ávikavist 1,9 mió.kr. og 10,3 mió.kr. í lønar-útreiðslum.

Í Skopunar skúla starvast skúlaleiðari, tveir lærarar, ein stuðul og ein vikarur. Harafturat eru fólk til KT og reingerð.

Í Stranda skúla starvast 20 lærarar, skúlastjóri, varaskúlastjóri, og bókavørður. Eisini eru heilsufrøðingur og skúlatænari.

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað, hvussu starvsfólkamál eru viðgjørd, um almenni setanarpolitikkurin er hildin, og um útgoldnu lønirnar í november 2023 eru rættar. Einki var at finnast at.

## 6.7 Rásin (LG 2020/207-232)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Rásini.

Í 2019 átti Rásin 12 t.kr. á fyri kostgjald hjá næmingi. Skúlin helt tað vera ósannlíkt at peningurin fekst inn, tí kravið rættarliga var ivasamt, av tí at næmingurin hevði ikki sjálvur tikið avgerð um skúlagongdina og var undir 18 ár. Landsgrannskoðanin mælti til at fáa greiði á, hvønn kravið skuldi sendast til.

Undirvísingarstýrið vísti Rásini á, at um næmingur ella avvarðandi ikki høvdu tikið avgerð um, at næmingur skuldi í skúla á Rásini, átti tann stovnur ella skipan, sum avgjørdi tað at vátta, at tey heftu fyri kostgjaldinum. Í 2023 kunnaði landsstýrisfólkið um, at mannagongdin viðvíkjandi kostgjaldinum var ikki broytt, og at arbeitt var við hóskandi loysn, fyri at umsitingin verður lættari.

Í august 2024 hevur landsstýrisfólkið kunnað um, at Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur ikki fingið fráboðan um, at mannagongdin viðvíkjandi kostgjaldinum er broytt.

## 6.8 Glasir (LG 2023/207-233)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Glasi. Játtanin er á høvuðskontu 7.23.3.05 "Miðnámsútbúgvingar", undirkontu 31.

Í 2023 er játtanin 129,2 mió.kr., og hon er lækkað 1,5 mió.kr., tí skúlin tók ein flokk minni upp, enn ráðlagt var í 2022. Landskassin rindar 80% av lærlingaundirvísingini og kommunurnar 20%. Í 2023 hava kommunurnar rindað tilsamans 2,9 mió.kr.

Glasir bjóðar eisini skeiðsvirksemi, fyrisitur sjálvsognarstovnin Føroya Handilsskúla og Skeiðsdepilin og rekur Skúlaheimið. Bygnaðurin er nakað broyttur í seinastuni. Í leiðsluni eru rektari og vararektari. Tvey útbúgvingarleiðarastørv eru løgd niður.

***Bygnaðurin á Glasi er broyttur.***

Skúlanet hevur ábyrgd av kunningartøknini hjá Glasi, KT-trygd o.ø. Skúlin verður skoðaður árliga.

### Uppfylging av seinastu grannskoðan

Í seinastu frágreiðing hevði Landsgrannskoðanin viðmerkingar, ið vit hava tikið afturíaftur.

*Depilsráð*

Í november 2023 hava landsstýrisfólkið í barna- og útbúgvingarmálum og Depilsráðið skrivað undir starvsskipan fyri Depilsráðið hjá Glasi, sum kom í gildi 1. juni 2023.

*Sjálvsognarstovnur*

Skeiðsdepilin og DLÚ[20] liggja undir sjálvsognarstovninum Føroya handilsskúli, sum landsstýrisfólkið hevur gjørt av at varðveita. Virksemið er savnað sum eginrakstur uttan fyri fíggjarlógina. Glasir hevur bókhaldið, og privat grannskoðanarvirki grannskoðar roknskapin.

Eitt fólk er í starvi á sjálvsognarstovninum. Lærarar á Glasi hava undirvíst á Skeiðsdeplinum, og undirvísingartíðin á Skeiðsdeplinum hevur ikki verið við í virksemisyvirlitinum hjá Glasi. Sambært Glasi skal tað gerast frameftir.

Sambært Undirvísingarstýrinum var upprunaliga ætlanin at niðurleggja báðar sjálvsognarstovnarnar og skipa inntøkufíggjað virksemi á Glasi, sum Depilsráðið skuldi hava ræði á. Ein fyritreyt fyri tí var, at tað skuldi bera til at flyta úrslit yvir um ár. Tá ið tær ætlanirnar vóru frammi, umleið í 2016, hevði Fíggjarmálaráðið ætlanir um at broyta játtanarskipanina, soleiðis at til bar at flyta yvirskot av inntøkufíggjaðum virksemi yvir um ár.

Játtanarskipanin bleiv ongantíð broytt, og tí er avgerð tikin um, at inntøkufíggjaða virksemið á Glasi verður lagt til sjálvsognarstovnin. Í stýrinum fyri sjálvsognarstovnin eru somu fólk, sum manna Depilsráðið. Sambært Undirvísingarstýrinum hevur stýrið lýst virksemið á sjálvsognarstovninum og Skeiðsdeplinum.

***Inntøkufíggjað virksemi lagt til sjálvsognarstovnin.***

*Inntøkur og útreiðslur bókaðar í fíggjarstøðuni*

Landsgrannskoðanin hevur fleiri ferðir víst á, at bókingarhátturin hjá Glasi er ikki í samsvari við roknskaparreglurnar. Landsstýrisfólk hava kunnað um, at tey eru samd við Landsgrannskoðanina og fóru at taka málið upp við Glasir í sambandi við dagføring av roknskaparreglugerðini.

***Bókingarhátturin hjá Glasi var ikki í samsvari við roknskaparreglurnar.***

---

[20] Diplomútbúgving í leiðslu.

***Glasir hevur fingið boð um at broyta roknskaparhátt.***

Í 2023 vísti landsstýrisfólkið á, at Glasir í 2022 fekk boð um at rætta bókingarháttin viðvíkjandi inntøkum og útreiðslum og um at boða frá, tá ið tað var gjørt. Einki var tó broytt, og Barna- og útbúgvingarmálaráðið skuldi taka viðurskiftini viðvíkjandi vantandi eftirlitsslóðini uppaftur við Glasir í sambandi við, at roknskaparreglugerðin fór at verða viðgjørd.

Í desember 2023 hevur Barna- og útbúgvingarmálaráðið givið Glasi boð um, at frá 1. januar 2024 skal alt bókast í raksturin, og eftir 31. desember 2024 skulu allar upphæddirnar í fíggjarstøðuni vera burtur.

Undirvísingarstýrið hevur kunnað um, at tey hava biðið Glasir broyta bókingarnar í sambandi við sølu av næmingaavrikum, av tí at sølan er partvís inntøkuførd í fíggjarstøðuni. Undirvísingarstýrið hevur fingið innlit í, at núverandi mannagongd er at bóka á rakstur, men framvegis verður bókað á ymisk støð. T.d. verður ein partur av vinningum inntøkuførdur á stað 0100 “Leiðsla”. Undirvísingarstýrið heldur ikki, at bókingarhátturin er rættur og hevur biðið Glasir greiða frá valda háttinum.

*Skyldugar lønir*

Í 2023 kunnaði landsstýrisfólkið m.a. um, at skúlaárið 2023/24 fór at verða ráðlagt so neyvt sum gjørligt eftir 1.750 +/-300 klokkutímum. Miðast skuldi ímóti, at við skúlaársbyrjan 2024/25 skuldu allar tímasaldur vera á hóskandi stigi og í samsvari við leiðreglurnar, sum Glasir hevur gjørt á økinum. Sambært yvirliti yvir samlaða virksemið var ráðlagt við -1.810 tímum tilsamans. Tað gjørdi, at samlaða tímatalið í tímabankanum fór at minka frá 18.363 til 16.551 tímar.

*Næmingagjøld*

***Glasir kravt pening frá næmingum fyri nýtslu av tilfari, men ikki øll hava goldið.***

Frá 2018 til 2020 kravdi Glasir næmingarnar eftir tilsamans 1.770 t.kr. fyri nýtslu av tilfari við upphavsrættindum. Næmingarnir rindaðu einans 552 t.kr., og áognin, sum var 1.218 t.kr., var ikki skrásett í roknskapinum.

Í 2023 kunnaði landsstýrisfólkið um, at Glasir hevði broytt mannagongdina soleiðis, at Glasir rindar gjaldið til Fjølrit, og einki verður kravt frá næmingunum.

***Ógoldnu upphæddirnar vóru ikki kravdar.***

Ógoldnu upphæddirnar vóru ikki kravdar, og goldnu upphæddirnar vóru ikki endurrindaðar, tí tey, sum høvdu goldið, gingu ikki longur á skúlanum.

Í juli 2024 hevur Glasir kunnað um, at afturrindanin er bert leysliga umrødd, og eingin ítøkilig niðurstøða fyriliggur. Fyrrverandi leiðslan tók sær av málinum, sum snúði seg um at gevast við at krevja næmingagjøld inn.

Landsstýrisfólkið kann heimilað skúlunum at krevja gjøld fyri undirvísingartilfar sambært § 39, stk. 2, í Ll. nr. 62/2012. Sambært Glasi hava tey ment eina nýggja skipan til endamálið, sum tó ikki er góðkend enn, og sambært Glasi eru løgfrøðingar ikki á einum máli um, hvat “undirvísingartilfar” merkir.

*Boð um at fáa viðurskifti avgreidd*

***Boð um at fáa viðurskifti avgreidd.***

Í desember 2023 hevur Undirvísingarstýrið biðið Glasir um at fáa viðmerkingarnar í frágreiðingini frá Landsgrannskoðanini, um at bóka keyp og sølu av lutum hjá t.d. timburdeildini og inntøkur hjá Skúlaheiminum í rakstrinum, avgreiddar. Gjøgnumskygni skal vera í roknskapinum, t.v.s. at inntøkur og útreiðslur skulu ikki bókast í fíggjarstøðuni.

Søla av næmingaavrikum er partur av vanliga rakstrinum hjá skúlanum og eigur tí at verða skrásett sum søla. Keypið eigur at verða bókað sum keyp av vørum til víðari sølu. Undirvísingarstýrið leggur afturat, at søla av næmingaavrikum skal bjóðast út alment, og vísir á, at Glasir hevur kravt MVG av sølu, sum ikki er avroknað við TAKS.

Undirvísingarstýrið hevur álagt Glasi at leggja niður allar internar grunnar í 2024, t.v.s. at tær sløku 1,5 mió.kr., ið eru støðlaðar, skulu fara til tað, tær eru ætlaðar til ella inntøkuførast við ársenda 2024. Undirvísingarstýrið hevur eisini biðið Glasir vátta fyri Undirvísingarstýrinum, at mannagongdirnar eru broyttar pr. 1. januar 2024.

**Roknskaparviðurskifti v.m.**

Sambært § 5, stk. 1, í Ll. nr. 33/1994 "um landsins almenna roknskaparhald v.m." skulu landsstovnar v.m. gera eina reglugerð um roknskaparhaldið.

Í oktober 2023 lat Glasir Landsgrannskoðanini avrit av roknskaparreglugerð, sum sambært skúlanum var send stjórnarráðnum at góðkenna. Reglugerðin er ikki góðkend.

***Roknskaparreglugerð ikki góðkend.***

Í august 2024 hevur Undirvísingarstýrið greitt frá, at *"9. mai 2017 sendir Glasir roknskaparreglugerð til góðkenningar hjá aðalráðnum og fekk ikki viðmerkingar til hesa. 28. oktober 2021 hevur Glasir sent avrit av eini dagførdari roknskaparreglugerð til Landsgrannskoðanina. Hendan reglugerð er eisini send til UVS/BUMR.*

*12. november 2021 boðar Undirvísingarstýrið frá, at roknskaparreglugerðin frá 2017 er løgd til síðis. Biðið er um eina dagførda roknskaparreglugerð sum avspeglar virksemi í 2021. Orsøkirnar eru tvíbýttar. 1: Skúlin er umskipaður og nógv broyttur síðan 2017 og 2: Taka atlit til tær viðmerkingar sum landsgrannskoðarin hevur í seinastu frágreiðing sínari.*

*Tað er onki hent viðv. roknskaparreglugerð inntil juni 2024, tá Undirvísingarstýrið sendir Glasir fyrispurning um støðuna viðv. landsgrannskoðarafrágreiðingini 2021. Tá verður biðið um eina nýggja roknskaparreglugerð, sum var send inn síðst í juni 2024. Vegna summarfrítíð, og tí at vit ynsktu fleiri upplýsingar, er hon ikki viðgjørd yvirhøvur."*

*Lønir*

Í 2023 eru lønarútreiðslurnar 123.789 t.kr., t.e. 1,2 mió.kr. meira, enn játtanin er.

Glasir hevur ásett reglur viðvíkjandi tímabankanum. Endamálið við tímabankanum er at virka fyri, at lønir hjá lærarum eru støðugar, og at tær verða minst møguligt ávirkaðar av sveiggjum í virkseminum í skúlaárinum ella yvir fleiri ár. Av tí at sáttmálin hevur áseting um, at tímabankin í mesta lagi kann vera +/- 300 tímar, kunnu tímar, ið eru oman fyri markið, altíð rindast út. Tímar innan fyri sáttmálamørkini vera at viðgera í mun til politikkin á økinum.

Lærarar fáa eina forskotsætlan fyri væntaða virksemið komandi skúlaárið, ið eisini tekur hædd fyri møguligum tímabanka. Tvær ferðir um árið endurskoðar Glasir næmingatølini, og í juli verður tímatalið í virkseminum nullstillað, og møguligt yvir- ella undirskot flutt í tímabankan.

Glasir hevur kunnað um, at deildarleiðarar góðkenna tímaseðlar hjá lærarum. Starvsfólkini á Serbreytini hava skema. Tímalønt starvsfólk lata inn tímaseðlar, og onnur starvsfólk, sum ikki undirvísa, skráseta tímar í Totalview. Lønarumsitingin skrásetir broytingar í virksemisyvirlitinum.

*Stakroyndir av lønum*

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað, um viðkomandi skjøl eru í lønarmálum og kannað næmingatøl, sum hava týdning fyri útrokning av lønum.

Í einum máli manglaði prógv fyri útbúgving.

Glasir hevur ásett, at eitt starvsfólk fær 1200 tímar fyri skemalegging, uttan at viðkomandi skrásetir tímarnar.

*Landsgrannskoðanin mælti til, at øll viðkomandi skjøl eru tøk í starvsfólkamálum.*

Fyri at kunna sanna, at goldnu lønirnar eru rættar, mælti Landsgrannskoðanin til, at viðkomandi skjøl eru tøk í starvsfólkamálum, og at øll starvsfólk skráseta arbeiðstíð.

Ein deildarleiðari hevur røkt starv á DLÚ í skúlaárunum 2021/2022 og 2022/2023, samstundis sum viðkomandi var deildarleiðari á Glasi. Undirvísingartímarnir á DLÚ hava ikki verið partur av virksemisyvirlitinum hjá Glasi.

Spurd, um Glasir hevur góðkent, at leiðari hevur starv á sjálvsognarstovninum, samstundis sum viðkomandi var leiðari á Glasi, svaraði leiðslan, at Glasir hevur ikki góðkent tað. Skúlin hevur broytt mannagongdirnar í 2023 soleiðis, at um starvsfólk ætla at átaka sær framíhjáarbeiði, roknar Glasir við, at tey umrøða spurningin við leiðsluna, um ivi er um, hvørt arbeiðið fellur innan fyri ella uttan fyri tað, sum vanliga verður góðtikið.

### *Ferðaútreiðslur uttanlands*

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað ferðaútreiðslur.

Í 2024 hevur Glasir rindað 21 t.kr. fyri ferð til Japan og Kina hjá lærara á hægri námi. Sambært Glasi rindar skúlin altíð fyri lærarar, ið fara við næmingum á námsferðir. Meginreglan er, at skúlin rindar fyri tveir lærarar, ið fara við miðnámsnæmingum. Fyri hægri nám rindar skúlin fyri ein lærara. Frávik kunnu vera.

Skúlin hevur rindað um 145 t.kr. fyri námsferð til Malta fyri 9 lestrarvegleiðarar á øllum miðnámsskúlunum í Føroyum. Í 2023 hevur Glasir rindað 71 t.kr. fyri gisting, men einans 21 t.kr. eru bókaðar í 2023, 51 t.kr. eru bókaðar í roknskapin 2022 sum tíðaravmarking. Leiðslan játtaði námsferðina, og flogferðin við gisting er keypt í oktober 2022.

Flogferðaseðilin til Malta báðar vegir kostaði 37,7 t.kr. og er goldin og útreiðsluførdur í 2022. Tær 51 t.kr. eru mettar útreiðslur fyri gisting, ið eisini eru útreiðsluførdar, men ikki goldnar. Í 2023 hevur skúlin rindað tilsamans 36,4 t.kr. fyri dagpengar á ferðini.

*Glasir hevur goldið ferðaútreiðslur í 2022, fyri ferð í 2023.*

Landsgrannskoðanin hevur víst á, at tað er ikki í samsvari við roknskaparkunngerðina, at útreiðsluføra ferðaútreiðslur í 2022 fyri ferð í apríl 2023. Tað ger, at roknskapurin 2023 er skeivur við 88,7 t.kr.

Í mars 2023 hevur Glasir goldið 16,4 t.kr. í stuðli til 4 lærarar vegna verkætlan, Finansøkonom Ninuuk Glasir, sambært avtalu. Grunnurin Vestnordisk Hovedstadsfond Nuuk, Reykjavík, Tórshavn, lat 140 t.kr. í stuðli til ferðina, og NATA lat 22 t.kr. Ferð og uppihald kostaðu 181 t.kr.

Glasir veit ikki akkurát, hvat liggur í avtaluni, tí leiðslan hevði gjørt munnliga avtalu um stuðul. Treytin fyri stuðlinum var, at frágreiðing og roknskapur skuldu sendast grunninum, tá ið átakið var liðugt.

### *Keyp til víðari sølu*

Í 2023 er keyp av vørum til víðari sølu 2.748 t.kr. Sambært Glasi stendur kantinuleiðarin fyri øllum innkeypi til kantinuna. Glasir biður ikki um tilboð, men keypir hvørja viku, har bíligast er. Kantinan hevur ikki goymsluhøli til at kunna keypa inn í stórum nøgdum.

### *Samskiftisútreiðslur*

Glasir hevur trý-ára avtalu við Føroya Tele um veiting av samskiftistænastum. Skúlin rindar telefonhald hjá leiðandi lærarum og lestrarvegleiðarum. Sambært leiðsluni kannar hon rokningarnar hvønn mánað, t.e. um upphæddir eru hægri, enn avtalan ásetir.

*Keyp av tænastuveitingum annars*
Í 2023 hevur Glasir keypt tænastur frá arkitektafelag til "Innrætting av lærarahølum" fyri 194 t.kr. Tey bóðu ikki um tilboð frá fleiri, av tí at sama fyritøka fyrr hevði veitt tænastur til innrætting av øðrum hølum í bygninginum. Landsgrannskoðanin mælti til at halda reglurnar um útboð.

***Landsgrannskoðanin mælti til at halda reglur um útboð.***

*Innbúgv, maskinur og útbúnaður annars*
Glasir hevur keypt vakmyndaskipan fyri 615 t.kr. Skúlin bað um tilboð frá fýra veitarum í Føroyum og tók av lægsta tilboðnum. Sambært Glasi mátti skúlin, eftir tilráðing frá serfrøði, skifta typu av kameraskipan. Tað, saman við príshækking á tilfari o.ø., gjørdi, at kostnaðurin var 615 t.kr.

Landsgrannskoðanin mælti til at halda reglurnar í rundskrivinum um keyp av vørum og tænastum og vísti á, at til ber at senda fyrispurning um møguligt undantak umvegis Keypsportalin.

Skúlin hevur goldið 185 t.kr. fyri keyp av innbúgvi. Sambært Glasi bað arkitektafyritøka um tilboð og lat Glasi tilmæli, og útboðstilfarið liggur hjá fyritøkuni.

*Onnur keyp*
Landsgrannskoðanin hevur áður víst á vantandi yvirlit yvir innbúgv o.a. hjá Glasi. Sambært skúlanum finst einki yvirlit yvir innbúgv, maskinur o.a.

Í 2021 hevur Glasir keypt innbúgv, so sum borð, stólar, fotoútgerð, ljóðútgerð, Clever Touch skermar og teldur fyri um 700 t.kr. Spurd, um innbúgv o.a. verður merkt, svaraði leiðslan, at sumt verður merkt, men t.d. møblar verða ikki merktir; KT-deildin hevur yvirlit yvir KT-útgerð.

## Inntøkur
Í 2023 hevur Glasir hesar inntøkur:

*t.kr.*

| Heiti | |
|---|---:|
| Húsaleiga og íbúðargjald | -1.231 |
| Leiga av økjum, uppsitaraavgjald o.a. | -116 |
| Vørusøla til privat | -6.317 |
| Vørusøla til alm. stovnar | -9 |
| Onnur søla av tæn. leigu v.m. privat | -715 |
| Onnur søla av tæn. leigu v.m. alment | -62 |
| **Tilsamans** | **-8.450** |

Næmingar á Skúlaheiminum rinda 3.600 kr. um mánaðin fyri vistarhald og kost. Leiðslan ásetir gjaldið saman við Depilsráðnum. Upphæddin var ásett fyri um 5 árum síðani. Stjórnarráðið hevur ikki góðkent gjaldið.

Skúlaheimið verður leigað út frá 26. juni til 12. august fyri tilsamans 345 t.kr. Leigumálið er boðið út, og avtalan um leigu er galdandi frá juni 2020 til september 2024. Glasir ætlaði at bjóðað leigumálið út av nýggjum í næstum.

*Kantinurakstur og inntøkufíggjað virksemi*
Sambært rundskrivi frá Fíggjarmálaráðnum "um roknskaparreglugerðir", skal almennur stovnur, sum hevur inntøkur, greiða frá í roknskaparreglugerðini um heimildir, prís-áseting, avsláttrar og kredittir. Eisini skal verða greitt frá, hvussu skrásetingin er løgd til rættis, og hvussu prísásetingin verður gjørd, so til ber at kanna, um samsvar er ímillum vørukeyp, vørunýtslu og sølu.

Glasir hevur fleiri kassar í kantinuni, harav ein er til at taka ímóti reiðum peningi, hinir eru bert til gjaldkort. Kassin í starvsfólkamatstovuni er ein sonevndur sjálvtøkukassi. Tað merkir, at starvsfólk gjalda við lyklakorti, og keypið verður drigið frá lønini. Á vári 2024 hevur Glasir gjørt príspolitikk fyri matstovuna.

***Mannagongdin viðvíkjandi inntøku-fíggjaðum virksemi er broytt.***

Glasir hevur kunnað um, at mannagongdin viðvíkjandi inntøkufíggjaðum virksemi er broytt frá 1. januar 2024, soleiðis at tað ikki verður bókað í fíggjarstøðuni.

## Fíggjarstøða

Sambært § 20 í roknskaparkunngerðini skulu stovnar hava yvirlit yvir allar ognir, so sum verkløg, jørð, bygningar, maskinur, før, innbúgv og annan virðismiklan útbúnað.

### *Støðisogn*

Í yvirlitinum yvir støðisogn í landsroknskapinum hevur Glasir skrásett 9 bygningar og 3 grundøki. Glasir hevur eisini skrásett tveir bilar.

Sambært Glasi eru tey í holt við at rudda upp í yvirlitinum yvir støðisognir, og tey hava sent rættingar til Gjaldstovuna.

Nýggi bygningurin var ikki skrásettur. Glasir skuldi kanna skrásetingarnar, og fáa tær upp á pláss. Sambært Glasi hava tey í juni í 2023 fingið nýtsluloyvi til nýggja bygningin.

Í 2021 keypti Glasir eina tjaldhøll fyri 714 t.kr. og rindaði 478 t.kr. fyri jørð- og stoypiarbeiði í sambandi við sokkul til tjald á timburdeildini.

***Landsgrannskoðanin mælti til at skráseta bygning og tjaldhøll í fíggjarstøðu og BSL.***

Glasir hevur greitt frá, at Landsverk fekk byggiloyvi til tjaldhøllina 12. juli 2021, men at skúlin hevur staðið fyri arbeiðinum sum byggiharri og hevur goldið størsta partin av høllini. Landsgrannskoðanin mælti til at skráseta samlaða kostnaðin í fíggjarstøðuni og í ognarskránni í Búskaparskipan landsins.

Í 2023 kunnaði landsstýrisfólkið um, at Glasir var í holt við at fáa eina skipan til skráseting av ognum, men hevði ikki funnið nakra skipan, ið á nøktandi hátt kann brúkast til endamálið.

Spurt, hvussu langt málið er komið, hevur Glasir svarað, at skúlin hevur valt eina skipan, sum er partur av kassaskipanini, har ognir verða skrásettar, so hvørt tær verða keyptar. Miðað verður eftir at fáa allar ognir skrásettar innan ársenda 2024.

### *Peningastovnskontur*

Glasir hevur fleiri kontur í peningastovnunum.

Mastercard Platinum-gjaldkort hjá fíggjarstjóranum er knýtt at einari kontu, ið ikki er skrásett í Búskaparskipan landsins. Sambært Glasi er kontan *"ein undirkonta til skráseting av nýtsluni á MC Platinum-kredittkortinum. Seinast í hvørjum mánað flytir Glasir pening á hesa kontuna av skúlans kontu og bókar kontuavritið."*

Sambært Rundskrivi "um nýtslu av gjaldskorti og kredittkorti fyri landsstovnar" skal heimildarváttan gerast, har m.a. skal upplýsast, hvat gjaldkort kann nýtast til. Frágreiðing skal vera í roknskaparreglugerðini, og kortið skal stovnast á serstaka gjaldkortkontu.

***Reglurnar um gjald-kort eru ikki hildnar.***

Tað er ikki í samsvari við reglurnar um gjaldkort, at Glasir flytir pening á gjaldkort-kontuna, eftir at kortið er brúkt. Tað skal vera ásett í heimildarváttanini, hvussu stór upphæddin á kortkontuni kann vera, og stovnurin kann heita á Gjaldstovuna um at flyta gjaldføri á kontuna.

Tvey gjaldkort eru knýtt at kontu, sum er til kantinuna. Tað er ikki í samsvari við reglurnar at hava gjaldkort knýtt at kontu, sum verður brúkt til raksturin av skúlanum, so sum inntøkur v.m.

Glasir hevur kunnað um, at skúlin hevur 3 debitkort knýtt at hesari kontuni, sum av og á hevur verið brúkt til inngjald frá matstovuni. Skúlin ætlar at broyta mannagongdina, soleiðis at inngjøld frá matstovuni ikki koma á kontuna frameftir.

*Skuldarar*
31. desember 2023 er saldan á kontuni “Tænastu- og vøruskuldarar” 225.586 kr. Áognin, ið er eldri enn 31 dagar, er 112.132 kr. Sambært Glasi er ikki talan um gamla skuld, sum ikki kann krevjast inn.

## 6.9 Tekniski skúli í Klaksvík, løgujáttan (LG 2018/207-233)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin løgujáttanina til Tekniska skúla í Klaksvík. Sambært landsroknskapinum kostaði skúlin 36,6 mió.kr. Tó hevði landið goldið 38,2 mió.kr. fyri bygningina. Munurin stóðst av, at Landsverk í 2016 sendi høvuðsráðgevanum ein faktura, 1,6 mió.kr., har Landsverk vísti til, at feilir hjá ráðgevanum høvdu gjørt, at aðrar arbeiðstøkur vóru vorðnar dýrari. Upphæddin var mótroknað í prosjekteringsútreiðslunum.

Landsgrannskoðanin vísti á, at tað var lítið sannlíkt, at landið fór at fáa peningin, og at roknskapurin fyri bygningina tí ikki var rættur. Í 2018 hevði høvuðsráðgevin einki goldið. Mentamálaráðið tók undir við Landsgrannskoðanini, at bókingarhátturin gjørdi, at roknskapurin var ikki rættur.

***Roknskapurin fyri bygningina er ikki rættur.***

Í 2019 segði landsstýrisfólkið, at Landsverk royndi at fáa semju við høvuðsráðgevan, av tí at sakarmál var kostnaðarmikið og tíðarkrevjandi.

Í 2020 kunnaði landsstýrisfólkið um, at Landsverk hevði latið gerðarrættinum málið.

Í 2021 greiddi landsstýrisfólkið frá, at síðani 2020 var roynt at fáa semju millum partarnar, tó uttan nakra niðurstøðu. Seinastu tíðina hevði tað víst seg, at bygningurin lak sera illa. Nærri kanningar vístu, at bygningurin mátti umvælast. Landsverk hevði boðið umvælingina út og fingið tilboð á slakar 2 mió.kr. við MVG. Samlaða kravið í hesum máli var tískil hækkað til 3,4 mió.kr. við MVG. Tað var fráboðað gerðarrættinum 24. august 2021. Partarnir samráddust tá um sýn og meting á staðnum, fyri at fáa staðfest manglar, áðrenn teir vórðu umvældir.

***Kravið hækkað frá 1,6 mió.kr. til 3,4 mió.kr.***

Í 2022 kunnaði landsstýrisfólkið um, at sambært Landsverki, vóru sýn og meting gjørd av takinum á Tekniska skúla í Klaksvík. Semja var tó ikki funnin millum partarnar, men málini vóru enn áleikandi. Landsverk gjørdi tá eina nýggja roynd at fáa semju, men annars var hildið fram við gerðarrættarmálinum. Málið um lekan var partur av málinum.

Í 2023 greiddi landsstýrisfólkið frá, at gerðarrættarmálið lá enn í einari millumstøðu, meðan roynt hevði verið at at finna semju. Landsverk royndi nakað enn, og um tað ikki bar á mál, fór málið at verða tikið uppaftur við gerðarrættin.

Í august 2024 hevur landsstýrisfólkið kunnað um, at Landsverk og ráðgevin gjørdu semju um málið í november 2023, um at ráðgevin skuldi gjalda 500 t.kr. Sambært Landsverki er málið avgreitt við semjuni.

***Landsverk og ráðgevin hava gjørt semju um at ráðgevin rindar 500 t.kr.***

## 6.10 Húsarhaldsskúlin í Klaksvík, løgustuðul (LG 2023/207-235)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað høvuðskontu 7.23.5.05, sum er løgustuðul til bygging av nýggjum Húsarhaldsskúla í Klaksvík.

Sambært fíggjarlógini 2023 søkti sjálvsognarstovnurin, Húsarhaldsskúli Føroya, í 2016 um stuðul til at byggja nýggjan húsarhaldsskúla í Klaksvík. Verkætlanin skuldi kosta í mesta lagi 67 mió.kr. við MVG. Húsarhaldsskúlin fekk treytaða tilsøgn um 21 mió.kr. sum rentu- og avdráttarfrítt lán. Klaksvíkar kommuna gav somuleiðis skúlanum treytaða tilsøgn um stuðul, umframt at Bústaðir skuldu fíggja vistarpartin av skúlanum.

*Eftir útboð var kostnaðurin væl hægri, enn mett.*

Eftir at Húsarhaldsskúlin hevði havt byggingina av nýggja skúlanum í útboði, vísti tað seg, at samlaði kostnaðurin bleiv væl hægri, enn áður mett. Skúlin kostaði 85,6 mió.kr. Eftir umbøn frá Húsarhaldsskúlanum hækkaði Løgtingið, við Ll. nr. 114/2022, treytaðu tilsøgnina frá 21 mió.kr. til 37,3 mió.kr., umframt 5 mió.kr. til innbúgv.

15. juli 2019 gav Mentamálaráðið treytað tilsagnarskriv, sum vísir, at verkætlanin fevnir um ein skúlapart á fyrstu hædd við egnum matrikkulnummari, og ein vistarpart á aðru og triðju hædd, eisini við egnum matrikkulnummari. Landskassin og Klaksvíkar kommuna fíggja skúlapartin, meðan Bústaðir fíggja vistarpartin, sum verður ogn hjá Bústøðum.

Sambært stjórnarráðnum hevur landið ikki havt týðandi leiklut í, hvussu verkætlanin sær út. Umboð fyri Mentamálaráðið hevur verið í bygginevndini, sum gjørdi skipanar-uppskot.

Verkætlanin er skipað við bygginevnd við umboðum úr leiðsluni í Húsarhalds-skúlanum, har stjórin er forkvinna. Harumframt er ein fylgibólkur settur við umboði frá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum, Klaksvíkar kommunu og Bústøðum, sum sambært ráðnum hevur 3 - 4 ástaðarfundir um árið, har tey m.a. hyggja eftir, at byggingin gongur, sum hon skal.

Landsverk er byggifakligur ráðgevi hjá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum.

*Heildarveiting uttan fyrivarni.*

Byggifelag er høvuðsarbeiðstakari, og talan er um heildarveiting uttan fyrivarni. Sambært Barna- og útbúgvingarmálaráðnum er sáttmálaupphæddin føst. Ráðið hevur ikki gjørt kredittmeting av arbeiðstakaranum, men Landsverk hevur sagt gott fyri honum.

## Lógir og reglur

*Rentu- og avdráttar-frítt lán til 50% av kostnaðinum.*

Heimildin at lata stuðul til rakstur og bygging av húsarhaldsskúlum er í Ll. nr. 66/1992 "um húsarhaldsskúlar". Í § 11, stk. 1, nr. 1 í lógini er ásett, at til keyp av húsum ella til bygging ella umbygging av húsum til húsarhaldsskúla verða, eftir landsstýrisins góð-kenning, latin 50% sum rentu- og avdráttarfrí lán úr landskassanum, og 25% verða latin av kommununi, har skúlin er.

Sambært Ll. nr. 68/2019 "um studningslán til at byggja húsarhaldsskúla í Klaksvík" hevur landsstýrismaðurin heimild at veita stuðul til at byggja húsarhaldsskúla í Klaksvík. Stuðulin kann í mesta lagi verða 37,3 mió.kr., og skal verða veittur sum rentu- og avdráttarfrítt lán. Lógin heimilar harafturat landsstýrismanninum at veita stuðul til keyp av innbúgvi og útbúnaði fyri í mesta lagi 5 mió.kr., tó ikki meira enn 50% av veruligu útreiðslunum.

Sambært § 2 stk. 1, í lógini er lánið treytað av, at landið fær síðusettan 1. veðrætt í bygninginum. Landskassin rindar tinglýsingarkostnaðin, sum er mettur til 300 t.kr.

Sambært viðmerkingunum til lógina stendur Húsarhaldsskúli Føroya fyri verkætlanini, sum eftir ætlan verður fíggjað soleiðis:

| | mió.kr |
|---|---|
| Landskassin | 37,0 |
| Bústaðir | 27,6 |
| Klaksvíkar kommuna | 21,0 |
| **Tilsamans** | **85,6** |

Í almennu viðmerkingunum til Ll. nr. 114/2022 "um broyting í løgtingslóg um studningslán til at byggja húsarhaldsskúla í Klaksvík (Hækka studningslánið og áseta stuðul til innbúgv og útbúnað)" sigur landsstýrisfólkið m.a., at Húsarhaldsskúlin, sambært TAKS, lýkur ikki treytirnar um afturbering av MVG, og skal tí rinda MVG av verkætlanini. Skúlaparturin er mettur at kosta tilsamans 58 mió.kr., íroknað MVG.

***MVG skal rindast av verkætlanini.***

Í viðmerkingunum sigur landsstýrisfólkið eisini, at samlaðu MVG-útreiðslurnar av skúlapartinum eru 11,6 mió.kr., og nettoútreiðslan hjá landskassanum verður tí 37 - 11,6 mió.kr. = 25,4 mió.kr. Við at draga MVG-útreiðslurnar frá stuðlinum er landskassans partur og parturin hjá Klaksvíkar kommunu sambært landsstýrisfólkinum:

| | mió.kr | % |
|---|---|---|
| Landskassin, netto | 25,4 | 54,7 |
| Klaksvíkar kommuna | 21,0 | 45,3 |

Landsgrannskoðanin hevur víst á, at játtaða stuðulsupphæddin sambært verklagslógini er 37 mió.kr. Lutfalsligi parturin hjá landinum er tí 63,8% av kostnaðinum, og parturin hjá Klaksvíkar kommunu er 36,2%.

***Landsins partur er 63,8%.***

Í viðmerkingum til lógina mælti Uttanríkis- og mentamálaráðið til, at frávik varð gjørt frá § 11, stk. 1, nr. 1 í lógini um húsarhaldsskúlar, soleiðis at landið átók sær at fáa til vega neyðugu fíggingina til skúlapartin.

Sambært Barna- og útbúgvingarmálaráðnum hava tey umrøtt málið um stuðulspartin – eisini saman við Fíggjarmálaráðnum. Av tí at lógin um "Studningslán til at byggja húsarhaldsskúla í Klaksvík" er nýggjari enn lógin um húsarhaldsskúlar, kemur hon framum, soleiðis at reglan, um í mesta lagi 50% í stuðli, ikki er galdandi fyri hesa verkætlanina.

## Roknskaparviðurskifti o.a.

Roknskapartøl fyri høvuðskontu 7.23.5.05 "Húsarhaldsskúlin í Klaksvík, løgustuðul", frá 2017 til 2023:

*t.kr.*

| | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Íløgustuðul | 400 | 0 | 2.500 | 3.500 | 8.750 | 4.000 | 9.250 |
| *Játtan* | *400* | *2.000* | *2.500* | *3.500* | *8.750* | *4.000* | *9.250* |

Fíggjarstøða:

*t.kr.*

| | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Goymslur og áogn | -400 | -400 | -2.024 | -2.024 | -2.024 | -2.024 | -23.844 |
| Útjavningarkonta | 0 | 400 | 400 | 2.900 | 6.400 | 15.150 | 19.150 |
| Stuttfreistað skuld | 0 | 0 | -876 | -4.376 | -13.126 | -17.126 | -4.556 |
| **Tilsamans** | **-400** | **0** | **-2.500** | **-3.500** | **-8.750** | **-4.000** | **-9.250** |

Í fíggjarlógini 2017 vóru 400 t.kr. játtaðar til fyrireiking av nýggja Húsarhaldsskúlanum. Upphæddin var goldin skúlanum í mars 2017.

Í 2018 vóru játtaðar 2 mió.kr. til bygging av nýggjum húsarhaldsskúla. Peningurin bleiv ikki brúktur, og játtanin datt burtur.

Í 2019 vóru játtaðar 2,5 mió.kr. Eftir umsókn frá Húsarhaldsskúlanum vóru 1.624 t.kr. goldnar sjálvsognarstovninum til helvtina av prosjekteringkostnaðinum av nýggja

skúlanum. Restin av játtanini, 876 t.kr., var støðlað í fíggjarstøðuni sum stuttfreistað skuld.

Í 2020, 2021 og 2022 vóru ávikavist 3,5 mió.kr., 8,75 mió.kr. og 4 mió.kr. játtaðar. Upphæddirnar vóru støðlaðar sum "Skyldur, ið ikki eru endaligar".

31. desember 2022 stóðu 17,1 mió.kr. í fíggjarstøðuni sum skyldur hjá landinum.

Í 2023 eru 9,25 mió.kr. játtaðar. Øll upphæddin er útreiðsluførd og støðlað. Frá 2019 til 2023 eru tilsamans 26,4 mió.kr. støðlaðar sum "Skyldur, ið ikki eru endaligar".

### Roknskaparlig viðgerð

Játtanin til at byggja nýggjan Húsarhaldsskúla í Klaksvík er stuðulsjáttan.

Reglurnar um stuðulsjáttanir eru m.a. í K. nr. 125/2011 "um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan". Í § 11 er ásett, at stuðul skal útreiðsluførast í tí fíggjarári, har bindandi tilsøgn er givin, uttan mun til, um goldið verður heilt ella partvíst í seinni fíggjarári. Ikki útgoldnar tilsagnir verða fluttar yvir til fíggjarstøðuna.

***Játtanirnar eru útreiðsluførdar og støðlaðar í fíggjarstøðuni.***

Játtanirnar 2019 til 2023 til byggingina eru útreiðsluførdar hvørt árið og støðlaðar í fíggjarstøðuni.

Í 2023 er Barna- og útbúgvingarmálaráðið byrjað at gjalda stuðul út. Upphæddirnar eru fluttar beinleiðis av fíggjarstøðuni til Húsarhaldsskúlan.

***Útreiðslan sæst ikki í rakstrarroknskapinum. Roknskapurin er ikki gjøgnumskygdur.***

Landsgrannskoðanin hevur víst á, at útgjøldini síggjast ikki í rakstrarroknskapinum, og at tað ger roknskapin minni gjøgnumskygdan, havandi í huga, at við árslok 2022 vóru 18,75 mió.kr. útreiðsluførdar, uttan at byggingin var byrjað. Útreiðslurnar fylgja tí ikki gongdini í byggingini ár fyri ár.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur greitt frá, at byggingin byrjaði væl seinni enn ætlað, t.e. seinast í 2022. Av teirri orsøk vóru játtaðu upphæddirnar 2019 til 2022 útreiðsluførdar og støðlaðar í fíggjarstøðuna, síðani er stuðulin goldin út av fíggjarstøðuni sambært byggigongdini.

Ásannandi, at tað ber ikki til at broyta roknskaparmannagongd fyri eldri ár, og at illa ber til at broyta í hesari verkætlanini, mælti Landsgrannskoðanin til, at Barna- og útbúgvingarmálaráðið frameftir, í møguligum øðrum líknandi støðum, finnur ein bókingarleist, har útreiðslurnar í rakstrinum endurspegla veruligu nýtsluna.

***Fíggjarmálaráðið ætlar at kanna, um tað ber til at brúka annan bókingarleist.***

Sambært Fíggjarmálaráðnum er ætlanin at kanna, um til ber at brúka annan bókingarleist, sum vísir realbúskaparligu nýtsluna av tilsagnum.

#### *Ætlan og treytir fyri útgjaldi*

Sambært tilsagnarskrivinum 31. august 2022, letur landið í mesta lagi 37 mió.kr. í studningsláni. Lánið er rentu- og avdráttarfrítt, og 9/10 partar av upphæddini, t.e. 33,3 mió.kr., verða goldnar lutfalsliga eftir byggigongdini og eftir skrivligari áheitan frá stýrisbólkinum. Heildarráðgevin skal vátta, at parturin av arbeiðinum, sum útgjaldið er fyri, er liðugur.

Seinasti 1/10 parturin av samlaðu upphæddini verður goldin út, tá ið ein røð av treytum eru loknar, m.a. at verkætlanin er endaliga liðug, at myndugleikakrøv eru lokin og endaligt nýtsluloyvið er fingið til bygningin.

#### *Kanning av útgjøldum*

Landsgrannskoðanin hevur hugt at útgjøldum frá byrjan til og við 2023. M.a. kannaðu vit, um umbønir eru komnar frá Húsarhaldsskúlanum, at heildarráðgevin hevur váttað,

at útgjøldini eru í samsvari við byggigongdina, og at avvarðandi stjórnarráð hevur góðkent útgjøldini.

Frá 2020 til árslok 2023 eru goldnar tilsamans 23.844 t.kr. til nýggja Húsarhaldsskúlan í Klaksvík. Váttanir o.a., sum er kravt sambært tilsagnarskrivinum, er tøkt í málinum. Einki var at finnast at.

***Kravdar váttanir o.a. vóru tøkar.***

Landsgrannskoðanin fekk útflýggjað gjaldsætlan, sum vísir, at seinasta útgjald til Húsarhaldsskúlan verður í desember 2024.

## 6.11 Frítíðarundirvísing (LG 2019/207-235)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av játtanini til Frítíðarundirvísing. Undirvísingarstýrið vísti í 2019 Mentamálaráðnum á, at neyðugt var at dagføra lógarverkið. Stýrið hevði spurt um tulkingar av lógini og av fyrisitingarligu mannagongdunum, sum høvdu verið siðvenjur, áðrenn Undirvísingarstýrið fekk ábyrgdina av at fyrisita lógina.

Í 2020 greiddi landsstýrisfólkið frá, at ætlanin var at dagføra lógina um frítíðarundirvísing v.m., og lógin var sett á løglistan.

***Í 2020 var ætlanin at dagføra lógina.***

Landsgrannskoðanin vísti á ymisk viðurskifti í rundskrivinum um læraralønir frá 5. juli 2001. Talan var um ásetingar í sambandi við lønir til almenna frítíðarundirvísing, serstaka frítíðarundirvísing og frítíðarvirksemi.

Í 2021 greiddi landsstýrisfólkið frá, at arbeitt var framvegis við lógarbroytingunum, serliga at gera ítøkiligari ásetingar fyri føroyskt sum annaðmál, ið verður skipað sum serstøk frítíðarundirvísing. Rundskrivið um læraralønir var partur av hesum arbeiði, og fór at verða endurskoðað samstundis.

Í 2022 kunnaði landsstýrisfólkið um, at arbeiðið við lógarbroytingunum var framvegis í gongd.

Í 2023 greiddi landsstýrisfólkið frá, at Barna- og útbúgvingarmálaráðið var ikki komið víðari við málinum um møguligar broytingar í lógini um frítíðarundirvísing. Málið varð umrøtt, men enn bar ikki til at siga, nær fór at vera komið á mál.

Í august 2024 hevur landsstýrisfólkið kunnað um, at avbjóðingin, sum var við "Føroyskt sum annaðmál" undir frítíðarundirvísingini er loyst á annan hátt, og tí er ikki sami tørvur á at gera broytingar í lógini um frítíðarundirvísing. Arbeitt verður ikki í løtuni við at gera broytingar í lógini.

***Arbeitt verður ikki við at broyta lógina.***

## 6.12 Musikkskúlar (LG 2021/207-235)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Musikkskúlaskipanini.

*Ferðaendurgjøld*
Í § 4 í musikkskúlalógini er m.a. ásett, at landið rindar ferðing hjá musikkskúlalærarum. Í viðmerkingunum til lógina stendur, at musikkskúlalærarar framhaldandi hava eina samskipaða setan, og at setanin fevnir alla Musikkskúlaskipanina.

Í § 4, stk. 5, í sáttmálanum ímillum Musikklærarafelagið og Fíggjarmálaráðið er ásett, at *"lærarar, sum í starvi sínum ferðast ímillum arbeiðsøki, fáa ferðakostnaðin endurgoldnan. Lærarar eiga í mesta mun at nýta almenna ferðasambandið. Um nýtsla av*

*egnum bili metist neyðug, verður km-gjald latið sambært galdandi reglum og harafturat møguligt ferðagjald fyri bil, har ferðing sjóvegis er neyðug."*

Í roknskaparreglugerðini hjá Musikkskúlaskipanini var ásett um ferðing innanlands, at uppgerðir verða gjørdar á ferðauppgerðarskjal, og víst verður til avtaluna ímillum Fíggjarmálaráðið og Tænastumannafelagið um dagpening.

***Skúlin rindaði endurgjøld fyri koyring frá bústaði til undirvísingarstað.***

Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum, um ferðaendurgjøldini vóru í samsvari við reglurnar frá Fíggjarmálaráðnum "um endurgjald fyri nýtslu av egnum bili í tænastuørindum". Samanumtikið brúktu fáir lærarar almenna ferðasambandið. Í fleiri førum sá út sum, at Musikkskúlaskipanin rindaði endurgjøld fyri koyring frá bústaði til undirvísingarstað og aftur, tá ið lærarar ferðast heimanífrá til skúla í aðrari bygd ella býi.

Fyri at fáa endurgjald eftir reglunum hjá Fíggjarmálaráðnum, er treytin, at starvsfólk javnan eru í tænastuørindum, og tá kunnu tey fáa skrivliga heimild frá stovninum at nýta egnan bil í tænastuørindum.

Landsgrannskoðanin vísti á, at vanliga hava tænastuørindi ikki verið roknað sum tað, at starvsfólk koyra heimanífrá til arbeiðsstað, men heldur at starvsfólk, sum eru møtt á arbeiðsstaðnum, og síðani verða send arbeiðsørindi, fáa endurgjald fyri koyring í egnum bili. Koyring frá egnum bústaði til arbeiðsstað er vanliga at rokna sum privat útreiðsla, sum løntakarar hava rætt til at søkja um ferðastuðul fyri.

Sambært stjóranum legði Musikkskúlaskipanin seg eftir at umsita ferðaendurrindanina soleiðis, at lærari bert fekk endurgjald fyri ferðing ímillum undirvísingarstøðini. Hann vísti á, at endurrindað var ikki ímillum heim og arbeiðspláss. Tó fekk lærari, sum ferðaðist til Suðuroyar í undirvísingarørindum, og bert hevði undirvísingarstað í Suðuroy, ferðina endurrindaða. Lærarin kundi í sínari sentralu setan verða fluttur ímillum ymisku musikkskúlarnar.

***Landsgrannskoðanin mælti til at seta reglur um endurgjald í roknskaparreglugerðina.***

Landsgrannskoðanin helt, at tørvur var á, at Musikkskúlaskipanin fekk greinað nærri, hvat setan í allari Musikkskúlaskipanini merkti, tá ið um endurgjøld fyri ferðaútreiðslur ræður, vísandi til lógina, roknskaparreglugerðina, rundskrivið o.a. Eisini mælti Landsgrannskoðanin til at seta mannagongdirnar í roknskaparreglugerðina.

Í 2022 og aftur í 2023 kunnaði landsstýrisfólkið um, at roknskaparreglugerðin fyri Musikkskúlan fór at verða partur av roknskaparreglugerðini hjá Undirvísingarstýrinum. Mannagongdir, sum Landsgrannskoðanin viðmerkti, fóru í tí sambandi at verða umrøddar.

Í august 2024 hevur landsstýrisfólkið kunnað um, at Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur móttikið roknskaparreglugerð fyri Undirvísingarstýrið til góðkenningar. Fyrisitingin av Musikkskúlanum er partur av reglugerðini. Enn er reglugerðin ikki góðkend, men væntandi verður tað gjørt í heysthálvuni.

## 6.13 Vinnuháskúlin (LG 2018/207-236)

Í undanfarnu frágreiðing hevur Landsgrannskoðanin umrøtt grannskoðan av Vinnuháskúlanum. Avtala um samsýning fyri verkætlanarleiðslu, sum Vinnuháskúlin hevði goldið, var ikki at finna. Sambært Vinnuháskúlanum var avtalan gjørd, áðrenn Maskinmeistaraskúlin var lagdur saman við Føroya Sjómansskúla.

Í 2021 greiddi landsstýrisfólkið frá, at sambært Vinnuháskúlanum var skrivlig avtala ikki gjørd um samsýningina, sum lærarar fingu fyri verkætlanarleiðslu hjá skipsføraralesandi. Føroya Sjómansskúli hevði ásett samsýningina í 2001 ella har á leið, og

samsýningin var ongantíð prísjavnað ella broytt. Í sambandi við sáttmálasamráðingarnar var arbeitt við ársverki fyri maritimu skúlarnar, sum ætlandi skuldi verða sett í verk í 2022. Í tí sambandi fór Fíggjarmálaráðið at endurskoða og góðkenna allar samsýningar.

Í 2023 greiddi landsstýrisfólkið frá, at lønarsáttmálin millum Felagið Maskinmeistaralærarar og Fakfelag Sjómansskúlalærara øðrumegin og Fíggjarmálaráðið hinumegin var nýliga endurnýggjaður, uttan at broytingar vóru gjørdar í samsýningunum hjá Vinnuháskúlanum. Orsøkin var, at samráðingarnar drógu so langt út, at Lønardeildin var ikki sinnað at halda fram við samráðingunum um annað enn lønarspurningin á hesum sinni. Málið fór at verða tikið uppaftur.

Í august 2024 hevur landsstýrisfólkið kunnað um, at einki nýtt er í málinum. Málið bíðar til komandi sáttmálasamráðingar, sum ikki eru farnar í gongd.

## 6.14 Fróðskaparsetur Føroya (LG 2021/207-236)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Fróðskaparsetri Føroya.

Fróðskaparsetrið hevði dagført roknskaparreglugerðina í mars 2022 og sent hana til góðkenningar hjá Uttanríkis- og mentamálaráðnum. Í august 2023 kunnaði landsstýrisfólkið um, at reglugerðin var ikki góðkend. Hon skuldi tillagast smærri broytingum, sum sambært Fróðskaparsetrinum skuldu fremjast á heysti 2023.

***Roknskaparreglugerð ikki góðkend.***

Í august 2024 hevur landsstýrisfólkið kunnað um, at sambært Fróðskaparsetur Føroya hevur ikki verið møguligt at dagføra roknskaparreglugerðina í 2023 orsakað av munandi bygnaðarbroytingum, bæði í fyrisitingini og á fakultetunum. Bygnaðarbroytingarnar virka nú eftir ætlan, tí er arbeiðið við at dagføra reglugerðina flutt til í vetur 2024/2025.

*Leiga*

Leigumálið fyri Sjóvinnuhúsið er galdandi frá 2017 til 2027, og kann sigast upp av báðum pørtum við 12 mánaða varningi. Um eigarin sigur leigumálið upp, innan 10 ár eru umliðin, síðan gildiskomuna av sáttmálanum, skal hann endurrinda leigaranum íløguna, leigarin hevur gjørt í leigumálið við leigumálsbyrjan, frádrigið tað áramálið, farið er av leigumálinum deilt við 10.

Landið hevði goldið 10,6 mió.kr. til at innrætta leigaðu hølini í Sjóvinnuhúsinum. Setrið væntaði ikki at fáa longt sáttmálan við Tórshavnar havn.

Í 2023 kunnaði landsstýrisfólkið um, at avtalað var við Tórshavnar Havn, at ein hædd í Sjóvinnuhúsinum verður avhendað á sumri 2024. Restin av leigumálinum var ikki endaliga komið upp á pláss, og tí helt sáttmálin fram.

Í august 2024 hevur landsstýrisfólkið kunnað um, at avhendanin av tí einu hæddini í Sjóvinnuhúsinum er útsett til umvælingin av fyrstu lonini á Frælsinum er liðug. Leigusáttmálin er ikki uppsagdur, og væntað verður, at leigusáttmálin partvís heldur fram, til alt virksemið er flutt niðan á Frælsið.

*Yvirlit yvir innbúgv o.a.*

Í ársfrágreiðingini 2019 umrøddi Landsgrannskoðanin m.a., at Fróðskaparsetrið hevði ikki skrásett innbúgvið í Sjóvinnuhúsinum. Landsgrannskoðanin vísti á, at í løgujáttan til Fróðskaparsetur Føroya hevði landið goldið góðar 2 mió.kr. fyri innbúgv til Sjóvinnuhúsið.

Fróðskaparsetrið var samt við Landsgrannskoðanina, at tað var ikki nøktandi, at innbúgv v.m. ikki var skrásett, og sambært Setrinum høvdu tey nú skrásett lutir, ið høvdu virði oman fyri 50 t.kr., í Búskaparskipan landsins.

Í august 2024 hevur landsstýrisfólkið greitt frá, at Fróðskaparsetrið er í holt við at skráseta innbúgv og aðrar viðkomandi lutir, sum hava virði undir 50 t.kr., í einari KT-skipan. Teldur o.l. er skrásett á KT-deildini í egnari skipan.

## 6.15 Lestrarstuðul og lestrarlán (LG 2023/207-237)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað lestrarstuðul á høvuðskontu 7.23.7.04, undirkontu 01 og lestrarlán á høvuðskontu 7.23.7.05.

### Reglur

Umframt treytir um ríkisborgararætt, bústað og lestur á stuðulsheimilaðari útbúgving í Føroyum, skulu lesandi vera lestrarvirkin, fyri at kunna fáa studning. Lestrarvirkni merkir, at tann lesandi:

- ikki er meira enn eitt ár afturúr við lesnaðinum í mun til ásettu lestrartíðina,
- møtir til frálæruna,
- letur inn kravdar uppgávur, og
- fer til próvtøkurnar eftir reglunum, sum galda á útbúgvingarstovninum.

Útbúgvingarstovnurin hevur sambært lógini skyldu til at hava eftirlit við, um lesandi eru lestrarvirkin, og í seinasta lagi 6 mánaðir eftir at lesandi eru farin undir útbúgvingina og hvørt hálvár eftir tað, boða Studna frá, um lesandi eru lestrarvirkin. Studni kann krevja stuðul rindaðan aftur, um lesandi hevur givið skeivar ella villleiðandi upplýsingar, hevur tagt burtur týðandi upplýsingar ella ikki lýkur treytirnar fyri stuðli annars.

Bæði lesandi og útbúgvingarstovnar hava skyldu til at boða Studna frá, um lesandi gevast, ella um aðrar broytingar eru í lestrarviðurskiftunum.

Afturrindan av lestrarskuld skal vanliga byrja 1 ár eftir, at tað stuðulsárið er endað, sum útbúgvingin er lokin.

Um lántakarin ikki lýkur lánitreytirnar ella letur vera við at rinda, kann skuldin sigast upp til skaðaleysa afturrindan. TAKS kann heinta inn og panta lán og rentur. Skuld, ið ikki verður heintað inn av TAKS, kann krevjast inn av øðrum innkrevjingarstovni.

### Um Studna

Studni fyrisitur lestrarstuðul og -lán. Studni er partur av Undirvísingarstýrinum, og stjórin á Undirvísingarstýrinum er leiðari á Studna.

*Reglugerð um roknskaparhald*

***Roknskaparreglugerð ikki góðkend.***

Roknskaparreglugerðin fyri Undirvísingarstýrið er ikki góðkend. Sambært stýrinum er hon dagførd í januar 2024 og send stjórnarráðnum at góðkenna, men tað er ikki gjørt so nógv burtur úr partinum um Studna.

Landsgrannskoðanin mælti til, at Undirvísingarstýrið fær góðkenda roknskapar-reglugerð, herundir eisini viðvíkjandi umsitingini av lestrarstudningi og -lánum.

Í august 2024 hevur landsstýrisfólkið kunnað um, at ráðið hevur móttikið roknskapar-reglugerðina fyri Undirvísingarstýrið. Enn er reglugerðin ikki góðkend.

*Umsitingin av lestrarstudningi og -lánum*

Studni hevði havt 3,5 ársverk at umsita studning og lán. Í apríl 2024 var bert ein máls-viðgeri eftir.

Landsgrannskoðanin vísti á, at tað kann vera ein bági fyri umsitingina, at fá starvsfólk eru, og at hvørt virkisøki tí er sera tongt at einum starvsfólki. Tað kann m.a. hava við sær, at torført er at hava skilnað ímillum t.d. góðkenning og skráseting av umsóknum, at vegleiða lesandi, rinda studning og lán, gera avtalur um afturgjald, og at hava eyguni við, at skuldin verður goldin.

*Tað er ein bági fyri umsitingina, at fá starvsfólk eru.*

Undirvísingarstýrið hevur greitt frá, at tey eru í holt við at umskipa fyrisitingina av lestrarstudningi og -lánum. Nýggj starvsfólk við øðrum førleikum eru sett og fyrisitingin av lestrarstuðli v.m. fer at verða skipað í einum toymi fyri at minka um váðar við, at uppgávurnar eru ov nógv tongdar at persónum.

*Nýggj starvsfólk við øðrum førleikum eru sett.*

Ein stórur váði er eisini, at bert eitt starvsfólk hjá Studna, umframt eitt fólk hjá veitaranum av ÚS-skipanini, hevur fult innlit í útgjaldsskipanina, sum avgreiðir 130 mió.kr. í studningi um árið, umframt at rinda og umsita lestrarlánini.

*Útgjaldsskipanin er tongd at fáum persónum.*

Undirvísingarstýrið hevur kunnað um, at útgjaldsskipanin var skjalfest, tá ið hon var gjørd. Stýrið hevur fingið at vita frá veitaranum, at broytingar eru ikki skjalfestar, og at hann fer at fáa skjalfestingina upp á pláss. Veitarin hevði váttað, at fyritøkan hevur ein annan persón við tekniskum førleikum til tøknina, ÚS-skipanin er ment í.

Sambært Undirvísingarstýrinum hevur stovnurin sett í verk dagføring av mannagongdunum, og tað skal eisini tryggja vitanarskifti millum øll starvsfólkini hjá Studna.

Í seinastu frágreiðing mælti Landsgrannskoðanin til, at leiðslan fær boð, tá ið broytingar verða gjørdar í útgjaldsskipanini, og tá ið grunddátur verða broyttar. Sambært Undirvísingarstýrinum verður leiðslan nú kunnað og spurd, tá ið broytingar verða gjørdar, og leiðslan skal játta, um broytingar skulu gerast.

### Úr grannskoðanarfrágreiðingini 2021

Landsgrannskoðanin kundi ikki sanna, at roknskapirnir vóru rættir, m.a. tí at stakroyndir vístu, at:

- Studni hevði ikki nóg væl skipað eftirlit við, um studningsmóttakarar vóru lestrarvirknir,
- Studni hevði ikki fingið neyðug skjalprógv frá hægru lærustovnunum um, at lesandi vóru lestrarvirkin,
- tó at stovnurin hevði havt beinleiðis samband við próvbókina hjá Fróðskaparsetrinum í rúma tíð, vóru upplýsingarnar ikki brúktar til at hava eftirlit við lestrarvirkni hjá teimum lesandi, og
- dømi vóru um, at Studni hevði ikki kravt staðfestan “ov nógv útgoldnan stuðul” aftur frá móttakarum.

*Í seinastu grannskoðan vísti Landsgrannskoðanin á fleiri viðurskifti.*

Aðrar orsøkir, sum gjørdu roknskapirnar misvísandi, vóru, at Studni hevði skrásett ágóða av ov nógv útgoldnum studningi á aðra høvuðskontu, enn hana, studningurin er játtaður á, og at reglurnar um í mesta lagi 15 ára afturgjaldstíð av lánum vóru ikki altíð fylgdar.

Í 2022 kunnaði landsstýrisfólkið um, at Studni fór at betra um viðurskiftini, sum sambært frágreiðingini frá Landsgrannskoðanini áttu at verið handfarin betur, soleiðis at eftirlitið varð styrkt. Studni skuldi ganga ígjøgnum allan lestrarstuðul, ið var goldin út 5 ár aftur í tíð og krevja aftur upphæddir, sum vóru goldnar av órøttum. Stovnurin skuldi tryggja í mesta lagi 15 ára afturgjaldstíð, og at øll, sum fingu studning, vóru lestrarvirkin.

Í 2023 boðaði landsstýrisfólkið frá, at Barna- og útbúgvingarmálaráðið støðugt hevði samskift við Studna. Studni hevði saman við Fróðskaparsetrinum gingið ígjøgnum lestrarvirkni 5 ár aftur. Komið var á mál, og afturgjaldsskriv vóru send út. Skipanin var ment soleiðis, at eftirlitið við lestrarvirkni var vorðið tryggari.

***Avtalur eru gjørdar um lán, sum hava longri afturgjaldstíð enn 15 ár.***

Studni hevði gjøgnumgingið øll lán, har afturgjaldstíðin var longri enn 15 ár, og gjørt nýggjar avtalur. Studni hevði gjøgnumgingið stuðulsútgjøldini síðstu 5 árini og kravt ov nógv útgoldnan stuðul aftur.

### Grannskoðan 2023

Í seinastu frágreiðing umrøddu vit m.a. heimildina hjá Studna at seta sum treyt, fyri at lesandi á miðnámsskúlum skulu hava rætt til hægra studningin, at tey høvdu flutt bústað sambært Landsfólkayvirlitinum.

Undirvísingarstýrið hevur saman við Barna- og útbúgvingarmálaráðnum gjørt eina meting av § 7, stk. 5, í lógini um lestrarstuðul, har niðurstøðan er, at heimildin kann brúkast til at áseta treytina um flyting í fólkayvirlitinum í kunngerð. Uppskot til broytingar í kunngerðini hevur verið til hoyringar hjá Studna, sum hevur gjørt viðmerkingar og uppskot til upprit í juli 2023.

Í august 2024 hevur landsstýrisfólkið kunnað um, at Studni, í sambandi við eftirlits-arbeiðið, er komið fram á, at nøkur lesandi, sum ikki lúka treytirnar fyri at fáa hægra lestrarstudningin, kortini hava fingið hægra studningin. Talan kann t.d. vera um lesandi, ið hevur "pro-forma" bústað hjá skyldfólki ella vinum, men sum í veruleikanum er búsitandi heima hjá foreldrunum. Á henda hátt fáa summi lesandi á miðnáms-útbúgvingum hægra studningin, uttan at lúka treytirnar um útreiðslur fyri livikostnað.

Sambært landsstýrisfólkinum hevur tað havt við sær, at Barna- og útbúgvingar-málaráðið og Studni hava ynskt at fáa heimild í kunngerðina um lestrarstuðul til at áseta skráseting sambært Landsfólkayvirlitinum sum treyt fyri hægra studninginum til lesandi á miðnámsútbúgvingum, pørtum av miðnámsútbúgvingum ella útbúgvingum á framhaldsdeildarstigi, sum búgva til leigu.

Landsstýrisfólkið vísir á, at tað hevur drigið út at finna fram til neyva innihaldið í hesari ásetingini í kunngerðini, soleiðis at ásetingin røkkur ætlaða endamálinum. Arbeitt verður víðari við málinum, ið væntandi verður loyst í heysthálvuni. Afturat tí verður umrøtt við Studna, um tað eisini eru aðrir møguleikar, sum kunnu verða við til at styrkja um eftirlitið við lestrarstudninginum.

#### *Innheinting av ov nógv goldnum studningi*

***Uppskot er gjørt til heimild at krevja ov nógv útgoldnan studning aftur.***

Undirvísingarstýrið hevur kunnað um, at í mars 2023 var gjørt eitt uppskot til broyting av § 21 í lógini um lestrarstuðul, sum skuldi geva heimild at senda krøv viðvíkjandi studningi, ið Studni kann krevja rindaðan aftur, til TAKS at heinta inn.

Í september 2023 var broytingaruppskotið sent Løgmálaráðnum til lógareftirkanningar. Løgmálaráðið helt, at talan var um ov víðfevnt tvingsilsinntriv samanborið við, at talan var um einstøk peningakrøv, ið kunnu hava próvligar ella rættarliga ósemjur við sær. Í samskifti millum Barna- og útbúgvingarmálaráðið og Studna, var ynski um at fáa heimild hesum viðvíkjandi, og Studni skuldi arbeiða víðari við nýggjum uppskoti.

Í august 2024 hevur landsstýrisfólkið kunnað um, at lógin um lestrarstuðul er enn ikki broytt í mun til vantandi heimildina at senda krøv viðvíkjandi studningi, ið Studni kann krevja rindaðan aftur, til TAKS at heinta inn. Arbeitt verður við málinum, ið ætlandi verður avgreitt í heysthálvuni.

Neyðugt er at broyta ÚS-skipanina, um Studni skal kunna krevja "ov nógv útgoldnan studning" aftur á heimilaðan hátt. Studni ætlaði at fáa stjórnarráðið at biðja um eyka-játtan til broytingina í mars 2024, men tað vildi ráðið ikki.

#### *Afturgjaldstíð av lánum*

Sambært Undirvísingarstýrinum hevur Elektron ment útgjaldsskipanina soleiðis, at til ber at fáa yvirlit yvir øll lán, har afturgjaldstíðin er yvir 15 ár.

Elektron hevur sambært Undirvísingarstýrinum skilgreinað fyrispurning viðvíkjandi lestrarvirkni, soleiðis at til ber at finna, hvørji lesandi ikki hava verið lestrarvirkin ta tíðina, tey hava fingið studning fyri seinastu 5 árini.

## Roknskapartøl

Roknskapartøl studningur, fyri høvuðskontu 7.23.7.04, undirkontu 01:

*t.kr.*

| Heiti | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|
| Ógreinað | 75 | 31 | 69 | 44 | 45 |
| ÚS | 94.969 | 94.341 | 100.109 | 99.992 | 100.916 |
| ÚSUN | 8.956 | 8.810 | 9.254 | 7.931 | 5.794 |
| Ferðastudn.uttanlands | 2.024 | 1.832 | 1.423 | 1.661 | 1.361 |
| Verkætlanarstudningur | 162 | 67 | 73 | 246 | 172 |
| **Tilsamans** | **106.185** | **105.080** | **110.929** | **109.873** | **108.288** |

Roknskapartøl lán, fyri høvuðskontu 7.23.7.05:

*t.kr.*

| Heiti | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|
| Tilskot til einstaklingar | 147 | 33 | 52 | 44 | 10 |
| Rentuútreiðslur o.a. | 0 | 0 | 0 | 0 | 3 |
| Rentuinntøkur og vinningsbýti | -1.937 | -1.749 | -1.546 | -1.378 | -2.163 |
| Útlán v.m. | 8.466 | 6.483 | 6.238 | 6.033 | 7.564 |
| Afturgjalding av útlánum v.m. | -11.867 | -12.381 | -12.394 | -9.658 | -11.352 |
| **Tilsamans** | **-5.191** | **-7.613** | **-7.650** | **-4.959** | **-5.938** |

Yvirlit yvir lán, tilgongd, frágongd og avsetingar seinastu 5 árini:

*t.kr.*

| Heiti | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|
| Útlán (primo) | 72.169 | 68.768 | 62.870 | 56.715 | 53.090 |
| Útlán (tilgongd) | 8.466 | 6.483 | 6.238 | 6.033 | 7.564 |
| Útlán (frágongd) | -11.867 | -12.381 | -12.394 | -9.658 | -11.352 |
| Avseting móti tapi | 0 | 0 | 0 | 0 | -8.384 |
| **Tilsamans** | **68.768** | **62.870** | **56.715** | **53.090** | **40.918** |

Ímillum saldurnar á lánum er eisini “ov nógv útgoldin lestrarstuðul”, sum er játtaður og goldin út á høvuðskontu 7.23.7.04. Tá ið studningsmóttakarar hava fingið ov nógv útgoldið í lestrarstudningi, bókar Studni upphæddirnar sum lán í fíggjarstøðuni á hesari høvuðskontuni.

## Stakroyndir av studningi

Við stakroyndum kannaði Landsgrannskoðanin nøkur mál viðvíkjandi studningi, um umsóknir eru, um skjalprógv eru við, um umsóknirnar eru rætt skrásettar, og um útgoldni studningurin er rættur. Einki var at finnast at.

## Stakroyndir av lánum

Við stakroyndum kannaði Landsgrannskoðanin mál viðvíkjandi lestrarlánum. Saman við Studna gingu vit ígjøgnum málini í ÚS-skipanini. Í fleiri málum var einki at finnast at, uttan at krøvini eru send seint til advokat.

Í einari av stakroyndunum er ov nógv útgoldin studningur bókaður á høvuðskontuna, Lestrarlán, tó at tað hoyrir til “Lestrarstuðul”.

Í juni 2024 hevur Undirvísingarstýrið kunnað um, at tey hava ikki broytt mannagongdina til at skráseta “ov nógv útgoldnan studning” á rætta høvuðskontu. Útgjaldsskipanin klárar ikki at gera mun á ov nógv útgoldnum studningi og lánum, tí verður skuld viðgjørd sum skuld.

***Krøv eru skrásett á skeivari høvuðskontu.***

Í august 2024 hevur landsstýrisfólkið greitt frá, at Barna- og útbúgvingarmálaráðið er samt við Landsgrannskoðanina í, at ov nógv útgoldin lestrarstudningur eigur at verða

bókaður inn aftur á høvuðskontu 7.23.7.04 “lestrarstuðul”, haðani hann er útgoldin. Fyri at tað skal lata seg gera, er neyðugt at gera nakrar tillagingar í Útgjaldsskipanini. Studni hevur ikki neyðugu fíggingina til broytingarnar, og enn hevur Barna- og útbúgvingarmálaráðið ikki funnið nakra aðra fígging til broytingarnar.

Eitt mál, sum Studni hevði sent til TAKS í mai 2023, var komið aftur til stovnin í februar 2024, har TAKS kunnaði um, at persónurin var fluttur uttanlands í februar 2020.

Landsgrannskoðanin spurdi, hví so long tíð gongur, til Studni fær mál aftur frá TAKS, og hví málið ikki var sent til advokat, tá ið persónurin var fluttur uttanlands.

Undirvísingarstýrið svaraði, at spurningurin viðvíkjandi viðgerðartíðini hjá TAKS má setast TAKS, og at Studni hevur ikki møguleika at samkoyra upplýsingar frá Landsfólkayvirlitinum og tað, sum er sent til TAKS at krevja inn.

Í august 2024 hevur landsstýrisfólkið greitt frá, at tá ið Studni sendir lán til innheintingar hjá TAKS ella advokati, verða lánini uppsøgd til skaðaleysa afturrindan, og kunnu, í hesum føri, bert gjaldast til TAKS. Tá ið slík hending er gjørd í skipanini, ger Studni einki meira við málið, tí tá liggur málið í hondunum á ávikavist TAKS og advokati. Er tað soleiðis, at TAKS ikki fær innheintað kravið, tí viðkomandi er fluttur uttanlands, fær Studni boð um tað. Síðan tekur Studni lánið aftur, og sendir tað til advokat til innheintingar.

*Víðkan av stakroyndum*

Í mai 2024 valdi Landsgrannskoðanin at kanna nakrar stakroyndir afturat; tó løgdu vit okkum eftir at kanna mál, ið ikki vóru send til innheintingar, hóast afturgjaldið langt síðani skuldi verið byrjað, og lítið ella einki var goldið.

***Innanhýsis reglur og mannagongdir eru ikki nóg greiðar.***

Stakroyndirnar vístu samanumtikið, at innanhýsis reglur og mannagongdir eru ikki nóg greiðar. Mál verða send seint til innkrevjing. Mál, sum eru send til TAKS, koma ikki aftur, fyrr enn langa tíð eftir, at TAKS hevur móttikið tey, tó at persónur sambært TAKS var fluttur uttanlands, áðrenn TAKS fekk áheitanina um innheinting.

Mál, sum skuldi byrja afturgjald í mai 2023, var ikki sent til advokat.

Ein persónur skuldi byrja at rinda skuld aftur juli 2022, men rindaði einki. Studni boðaði honum frá, at tey fóru at senda málið til TAKS at heinta inn. Hann bað tá um at sleppa at gjalda nakað minni um mánaðin frá mai 2024 við teirri grundgeving, at inntøkuviðurskiftini vóru broytt. Landsgrannskoðanin vísti á, at 21 mánaðir gingu, frá tí at persónurin átti at byrja at rinda lánið, til seinna avtalan bleiv gjørd.

Undirvísingarstýrið hevur víst á, at tað tekur nakað av tíð, frá tí at afturgjald skal byrja, til Studni staðfestir, at einki er komið inn, og at innheintingarmannagongdir verða tá settar í verk. Undirvísingarstýrið ásannar, at tað kundi gingið skjótari, og at stovnurin fer at taka tað upp í sambandi við dagføringina av mannagongdunum.

## Samanumtikið

Studni hevur bøtt um umstøðurnar at hava eftirlit við, um studningsmóttakarar eru lestrarvirknir, við at hava møguleikar at fáa upplýsingar úr útgjaldsskipanini, har útbúgvingarstovnarnir kunnu kanna, um lesandi eru virkin. Sambært Undirvísingarstýrinum verður tað enn betri, tá ið nýggja KT-skipanin er liðug.

Studni hevur broytt mannagongdirnar soleiðis, at reglurnar um 15 ára afturgjald og í minsta lagi 300 kr. um mánaðin eru hildnar.

Studni hevur strammað upp, soleiðis at krøv verða send til TAKS ella til advokat, eftir at tríggir rykkjarar eru sendir til skuldarar.

Lesandi, ið hava fingið ov nógv í studningi, fáa ætlanarskriv og avgerðarskriv við kæruvegleiðing. Komið er tó ikki á mál við tí, av tí at Studni hevur ikki nóg stóra arbeiðsorku.

Enn er einki gjørt við at fáa skrásett krøv viðvíkjandi “ov nógv goldnum studningi” á rætta høvuðskontu. Sambært Studna er orsøkin, at Undirvísingarstýrið fær ikki játtan til at gera tillagingar av útgjaldsskipanini.

Undirvísingarstýrið hevur víst á, at sum fyrr nevnt, hevur stovnurin sett arbeiði í verk at dagføra mannagongdirnar, og at tað arbeiðið eftir ætlan skal verða liðugt 1. desember 2024.

# 7. Heilsumál

## 7.1 Heilsumálaráðið (LG 2023/211-111)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Heilsumálaráðnum á høvuðskontu 11.11.1.24. Í 2023 eru játtaðar 15,2 mió.kr.

### Roknskaparviðurskifti o.a.

Roknskaparreglugerðin er frá 2020. Sambært ráðnum eru tey í holt við at dagføra reglugerðina.

Heilsumálaráðið og Almanna- og mentamálaráðið hava felags fyrisiting. Játtanin til felagsfyrisitingina er á høvuðskontuni hjá Heilsumálaráðnum á undirkontu 30. Ráðini rinda helvt um helvt fyri felags útreiðslur.

Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum nøkur lønarmál. Einki var at finnast at.

Í roknskaparreglugerðini er ásett, at starvsfólk kunnu í mesta lagi eiga 30 tímar á ella skylda í mesta lagi 15 tímar. Sambært tímayvirliti áttu nøkur fleiri tímar á, enn ásetta markið. Ráðið hevur greitt frá, at tímaskráseting er partur av dagføringini av roknskaparreglugerðini.

Við stakroyndum kannaðu vit uppgerðir fyri ferðing uttanlands. Vit kannaðu um ásetingarnar í rundskrivinum um tænastuferðir vóru hildnar. Einki var at finnast at.

### Fíggjarstøða o.a.

Heilsumálaráðið og Almanna- og mentamálaráðið hava tvær peningastovnskontur í felag, sum eru skrásettar í fíggjarstøðuni hjá Heilsumálaráðnum. Onnur kontan hevur gjaldkort atknýtt.

Sambært roknskaparreglugerðini er gjaldkortkontan ætlað til keyp á netinum. Hámarksupphæddin er 50 t.kr., og kontan verður gjørd upp eina ferð um mánaðin.

Vit kannaðu, um upphæddirnar í fíggjarstøðuni við ársbyrjan og við árslok 2023 stemmaðu við uttanhýsis kontuavrit, og um saldan var innan fyri loyvda hámarkið. Einki var at finnast at.

Hin peningastovnskontan verður nýtt til tað, sum ikki fer ígjøgnum kreditorskipanina hjá Gjaldstovuni. Inngjaldingarnar á kontuna eru frá starvsfólkunum og frá flytingum av gjaldkortkontuni. Afturat tí hevur Patienterstatningen í fleiri ár flutt reguleringar av íkastinum frá Heilsumálaráðnum á kontuna.

Ákontugjaldið til donsku tryggingarskipanina verður goldið av høvuðskontu 11.20.3.23 “Umsiting av sjúklingatrygging”. Reguleringin fyri 2022 var 107 t.kr., sum er goldið á peningastovnskontuna í 2023.

Spurt, hví upphæddirnar frá Patienterstatningen ikki vóru fluttar til kontu hjá Gjaldstovuni, svaraði Heilsumálaráðið, at ráðið hevur verið í samband við Patienterstatningen og biðið um, at inngjøld frameftir verða flutt til landskassan.

Landsgrannskoðanin vísti á, at tað er ikki í samsvari við reglurnar um egna peningastovnskontu, at inngjaldingar frá aðrari játtan verða brúktar sum gjaldføri á peningastovnskontuni.

## 7.2 Fólkaheilsustýrið (LG 2023/211-201)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað Fólkaheilsustýrið, játtanin er á høvuðskontu 11.20.1.02. Fólkaheilsustýrið er sett á stovn 1. januar 2023. Stovnurin virkar sambært Ll. nr. 77/2022 "um Fólkaheilsustýrið". Við Ll. nr. 59/2024 er heitið á stovninum broytt til Heilsustýrið.

### Roknskaparviðurskifti v.m.

Roknskapar- og játtanartøl, býtt á undirkontur:

*t.kr.*

| Heiti | *J 2023* | R 2023 |
|---|---|---|
| Vanligt virksemi | *7.277* | 7.273 |
| Verkætlanin FarGen | *2.800* | 2.804 |
| Stuðulsfíggjað virksemi | *0* | 0 |
| **Tilsamans** | ***10.077*** | **10.077** |

Fólkaheilsustýrið hevur gjørt roknskaparreglugerð fyri samanlagda stovnin, sum stjórnarráðið hevur góðkent.

*Lønir*
Við stakroyndum hevur Landsgrannskoðanin kannað nøkur lønarmál. Einki var at finnast at.

*Keyp*
Fólkaheilsustýrið kunnaði um, at tey biðja um tilboð, tá ið tey keypa fyri størri upphæddir.

*Keyp av tænastuveitingum*
Fólkaheilsustýrið hevur goldið 143 t.kr. fyri viðlíkahald av KT-skipan umframt eykarokningar. Fólkaheilsustýrið hevur kunnað um, at veitarin hevur veitt tænastur til Ílegusavnið síðani 2007. Tá ið virksemið hjá FarGen vaks, fingu tey tilboð frá einum øðrum veitara, men tann prísurin var hægri.

Fólkaheilsustýrið bað um prísir frá fleiri, tá ið stovnurin skuldi útvega filmar til ABC-vikuna. Arbeiðið kostaði 59.200 kr.

Fólkaheilsustýrið hevur í einum føri keypt konsulenttænastur fyri 189 t.kr., uttan at biðja um prísir frá fleiri. Stovnurin kunnaði um, at talan var um tænastur, ið ikki kundu bjóðast út, og at tey, sum veittu tænasturnar, vóru best skikkað yvirhøvur.

Landsgrannskoðanin mælti til at halda reglurnar um keyp av vørum og tænastum, og um neyðugt biðja um undantak, um vørur ella tænastur eru av slíkum slagi, at ikki ber til at bjóða tær út.

Heilsumálaráðið tekur undir við tilmælinum, men vísir tó á, at rundskrivið um keyp av vørum og tænastum hevur undantak fyri ávísar KT-skipanir.

*Ferðing uttanlands og umboðan*
Fólkaheilsustýrið tók undir við tilmælinum frá Landsgrannskoðanini um at viðmerkja á rokningar, tá ið stovnurin rindar meira fyri gisting, enn reglurnar í rundskrivinum um

tænastuferðir áseta, og at viðmerkja á matstovurokningar v.m., hvørjar persónar stovnurin rindar fyri.

*Inntøkur*
Í 2023 hevur Fólkaheilsustýrið 314 t.kr. í inntøkum frá verkætlanum, sum eru fíggjaðar av øðrum.

*Fíggjarstøða*
Fólkaheilsustýrið hevur nakrar størri ognir, og tær eru skrásettar í ognarskránni í Búskaparskipan landsins.

### Stuðulsfíggjað virksemi

Umframt vanliga stovnsraksturin hevur Fólkaheilsustýrið eisini stuðulsfíggjað virksemi. Nettojáttanin til stuðulsfíggjaða virksemið er 0 kr., 2 mió.kr. í útreiðslum og 2 mió.kr. í inntøkum.

Roknskapartøl frá 2019 til 2023:

*t.kr.*

| Heiti | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 1.327 | 1.712 | 1.148 | 1.094 | 1.683 |
| Keyp av vørum og tænastum | 944 | 750 | 514 | 997 | 1.102 |
| Keyp av útbúnaði, netto + leiga | 11 | 114 | 7 | 381 | 13 |
| Vanligar flytingarinnt. | -1.492 | -1.721 | -1.336 | -791 | -617 |
| Flytingarinntøkur úr útlandinum | -641 | -741 | -255 | -1.580 | -2.156 |
| Innanh. flyt. millum almennar stovn. (útr.) | 0 | 8 | 28 | 0 | 0 |
| Innanh. flyt. millum almennar stovn. (innt.) | -150 | -127 | -107 | -101 | -25 |
| **Tilsamans** | **0** | **-6** | **0** | **0** | **0** |

Landsgrannskoðanin hevur kannað tríggjar av teimum 19 verkætlanunum, sum Fólkaheilsustýrið hevði í 2023.

***Granskingar-verkætlanir.***

*HBOC*
Í 2017 byrjaði verkætlanin "Identifying breast cancer susceptibility genes in the Faroese population and its relation to hereditary breast-ovarian cancer syndrome".

Ílegusavnið gjørdi verkætlanina upp pr. 31. desember 2019, og var kostnaðurin 1.154 t.kr. Granskingarráðið lat 576 t.kr., og Krabbameinsfelagið og Betri-stuðulsgrunnurin lótu tilsamans 529 t.kr.

Verkætlanin helt fram, og Fólkaheilsustýrið roknaði við, at samlaði kostnaðurin frá august 2020 til 30. september 2021 fór at verða 1.272 t.kr.

Granskingarráðið játtaði 840 t.kr., og ætlanin var at søkja um stuðul frá: Genetic Biobank, FarGen, Rigshospitalet og Nottingham University Hospital, tilsamans 425 t.kr.

Landsgrannskoðanin vísti á, at tað sást ikki í roknskapinum, at verkætlanin hevði fingið stuðul frá nevndu stovnum.

***Tað sæst ikki í roknskapinum, hvør hevur latið stuðul.***

Fólkaheilsustýrið hevur greitt frá, at stuðulin frá Genetic Biobank, FarGen og Rigs-hospitalet er fígging "in kind", sum merkir, at persónar, fyritøkur og/ella stovnar bjóða seg til at lata vørur ella tænastur fyri at stuðla verkætlanum uttan at rinda við reiðum peningi. Tað er "ókeypis" stuðul, sum er týdningarmikil at fáa til verkætlanir, og sum ger, at ein verkætlan gerst møgulig uttan at fáa beinleiðis fíggjarligan stuðul. Áður var tað kallað kapitalisering av egnum avriki. Fólkaheilsustýrið vísti á, at mannagongdin hjá stovninum hevði ikki verið at bóka tílíkan stuðul í verkætlanarroknskapin.

Í juni 2024 hevur Heilsumálaráðið greitt frá, at fyribrigdið "in kind" má síggjast í rokn-skapinum, til tess at roknskapurin kann vísa samlaða kostnaðin av verkætlan.

***Gjøgnumskygnið í roknskapinum hevur ikki verið nóg gott.***

Ráðið vísir á, at gjøgnumskygni hevur ikki verið nóg gott, tí at stovnurin hevur ikki fylgt meginregluni í vegleiðingini um fremmanda fígging um at bóka játtaðan stuðul í fíggjarstøðuni sum áogn hjá stuðulsveitara og sum skuld hjá stovninum, sum fremur verkætlanina. Heilsumálaráðið vísir á, at mannagongdirnar í vegleiðingini um fremmanda fígging eiga at verða brúktar í sambandi við slíkar verkætlanir.

*FarGen-PGX*

Í desember 2022 hevur Ílegusavnið gjørt sáttmála við Granskingarráðið um stuðul til verkætlanina FarGen-PGX "Samanrenning millum ílegur og ymisk sløg av heilivági í føroysku populatiónini". Starvsfólk frá Náttúruvísindadeildini er verkætlanarleiðari.

Granskingarráðið játtaði 435 t.kr., verkætlanin kostaði 1.108 t.kr., og hon var upprunaliga ætlað at vara frá 1. august 2022 til 1. september 2023.

31. desember 2023 stóðu 384 t.kr. í fíggjarstøðuni sum "Ikki inntøkuført". Sambært ársuppgerð til Granskingarráðið endar verkætlanin 1. januar 2024, og sambært roknskapinum hevur einki virksemi verið í 2023.

Fólkaheilsustýrið hevur víst á, at virksemið fer fram á øðrum stovni, og rokningar koma haðani, tá ið arbeiðið er gjørt. Verkætlanin er longd til desember 2024.

Í juni 2024 hevur Heilsumálaráðið kunnað um, at tá ið verkætlanir verða longdar, verður tað avtalað ímillum stuðulsveitara og stuðulsmóttakara. Verkætlanin er longd, grundað á broyting frá september 2023 í lógini um Vísindasiðsemisnevnd, sum gjørdi, at samtykki kann latast talgilt.

*FarGen II*

Annað skeiðið viðvíkjandi granskingarverkætlanini, FarGen II, snýr seg um at skilja arvafrøðiligu fortreytirnar hjá føroyska fólkinum og fáa vissu fyri genetisku ávirkanini á sjálvórins- og evnaskiftissjúkur hjá føroyingum.

Ílegusavnið fremur verkætlanina saman við amerikonsku fyritøkuni Variant Bio og Globe Institute hjá Keypmannahavnar Universiteti. Í november 2021 gjørdu Ílegusavnið og Variant Bio-group rammusáttmála um gransking viðvíkjandi Føroysku Genome-verkætlanini. Verkætlanin skuldi fíggjast soleiðis:

| | *t.kr.* |
|---|---:|
| **Stuðulslatarar** | |
| Ílegusavnið | 4.607 |
| Variant Bio | 10.921 |
| Globe Institute | 765 |
| Granskingarráðið | 775 |
| **Tilsamans** | **17.068** |

Tær 4,6 mió.kr. frá Ílegusavninum skuldu nýtast til útreiðslur av at goyma blóðroyndirnar, t.v.s. at talan er um rakstrarútreiðslur hjá stovninum.

Eingin ágóði (játtaður stuðul) er í fíggjarstøðuni. Landsgrannskoðanin spurdi, hvussu nógv, hvør stuðulslatari hevur bundið seg til at rinda, og bað um møgulig skjalprógv.

***Stuðul latin í naturalia.***

Fólkaheilsustýrið hevur kunnað um, at fíggjarætlanin er ein meting, sum er gjørd í samstarvi við stuðulslatarar, og parturin hjá Ílegusavninum og Globe institute er "in kind". Stuðulin frá Variant Bio verður latin í naturalia, og Fólkaheilsustýrið sendir rokningar leypandi fyri útreiðslur, sum eru knýttar at verkætlanini. Granskingarráðið játtaði ikki stuðul.

1. januar 2022 skuldi arbeiðið við blóðroyndum byrja. Ílegusavnið skuldi, sambært sáttmálanum við Variant Bio-group, gera eina sjálvstøðuga verkætlanarkontu, har tey umsita føroyska stuðulin til verkætlanina.

Í avtaluni við Variant Bio stendur m.a., at Íløgusavnið skal fakturera til Variant Bio samsvarandi fíggjarætlanini og gjaldsætlanini hægst eina ferð um ársfjórðingin. Gjaldast skal í peningastovn innan 45 dagar. Ílegusavnið skal gera fullfíggjaðar roknskapir, sum skulu skjalprógvast við skrásetingum av lønum, kvittanum o.ø. skjalprógvum. So leingi avtalan er í gildi og í eitt ár eftir, at verkætlanin er endað, kann Variant Bio, umboð teirra ella grannskoðari, sum fyritøkan velur, kanna konturnar og tilhoyrandi skjøl. Ílegusavnið rindar øll avgjøld, ið eru áløgd verkætlanini.

Landsgrannskoðanin spurdi,
- um tað er rætt skilt, at Variant Bio skal rinda 10.921 t.kr. tilsamans, um ja
- nær restin skal rindast,
- nær stuðulin frá Globe Institute skal rindast, og
- hví avtalaðu upphæddirnar ikki eru bókaðar í fíggjarstøðuni.

Fólkaheilsustýrið hevur greitt frá, at *"Hetta er fyrstu ferð, vit hava eina avtalu av hesum slagi. Har talan meira er um eitt samstarv enn stuðul. Variant Bio fíggjar virksemi, har tey levera vøru til FarGen. Størsti parturin av teimum 10 mió.kr. skulu brúkast til sekventering, sum verður gjørd í 2024 og 2025. Vit síggja, at her er neyðugt við einari mannagongd, sum skal tryggja, at vit fylgja reglugerðini um fremmanda fígging."*

Sambært Búskaparskipan landsins hevur Variant Bio goldið Fólkaheilsustýrinum 1.673 t.kr. í 2023 og 452 t.kr. til august í 2024, tilsamans 2.125 t.kr.

Sambært Variant Bio hevur Ílegusavnið fingið vørur og tól frá fyritøkuni fyri 323 t.kr. Starvsfólk hjá Variant Bio hava havt tólini við til Føroyar sum ferðagóðs. Nakrar vørur eru tollaðar av ávísum virði, meðan fleiri eru tollgreiddar, uttan at avgjald er roknað. Fólkaheilsustýrið vísir á, at flestu vørurnar eru útflýggjaðar við útflýggingarloyvi frá TAKS, uttan at MVG er kravt, og at tann mannagongdin skal møguliga broytast.

Landsgrannskoðanin kann ikki sanna, at allar vørurnar eru rætt tollgreiddar við innflutningi.

***17 mió.kr. í játtaðum stuðli sæst ikki í roknskapinum.***

Verkætlanin FarGen II er ikki skrásett í Búskaparskipan landsins ella sambært almennu reglunum. Tað sæst t.d. ongastaðni í roknskapinum, at stovnurin hevur fingið játtaðar 17 mió.kr. til verkætlanina.

Landsgrannskoðanin mælti til, at roknskapurin verður somikið gjøgnumskygdur, at allar játtaðar inntøkur, umframt vørur og tænastur, sum verða brúktar til verkætlanina, síggjast aftur í roknskapinum.

Í juni 2024 hevur Heilsumálaráðið víst á, at verkætlanin er øðrvísi enn aðrar verkætlanir, tí tað mesta av stuðlinum er í naturalia. Fólkaheilsustýrið fer at seta seg í samband við Gjaldstovuna ella uttanhýsis veitara fyri at fáa greiða mannagongd, soleiðis at stovnurin fylgir reglunum. Tað skal samstundis tryggja, at tað framgongur í roknskapinum, at stovnurin hevur fingið játtað stuðul.

Heilsumálaráðið er samt við Landsgrannskoðanina, at verkætlanarroknskapir eiga at vera somikið gjøgnumskygdir, at allar játtaðar inntøkur, umframt vørur og tænastur, sum verða brúktar til verkætlanir, síggjast aftur í roknskapinum. Heilsumálaráðið hevur biðið Fólkaheilsustýrið um at fylgja vegleiðingini um fremmanda fígging. Játtanir, sum eru "in kind" skulu eisini síggjast í verkætlanarroknskapunum.

# 8. Almanna- og mentamál

## 8.1 Almanna- og mentamálaráðið (LG 2023/212-111)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Almanna- og mentamálaráðnum á høvuðskontu 12.11.1.26.

**Roknskaparviðurskifti o.a.**
Í 2023 eru lønarútreiðslurnar 11,4 mió.kr. Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum nøkur lønarmál, um lýsingar, umsóknir, setanarskriv o.a. eru í málunum, og um størvini eru rætt flokkað. Einki var at finnast at.

Sambært ráðnum fylgja tey reglunum í rundskrivinum um tíðarskráseting, har ásett er, at "*Fulltíðarsett starvsfólk á arbeiðsplássum við fleksarbeiðstíð skulu vegleiðandi í mesta lagi eiga 40 tímar á og í mesta lagi skylda 30 tímar.*"

Í desember 2023 vóru flest allar tímasaldurnar innan fyri ásett mørk. Sambært ráðnum hevur eitt starvsfólk ábyrgd av at góðkenna rættingar, sum starvsfólk gera av tíðarskrásetingum, og deildarleiðarin kannar saldurnar mánaðarliga.

*Ferðaútreiðslur*
Við stakroyndum kannaði Landsgrannskoðanin uppgerðir fyri ferðing uttanlands. Vit kannaðu, um ásetingarnar í rundskrivinum "um tænastuferðir uttanlands" vóru hildnar, um ferðaloyvi vóru givin, og um møguligar fríar máltíðir vóru drignar frá dagpengunum. Einki var at finnast at.

*Fíggjarstøða*
Almanna- og mentamálaráðið og Heilsumálaráðið hava tvær peningastovnskontur í felag, sum eru skrásettar í fíggjarstøðuni hjá Heilsumálaráðnum. Onnur kontan hevur gjaldkort atknýtt.

Sambært roknskaparreglugerðini er gjaldkortkontan ætlað til keyp á netinum. Hámarksupphæddin er 50 t.kr., og kontan verður gjørd upp eina ferð um mánaðin.

Vit kannaðu um upphæddirnar í fíggjarstøðuni við árslok 2023 stemmaðu við uttanhýsis kontuavrit. Einki var at finnast at.

## 8.2 Almannaverkið (LG 2021/212-211)

***Roknskaparreglugerð enn ikki dagførd.***

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin, at roknskaparreglugerðin hjá Almannaverkinum var frá 2004 og var ikki dagførd síðani. Almannaverkið arbeiddi við nýggjum leisti til roknskaparreglugerð.

Í august 2024 hevur landsstýrisfólkið greitt frá, at sambært Almannaverkinum er roknskaparreglugerðin enn ikki dagførd ella góðkend. Tað bar ikki á mál við nýggja leistinum, sum ætlað, og arbeiðið er tíverri ikki tikið uppaftur.

## 8.3 Barnapeningur veittur í forskoti (LG 2015/212-213)

Barnagjald veitt í forskoti er heimilað í Ll. nr. 71/1996 "um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl." Lógin heimilar landinum at gjalda barnagjald forskotsvíst, tá ið tað ikki er goldið forfallsdagin av gjaldsskylduga.

Roknskapar- og játtanartøl 2023:

*t.kr.*

| Undirkonta | *Játtan* | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 01. Forskotsrindan | *9.403* | 8.954 | 449 |
| 02. Innkrevjing av forskotsrindan av barnapeningi | *-9.302* | -13.299 | 3.997 |
| **Tilsamans** | ***101*** | **-4.346** | **4.447** |

Í 2023 var meirinntøkan 4.447 t.kr. Sambært landsstýrisfólkinum kom eitt óvæntað inngjald 3.500 t.kr. frá Gældsstyrelsen í Danmark umvegis TAKS, í sambandi við at donsku myndugleikarnir hava framt ymisk innkrevjingarátøk. Talan er um skuld, sum í fleiri ár ikki hevur verið kravd inn, orsakað av tøkniligum trupulleikum.

***9,5 mió.kr. komnar inn frá Gælds-styrelsen í 2023 og 2024.***

Í august 2024 hevur landsstýrisfólkið kunnað um, at í 2024 eru 6 mió.kr. afturat komnar frá Gældsstyrelsen í Danmark. Sambært Almannaverkinum roknar TAKS við at fáa fleiri inngjøld í 2024, men talan verður um minni upphæddir.

*Heimild at heinta inn barnagjøld, móttikin av órøttum*

Landsgrannskoðanin hevur í fleiri frágreiðingum umrøtt grannskoðan av barnapeningi, serliga innheinting av barnagjøldum, móttikin av órøttum.

***2017:***
***Torført at heinta eftirstøðu inn.***

Í august 2016 var eftirstøðan frá barnagjøldum, móttikin av órøttum, 445 t.kr. Almannaverkið krevur eftirstøðuna inn, men roknaði tá við, at meginparturin fór ikki at verða goldin.

Í 2017 greiddi landsstýrisfólkið frá, at hóast tað var óvist, hvussu nógv veruliga kundi krevjast inn, helt Almannamálaráðið, at heimild helst átti at verða veitt TAKS at fremja innheintingina, tá ið ikki bar til at fáa gjaldsavtalu við gjaldskyldug. Fyrireikingar til møguligar lógarbroytingar vóru byrjaðar í samráði við TAKS og Almannaverkið.

Í 2021 kunnaði landsstýrisfólkið um, at Almannamálaráðið hevði vent sær til TAKS fyri at fáa heimild til vega at krevja upphæddina inn umvegis TAKS. Miðað var eftir at áseta reglur um tað, næstu ferð broytingar skuldu verða gjørdar í Ll. nr. 71/1996 "um barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.fl."

***2024:***
***Einki nýtt í málinum.***

Í august 2024 hevur landsstýrisfólkið kunnað um, at einki nýtt er í málinum um at áseta reglur fyri innkrevjingina.

## 8.4 Einkjubarnastyrkur (LG 2014/212-213)

Í undanfarnu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av umsitingini av játtanini til einkjubarnastyrk.

Sambært § 21, stk. 2, í Ll. nr. 71/1996 "um barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.fl." skal barnagjald, sum umsøkjari hevur móttikið av órøttum, gjaldast aftur. Lógin sigur einki um, hvørji amboð Almannaverkið kundi ella skuldi brúka at krevja gjaldið aftur.

Landsgrannskoðanin vísti á, at við hesum í huga átti Almannaverkið at styrkt um eftirlitið, sum skuldi forða fyri feilum.

Almannamálaráðið helt tað vera neyðugt at umrøða reglur um innkrevjing av útgjøldum nærri saman við TAKS og Almannaverkinum.

Í 2021 kunnaði landsstýrisfólkið um, at Almannamálaráðið hevði vent sær til TAKS fyri at fáa til vega heimild at krevja upphæddina inn umvegis TAKS. Miðað var eftir at áseta reglur um tað, næstu ferð broytingar skuldu verða gjørdar í lógini um barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.fl.

Í august 2024 hevur landsstýrisfólkið kunnað um, at einki nýtt er í málinum.

## 8.5 Barnaískoyti (LG 2015/212-213)

Í undanfarnu frágreiðing vísti Landsgrannskoðanin á, at ivi var um innheintingar-heimildirnar hjá Almannaverkinum. Sambært § 21, stk. 2, í Ll. nr. 71/1996 "um barna-gjald til einsamallar uppihaldarar o.fl." skal tann, sum hevur móttikið barnaískoyti móti betri vitan, uttan at hava rætt til tað, gjalda upphæddina aftur. Í lógini framgongur ikki, hvørji amboð Almannaverkið kann ella skal brúka at krevja peningin aftur. Landsgrann-skoðanin vísti á, at við hesum í huga átti Almannaverkið at styrkt um eftirlitið, sum skuldi forða fyri feilum.

Í 2017 helt Almannamálaráðið, at heimild helst átti at verið veitt TAKS at heinta inn, um ikki bar til at fáa í lag gjaldsavtalu.

Í 2018 greiddi Almannamálaráðið frá, at fundur hevði verið um málið ímillum TAKS, Almannaverkið og Almannamálaráðið. Eingin niðurstøða var gjørd, tí støða skuldi takast til m.a. fíggjarlig, teknisk og løgfrøðilig atlit.

Í 2021 kunnaði landsstýrisfólkið um, at Almannamálaráðið hevði vent sær til TAKS fyri at fáa heimild til vega at krevja upphæddina inn umvegis TAKS. Miðað varð eftir at áseta reglur um tað, næstu ferð broytingar skuldu gerast í lógini um barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.fl.

Í august 2024 hevur landsstýrisfólkið greitt frá, at einki nýtt er í málinum.

## 8.6 Familjuískoyti (LG 2023/212-213)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað Familjuískoyti á høvuðskontu 12.21.3.09. Í 2023 er játtanin 21,3 mió.kr. býtt á tvær undirkontur, 01. Familjuískoyti og 02. Olju- og hjálparískoyti.

Roknskapar- og játtanartøl:

*t.kr.*

| **Familjuískoyti** | **2019** | **2020** | **2021** | **2022** | **2023** |
|---|---|---|---|---|---|
| Roknskapur | 10.170 | 10.797 | 9.833 | 13.934 | 21.379 |
| *Játtan* | *10.250* | *10.760* | *10.360* | *16.935* | *21.260* |
| **Meir-/minninýtsla** | **-80** | **37** | **-527** | **-3.001** | **119** |

Frá 2019 til 2021 hevur játtanin ligið um 10 mió.kr., men í 2022 er hon hækkað til 16,9 mió.kr. við olju- og hjálparískoytinum, og í 2023 er játtanin 21 mió.kr.

## Lógargrundarlag

*Familjuískoyti.*

Heimild at lata familjuískoyti er í Ll. nr. 160/2015 "um familjuískoyti". Sambært viðmerkingunum til lógina er endamálið at bøta um fíggjarligu korini hjá barnafamiljum, ið hava lágar inntøkur og trong fíggjarlig kor.

Í lógini verður skilt ímillum stakar uppihaldarar og uppihaldarar, ið liva í samlívi ella eru hjún. Serliga eru tað stakir uppihaldarar, sum vanliga verða mettir at hava trong fíggjarlig kor, og verður eisini veittur ein serligur stuðul til teirra. Í viðmerkingunum til lógina stendur: *"Tað hava serliga verið stakir uppihaldarar, sum hava verið tiknir fram sum ein bólkur, ið hevur trong fíggjarlig kor, og sostatt er tað eisini veittur ein serligur stuðul til stakar uppihaldarar. Men tað eru pør við børnum, sum í Føroyum hava eins trong fíggjarlig kor sum stakir uppihaldarar. Tí er familjuískoytið ikki einans eyðmerkt til støk við børnum."*

Sambært viðmerkingunum til lógaruppskotið metti landsstýrisfólkið, at umleið 60% av teimum húskjum, ið fara at móttaka familjuískoyti, fóru at verða stakir uppihaldarar og umleið 40% uppihaldarar í hjúnalagi ella samlívi, og at um triðingurin av móttakarunum fóru at vera uppihaldarar, ið fingu útbúgvingarstuðul.

Ískoyti til stakan uppihaldara við einum barni er 24.000 kr. um árið, og hækkar við 6.000 kr. fyri hvørt barni. Fult ískoyti verður veitt, um inntøkan í mesta lagi er 220.000 kr. um árið, og tað lækkar stigvíst, sum inntøkan hækkar.

Familjuískoyti til pør við einum barni er 24.000 kr. um árið, um inntøkan ikki fer upp um 320.000 kr., og hækkar við 6.000 kr. fyri hvørt barnið; útgjaldið lækkar stigvíst, sum inntøkan hækkar.

Tá ið familjuískoyti skal ásetast, verða allar inntøkur í húskinum tiknar við, eins og umsøkjarar ikki skulu hava ognir av týdningi.

*Oljuískoyti.*

Oljuískoyti kom í lógina við Ll. nr. 136/2022 "um broyting í løgtingslóg um familjuískoyti", og var sett at vera 10.000 kr. um árið. Við Ll. nr. 42/2023 broyttist oljuískoytið til hjálparískoyti, sum er eingangsupphædd á 12.000 kr. Húski við einum vaksnum, har inntøkan í mesta lagi er 290.000 kr. og húski við tveimum ella fleiri vaksnum, har inntøkan í mesta lagi er 440.000 kr. um árið, kunnu fáa hjálparískoyti.

Átta broytingar eru gjørdar, síðani lógin um familjuískoyti var samtykt í 2015, tí samsvara viðmerkingarnar til lógina ikki altíð við galdandi lóg.

## Umsóknir um familjuískoyti

Í innanhýsis leiðbeining hevur Almannaverkið ásett, at málsviðgerar skulu samanhalda upplýsingarnar í umsóknum við Landsfólkayvirlitið og kanna inntøkur og ogn. Um umsøkjari er fluttur til Føroyar seinastu 12 mánaðirnar, skal málsviðgerin biðja um inntøkuupplýsingar úr útlandinum. Um inntøka hjá stuðulsmóttakara broytist munandi, kann málsviðgeri gera av, at annað inntøkugrundarlag skal brúkast. Tá skal frágreiðing skrivast.

Málsviðgerð skal stovnast í Heildarskipanini. Almannaverkið sendir játtanar- ella sýtanarskriv, tá ið avgerðir eru tiknar, og fulltrúi ella leiðari hevur kannað málini.

### *Ognir*

Familjuískoyti kann ikki veitast, um umsøkjari eigur pening ella virðisbrøv, ið eru mett at vera oman fyri 30.000 kr. í virði, uttan so at talan er um endurgjald fyri varandi mein ella ikki-fíggjarligan skaða.

*Fráboðanarskylda*
Umsøkjari hevur skyldu til at boða frá broytingum í viðurskiftum sínum, ið kunnu skerja rættin til familjuískoyti, ella tá ið talan er um mistak í útgjøldum. Familjuískoyti skal rindast aftur, um tað er móttikið av órøttum ella móti betri vitandi.

Okkara stakroyndir vístu, at umsøkjararnir eru kunnaðir um fráboðanarskylduna við játtanarskrivinum.

*Sýtanarskriv*
Í standardsýtanarskrivinum greiðir Almannaverkið frá, hvør hevur rætt til familjuískoyti sambært lógini. Eitt brot er við grundgeving um, hví umsøkjari ikki hevur rætt til útgjald, og eitt um kæruvegleiðing.

*Málsviðgerð*
Húski kunnu søkja um familjuískoyti og hjálparískoyti umvegis Vangan ella við at senda oyðublað til Almannaverkið. Á Vanganum eru fleiri upplýsingar givnar framman-undan, men søkja fólk við oyðublaði, skulu tey fylla fleiri upplýsingar út, harímillum váttan um samlív, sum skal endurnýggjast hvørt ár.

Við undirskrift loyva umsøkjarar og makar teirra Almannaverkinum at útvega upplýsingar, sum eru neyðugar fyri málsviðgerðina, frá skattamyndugleikunum og peningastovnum.

**Stakroyndir**
Við stakroyndum kannaði Landsgrannskoðanin nøkur mál um útgjald av familjuískoyti og olju- og hjálparískoyti í 2023. Vit kannaðu umsóknir, málsviðgerðir, játtanir, og um upphæddirnar eru rættar. Vit høvdu nakrar viðmerkingar.

Í stakroyndunum staðfesti Landsgrannskoðanin, at tó at innaneftirlit og mannagongdir eru, henda mistøk. Landsgrannskoðanin mælti til, at Almannaverkið fylgir neyvari við, so feilir ikki koma fyri. Almannaverkið tekur undir við tilmælinum.

## 8.7 Almannaverkið, Trivnaðartænastur (LG 2023/212-216)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað Trivnaðartænasturnar við serligum denti á eindina Menningartarn. Játtanin til Trivnaðartænastur er á høvuðskontu 12.21.6.09, undirkontu 20 “Trivnaðartænastur”.

Endamálið við grannskoðanini er m.a. at kanna, um roknskapurin er rættur sammett við lønarsáttmálar, vaktarætlan og vanligar roknskaparreglur, og um innanhýsis mannagongdir og lógir um sambýli v.m. eru hildnar.

**Reglur**
Virksemið er skipað við heimild í Ll. nr. 72/2020 “um almannatrygd og tænastur” við bú- og viðgerðarstovnum, búfelagsskapum og sambýlum.

Sambært § 48 í lógini skulu persónar í fyribilsbústøðum og vardum bústøðum rinda húsaleigu, íroknað streym og olju, umframt felagsútreiðslur. Húsaleigan verður m.a. ásett eftir, hvussu standurin á tí leigaða er. Upphæddin til felagsútreiðslur verður ásett eftir, hvørjar útreiðslur eru felags, men tær skulu í minsta lagi fevna um endurnýggjan av felags innbúgvi. Felagsútreiðslurnar eru ásettar í reglugerð fyri hvønn einstakan bústað.

Landsstýrisfólkið hevur lýst K. nr. 221/2020 “um húsaleigu og felagsútreiðslur, skilhald o.a. á fyribilsbústøðum og vardum bústøðum”.

Frá 1. januar 2024 rinda borgarar 250 kr. um mánaðin fyri endurnýggjan av felagsinnbúgvi. Gjaldið kann javnast eftir tørvi á felagshølunum. Peningurin verður savnaður saman í fíggjarstøðuni hjá stovninum og eyðmerktur til einstaka bústaðin.

Peningurin til felagsútreiðslur fer í ein felagskassa og er ogn hjá búfólkunum. Sambært § 8 í kunngerðini verður felagskassin gjørdur upp 4 ferðir um árið, og endaliga gjørdur upp, tá ið persónur flytur frá bústaðnum. Inngjøldini fara á peningastovnskontur hjá landinum, og bókhaldið er í Búskaparskipan landins undir roknskaparøkinum "umsiting av ogn og skuld hjá øðrum".

Síðani 2019 hevur Landsgrannskoðanin, eftir áheitan frá Almannamálaráðnum, grannskoðað felagskassarnar sum part av virkseminum hjá Trivnaðartænastum. Vanlig krøv eru til bókhald v.m., og Landsgrannskoðanin ger serstaka frágreiðing um grannskoðanina til Almannaverkið.

### Roknskaparviðurskifti v.m.

Játtanar- og roknskapartøl fyri høvuðskontu 12.21.6.09, undirkontu 20 "Vanligt virksemi":

***Útreiðslurnar í roknskapinum víkja nógv frá upphæddunum, ið eru játtaðar.***

*t.kr.*

| Heiti | *J 2023* | R 2023 |
|---|---|---|
| Lønir v.m. | *366.045* | 335.351 |
| Keyp av vørum og tænastum | *20.823* | 31.030 |
| Keyp av útbúnaði, netto | *2.713* | 10.524 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur, avskrivingar o.a. | *9.752* | 16.381 |
| Ymsar rakstrarútreiðslur | *1.132* | 1.365 |
| Søla av vørum og tænastum | *-12.732* | -17.044 |
| Ymsar rakstrarinntøkur | *-433* | -1.490 |
| Íløgustuðul o.a. | *0* | 200 |
| Innanh. flyt. millum almennar stovn. (útr.) | *11.567* | 18.100 |
| Flytingar frá landi til kommunur (land) | *0* | 1.010 |
| Innanh. flyt. millum almennar stovn. (innt.) | *0* | -635 |
| **Tilsamans** | ***398.867*** | **394.792** |

Nógv tann størsti parturin av útreiðslunum er til lønir v.m., og Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað lønir í eindini Menningartarn og annars gjøgnumgingið aðrar útreiðslur í roknskapinum 2023 hjá Trivnaðartænastum.

### Menningartarn, stað 6002

Almannaverkið hevur innanvirkis roknskap soleiðis, at útreiðslurnar fyri hvørja eind eru konteraðar á "stað", í hesum føri stað 6002. Lønarútreiðslurnar í eindini Menningartarn eru 92 mió.kr. í 2023.

#### *Lønargrannskoðan*

Almannaverkið hevur nógv starvsfólk, nógv sambýlir, bústovnar v.m., og setir tí nógv fólk í starv. Seinastu 2-3 árini hevur Almannaverkið brúkt KT-skipan, starvsávísara, til umsiting og viðgerð av starvslýsingum og umsóknum v.m.

Almannaverkið ger lýsingar í starvsávísaraskipanini, har umsøkjarar kunnu søkja. Almannaverkið goymir setanarskjølini í skipanini. Hjá tí, ið fær starvið, verður setanarmálið til eitt starvsfólkamál. Tey, ið ikki fáa starv, fáa skrivlig svar við grundgevingum og kæruvegleiðingum, og málini verða goymd í tvey ár.

Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum nakrar lønir. Einki var at finnast at.

### Gjøgnumgongd av rakstri

Landsgrannskoðanin hevur gjøgnumgingið inntøkur og útreiðslur í roknskapinum 2023 hjá Trivnaðartænastunum.

Útreiðslurnar til útbúnað eru 10,5 mió.kr., samanborið við 5,7 mió.kr. árið fyri. Almannaverkið hevði boðið keyp av 13 bilum og einum bussi, fyri tilsamans 3,9 mió.kr., út á Keypsportalinum. Bussurin kostaði góðar 800 t.kr., og bilarnir ímillum 240 t.kr. og 270 t.kr. Akførini eru fingin í desember 2023 og januar 2024. Almannaverkið hevur fingið undantaksloyvi frá Akstovuni til, at fýra akfør ikki eru merkt við búmerkinum hjá Almannaverkinum, hini eru merkt.

16,5 mió.kr. eru brúktar til leigu, viðlíkahald og skatt. Játtaðar vóru 9,8 mió.kr. Sambært Almannaverkinum er virksemið vaksið, og stovnurin hevur gjørt fleiri nýggjar leigusáttmálar, umframt at verandi leigusáttmálar eru prístalsjavnaðir. Útreiðslurnar til viðlíkahald annars eru eisini øktar.

Í 2023 eru inntøkurnar av sølu av vørum og tænastum 17 mió.kr. samanborið við 15,5 mió.kr. í 2022. Inntøkurnar stava frá sølu hjá verkstøðum, húsaleigu á sambýlum, og brúkaragjøldum á sambýlum, dagtilhaldum o.l.

Sambært Almannaverkinum er høvuðsorsøkin til inntøkuhækkingina, at Móttøkuskyldan gav 1,3 mió.kr. meira í inntøku. Móttøkuskyldan er lógarfest í lógini um Almannatrygd[21], sum ásetir, at Almannaverkið hevur skyldu til at veita bútilboð til persónar, ið sambært rættarúrskurði skulu sinniskannast, sambært rættarúrskurði ella dómi skulu setast í vardan bústað ella vera undir eftirliti, ella sum treyt fyri ákæruafturtøku ella royndarleyslating verða settir í vardan bústað. Játtanin er á høvuðskontu 12.21.7.01, undirkonta 08 "Móttøkuskylda og tryggjaðar búfyriskipanir".

Húsaleiguinntøkurnar eru hækkaðar, eftir at fólk eru flutt inn á Skálagarð og Sambýlið á Mýrini.

Í 2023 eru ymsar rakstrarinntøkur 1,5 mió.kr., harav tað mesta er frá borgarum til mat v.m. og kostpeningur frá starvsfólkunum á støðum, har tað ikki er grundarlag at hava felagskassa. Dagtilhaldini hava ikki felagskassar, men borgararnir rinda tó til raksturin fyri mat. Almannaverkið hevur leigað starvsfólk út til Sandoyar barnaverndartænastu, uttan at talan er um langtíðarloysn.

Í 2023 vóru játtaðar 11,6 mió.kr. til innanhýsis flytingar millum almennar stovnar (útr.), og 18 mió.kr. eru brúktar.

***Játtanin endurrindar Almannaverkinum 18 mió.kr. í fyrisitingargjaldi.***

Trivnaðartænastur rinda Almannaverkinum endurgjald fyri felagsútreiðslur. Endurgjaldið verður roknað út eftir einum býtislykli. Trivnaðartænastur rinda eisini Gjaldstovuni fyri at brúka Vaktætlan.

Sambært Almannaverkinum vaksa útreiðslurnar javnan, tí neyðugt er at styrkja fyrisitingina orsakað av stóra rakstrarvøkstrinum, og tær vaksa eisini við lønarframskrivingum og broytingum í bygnaðinum, har virkisøkir verða flutt, og nýggj virkisøkir stovnað.

Almannaverkið vísir eisini á, at játtanin í fíggjarlógini til innanhýsis flytingar til almennar stovnar hevur verið óbroytt í nøkur ár, meðan útreiðslurnar eru hækkaðar. Til komandi fíggjarlóg ætlar Almannaverkið at fáa eina meira rættvísandi mynd av játtanini samanborið við veruligu útreiðslurnar.

### Vitjan á sambýlum og bústovnum v.m.

Í desember 2023 vitjaði Landsgrannskoðanin sambýlir og bústovnar v.m. í Tórshavn, við tí endamáli at kunna okkum um umstøðurnar, sum borgarar og starvsfólk liva og virka undir.

[21] §§ 49-52 í Ll. nr. 72/2020 "um almannatrygd og tænastur".

Eindarleiðarar vístu okkum runt saman við starvsfólkum á staðnum. Landsgrannskoðanin hevur ikki førleika at meta um, hvørt umstøðurnar tøkniliga ella námsfrøðiliga eru nøktandi, og gera tí onga niðurstøðu um tað.

Búfelagsskapurin á Karlamagnusarbreyt er í einum bústaðarblokki, sum Almannaverkið leigar frá Bústøðum. Búfólkini hava egnar íbúðir, og tvær av íbúðunum í blokkinum eru lagdar saman til felagshøli.

Sambýlið í Smærugøtu er í einum stórum nýliga umvældum sethúsum.

Bú- og viðgerðarstovnurin í Børkugøtu hevur fyrr verið skúlaheim, og har eru kømur við felags køki og stovu, og felags baðirúmum. Bú- og viðgerðarstovnurin er ikki eitt varandi heim, men eitt fyribilsstað til ungfólk, sum hareftir fara á annað hóskandi stað, t.d. sambýli ella íbúð.

Sambýlið á Grønlandsvegnum er í sethúsum, sum ikki eru bygd til endamálið, m.a. er einki starvsfólkavesi, og húsini tykjast ikki at hava verið røkt. Ætlanin er at flyta í Torfinsgøtu, men tey hølini skulu dagførast fyrst. Tey vænta at flyta í 2024.

Sambýlið í Stoffalág verður umvælt, og tí halda tey til í sethúsum í Svanga, sum hava verið nýtt til frítíðarvirksemi hjá børnum, ið er flutt til Frúutrøð.

Sambýlið á Mýrini er nýtt. Eindarleiðarin og leiðarin vóru sera glaðir fyri nýggju umstøðurnar. Tá ið vit vitjaðu vóru ikki øll búfólkini flutt inn. Á ovaru hæddini eru íbúðir, og í fyrsta umfari var ein íbúð brúkt til felagshøli. Um tørvur seinni verður á felagshølum, kunnu tey brúka hølini í niðaru hæddini.

Sambýlini á Eirargarði 16a og 16b vóru fyri fáum árum síðani umvæld, og trappuuppgongdin er nýliga umvæld. Fyri at vit kundu síggja, hvussu hølini sóu út fyri umvælingina, vístu starvsfólk okkum sambýlið Fjálgulon á Eirargarði 14b.

Húsini í Skrivaragøtu verða umvæld, so børnini, ið hava húsast í Frítíðarheiminum har, ið er dag- og samdøgurumlætting, halda fyribils til á Eirargarði í einari lon, sum er umvæld fyri nøkrum árum síðani. Sambært landsstýrisfólkinum er umlættingin flutt úr Frítíðarheiminum í Skrivaragøtu, sum er ogn hjá Javna. Umlættingin er fyribils á Eirargarði, men ætlanin er, at hon verður flutt í Børkugøtu.

Sambýlið í Garðsgøtu 20 er í sethúsum, sum eru innrættað til sambýli. Búfólkini hava egið kamar, men felags stovur og baðirúm. Tey húsini skulu umvælast. Tekningar eru gjørdar, og frameftir fara búfólk at hava egið kamar og baðiverilsi. Starvsfólkini høvdu sæð tekningarnar, og høvdu eisini gjørt viðmerkingar til tær.

Á sambýlinum í Hóvabrekku eru fleiri búfólk, sum eru røktarkrevjandi, og miðalaldurin er nakað hægri enn aðrastaðni. Fleiri teirra brúka koyristól, og tí eru hurðar skiftar og gáttir tiknar burtur, so tað slepst inn í koyristólum. Sambýlið í Hóvabrekku hevur 4 bústaðarøkir/-lonir, og á tann hátt kunnu búfólkini bólkast í smærri eindir.

## 8.8 Kassaeftirlit verkstøð (LG 2022/212-216)

Í juli 2023 var Landsgrannskoðanin á ófráboðaðum kassaeftirliti á Verkstaðnum Vón.

Kassin var seinast gjørdur upp 30. juni 2023, og peningurin goymdur í læstum pengaskápi. Reiðupeningurin var ikki settur inn, tí peningastovnarnir hava einans opið tveir dagar um vikuna. Kassin verður eisini brúktur sum námsfrøðiligt amboð. Verkstaðið hevur eisini gjaldsterminal.

Kundar, ið keypa størri nøgdir, keypa upp á borg og fáa fylgiseðlar. Eitt avrit av fylgiseðlunum fer til Almannaverkið at gera rokning eftir. Í 2022 vóru 71% av samlaðu søluni upp á borg. Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum fylgiseðlarnar. Einki var at finnast at.

Vit kannaðu kassauppgerðir og sølu fyri juni, og fyri 3. og 4. juli 2023. Smærri kassamunir vóru báðar vegir.

Í roknskapinum hjá verkstaðnum vóru bókingarnar "søla sambært terminali" og "søla sambært taldum peningi". Kassamunir vóru ikki bókaðir, men sóust í kassauppgerðunum. Til juli 2023 var kassamunurin í roknskapinum 8.776 kr. í útreiðslum, og í 2022 var kassamunurin 25.195 kr. í útreiðslum.

Landsgrannskoðanin spurdi, hví kassamunir eru í roknskapinum, tá ið kortsøla verður bókað sambært upphæddunum í terminalinum og kontantsølan sambært talda peninginum. Almannaverkið svaraði, at tað til tíðir kundi vera torført at fáa søluuppgerðirnar, og tað gjørdi, at sølan ikki kundi gerast upp, og endaði tí sum kassamunur. Kostnaður í sambandi við kortsølu var bókaður sum kassamunur, men átti at verið bókaður sum ómaksgjald. Almannaverkið ætlaði at fáa bókingarnar nágreiniligari og søluna meira gjøgnumskygda.

Í desember 2023 greiddi landsstýrisfólkið frá, at Almannaverkið ætlaði at dagføra skjalið, sum var brúkt til at gera sølu upp. Harumframt fór Almannaverkið at skifta gomul kassatól og terminalar út, og fór tað at betra um avgreiðsluna og uppgerðirnar.

## 8.9 Almannatrygd (LG 2023/212-217)

*Fyribils uppihaldsveiting.*

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað skipanina "Fyribils uppihaldsveiting", á undirkontu 01 til høvuðskontu 12.21.7.01 "Almannatrygd". Í 2023 var samlaða játtanin til Almannatrygd 132,7 mió.kr.

### Lógargrundarlag v.m

Almannatrygd verður veitt við heimild í Ll. nr. 72/2020 "um almannatrygd og tænastur".

Endamálið við veiting av fyribils fíggjarligari hjálp eftir §§ 10-12 er at forða fyri, at lívskorini hjá persóni og familju hansara versna munandi orsakað av einari almannahending, t.d. sjúku, hjúnaskilnaði ella viðgongu.

Í seinasta lagi tríggjar mánaðir eftir, at ein persónur hevur fingið játtað fyribils uppihaldsveiting, skal Almannaverkið meta, um grundarlag er fyri hjálp sambært aðrari lóggávu, undir hesum um viðkomandi lýkur treytirnar fyri at koma í fyriskipan sambært lógini um arbeiðsfremjandi tiltøk.

Støddin á fyribils uppihaldsveiting er tongd at uppihaldsskyldu, aldri og bústaðarviðurskiftum, roknað eftir hægstu uppihaldsveiting. Í 2023 var hægsta uppihaldsveiting 19.169 kr. um mánaðin.

Sambært lógini eru 7 ymiskir satsir fyri mánaðarligar veitingar:

1. Persónur, sum býr einsamallur og hevur uppihaldsskyldu mótvegis barni, fær 90% av hægstu uppihaldsveiting, t.e. 17.252 kr.
2. Persónur, ið er sambúgvandi og hevur uppihaldsskyldu mótvegis barni, fær 70% av hægstu uppihaldsveiting, t.e. 13.418 kr.
3. Persónur, 25 ár og eldri, ið býr einsamallur og ikki hevur uppihaldsskyldu mótvegis barni, fær 75% av hægstu uppihaldsveiting, t.e. 14.377 kr.
4. Persónur, 25 ár og eldri, ið er sambúgvandi og ikki hevur uppihaldsskyldu mótvegis barni, fær 50% av hægstu uppihaldsveiting, t.e. 9.585 kr.

5. Persónur, yngri enn 25 ár, ið ikki býr hjá einum ella báðum foreldrum og ikki hevur uppihaldsskyldu mótvegis barni, fær 40% av hægstu uppihaldsveiting, t.e. 7.668 kr.
6. Persónur, yngri enn 25 ár, ið býr hjá einum ella báðum foreldrum og ikki hevur uppihaldsskyldu mótvegis barni, fær 22% av hægstu uppihaldsveiting, t.e 4.217 kr.
7. Persónur, sum er varðhaldsfongslaður ella settur í varðhaldslíknandi fyriskipan, situr dóm, ella er undir aðrari frælsisskerjandi fyriskipan sambært dómi, fær 7% av hægstu uppihaldsveiting, t.e. 1.342 kr.

Bundna eftirlønargjaldið verður lagt afturat uppihaldsveitingum.

Egininntøka, sum ikki er skattskyldug, verður faldað við 1,5 og síðani drigin frá uppihaldsveitingini.

Veitingar sambært lógini um barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.fl., ella sambært lógini um familjuískoyti verður ikki tikin við sum inntøka. Stuðul frá privatum hjálparfelagsskapum verður heldur ikki tikin við.

### Málsgrannskoðan

Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum, um:

- treytirnar í § 11 eru loknar, og neyðug skjøl eru tøk,
- veitingin samsvarar við uppihaldsskyldu og hjúnastøðu sambært § 12,
- útgoldna upphæddin er í samsvari við játtaða upphædd, og um
- útgjøldini eru lækkað sambært § 21.

Í einum máli var eingin umsókn, og heitini á viðheftu skjølunum samsvaraðu ikki við innihaldið. Almannaverkið hevur kunnað um, at talan var um feil; umsóknin er til, men hon er ikki viðheft.

Í einum máli hevði umsøkjarin havt aðra inntøku og fingið rentustuðul. Almannaverkið hevði mótroknað lønina, men rentustuðulin fyri tríggjar mánaðir var ikki mótroknaður í útgoldnu veitingunum.

Almannaverkið hevði spurt sín KT-veitara, hví rentustuðulin ikki altíð er mótroknaður. Veitarin svaraði, at talan er um ein feil í forritinum, sum vísir seg, tá ið inntøkur verða heintaðar manuelt. Sambært Almannaverkinum er feilurin í forritinum rættaður.

Í einum máli stóð í umsóknini, at persónurin búði einsamallur. Viðkomandi hevði fingið uppihaldsveiting eftir reglunum um sambúgvandi ikki forsyrgjari yvir 25 ár. Í málinum sást, at bústaðarviðurskiftini vóru broytt.

Almannaverkið hevur kunnað um, at persónurin býr í húsum hjá øðrum vaksnum, og at hin var fluttur út. So leingi umsøkjari hevur bústað saman við øðrum vaksnum persóni, ella hann ikki kann skjalprógva, at hann leigar, verður veitingin ásett samsvarandi treytunum fyri sambúgvandi og vísandi til upplýsingar frá Landsfólkayvirlitinum.

Í einum máli var umsøkjarin sambúgvandi sambært umsóknini. Í 2023 fekk hann uppihaldsveiting sum einsamallur ikki-forsyrgjari yvir 25 ár. Eingi skjalprógv vóru fyri broyttum bústaðarviðurskiftum. Sambært Almannaverkinum hevði persónurin fingið íbúð frá Bústøðum, og tá var veitingin broytt samsvarandi.

## 8.10 Arbeiðsfremjandi tiltøk, tillagað starv (LG 2023/212-217)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað skipanina “Tillagað starv”. Játtanin er á høvuðskontu 12.21.7.02 “Arbeiðsfremjandi tiltøk”, undirkontu 03. Í 2023 er samlaða játtanin 141,5 mió.kr., og játtanin til tillagað starv er 93,8 mió.kr.

Roknskapartøl 2019 til 2023:

*t.kr.*

| | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|
| Tillagað starv, arbeiðsfremjandi tiltøk | 49.958 | 62.685 | 74.061 | 83.237 | 95.360 |

### Lógargrundarlag v.m.
Sambært § 21 í Ll. nr. 63/2012 “um arbeiðsfremjandi tiltøk” kann lønarískoyti til tillagað starv veitast persóni til starv á arbeiðsmarknaðinum, um arbeiðsførleikin varandi er minkaður við í minsta lagi 1/3, og tað ger, at viðkomandi ikki kann fáa ella varðveita arbeiði undir vanligum treytum á arbeiðsmarknaðinum.

Í § 22 er ásett, hvat upphæddin í mesta lagi kann vera og mannagongdir fyri, nær ískoytið verður lækkað. Sambært K. nr. 146/2022 kundi lønarískoytið í 2023 í mesta lagi vera 19.169 kr. um mánaðin, umframt frítíðarløn, arbeiðsmarknaðargjøld og eftirlønargjald.

Almannaverkið hevur eftirlit við, at arbeiðstakari framhaldandi er í starvi, og at lønin, sum arbeiðsgevarin rindar, samsvarar við brøkin, sum arbeiðstakarin er mettur at vera skerdur. Almannaverkið tekur mál upp til nýggja viðgerð, um ósamsvar er millum lønina, sum arbeiðsgevari rindar og tað, arbeiðstakari er mettur at vera skerdur.

Sambært § 7 í K. nr. 114/2012 “um virknisvenjing, arbeiðsbúgving, tillagað starv, leiðbeinaraskipan o.a.” ger Almannaverkið, í samsvari við meting um minkaðan arbeiðsførleika, avtalu við arbeiðsgevara um løn frá arbeiðsgevara og lønarískoyti, avtalu um arbeiðstíð, arbeiðsuppgávur og møgulig serlig atlit í hesum sambandi.

Uppihaldsveitingar verða javnaðar sambært Ll. nr. 64/2018 “um javningarprosent til almannaveitingar”.

### Mannagongdir
Almannaverkið ásetir lønarískoyti fyri 12 mánaðir, við upphæddini, ið er í viðkomandi sáttmála, tá ið ískoyti verður roknað. Tað kemur tí fyri, at løn frá arbeiðsgevara er eftir nýggjum taksti, meðan lønarískoyti ikki er dagført.

***Lønarískoyti.***

Um lønarútgjald ein mánað hækkar meira enn 90%, steðgar útgjald av lønarískoyti sjálvvirkandi. Sambært Almannaverkinum hendir tað seg t.d., um arbeiðsgevari hevur gloymt at broyta lønarútgjald hjá arbeiðstakara, tá ið viðkomandi fekk tillagað starv.

Almannaverkið ásetir eisini eitt ovara og eitt niðara mark fyri, hvussu nógv samlaða upphæddin fyri eitt ár kann fara út um ásetta sáttmálaløn. Eina ferð um árið gjøgnumgongur Almannaverkið upphæddirnar, og um onkur upphædd liggur uttan fyri mørkini, kannar stovnurin útgjøldini nærri og ger neyðugar tillagingar.

*Málsgrannskoðan*
Við stakroyndum kannaðu vit m.a.:

- um heimildir og skjalfestingar eru fyri útgjaldingum sambært § 21,
- um útgoldnu upphæddirnar eru í samsvari við § 22, og
- um Almannaverkið hevur framt eftirlit sambært § 23.

Einki var at finnast at, vit høvdu tó viðmerking til eitt mál. Almannaverkið hevur greitt frá, hvør orsøkin er til feilin.

Í stakroyndunum sá Landsgrannskoðanin, at ovaru og niðaru mørkini eru ymisk frá máli til mál. Almannaverkið hevur greitt frá, at vanliga verða mørkini sett til 10%, men í málum har persónur fær útgoldið løn javnan fyri t.d kvøld- og náttarvaktir og harvið fær hægri løn enn grundlønina, setir Almannaverkið eitt hægri frávik.

## 8.11 Fyritíðarpensjón (LG 2023/212-218)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað játtanina til fyritíðarpensjón. Endamálið við grannskoðanini er at kanna, um ásetingarnar um viðgerðartíðir í lógini um almannapensjónir eru hildnar. Grannskoðanin er gjørd við stakroyndum og við støði í skrásetingunum í KT-heildarskipanini hjá Almannaverkinum.

### Um fyritíðarpensjón

Fyritíðarpensjón verður veitt við heimild í Ll. nr. 48/1999 "um almannapensjónir o.a."

Trý stig eru av fyritíðarpensjón. Hægsta fyritíðarpensjón og miðal fyritíðarpensjón eru settar saman av grundupphæddum, viðbótum og avlamisviðbótum. Lægsta fyritíðarpensjón er sett saman av grundupphædd, viðbót og eykaviðbót.

Síðani 1. januar 2020 hava persónar, sum eru likamliga ella sálarliga niðurslitnir, kunnað fingið framskundaða pensjón í upp til trý ár fyri fólkapensjónsaldur. Tann upphæddin skal svara til í minsta lagi miðal fyritíðarpensjón, sí Ll. nr. 66/2018.

Persónar í aldrinum frá 18 ár og til fólkapensjónsaldur kunnu fáa fyritíðarpensjón, um arbeiðsførið er varandi niðursett orsakað av sjúku, avlamni e.ø. serligum orsøkum. Veitingarnar verða javnaðar hvørt ár sambært lógini um javningarprosent til almannaveitingar.

### Hagtøl í fíggjarlógini 2024

Í talvuni niðanfyri sæst, hvussu nógvir persónar hava fingið fyritíðarpensjón frá 2021 til 2023:

*Tal av fyritíðar-pensjónistum.*

*Tal av persónum*

| Virksemi | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|
| Hægsta fyritíðarpensjón | 1.381 | 1.463 | 1.554 |
| Miðal fyritíðarpensjón | 377 | 351 | 297 |
| Lægsta fyritíðarpensjón | 240 | 231 | 185 |
| Framskundað pensjón | 38 | 43 | 33 |
| **Tilsamans** | **2.036** | **2.088** | **2.069** |

Í 2023 fingu 173 fleiri fólk hægstu fyritíðarpensjón enn í 2021. Í 2023 var talið av teimum, sum fingu miðal, lægstu og framskundaða pensjón 140 lægri, enn tað var í 2021. Í talvuni sæst ikki, hvussu nógvir persónar flyta millum stigini.

Roknskapartøl:

*Kostnaður.*

*t.kr.*

| Undirkonta | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|
| 01. Hægsta fyritíðarpensjón | 209.095 | 221.467 | 236.738 |
| 02. Miðal fyritíðarpensjón | 40.677 | 36.008 | 31.164 |
| 03. Lægsta fyritíðarpensjón | 24.678 | 21.859 | 20.527 |
| 06. Framskundað pensjón | 4.451 | 4.482 | 2.723 |

Útreiðslurnar til hægstu fyritíðarpensjón eru vaksnar, meðan útreiðslurnar til hini stigini eru minkaðar.

### Umsóknir um fyritíðarpensjón

Umsøkjarar senda Almannaverkinum umsóknir á standard oyðublaði. Sambært lógini verður fyritíðarpensjón veitt frá fyrsta í mánaðinum eftir, at umsókn er játtað.

*Drúgv viðgerðartíð.*

Viðgerðartíðin kann, sambært Almannaverkinum, vera drúgv, og ímeðan bíðað verður eftir avgerð, kann Almannaverkið gjalda forskot ella veita hjálp eftir almannalógini. Er viðgerðartíðin longur enn 3 mánaðir, roknað frá fyrsta í mánaðinum, eftir at umsóknin er móttikin, fær persónurin pensjónina útgoldna sum eftirgjald. Eftirgjald verður roknað frá fyrsta í fjórða mánaðinum, eftir at umsókn er móttikin.

Framskundað pensjón verður veitt frá 1. í mánaðinum eftir dagfesting fyri móttøku av umsókn, treytað av at umsøkjari lýkur treytirnar.

### Grannskoðan

Landsgrannskoðanin hevur kannað 12 tilvildarliga vald mál. Við støði í §§ 32 og 33 í lógini, kannaðu vit, um pensjónirnar eru veittar frá 1. í mánaðinum eftir, at umsóknir er játtaðar, tó í seinasta lagi í fjórða mánaði eftir, at umsóknir er móttiknar.

- Í einum máli hevur Almannaverkið játtað hægstu fyritíðarpensjón og avgreitt hana tveir dagar eftir, at umsóknin var komin til Almannaverkið.
- Í trimum málum vóru umsóknir ikki neyðugar. Harav talan var um broytta borgarastøðu í tveimum, og ein skuldi skifta frá miðal til lægstu fyritíðarpensjón.
- Í fýra málum vóru útgjøldini seinkað samanborið við játtanirnar. Eitt mál um hægstu fyritíðarpensjón var seinkað 2 mánaðir, tvey mál um miðal fyritíðarpensjón vóru seinkað ávikavist 1 og 4 mánaðir, og eitt mál um framskundaða hægstu fyritíðarpensjón var seinkað 10 mánaðir.

Almannaverkið rindaði fyritíðarpensjónirnar afturvirkandi frá játtanardegnum.

Tríggir umsøkjarar fingu aðra almannaveiting í tíðarbilinum, til teir fingu játtaða fyritíðarpensjón.

- Í einum máli um miðal fyritíðarpensjón var viðgerðartíðin frá umsókn til játtan 6,5 mánaðir, í einum máli um lægstu fyritíðarpensjón var viðgerðartíðin 5 mánaðir, og eitt mál um framskundaða hægstu fyritíðarpensjón tók 4 mánaðir.
- Eitt mál var feilskrásett.

*Viðgerðartíðin er longri, orsakað av vantandi starvsfólkaorku.*

Almannaverkið hevur greitt frá, at í tveimum málum um framskundaða hægstu fyritíðarpensjón er viðgerðin seinkað ávikavist 5 og 10 mánaðir, av tí at stovnurin misti fleiri roynd starvsfólk nærum samstundis, og megnaði tí ikki at seta onnur starvsfólk nóg skjótt; viðgerðartíðirnar blivu tí longri eitt tíðarskeið.

I august 2024 hevur landsstýrisfólkið kunnað um, at orsøkin til seinkingina er starvsfólkatrot á deildini Arbeiðsbúgving, har umsóknirnar verða viðgjørdar. Eingin bíðitíð hevur verið á deildini fyri útgjald, tí eru útgjøldini ikki seinkað, men viðgerðartíðin er nú komin í rættlag.

## 8.12 Tjóðsavnið (LG 2019/207-243)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Tjóðsavninum og umsiting stovnsins av stuðulsjáttanum. Roknskaparreglugerðin var dagførd í 2019, men ikki góðkend.

Í 2022 greiddi landsstýrisfólkið frá, at roknskaparreglugerðin var enn ikki góðkend. Uttanríkis- og mentamálaráðið hevði fingið eina dagførda roknskaparreglugerð frá Tjóðsavninum, sum ráðið var í holt við at gjøgnumganga.

Í 2023 kunnaði landsstýrisfólkið í almanna- og mentamálum um, at roknskaparreglugerðin er ikki góðkend.

Í august 2024 hevur landsstýrisfólkið greitt frá, at einki nýtt er í málinum. Tjóðsavnið hevur boðað frá, at tey fara at dagføra uppskotið, sum var sent táverandi Uttanríkis- og mentamálaráðnum.

*Umsiting av stuðulsjáttanum*

Landsgrannskoðanin grannskoðaði útgjøldini av stuðli, sum Tjóðsavnið lat bygdasøvnum, mentanarsøguligum skipum, Sjósavninum og listasøvnum.

Tá ið reglur um eftirlit, roknskap, grannskoðan v.m. ikki eru í serligu heimildarlógunum, eru reglurnar í kunngerðini um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan galdandi.

Stuðul til bygdasøvn og mentanarsøgulig skip hevur heimild í serligari lóg, men tað hevur stuðulin til Sjósavnið og stuðulin til listasøvn ikki.

Í 2022 kunnaði landsstýrisfólkið um, at málið um umsitingina av stuðulsjáttanum hjá Tjóðsavninum var umrøtt við Tjóðsavnið. Uttanríkis- og mentamálaráðið samskifti við Fíggjarmálaráðið um møguligar tillagingar av reglunum, ið stuðulin varð umsitin eftir, men arbeiðið var ikki liðugt.

Í 2023 og aftur í august 2024 hevur landsstýrisfólkið í almanna- og mentamálum greitt frá, at einki nýtt er í málinum.

## 8.13 Landsbókasavnið (LG 2020/207-243)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Landsbókasavninum.

Roknskaparreglugerðin var seinast dagførd í 2019. Í 2022 kunnaði landsstýrisfólkið um, at Landsbókasavnið hevði sent Uttanríkis- og mentamálaráðnum dagførda roknskaparreglugerð, ið Landsbókasavnið síðani var farið í holt við at gjøgnumganga av nýggjum. Tá ið tað var gjørt, fór reglugerðin at verða send av nýggjum til góðkenningar hjá ráðnum.

Í 2023 greiddi landsstýrisfólkið í almanna- og mentamálum frá, at sambært Landsbókasavninum, var roknskaparreglugerðin send táverandi Uttanríkis- og mentamálaráðnum til góðkenningar í mai 2021. Reglugerðin var ikki góðkend.

Í august 2024 hevur landsstýrisfólkið greitt frá, at einki nýtt er í málinum.

## 8.14 Kirkjugrunnurin og Tiltaksgrunnurin (LG 2018/207-245)

***Lógin um fólkakirkjuna í Føroyum er frá 2007.***

Í fleiri ár hevur Landsgrannskoðanin víst á, at sambært Ll. nr. 60/2007 “um fólkakirkjuna í Føroyum” ásetir landsstýrismaðurin neyvari reglur um virksemið hjá Stiftsstjórnini, og sambært Ll. nr. 61/2007 “um fíggjarviðurskifti fólkakirkjunnar” ásetir landsstýrismaðurin reglur fyri, hvussu kirkjuráðini gera fíggjarætlanir.

***Í 2014 var ætlanin at gera kunngerðirnar.***

Í 2014 kunnaði landsstýrisfólkið um, at ætlanin var at gera kunngerðirnar í 2015, og í 2017 upplýsti landsstýrisfólkið, at enn var arbeitt við kunngerðunum.

Í uppskoti til samtyktar at góðkenna landsroknskapin 2016 vóru løgtingsgrannskoðararnir ónøgdir við, at kunngerðirnar enn ikki vóru gjørdar, hóast meira enn 10 ár vóru liðin, síðani lógirnar komu í gildi.

Í 2018 ásannaði Mentamálaráðið, at gott hevði verið, um kunngerðir vórðu gjørdar; men av tí at virksemið var í hampiliga tryggari legu, hevði Mentamálaráðið fyri ein part valt at raðfesta annað virksemi, og lutvíst høvdu viðurskifti, ið ráðið ikki var harri yvir, kravt stóran part av teirri avmarkaðu orku, ið var til meira yvirskipaða málsviðgerð viðvíkjandi kirkjuøkinum. Tí var arbeiðið ikki gjørt enn.

***2018.***

Í 2020 kunnaði landsstýrisfólkið um, at: *"Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur greiða fatan av, at virksemið hjá Stiftsstjórnini yvirhøvur er í tryggari legu, um enn einki er at taka seg aftur í, at ein hóskandi kunngerð hevði verið ein lætti fyri arbeiðið hjá Stiftsstjórnini. Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur tí ikki raðfest uppgávuna so høgt, men væntar - við fyrivarni fyri, hvørjar meira áleikandi uppgávur fara at koma nú í heyst og vetur - at kunngerð kann verða lýst komandi vár. Komið er ikki á mál við reglunum fyri, hvussu kirkjuráðini gera fíggjarætlanir. Uttanríkis- og mentamálaráðið kann tó upplýsa, at Stiftsstjórnin arbeiðir við einum kunngerðaruppskoti, sum er um ein part av hesum. Miðað verður eftir, at kunngerð kann verða lýst komandi vár. Tá arbeiðið er liðugt, fer Uttanríkis- og mentamálaráðið at gera eina aðra kunngerð um teir partarnar av reglunum fyri, hvussu kirkjuráðini gera fíggjarætlanir, sum hendan kunngerðin ikki fer at fevna um".*

***2020.***

Í 2021 greiddi landsstýrisfólkið frá, at einki nýtt var hent í málinum. Málsøkini, fólkakirkjan, onnur trúarsamfeløg og attongd øki, vóru bert mannað við einum ársverki tilsamans, og tá ið drúgt forfall hevði verið, hevði tíverri ikki borið til at fremja annað enn tær mest neyðugu málsviðgerðirnar seinasta árið, og alt menningararbeiðið hevði ligið stilt.

***2021.***

Í 2022 kunnaði landsstýrisfólkið um, at arbeiðsorkan á málsøkinum fólkakirkjan, onnur trúarsamfeløg og attongd øki var nú mannað aftur, og tí var gongd sett á aftur arbeiðið at menna reglurnar á økinum. Tað, sum fyrst lá fyri, var at laga til uppskot til kunngerð um samsýningar til kirkjutænarar og hjálparfólk, ið Stiftsstjórnin hevði gjørt uppkast til, so tað kundi verða sett í gildi. Kunngerðin um samsýningar til kirkjutænarar og hjálparfólk kom at regluseta ein týðandi part av arbeiðinum hjá kirkjukassunum við at gera fíggjarætlanir.

***2022.***

Í 2023 kunnaði landsstýrisfólkið í almanna- og mentamálum um, at einki nýtt var hent í málinum.

Í august 2024 hevur landsstýrisfólkið greitt frá, at ráðið er í holt við at gera kunngerð um samsýningar til hjálparfólk og kirkjutænarar. Tá ið tað arbeiðið væntandi verður liðugt seinni í ár, verður kunngerðaruppskotið sent kirkjuliga landslagnum til ummælis, áðrenn tað fer í almenna hoyring og á landsstýrisfund.

Landsstýrisfólkið vísir á, at tað er óheppið, at kunngerðirnar ikki eru gjørdar. Ráðið hevur ikki verið nóg týðiligt um sínar raðfestingar. Almanna- og mentamálaráðið heldur tó, at virksemið liggur í hampiliga tryggari legu, og tí hevur ráðið, við sínari avmarkaðu arbeiðsmegi, valt at raðfesta annað virksemi kirkjuni at gagni, ið ráðið heldur vera meira átrokandi. Tað verður allarhelst støðan í rúma tíð afturat.

***2024:***
***Tað fer helst at taka rúma tíð afturat at fáa kunngerðir.***

# 9. Lógarmál

## 9.1 Løgmálaráðið (LG 2023/214-111)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Løgmálaráðnum á høvuðskontu 14.11.1.28. Í 2023 eru játtaðar 7,4 mió.kr.

**Roknskaparviðurskifti**
Løgmálaráðið hevur ikki dagførda roknskaparreglugerð.

*Lønir*
Í 2023 eru lønarútreiðslurnar 5,4 mió.kr. Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað nøkur lønarmál. Einki var at finnast at.

Starvsfólk skráseta arbeiðstíð í skipanini Totalview. Í februar 2024 vóru flestu saldurnar innan fyri vegleiðandi mørkini í rundskrivinum "um skráseting av arbeiðstíð o.a."

*Ferðaútreiðslur*
Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum, um endurgjøldini fyri ferðing innanlands eru sambært rundskrivinum "um reglur um endurgjald fyri nýtslu av egnum bili í tænastuørindum". Einki var at finnast at.

Eisini kannaðu vit við stakroyndum, um uppgerðir av uttanlandsferðum fylgja rundskrivinum, t.e. um ferðaloyvi eru fingin, áðrenn tænastuferðir byrja, um dagpeningur og útreiðslur til hotell eru innan fyri loyvdar upphæddir, og um møguligar fríar máltíðir eru drignar frá.

Í fleiri førum var kostnaðurin fyri hotell hægri enn loyvda markið í rundskrivinum.

*Keyp av vørum og tænastum v.m.*
Vit kannaðu við stakroyndum, um telefonrokningar og gjøld fyri brúkarar hjá Landsneti eru røtt. Einki var at finnast at.

Løgmálaráðið kunnaði um, at innbúgv fyri 168 t.kr. til skrivstovuna hjá landsstýrisfólkinum var boðið út, og tikið var av lægsta tilboðnum.

## 9.2 Neyðhjálp og menningarsamstarv (LG 2023/214-133)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað stuðulsjáttanina til Neyðhjálp og menningarsamstarv á høvuðskontu 14.13.3.03. Játtanin hevur tvær undirkontur, 01. Neyðhjálp og 02. Menningarsamstarv.

*Undirkonta 01. Neyðhjálp*
Endamálið við játtanini er at veita neyðhjálp til m.a. krígsherjað øki, og tá ið vanlukkur brádliga raka úti í heimi. Neyðhjálp kann verða latin sum peningaligur stuðul og sum **_Neyðhjálp._**

virkin luttøka í neyðhjálpararbeiði. Hjálpin verður vanliga latin gjøgnum hjálparfelagsskapir og altjóða stjórnarfelagsskapir.

Játtanin verður eisini, sambært viðmerkingunum í fíggjarlógini, nýtt at svara áheitanum frá felagsskapum og altjóða myndugleikum um t.d. at lata pening til at basa hungursneyð. Felagsskapurin Mercy Ships kann søkja upp í 200 t.kr. í stuðli av játtanini til neyðhjálp.

Løgmálaráðið fær ársfrágreiðingar og roknskapir frá felagsskapunum, sum vísa, hvussu peningurin er nýttur.

Neyðhjálp kann verða tillutað bæði eftir umbøn frá umsøkjara ella eftir politiskari áheitan um at veita humaniteran stuðul til eina ávísa vanlukkustøðu. Neyðhjálp verður latin til bráðfeingis lívbjargandi endamál so sum mat, klæði, vetrarhjálp, fyribils skjól og sálarliga kreppuhjálp. Vanliga verður neyðhjálp latin innan 6 mánaðir eftir, at ein vanlukka er hend.

*Undirkonta 02. Menningarsamstarv*

***Menningarsamstarv.***

Endamálið við játtanini er at útinna Ll. nr. 44/2007 "um altjóða menningarsamstarv" og K. nr. 72/2008 "um altjóða menningarsamstarv, hvørs endamál er at minka um búskaparliga ójavnan í heiminum við m.a. at vera við í sjálvberandi menningarsamstarvi." Játtanin fyri 2023 er hækkað við 500 t.kr.

Sambært Løgmálaráðnum er málið at fáa føroyingum royndir, kunnleika og áhuga fyri altjóða menningarviðurskiftum við samstarvi við lokalar, millumtjóða og altjóða hjálparfelagsskapir. Tá ið tað ber til, eigur føroysk vitan og føroyskur serkunnleiki tí at verða nýttur og mentur í sambandi við menningarverkætlanir, ið landsstýrið stuðlar.

Løgmálaráðið ger skrivliga avtalu við hvønn einstakan stuðulsmóttakara um frágreiðingar og roknskap. Harumframt ger ráðið stakroyndir av verkætlanum, ið ráðið stuðlar.

Stuðul verður ikki latin til rakstur, og ein verkætlan kann ikki fáa stuðul meira enn 4 ár á rað. Tó kunnu upp til 7,5% stuðlinum fara til umsiting.

Landsstýrisfólkið tilnevnir nevnd at viðgera tilmælini til menningarsamstarv. Nevndin arbeiðir eftir einari fyriskipan. Hvør verkætlan kann í mesta lagi fáa 800 t.kr. í stuðli um árið.

Roknskapartøl 2019 til 2023:

*t.kr*

| **Undirkonta** | **2019** | **2020** | **2021** | **2022** | **2023** |
|---|---|---|---|---|---|
| 01. Neyðhjálp | 2.800 | 6.692 | 4.329 | 6.836 | 15.494 |
| 02. Menningarsamstarv | 6.199 | 2.346 | 4.698 | 5.115 | -5 |
| **Tilsamans** | **8.999** | **9.038** | **9.027** | **11.951** | **15.489** |

Í 2023 var játtanin til neyðhjálp og menningarsamstarv 15,5 mió.kr.; 8,25 mió.kr. til neyðhjálp og 7,25 mió.kr. til menningarsamstarv. Sambært viðmerkingunum í fíggjarlógini eru játtanirnar á hvør sínari undirkontu, men avlop á aðrari, kann brúkast á hinari.

***Roknskapurin fyri menningarsamstarv er ikki rættvísandi.***

Sambært roknskapinum fyri 2023 er einki latið til menningarsamstarv. Orsøkin er, at stuðulin til menningarsamstarv er bókaður á undirkontuna til neyðhjálp. Hesin bókingarháttur gevur ikki eina rættvísandi mynd av virkseminum.

Løgmálaráðið hevur greitt frá, at talan er um ein feil, og at tað verður rættað fyri útgjøldini í 2024. Í roknskapinum 2023 skuldu upphæddirnar verið 6.946 t.kr. til menningarsamstarv og 8.550 t.kr. til neyðhjálp.

Í 2023 er ikki so nógv latið til menningarsamstarv, tí Landsstýrið valdi at lata 7 mió.kr. í neyðhjálp til Ukraina. Hjálpin er latin ígjøgnum UNCHR.

*Mannagongd fyri málsviðgerð*
Sambært ráðnum byggir málsviðgerðin á lógina um menningarsamstarv og á “Krøv og raðfestingar í sambandi við stuðul”, sum liggur á heimasíðuni hjá ráðnum.

Løgmálaráðið krevur, at umsøkjarar brúka oyðublaðið “Umsóknarblað um stuðul til menningarsamstarv”, tá ið teir søkja.

Umsóknarfreistirnar verða ásettar í samráð millum stjórnarráðið og ráðgevandi nevndina. Í 2023 vóru tvær umsóknarfreistir; tann fyrra 1. mai og tann seinna 1. september. Fulltrúi metir um umsóknir út frá raðfestingum og ger tilmæli til ráðgevandi nevndina. Eftir viðgerðina í nevndini, verður málið lagt fyri landsstýrisfólkið, sum tekur endaliga avgerð.

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað, um málsviðgerðin er farin fram eftir K. nr. 72/2008, og um umsókn við kravdum upplýsingum er latin Løgmálaráðnum á oyðublaðnum. Eisini kannaðu vit, um málsviðgerðin inniheldur tilmæli til ráðgevandi nevndina, fundarfrágreiðing, samanumtøku og tilmæli frá nevndarviðgerðini til landsstýrisfólkið, og skriv til umsøkjara um úrslitið av viðgerðini. Einki var at finnast at.

Sambært leiðreglunum, skulu felagsskapir senda inn endaliga frágreiðing og roknskap seinast tríggjar mánaðir eftir verkætlanarlok. Sambært kunngerðini um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan skulu roknskapirnir vera inni í seinasta lagi 1. apríl.

Landsgrannskoðanin hevur kannað útgjøldini til verkætlanirnar í 2023, um frágreiðing og grannskoðaður roknskapur eru latin ráðnum, eftir at verkætlanin er liðug. Einki var at finnast at.

## 9.3 Føroya Kærustovnur (LG 2023/214-141)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Føroya Kærustovni á høvuðskontu 14.14.1.04.

Føroya Kærustovnur er skipaður eftir Ll. nr. 147/2021 “um Føroya Kærustovn” og K. nr. 161/2021 “um starvsskipan fyri Føroya Kærustovn”. Kærustovnurin er sjálvstøðugur og óheftur myndugleiki.

**Roknskaparviðurskifti o.a.**
Roknskaparreglugerðin er góðkend í november 2022, men stjórin vísti á, at nakrar smærri tillagingar skulu gerast í næstum.

Roknskapartøl frá 2018 til 2023:

*t.kr.*

| Heiti | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 6.058 | 6.463 | 7.017 | 7.879 | 7.957 | 8.855 |
| Keyp av vørum og tænastum | 963 | 1.183 | 1.213 | 1.084 | 1.186 | 1.114 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 143 | 129 | 148 | 114 | 218 | 78 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 373 | 371 | 387 | 369 | 404 | 388 |
| Søla av vørum og tænastum | -150 | -150 | -150 | -150 | -150 | -182 |
| Eftirlits- og umsjónaravgjøld | -16 | -8 | -4 | -12 | -4 | 0 |
| Innanh. flyt. ml. alm. stovnar | ´50 | -50 | -50 | -50 | -50 | -50 |
| **Tilsamans** | **7.321** | **7.938** | **8.560** | **9.234** | **9.561** | **10.203** |

*Lønir o.a.*
Størsti parturin av útreiðslunum er lønir. Partur av lønarútreiðslunum fara til samsýningar til serkøn, sum taka avgerðir saman við løgfrøðingum á Føroya Kærustovni.

Á Kærustovninum arbeiða 14 fólk. Við stakroyndum kannaðu vit nakrar lønir, sum vóru goldnar í oktober 2023. Einki var at finnast at.

Stovnurin brúkar Totalview til skráseting av arbeiðstíð. Sambært roknskaparreglugerðini kunnu starvsfólk eiga upp í 30 tímar á ella skylda í mesta lagi 20 tímar. Stjórin kannar javnan tímarnar hjá starvsfólkunum, og ger hon vart við tað, um nakað er at viðmerkja.

*Nevndir og samsýningar*

***Kærustovnurin er umskipaður.***

Við Ll. nr. 147/2021 "um Føroya Kærustovn" er Føroya Kærustovnur farin frá at vera skrivstova hjá kærunevndum, ið viðgera avgerðir hjá almennum myndugleikum, til at vera ein sjálvstøðugur kærumyndugleiki fyri fyrisitingarligar avgerðir. Harumframt tekur Føroya Kærustovnur avgerðir í málum, tá ið tað er ásett í løgtingslóg. Í tíðarskeiðnum frá 1. januar 2022 til 1. januar 2024 hevur Føroya Kærustovnur verið í einari skiftistíð, har stovnurin bæði hevur verið avgerðarmyndugleiki á ávísum økjum og skrivstova hjá ávísum kærunevndum.

1. januar 2024 eru allar nevndirnar, sum stovnurin hevur verið skrivstova hjá, tiknar av og virkisøki teirra flutt til Føroya Kærustovn. Eftir tað er eingin nevndarsamsýning goldin.

Í staðin fyri nevndirnar kallar stovnurin serkøn inn í sambandi við viðgerð av málum, tá ið serkunnleiki verður mettur neyðugur fyri viðgerðina. Á ávísum økjum skulu serkøn verða við í viðgerðini og taka tá avgerð saman við løgfrøðingum á Kærustovninum.

Í juni 2023 ásetti landsstýrisfólkið í lógarmálum samsýningar til serkøn fólk í ymisku kærumálunum. Samsýningin fyri serkøna ráðgeving í sambandi við fyrireikingar av flestu málunum er 1.000 kr. Samsýningin til serkøn, sum taka sæti í setta Kærustovninum, er 2.000 kr. fyri hvørt mál, íroknað fyrireiking. Er talan um serliga umfatandi mál, kann Kærustovnurin gera av at lata 500 kr. um tíman í serstakari samsýning í staðin fyri vanligu samsýningina.

Í barnaverndarmálum fáa tveir persónar fasta samsýning sum serkøn, tí tey luttaka á øllum fundunum í sambandi við barnaverndarmál. Er tørvur á øðrum fólkum til barnaverndarmálini, verða tey kallað inn og fáa samsýning fyri hvørt málið.

Serkøn, sum koma uttanlands frá, fáa í minsta lagi samsýning, sum svarar til 8 tímar fyri hvønn heilan dag, ið má setast av til fundarvirksemi í Føroyum. Samsýningin er 500 kr. um tíman. Umframt samsýningina fáa tey endurgjald fyri ferðing, uppihald o.a. í sambandi við málið.

*Ferðaútreiðslur*
Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum ferðaútreiðslur. Einki var at finnast at.

*Keyp av vørum og tænastum*
Útreiðslurnar til keyp av vørum og tænastum, eru fyri tað mesta keyp av advokatserkunnleika í sambandi við, at mál verða viðgjørd í rættinum. Kærustovnurin hevur skyldu til at samsýna advokatum fyri arbeiði í sambandi við sakarmál.

Deildarleiðari kannar og góðkennir rokningar. Stjórin kannar og leysgevur, og eina ferð um mánaðin kannar skrivstovufólkið allar rokningar og lønir.

Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum útreiðslur til umboðan. Einki var at finnast at.

Stovnurin heldur til í leigaðum hølum, sum Havnar róðrafelag eigur.

*Inntøkur*
Kærustovnurin hevur fyrr havt smávegis inntøkur fyri ávísar kærur í vinnumálum. Vinnukærunevndin var løgd niður 1. juli 2022, og virkisøkið er flutt til Føroya Kærustovn. Samstundis er umsitingargjaldið frá Arbeiðsloysisskipanini hækkað frá 150 t.kr. til 182 t.kr., tí stovnurin skal eisini gjalda fyri serkøna vitan. Kærustovnurin fær eisini 50 t.kr. um árið frá Barsilsskipanini fyri skrivstovuhald.

*Ognaryvirlit*
Kærustovnurin hevur skrásett allar ognir í innanhýsis skjali. Eingin støðisogn er skrásett í Búskaparskipan Landsins, tí stovnurin eigur einans smærri ognir.

**KT-viðurskifti**
Føroya Kærustovnur er partur av KT-landsins og hevur ongar innanhýsis skipanir. Stovnurin var KT-grannskoðaður í 2022, men skipanin er broytt soleiðis, at Gjaldstovan fer ikki út á stovnarnar hvørt ár. Av tí at Kærustovnurin arbeiðir nógv við persónupplýsingum, verða m.a. rokningar frá advokatfeløgum orðaðar soleiðis, at tað ikki ber til at eyðmerkja persónarnar, sum rokningarnar snúgva seg um.

## 9.4 Útlendingastovan (LG 2023/214-141)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað Útlendingastovuna. Játtanin er á høvuðskontu 14.14.1.10, sum hevur tvær undirkontur: 20. Vanligt virksemi og 21. Útlegg fyri tænastur til flóttafólk. Í 2023 er játtanin til Útlendingastovuna 8.431 t.kr.

**Endamál, virksemi og uppgávur**
Útlendingamál eru ríkismál, tí tekur danska Udlændingestyrelsen og Styrelsen for International Rekruttering og Integration avgerðir um arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum.

Útlendingastovan, sum var sett á stovn í 2008, umsitur útlendingaøkið í Føroyum fyri Udlændingestyrelsen sambært Anordning nr. 182 af 22. marts 2001 “om ikrafttræden for Færøerne af udlændingeloven”.

Løgmálaráðið umsitur integratiónsmál. Sambært Útlendingastovuni er tørvurin á integratión vaksin nógv, tí talið av útlendingum í Føroyum er vaksið, bæði í sambandi við familjusameiningar, arbeiðsloyvi og ítróttafólk.

Uppgávurnar hjá Útlendingastovuni eru serliga, at:

- ummæla umsóknir um arbeiðs- og uppihaldsloyvi og familjusameining,
- vegleiða og hjálpa útlendingum, viðvíkjandi føroyskum viðurskiftum,
- røkja ymisk arbeiði í sambandi við móttøku av fólki frá Ukraina, og
- samskipa og útvega ukrainum hóskandi bústaðir til langtíðarleigu.

**Roknskaparviðurskifti o.a.**
Útlendingastovan hevur roknskaparreglugerð saman við eftirlitsstovnunum undir Vinnustovninum. Reglugerðin er góðkend í 2014, og er ikki ikki dagførd síðani. Sambært leiðsluni er Vinnustovnurin í holt við at dagføra reglugerðina.

***Roknskaparreglugerðin er frá 2014.***

Roknskapartøl fyri vanliga virksemi hjá stovninum á undirkontu 20:

*t.kr.*

| Heiti | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 2.561 | 2.659 | 3.938 | 4.761 | 4.858 | 5.569 |
| Keyp av vørum og tænastum | 350 | 562 | 578 | 845 | 1.196 | 1.473 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 98 | 146 | 414 | 231 | 129 | 557 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 626 | 414 | 492 | 1.397 | 341 | 309 |
| Søla av vørum og tænastum | 0 | 0 | 0 | -91 | -100 | -52 |
| Innanh. flyt. millum almennar stovn.(útr.) | 45 | 198 | 219 | 373 | 41 | 466 |
| Innanh. flyt. millum almennar stovn.(innt.) | -133 | -467 | -263 | -364 | 0 | 0 |
| **Tilsamans** | **3.546** | **3.512** | **5.377** | **7.153** | **6.465** | **8.323** |

Síðani 2021 hevur stovnurin havt inntøku av húsaleigu frá flóttum úr Ukraina, sum búgva í móttøkuhúsunum í eina tíð, til teir hava fingið svar um uppihaldsloyvi. Nakað av útreiðslum hava verið til tulkatænastu.

Roknskapartøl fyri undirkontuna, Útlegg fyri tænastur til flóttafólk:

*t.kr.*

| Heiti | 2022 | 2023 | *J 2023* |
|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 0 | 0 | *396* |
| Keyp av vørum og tænastum | 1.674 | 2.999 | *353* |
| Keyp av útbúnaði, netto | 294 | 82 | *0* |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 171 | 283 | *139* |
| Ymsar rakstrarútreiðslur | 0 | -1 | *0* |
| Tilskot til einstaklingar | 0 | 0 | *231* |
| Flytingarinntøkur úr útlandinum | -2.184 | -3.365 | *-1.119* |
| Innanh. flyt. millum almennar stovn. (útr.) | 45 | 14 | *0* |
| Innanh. flyt. millum almennar stovn. (innt.) | 0 | -12 | *0* |
| **Tilsamans** | **0** | **0** | ***0*** |

***Staturin endurrindar útreiðslurnar hjá "útlegg fyri tænastur til flóttafólk".***

Útreiðslur til ukrainskar flóttar í móttøkuhúsunum o.a. verða goldnar av Udlændingestyrelsen. Útlendingastovan ger upp hvønn ársfjórðing til Udlændingestyrelsen, sum síðani endurrindar Útlendingastovuni.

### *Lønargrannskoðan*

Við stakroyndum kannaði Landsgrannskoðanin nøkur lønarmál. Vit kannaðu, um viðkomandi skjøl vóru í málunum, t.e. lýsing eftir starvsfólki, umsókn, prógv, setanarskriv og lønargjaldsumbøn. Eisini kannaðu vit grundarlagið fyri lønarútgjøldum í september 2023. Einki var at finnast at.

Útlendingastovan brúkar Totalview til skráseting av arbeiðstíð. Starvsfólk kunnu eiga 40 tímar á ella skylda í mesta lagi 30 tímar. Vit kannaðu, um tímatalið hjá starvsfólkunum var innan fyri ásetingina. Einki var at finnast at.

### *Kassi og peningastovnskontur*

Útlendingastovan hevur peningastovnskontu, sum deildarleiðari hevur loyvi til at taka pening út av. Peningurin verður einans brúktur til flóttafólk í móttøkuhúsunum. Flóttafólk hava hvørki peningastovnskontu ella p-tal, tá ið tey koma til landið og eru tí í einari serligari støðu.

Útlendingastovan greiddi frá, at brátt íkomna støðan við krígnum í Ukraina gjørdi, at neyðugt var við skjótum tiltøkum til flóttafólkini, sum komu til Føroyar. Sambært § 30 stk. 2, í A. nr. 433/2022 (Serlóg viðvíkjandi Ukraina) hevur Útlendingastovan ábyrgd av flóttunum, frá tí teir koma og 4 gerandisdagar eftir, at teir hava fingið uppihaldsloyvi í Føroyum. Eftir tað hevur Almannaverkið ábyrgdina.

Meðan flóttarnir eru í móttøkuhúsunum og bíða eftir uppihaldsloyvi, fáa teir ávísa upphædd fyri hvønn dag til mat og sanitetsvørur. Útlendingastovan vísir á, at miðal prísirnir á gerandisvørum eru hægri í Føroyum, og tí hevur Útlendingastovan biðið

Udlændingestyrelsen um at lata flóttum 35 kr. eyka um dagin. Stakur persónur fær 127,61 kr. um dagin, sum verða goldnar kontant.

Hvønn mánað ger fulltrúin eitt uppgerðarskjal fyri stovnskassan. Tá ið upphæddin á kontuni minkar, sendir Útlendingastovan útgjaldsumbøn til Gjaldstovuna um at seta pening inn á kontuna. Í bókingarskjølunum í Búskaparskipan landsins sæst samskifti millum Udlændingestyrelsen og Útlendingastovuna um upphæddirnar.

*Størri keyp*
Í desember 2023 hevur Útlendingastovan keypt ein bil og hevur í tí sambandi biðið um tilboð frá fleiri veitarum. Av ikki afturvendandi útreiðslum eru m.a. klárgerð, avhendan og eftirkanning av “360 datagrunni”, sum Útlendingastovan hevur goldið veitara 147 t.kr. fyri.

*Ognaryvirlit*
Stovnurin hevur yvirlit yvir ognirnar. Tað eru fyri tað mesta innbúgv, fartelefonir og skrivstovuútgerð, og ein bilur er skrásettur í ognaryvirlitinum í desember 2023.

## 9.5 Dátueftirlitið (LG 2022/202-142)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Dátueftirlitinum. Landsgrannskoðanin mælti til at gera mannagongdir, ið tryggja, at váðameting og KT-trygdarpolitikkur verða samfeldir partar av innaneftirlitinum.

Dátueftirlitið hevði bíðað við at skifta KT-útbúnaðin út og at dagføra netið og skipanina, tí eingin tænasta fór at verða veitt til verandi útbúnað eftir 2020, og stovnurin arbeiddi við at endurskoða KT-viðurskiftini.

Í 2019 greiddi Dátueftirlitið frá, at trygdarskjøl, váttanir og KT-trygdarpolitikkur vóru nútímansgjørd og avgreidd, men at enn manglaði at avgreiða eina trygdarskoðan.

Í 2020 kunnaði Løgmansskrivstovan um, at sambært Dátueftirlitinum var trygdarskoðanin framvegis ikki gjørd. Dátueftirlitið hevði verið í drúgvum samskifti við Elektron og Formula, tí partarnir vóru ikki samdir um, hvørjar leiklutir teir høvdu, eitt nú dátuábyrgdari og dátuviðgeri.

Í 2021 greiddi Løgmansskrivstovan frá, at Dátueftirlitið og KT Landsins høvdu gjørt sáttmála um tænastustig av Landsnet-grundtænastum. Tað merkti m.a., at spurningurin um, hvussu ábyrgdarbýtið var skipað ímillum Elektron, Formula og Dátueftirlitið, ikki longur var viðkomandi.

Dátueftirlitið hevði eisini dátuviðgerðaravtalu við KT Landsins, sum m.a. tilskilaði, at KT Landsins var dátuviðgeri hjá Dátueftirlitinum, og at bæði Elektron og Formula vóru undirdátuviðgerar. Harumframt var tilskilað í avtaluni, at dátuviðgerin, fyri egna rokning skuldi útvega árliga skoðanarváttan frá óheftum triðjaparti um, at dátuviðgerin (t.e. KT Landsins) og undirdátuviðgerar (t.e. m.a. Elektron og Formula) halda dátuverndarlógina umframt aðra lóggávu um dátuvernd.

Dátueftirlitið og Gjaldstovan gjørdu í juli 2021 avtalu um Trygdarpakkan, sum m.a. hevði við sær, at Gjaldstovan eina ferð um árið skuldi skipa fyri, at Dátueftirlitið fekk skoðan av tí virksemi, sum lá hjá stovninum.

Í august 2024 hevur Løgmálaráðið kunnað um, at Gjaldstovan vitjaði Dátueftirlitið í oktober 2022. Løgmálaráðið vísir eisini á, at í 2023 fór Gjaldstovan frá at vitja stovnar, til at stovnarnir skuldu nýta eitt skjal til innanhýsis eftirlit. Dátueftirlitið hevur framt tílíkt innaneftirlit og hevur sent Gjaldstovuni úrslitið av eftirlitinum í desember 2023.

## 9.6 Rúsdrekkasøla Landsins (LG 2023/214-373)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Rúsdrekkasølu Landsins.

Í august 2023 spurdi Landsgrannskoðanin, hvat var hent síðani seinastu frágreiðing viðvíkjandi teimum spurningum, sum Landsgrannskoðanin hevði sett viðvíkjandi Rúsdrekkasøluni.

Landsstýrisfólkið í lógarmálum svaraði, at Løgmálaráðið hevði verið í sambandi við Uttanríkis- og vinnumálaráðið um spurningarnar, sum vístu til Rúsdrekkasølu landsins. Tá ið Løgmálaráðið spurdi hjá Rúsdrekkasøluni, var so mikið fráliðið, at vegna feriu var ikki møguligt at fáa svar við so stuttum skotbrái til frágreiðingina 2022.

### Reglur

Rúsdrekkasølan virkar sambært Ll. nr. 111/2023 "Innflutning, framleiðslu og sølu av rúsdrekka" og K. nr. 112/2023 "um skipan og rakstur av Rúsdrekkasølu Landsins". Rúsdrekkasølan hevur einkarrætt til innkeyp og sølu av rúsdrekka sambært lógini, og hevur átta handlar kring landið, umframt eina høvuðsgoymslu og høvuðsskrivstovu.

Í § 18 í játtanarskipanini er ásett, at ber virksemi handilsligan dám, kann landsstýrismaðurin í fíggjarmálum loyva, at tað verður framt eftir ræðisreglunum, galdandi fyri landsfyritøkur. Sambært § 21 skal loyvi at reka landsfyritøku vera greitt í viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið.

Í kunngerðini um rakstrarjáttan er somuleiðis ásett í § 13, stk. 2, at í viðmerkingunum skal vera greitt frá landsfyritøkuni, herundir bygnaði, slag av virksemi, og hvussu stórt virksemið ætlandi verður.

*Fíggjarlógarviðmerkingar*

Viðmerkingarnar í fíggjarlógini 2022 vístu til lógina og kunngerðina, sum Rúsdrekkasølan arbeiðir eftir, og at 8 sølubúðir vóru. Landsgrannskoðanin ivaðist í, um hesar viðmerkingarnar vóru í samsvari við ásetingarnar í játtanarreglunum.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið helt, at teksturin í játtanarskipanini sipaði til stovnar, sum hava borgaravendar tænastur og sum fáa eina árliga játtan í fíggjarlógini. Rúsdrekkasøla landsins er ein handil og sostatt ikki ein "vanligur" stovnur við borgaravendum tænastum, umframt at játtanin hevur eitt avlopskrav.

Í játtanarskipanini § 11, stk. 1, stendur soleiðis: "*Viðmerkingarnar til fíggjarlógaruppskotið skulu hava tilvísingar til lógarásetingar, sum gera av, hvussu játtanin verður nýtt, lýsing av teimum úrslitum, miðað verður eftir við játtanini, og upplýsingar um nádd úrslit o.t.*
*Stk. 2. Inntøkur og útreiðslur verða vístar í fleirárs yvirlitum, sum fevna um síðstu roknskapirnar, fíggjarlógina, fíggjarlógaruppskotið og veruligar fíggjarætlanir fyri fylgjandi fíggjarár.*"

Landsstýrisfólkið í umhvørvis- og vinnumálum vísti í 2022 á, at "*sambært omanfyristandandi skal stovnurin lýsa, hvussu játtanin skal nýtast, lýsa tey úrslit miðað verður eftir og upplýsa um nádd úrslit. Játtanin hjá Rúsdrekkasøluni er negativ og hóskar á tann hátt ikki beinleiðis inn í henda karm. Í viðmerkingunum til játtanina er víst til lógarásetingar, sum lýsa uppgávurnar hjá einkarsøluni, sum m.a. er at hava fjølbroytt úrval av rúsdrekka á goymslu, hava sølustøð kring landið. Út frá hesum hava vit mett, at viðmerkingarnar í fíggjarlógini hava verið fullgóðar. Tað hevur Fíggjarmálaráðið eisini mett og hevur góðtikið okkara viðmerkingar til játtanina. Vit fara tó at umhugsa um teksturin eigur at verða broyttur til fíggjarlógina fyri 2023.*"

Teksturin í fíggjarlógini 2023 var ikki broyttur og er eisini tann sami í fíggjarlógini 2024.

Í august 2024 hevur Løgmálaráðið greitt frá, at eftir at hava umhugsað støðuna, heldur ráðið, at teksturin í fíggjarlógini er í lagi, tó at onkur viðurskifti kunnu lýsast nærri. Í fíggjarlógini verður víst til hvørja løgtingslóg og hvørja kunngerð Rúsdrekkasøla landsins virkar eftir. Eisini framgongur, at Rúsdrekkasøla landsins hevur 8 sølubúðir kring landið, og at hon virkar sum skrivstova hjá loyvisnevndini.

Løgmálaráðið leggur afturat, at harumframt kundi verðið útgreinað, hvør høvuðs-uppgávan hjá Rúsdrekkasølu landsins er, herundir um einkarættarstøðuna, um avlopskravið, og hvar sølubúðirnar eru.

### Egin búskaparskipan

Rúsdrekkasølan brúkar egna búskaparskipan til skrásetingar av keypi og sølu, herundir eisini MVG og umsitingarkostnað av stovnsrakstrinum.

*Ikki formligt loyvi til egna fíggjarskipan.*

Rúsdrekkasølan hevði ikki formligt loyvi til egna fíggjarskipan. Fíggjarmálaráðið og Gjaldstovan vóru tó kunnað. Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevði fyri árum síðani, vegna Rúsdrekkasøluna, biðið Fíggjarmálaráðið um formligt loyvi til skipanina, uttan at tað var komið. Landsgrannskoðanin mælti til, at fáa formligu viðurskiftini í rættlag.

Í august 2024 hevur Løgmálaráðið kunnað um, at einki er hent síðani Umhvørvis- og Vinnumálaráðið bað um formligt loyvi. Rúsdrekkasølan roknar við, at málið verður tikið upp aftur í næstum, soleiðis at formligu viðurskiftini koma í rættlag.

Roknskapartíðarskeiðini í egnu búskaparskipanini blivu ikki stongd, og tí bar til at bóka í farnum tíðarskeiði, eftir at stovnurin hevði sent roknskapartølini til Gjaldstovuna. Sambært stjóranum var neyðugt at bóka í farnum tíðarskeiði, um tey skuldu hava ein rættvísandi roknskap.

Tá ið Rúsdrekkasølan bókar í farnum mánaðarroknskapum, eru mánaðarroknskapirnir í Búskaparskipan landsins ikki rættir. Landsgrannskoðanin mælti til at steingja roknskapartíðarskeiðini, tá ið roknskapartølini vóru send Gjaldstovuni at bóka í Búskaparskipan landsins.

### Vøru- og tænastuáogn

Í K. nr. 112/2023 er ásett, at loyvt er Rúsdrekkasøluni at selja upp á borg til skeinkiloyvishavarar. Sambært Rúsdrekkasøluni skulu kundar veita trygd, tá ið teir keypa upp á borg.

*Reglurnar um sølu upp á borg eru ikki hildnar.*

Á skuldaralistanum vóru fleiri skuldarar, sum ikki høvdu skeinkiloyvi, m.a. kommunur og almennir stovnar. Landsgrannskoðanin mælti til, at Rúsdrekkasølan helt ásetingina í kunngerðini, ella at stig vórðu tikin til at broyta kunngerðina.

Í august 2024 vísir Løgmálaráðið á, at skuldarar, ið ikki hava skeinkiloyvið, fyri tað mesta eru kommunur og almennir stovnar. Rúsdrekkasølan hevur av praktiskum orsøkum latið almennar stovnar og kommunur keypa upp á borg, tí tey meta, at peningurin er tryggur. Mannagongdin er tó ikki í samsvari við kunngerðina.

Tað verður latið upp til komandi leiðsluna á stovninum, um hon fer at biðja landsstýrisfólkið broyta kunngerðina ella mæla til, at Rúsdrekkasøla Landsins skal fylgja núverandi kunngerð. Løgmálaráðið fer at umrøða spurningin við nýggju leiðsluna í Rúsdrekkasøluni í næstum.

### Tíðaravmarkingar av egnum panti

*Í 2021 vóru 4,2 mió.kr. í egiðpanti í fíggjarstøðuni.*

Egiðpant er pant, sum Rúsdrekkasølan sjálv leggur á vørur. Rúsdrekkasølan hevði tíðaravmarkað munin ímillum egiðpant-sølu og egiðpant-keyp. Í 2021 var munurin 798 t.kr., og við árslok 2021 var saldan í fíggjarstøðuni 4.174 t.kr.

Upphæddirnar vóru støðugt vaksnar síðani 2018, og sambært stjóranum kundi ein orsøk vera, at fleiri einnýtisíløt vóru seld, og at fólk ikki bóru tey aftur.

Landsgrannskoðanin hevur spurt landsstýrisfólkið í lógarmálum, hvussu støðan er.

***Rúsdrekkasølan heldur tað vera rættast at afturføra tað, sum er eldri enn trý ár.***

Í august 2024 hevur landsstýrisfólkið svarað, at rætt er, at Rúsdrekkasøla Landsins hevur tíðaravmarkað munin millum egiðpant-sølu og egiðpant-keyp, og tíðar-avmarkingin er ongantíð afturførd. Rúsdrekkasølan ætlar at broyta roknskaparháttin og afturføra tíðaravmarkingina í roknskapinum fyri 2024. Rúsdrekkasølan heldur, at hóskandi er at afturføra alt, sum er eldri enn trý ár, tí um pant ikki er komið eftir trimum árum, kemur tað neyvan inn aftur.

### Kassa- og goymslueftirlit

Um ársskiftið gjørdi Landsgrannskoðanin eftirlitsuppteljingar av høvuðsgoymsluni á Hjalla. Einki var at finnast at.

# 10. Umhvørvismál

## 10.1 Umhvørvismálaráðið (LG 2023/218-111)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Umhvørvismálaráðnum á høvuðskontu 18.11.1.65.

### Roknskaparviðurskifti v.m.

Roknskaparreglugerðin er dagførd í november 2023.

Í 2023 eru játtaðar 8,5 mió.kr. á tvær undirkontur:

*t.kr.*

| Undirkonta | *Játtan* | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Vanligt virksemi | *7.956* | 8.052 | -96 |
| 21. Leigunevndin | *528* | 426 | 102 |
| **Tilsamans** | ***8.484*** | **8.478** | **6** |

Í 2023 eru lønarútreiðslurnar 7 mió.kr. Leigunevndin hevur lánt starvsfólk frá Umhvørvismálaráðnum fyrra hálvár 2023, tí eru 204 t.kr. fluttar millum undirkonturnar.

Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum lønarmál, um lýsingar, umsóknir, setanarskriv o.a. eru í málunum, og um størvini eru rætt flokkað. Einki var at finnast at.

Í roknskaparreglugerðini er ásett, at starvsfólk kunnu eiga 80 tímar á ella skylda 30 tímar. Sambært yvirliti 30. oktober 2023 vóru øll starvsfólk innan fyri ásettu mørkini.

Landsgrannskoðanin kannaði um útreiðslurnar til ferðing og flutning innanlands eru sambært galdandi reglum. Vit høvdu ikki aðrar viðmerkingar enn, at í einum føri var tímapeningur goldin, tó at ferðin byrjaði eftir kl. 7 og endaði fyri kl. 19. Sambært avtalu við Tænastumannafelagið verður tímapeningur ikki goldin, um tænastuferð byrjar eftir klokkan 7 og endar fyri klokkan 19. Umhvørvismálaráðið hevur kunnað um, at feilurin er rættaður.

Landsgrannskoðanin kannaði, um uppgerðirnar fyri ferðir uttanlands vóru sambært reglunum, um ferðaloyvi er givið, áðrenn tænastuferðin byrjaði, um dagpeningur og útreiðslur til hotell vóru innan loyvdar upphæddir, um drigið var frá fyri møguligar fríar máltíðir, og um avroknað var innan 3 vikur eftir heimkomu. Einki var at finnast at.

Við stakroyndum kannaðu vit, um telefonrokningar og gjøld til Landsnet eru røtt. Einki var at finnast at.

## 10.2 Umhvørvisstovan (LG 2021/206-374)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Umhvørvisstovuni.

### KT-viðurskifti

Teldurnar hjá Umhvørvisstovuni eru knýttar í Landsnet. Stovnurin hevur dátur, sum hava týdning fyri stovnin sjálvan og fyri samfelagið sum heild.

KT-grannskoðari skoðaði skipanirnar hjá Umhvørvisstovuni í 2021. Hann vísti á fleiri veikleikar og gav tilmælir, harav nøkur við høgari raðfesting. Grannskoðarin helt, at høgt raðfestu tilmælini áttu at verið bøtt, til tess at stovnurin kundi sigast at liva upp til ásetingarnar í rundskrivinum um KT-trygd. Sambært Umhvørvisstovuni høvdu tey avgreitt fimm av høgt raðfestu tilmælunum, og vóru í holt við restina.

Í august 2024 hevur Umhvørvismálaráðið greitt frá, at Umhvørvisstovan arbeiðir miðvíst við at liva upp til ásetingarnar í rundskrivinum um KT-trygd. Í nýggjastu frágreiðingini um skoðan av Umhvørvisstovuni, sum grannskoðanarvirki hevur gjørt, sæst, at nógv er gjørt, og at 4 av teimum 5 høgt raðfestu tilmælunum eru avgreidd. Málið, sum liggur eftir, er Vápnaskráin. Umhvørvisstovan hevur gjørt av at steðga á við menning av skipanini, tí ætlanin er at menna nýggja skipan. Í frágreiðingini frá grannskoðaranum eru 9 tilmæli við miðal raðfesting.

### Inntøkufíggjað virksemi

Í inntøkufíggjaða virkseminum eru virksemi hjá Skógrøktini í Hoydølum, røkt av viðarlundum og útskiftingararbeiði. Í 2021 var nettojáttanin 0 kr., t.e. 2,2 mió.kr. í inntøkum og 2,2 mió.kr. í útreiðslum.

Tær 1,8 mió.kr. á kontuni "Tíðaravmarkan" í fíggjarstøðuni vóru áognir hjá 32 jarðareigarum, sum Umhvørvisstovan ikki hevði fingið fatur á í sambandi við útskifting, tó at tey fleiri ferðir høvdu roynt.

Røktarleiðararnir hava heimild at avtala prísir á vørum og tænastum innan ávísar karmar. Prísásetingin var lagað til marknaðarprísir, og Skógrøktin hevði dagførdar príslistar. Flestu planturnar vóru eginframleiðsla, har útsøluprísurin svaraði til kostnaðin at ala tær. Í øðrum førum samanbar Skógrøktin við prísir hjá øðrum veitarum. Skógrøktin lat avsláttur til tey, ið keyptu nógv.

Prísirnir fyri røkt av skógarfriðaðum lendi vóru, sambært Umhvørvisstovuni, eftir avtalu við Tórshavnar Kommunu. Spurd um avtaluna, svaraði stovnurin, at tey funnu ikki avtaluna, men tey vóru í holt við at gera eina nýggja avtalu.

Í 2023 greiddi landsstýrisfólkið frá, at Skógrøkt landsins hevði avtalað við Tórshavnar kommunu, at nýggjar avtalur skuldu gerast um røkt av skógfriðaðu økjunum.

Í august 2024 hevur Umhvørvismálaráðið kunnað um, at Umhvørvisstovan hevur sent Tórshavnar kommunu uppskot til nýggja avtalu til viðmerkingar.

# 11. Fíggjarstøða

## 11.1 Fíggjarstøða landskassans (LG 2023/300-000)

Fíggjarstøðan í landsroknskapinum er samandráttur av fíggjarstøðunum hjá øllum vanligum landsstovnum, sum eru við í fíggjarlógini. Harafturat eru summir postar felags, t.d. størsti parturin av tøka peninginum og skuldini. Partafeløg, sum landið eigur, eru tikin við undir “virðisbrøv”.

Landsgrannskoðanin hevur í stóran mun bygt grannskoðanina av postum í fíggjarstøðuni 2023 á tey eftirlit og tær avstemmanir, ið Gjaldstovan støðugt fremur.

Fíggjarstøðan við árslok 2019 til 2023:

*mió.kr.*

| | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|
| **OGN** | | | | | |
| Kapitalinnskot | 399 | 402 | 0 | 0 | 0 |
| Keypsskála-skrásett virðisbrøv | 0 | 0 | 470 | 452 | 546 |
| Virðisbrøv | 1.626 | 1.791 | 1.841 | 1.895 | 1.933 |
| Útlán | 101 | 91 | 81 | 74 | 58 |
| Áogn o.a. | 657 | 718 | 765 | 774 | 831 |
| Tøkur peningur | 3.478 | 4.729 | 3.849 | 3.874 | 4.551 |
| **Ogn tilsamans** | **6.261** | **7.731** | **7.005** | **7.069** | **7.919** |
| **SKULD** | | | | | |
| Langfreistað skuld | 2.472 | 4.069 | 2.739 | 2.991 | 2.925 |
| Stuttfreistað skuld | 2.445 | 2.438 | 2.584 | 2.174 | 3.127 |
| Útjavningarkonta | 1.344 | 1.224 | 1.682 | 1.903 | 1.867 |
| **Skuld tilsamans** | **6.261** | **7.731** | **7.005** | **7.069** | **7.919** |

### 11.1.1 Kapitalinnskot (LG 2022/300-102)

Í nógv ár hevur Løgtingið mælt til at fáa greiði á hesum roknskaparposti, soleiðis at ikki bert Fíggingargrunnurin, men eisini aðrir grunnar o.l., sum landið eigur, verða skrásettir í landsroknskapinum, t.d. sum “Kapitalogn í landsfyritøkum”.

Í 2013 kunnaði landsstýrisfólkið í fíggjarmálum um, at hesir grunnar verða ikki tiknir við í landsroknskapin, men verða partur av samlaða almenna roknskapinum.

Í 2014, 2015 og aftur í 2016 greiddi landsstýrisfólkið frá, at arbeitt var framvegis við spurninginum, hvussu samlaði almenni roknskapurin skuldi gerast upp. Ætlanin var, at Frítíðargrunnurin, eins og Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin, skuldi bóka beinleiðis í Búskaparskipan landsins.

Grunnarnir eru tiknir við sum notur til landsroknskapin undir partinum “Eksternir grunnar”. Ætlanin var, at eginpeningurin í Húsalánsgrunninum, Búnaðargrunninum, Granskingargrunninum, Mentanargrunninum og Vinnuframagrunninum í framtíðini skuldi takast við í landsroknskapin undir “Innistandandi í landsfyritøkum, grunnum o.t.”

Eftir var at fáa greiði á, hvussu Arbeiðsloysisskipanin, Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin, Framtaksgrunnurin og Realurin kundu takast við í landsroknskapin.

Í 2018 og aftur í 2019 greiddi landsstýrisfólkið frá, at tað framhaldandi var arbeitt fram ímóti einum fullfíggjaðum landsroknskapi. Arbeiðið var gjørt í stigum.

Í mai 2022 var lógin um Føroya Realkreditstovn[22] broytt, og í § 16, stk. 3, er ásett, at *"Stovnurin verður skrásettur í landsroknskapinum, men virksemið hjá stovninum verður ikki tikið við í løgtingsfíggjarlógini"*. Lógin kom í gildi 1. januar 2023.

Í 2023 kunnaði landsstýrisfólkið um, at fundur hevði verið við Landsbankan, Hagstovuna og Gjaldstovuna um krøv og leist fyri innlating av roknskapartølum frá feløgum og grunnum.

Í august 2024 hevur landsstýrisfólkið víst á, at landsroknskapurin fevnir um virksemi, sum hevur rakstrarætlan við í fíggjarlógini, og annars sjálvstøðugar stovnar og grunnar hjá landinum. Gjaldstovan og Fíggjarmálaráðið hava lagt orku í at fáa landsroknskapin at samsvara við tilmælini í greiningini, sum OECD í 2020 gjørdi av føroyska almenna roknskapinum. Víst verður annars til brot 3.1 í hesari frágreiðingini.

### 11.1.2 Keypsskála-skrásett virðisbrøv

*t.kr.*

| | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|
| Føroya Banki | 469.590 | 452.259 | 546.306 |

Í 2021 vóru 3.342.280 partabrøv í Føroya Banka flutt frá Fíggingargrunninum frá 1992 til landskassan. Partabrøvini eru skrásett í keypsskála. Frammanundan átti landið harafturat 170 partabrøv, sum vóru skrásett í egnari goymslu, soleiðis at landið eigur tilsamans 3.342.450 partabrøv. Við árslok 2023 var kursurin 163,4449.

### 11.1.3 Virðisbrøv

*t.kr.*

| Skrásett í landsroknskapinum | 2021 | 2022 | 2023 | Til skjals |
|---|---|---|---|---|
| P/f Vágatunnilin | 160.300 | 160.300 | 160.300 | Ja |
| P/f Norðoyatunnilin | 235.000 | 235.000 | 235.000 | Ja |
| P/f Føroya Tele | 77.948 | 77.948 | 77.948 | Ja |
| P/f Postverk Føroya | 43.000 | 43.000 | 43.000 | Ja |
| P/f Fiskaaling | 17.376 | 17.376 | 17.376 | Ja |
| P/f Føroya Lívstrygging | 11.667 | 11.667 | 0 | |
| P/f Vága Floghavn | 822.818 | 822.818 | 822.818 | Ja |
| P/f Atlantic Airways | 186.912 | 186.912 | 186.912 | Ja *) |
| P/f Elektron | 2.347 | 2.347 | 2.347 | Ja |
| Sp/f Ítróttavedding | 20 | 20 | 20 | Nei |
| P/f Smyril Line | 32.760 | 32.760 | 32.760 | Ja |
| P/f Tjaldur | 140 | 140 | 0 | |
| P/f Føroya Banki | 1 | 1 | 1 | Ja *) |
| P/f Visit Faroe Islands | 500 | 500 | 500 | Nei **) |
| P/f Eystur- og Sandoyartunlar | 250.000 | 300.000 | 350.000 | Nei **) |
| P/f Suðuroyartunnil | 0 | 4.000 | 4.000 | Nei **) |
| **Partabrøv tilsamans** | **1.840.788** | **1.894.788** | **1.932.981** | |

*) Partabrøvini eru skrásett elektroniskt og tí pappírsleys.
**) Partabrøv verða ikki útskrivað longur.

Sum áður nevnt, átti landskassin, afturat partabrøvunum hjá Fíggingargrunninum frá 1992, eisini 170 partabrøv. Umframt at vera í postinum Keypsskála-skrásett virðisbrøv, eru tey partabrøvini eisini bókað til virði 1 t.kr. í postinum Virðisbrøv.

[22] Løgtingslóg nr. 75 frá 5. november 1998 um Føroya Realkreditstovn (Realin).

Partapeningurin í P/f Eystur- og Sandoyartunlar er hækkaður við 50 mió.kr. í 2023, og er tað í samsvari við Ll. nr. 30/2014[23]. Sambært lógini verður seinasta hækkingin av partapeninginum, 50 mió.kr., rindað P/f Eystur- og Sandoyartunlum í 2024. Tá hevur landið sett tilsamans 400 mió.kr. í felagið.

Í 2023 hevur landskassin selt síni partabrøv í P/f Føroya Lívstrygging og P/f Tjaldur.

***Landskassin hevur selt partabrøvini í P/f Føroya Lívstrygging og P/f Tjaldur.***

Í hesum 10 feløgunum eigur landið allan partapeningin:

*t.kr.*

| Roknskapartøl 2023 | Brutto-vinningur | Ársúrslit | Samlað ogn | Egin-peningur |
|---|---|---|---|---|
| P/f Vágatunnilin | 6.791 | 2.003 | 206.197 | 196.349 |
| P/f Norðoyatunnilin | 9.237 | 2.353 | 282.576 | 275.761 |
| P/f Føroya Tele (samtak) | 209.400 | 20.182 | 902.600 | 512.591 |
| P/f Postverk Føroya (samtak) | 69.178 | -6.939 | 128.042 | 31.161 |
| P/f Fiskaaling | 17.474 | 98 | 13.181 | -2.262 |
| P/f Vága Floghavn (samtak) | 82.092 | 13.960 | 978.552 | 838.069 |
| P/f Atlantic Airways | 236.898 | 35.845 | 756.239 | 313.905 |
| P/f Visit Faroe Islands | 7.399 | 17 | 4.407 | 564 |
| P/f Eystur- og Sandoyartunlar | 201.033 | 127.919 | 3.395.963 | 649.390 |
| P/f Suðuroyartunnil *) | -592 | -693 | 7.847 | 3.307 |
| **Tilsamans** | **838.910** | **194.745** | **6.675.604** | **2.818.835** |

*) P/f Suðuroyartunnil var stovnaður í 2022. Fyrsta roknskaparárið er frá 8. november 2022 til 31. desember 2023.

Samlaða ársúrslitið hjá feløgunum var 194,7 mió.kr. í vinningi eftir skatt, og samlaði eginpeningurin 2,8 mia.kr. Í 2022 var samlaða úrslitið hjá feløgunum, har landið eigur allan partapeningin, 168,7 mió.kr. í vinningi, og eginpeningurin var 2,6 mia.kr. Í 2023 áttu minnilutapartaeigararnir 11,9 mió.kr. í dótturfelagi hjá P/f Vága Floghavn.

## Samlað roknskapartøl hjá feløgunum

Roknskapartøl 2011 til 2023 fyri feløg, sum landið eigur allan partapeningin í:

*t.kr.*

| Ár | Brutto-vinningur | Ársúrslit | Samlað ogn | Egin-peningur |
|---|---|---|---|---|
| 2011 | 732.782 | -268.123 | 7.241.118 | 2.201.249 |
| 2012 | 608.022 | -513.502 | 3.730.656 | 1.631.006 |
| 2013 | 620.290 | 91.263 | 3.898.691 | 1.710.169 |
| 2014 | 660.020 | 67.148 | 4.201.625 | 1.819.871 |
| 2015 | 866.069 | 48.714 | 4.856.817 | 2.038.028 |
| 2016 | 607.125 | 71.277 | 5.835.015 | 1.990.572 |
| 2017 | 618.316 | 86.093 | 5.885.239 | 2.088.516 |
| 2018 | 580.528 | 86.576 | 6.097.371 | 2.196.207 |
| 2019 | 585.746 | 59.057 | 5.947.786 | 2.255.562 |
| 2020 | 389.466 | -94.728 | 5.977.783 | 2.277.936 |
| 2021 | 695.545 | 116.555 | 6.122.282 | 2.428.136 |
| 2022 | 818.221 | 168.748 | 6.348.917 | 2.611.027 |
| 2023 | 838.910 | 194.745 | 6.675.604 | 2.818.835 |

***Yvirskotið 2023 í landsins partafeløgum 194,7 mió.kr.***

### *Virðismeting*

Gjaldstovan hevur ásett reglur fyri, hvussu partabrøv eiga at verða goymd. Tá ið partabrøv og onnur virðisbrøv verða keypt, skulu tey latast Gjaldstovuni. Reglurnar viðgera ikki upp- og niðurskrivingar av partapeningi.

Í landsroknskapinum 2023 er partapeningurin hjá øllum feløgunum, uttan P/f Føroya Banka, skrásettur við keypsvirðinum. Talan er bæði um keyp til undirkurs, yvirkurs og útgávukurs. Skrásetti partapeningurin gevur sostatt onga ábending um ítøkiliga virðið á feløgunum.

***Skrásetti partapeningurin gevur ikki ábendingar um virðið á feløgunum.***

[23] “um at stovna partafelag og at byggja og reka undirsjóvartunlar millum Streymoy og Eysturoy og millum Streymoy og Sandoy”.

Innara virðið á 13 feløgum samanborið við keypsvirðið sambært landsroknskapinum fyri 2023:

*t.kr.*

| | Keypsvirðið sambært landsroknskapinum | Innara virðið |
|---|---|---|
| P/f Vágatunnilin | 160.300 | 196.349 |
| P/f Norðoyatunnilin | 235.000 | 275.761 |
| P/f Vága Floghavn *) | 822.818 | 838.069 |
| P/f Føroya Tele | 77.948 | 512.591 |
| P/f Postverk Føroya | 43.000 | 31.161 |
| P/f Fiskaaling | 17.376 | -2.262 |
| P/f Atlantic Airways | 186.912 | 313.905 |
| P/f Elektron | 2.347 | 15.329 |
| P/f Smyril Line | 32.760 | 89.148 |
| Sp/f Ítróttavedding | 20 | 35 |
| P/f Visit Faroe Islands | 500 | 564 |
| P/f Eystur- og Sandoyartunlar | 350.000 | 649.390 |
| P/f Suðuroyartunnil | 4.000 | 3.307 |
| **Partabrøv tilsamans** | **1.932.981** | **2.923.346** |

*) Parturin hjá minnilutapartaeigarum (Atlantic Airways) var 12 mió.kr.

Sum sæst í yvirlitinum, er keypsvirðið í nøkrum førum munandi lægri enn innara virðið.

Vinningsbýti frá partafeløgum, har landskassin er einasti partaeigari:

*t.kr.*

| | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|
| P/f Føroya Tele | 32.000 | 30.000 | 30.000 |

Í 2023 fekk landskassin harafturat vinningsbýti frá:

*t.kr.*

| | 2023 |
|---|---|
| P/f Føroya Banki | 87.037 |
| P/f Elektron | 1.701 |
| P/f Smyril Line | 1.624 |
| **Tilsamans** | **90.362** |

### 11.1.4 Útlán

*t.kr.*

| | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|
| Útlán ársbyrjan | 143.244 | 131.631 | 124.128 |
| Tilgongd í árinum | 6.238 | 6.037 | 7.566 |
| Frágongd í árinum | -17.851 | -13.540 | -15.695 |
| **Brutto útlán við ársenda** | **131.631** | **124.128** | **115.999** |
| Sett av ímóti tapi | -50.498 | -50.498 | -58.416 |
| **Sambært roknskapinum** | **81.134** | **73.631** | **57.584** |

Heitið útlán fevnir um veðhaldsútlegg, lestrarlán, ymisk vinnulán, serlán, kurslán og stuðulslán. Tilgongdin stavar í høvuðsheitum frá, at nýggj lestrarlán eru veitt. Frágongdin stavar í høvuðsheitum frá, at lán eru avskrivað, og at lestrarlán eru goldin aftur. Samanlagt eru útlánini lækkað 16 mió.kr. netto frá 2022 til 2023.

***Virðini á verðhalds-útleggum, serlánum, kurslánum og stuðulslánum eru sett til 0.***

Sett er av ímóti tapi. Virðini á veðhaldsútleggum, serlánum, kurslánum og stuðulslánum sambært roknskapinum eru sett til 0 kr. Avsetingin svarar í høvuðsheitum til útlán til privata vinnu, sum ikki frammanundan eru avskrivað ella løgd um til rentu- og avdráttarfrí útlán.

### Rentu- og avdráttarfrí útlán

t.kr.

| | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|
| Rentu- og avdráttarfrí lán ársbyrjan | 209.594 | 209.594 | 209.594 |
| Tilgongd í árinum | 0 | 0 | 0 |
| Frágongd í árinum | 0 | 0 | 0 |
| **Rentu- og avdráttarfrí lán ársenda** | **209.594** | **209.594** | **209.594** |
| Sett av ímóti tapi | -209.594 | -209.594 | -209.594 |
| **Sambært roknskapinum** | **0** | **0** | **0** |

Talan er um lán til Framtaksgrunnin, sjálvsognarstovnar, eldrasambýli og Postverk Føroya.[24]

Sambært landsroknskapinum eru rentu- og avdráttarfrí lán tikin við í roknskapin við virðinum 0 kr., av tí at talan er um treytað lán, sum bert skulu rindast aftur, um bygningar o.t., sum lán eru veitt til, verða brúkt til annað enn upprunaliga endamálið.

***Rentu- og avdráttarfrí lán eru sett til 0 kr., tí talan er um treytað lán.***

## 11.1.5 Áogn o.a.

### Skatta-, toll- o.t. skuldarar

t.kr.

| | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|
| Áogn landskassans brutto | 490.295 | 470.166 | 399.158 |
| Sett av ímóti tapi | -126.102 | -105.478 | -108.845 |
| **Sambært roknskapinum** | **364.193** | **364.688** | **290.313** |

Frá 2022 til 2023 er áognin lækkað 74,4 mió.kr. netto. Sambært landsroknskapinum eru størstu áognirnar við árslok 2023:

***Áognin er minkað 74,4 mió.kr.***

t.kr.

| Skatta- toll- o.t. skuldarar | |
|---|---|
| Tollavgjøld | 84.361 |
| Meirvirðisgjald | 59.884 |
| Vanligur landsskattur | 50.573 |
| TAKS, innkrevjing | 27.051 |
| Felagsskattur | 14.167 |
| Gjald til barsilsskipan | 12.420 |
| Skattur av vinningi frá sølu av veiðirættindum | 10.390 |
| Tøkugjald á alivinnu | 9.512 |
| Gjald til Heilsutrygd | 8.044 |
| Brennioljuavgjald | 6.462 |

### Tænastu-, vøru- og aðrir skuldarar

Talan er um tænastu- og vøruskuldarar hjá Apoteksverkinum, Landsverki, Landssjúkrahúsinum, Strandfaraskipum landsins og øðrum stovnum. Aðrir skuldarar eru m.a. inntøkur og endurgjøld, sum vanliga eru tíðaravmarkað. Eisini eru tað millumrokningar við landsstovnar, lønarútgjaldsskipanir, skipanir hjá TAKS o.a.

[24] Sí notu nr. 3 í landsroknskapinum.

Niðanfyri eru upphæddirnar útgreinaðar:

*t.kr.*

| | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|
| Tíðaravmarkingar | 89.582 | 82.147 | 155.570 |
| Avgjald á fiskatilfeingi | 88.602 | 26.167 | 96.479 |
| Apoteksverkið | 35.020 | 46.981 | 34.757 |
| Tøkugjald á alivinnu | 25.387 | 24.707 | 27.238 |
| Landsverk, inntøkufíggjað virksemi | 15.294 | 18.713 | 18.406 |
| Kapitalvinningsskattur | 184 | 631 | 14.201 |
| Søla av P/f Lív | 0 | 0 | 11.667 |
| Uppboðssøla av fiskatilfeingi | 0 | 62.872 | 9.269 |
| Gjald til Heilsutrygd | 8.114 | 8.234 | 9.261 |
| Landssjúkrahúsið | 9.058 | 6.620 | 8.781 |
| Niðurlaðing av Búnaðargrunninum | 160 | 379 | 8.400 |
| Strandfaraskip landsins | 3.670 | 4.172 | 7.192 |
| Tryggingareftirlitið | 4.117 | 4.758 | 5.015 |
| Umhvørvisstovan | 1.543 | 7.938 | 4.477 |
| Gjald til Búnaðarstovuna | 0 | 0 | 4.300 |
| Ríkisstuðul, endurgjøld | 2.555 | 2.505 | 4.119 |
| Ymiskir skuldarar, netto | 50.721 | 35.218 | 32.873 |
| **Tilsamans sambært roknskapinum** | **334.007** | **332.042** | **452.004** |

*Áognin er vaksin 117,8 mió.kr. í 2023.*

Fleiri hækkingar og lækkingar eru, sum frá 2022 til 2023 geva 117,8 mió.kr. í netto hækking. Størstu broytingarnar eru "Tíðaravmarkingar", "Avgjald á fiskatilfeingi", "Apoteksverkið" og "Kapitalvinningsskattur".

### Goymslur

*t.kr.*

| | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|
| Sambært roknskapinum | 66.400 | 77.455 | 88.121 |

Í tølunum eru vørugoymslurnar hjá Rúsdrekkasølu landsins, Apoteksverkinum, Strandfaraskipum landsins, Námi (útgávuvirksemi), Glasi, Miðnámi á Kambsdali, Landsverki, KT Landsins og Tekniska skúla í Klaksvík.

*Goymsluvirðið er hækkað 10,7 mió.kr. netto.*

Frá 2022 til 2023 er virðið á goymslunum hækkað 10,7 mió.kr. netto. Goymslurnar hjá Strandfaraskipum landsins og Apoteksverkinum eru hækkaðar ávikavist 7,7 og 9,6 mió.kr. Goymslan hjá Inntøkufíggjaðum virksemi hjá Landsverki er lækkað 5,9 mió.kr. Hinar goymslurnar eru bert broyttar smávegis.

## 11.1.6 Tøkur peningur

Tøkur peningur fatar um gjaldføri landsins. Sambært § 10, stk. 1, í Ll. nr. 116/2016 "um Landsbanka Føroya og Føroya váðaráð" umsitur Landsbankin gjaldføri landsins eftir ásetingum frá landsbankanevndini. Sambært § 10, stk. 2, er endamálið við umsitingini:

- at landið altíð hevur neyðugt gjaldføri tøkt, soleiðis at tað kann halda sínar skyldur,
- at landsins gjaldføri verður fyrisitið væl við atliti at tryggleika, herundir at samváðin millum landsins gjaldføri og føroyska búskapin verður sum minst, og
- at landsins gjaldføri verður rentað til marknaðarkor.

Sambært § 10, stk. 3 og 4, fevnir gjaldføri landsins um alt gjaldførið hjá allari landsumsitingini, øllum landsstovnum o.ø. Gjaldførið verður roknað sum landsins kassapeningur, innistandandi í peningastovnum og óveðsettar virðisbrævaognir.

Í fíggjarstøðuni er tøki peningurin býttur í tveir bólkar: virðisbrøv o.t. og bankakontur, girokontur og kassapeningur.

### Virðisbrøv o.t.

Landsbanki Føroya hevur sett part av tøka peninginum í stuttfreistað virðisbrøv, sum eru tikin við til marknaðarvirðið. Posturin nevnist "Virðisbrøv o.t."

Niðanfyri er yvirlit yvir Virðisbrøv o.t. seinastu 3 árini:

*mió.kr.*

| | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|
| Sambært roknskapinum | 3.449 | 3.174 | 3.931 |

Landsbankin hevur dagligu umsitingina av plaseringini av gjaldførinum hjá landinum, sum byggir á íløguinstruks frá landsbankanevndini. Í íløguinstruksunum eru ásetingar um m.a., hvussu nógv kann plaserast í ávís sløg av virðisbrøvum.

## Bankakontur og kassapeningur

*t.kr.*

| | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|
| Sambært roknskapinum | 400.188 | 699.474 | 620.324 |

*Bankakontur*

Roknskaparposturin vísir ikki, hvussu nógv landskassin tilsamans hevur standandi á bankakontum. Fleiri landsstovnar og -grunnar við leysum tilknýti til fíggjarlóg ella landsroknskap hava nógvan pening standandi í virðisbrøvum og á peningastovnskontum, sum ikki eru við í landsroknskapinum.

Í 2023 kann upphæddin greinast sundur í tær kontur, sum Landsbankin og Gjaldstovan umsita, og tær, sum aðrir stovnar í landsroknskapinum umsita.

*Kassapeningur*

Landsgrannskoðanin hevur framt nøkur kassaeftirlit í 2023, har vit hava stemmað kassapening av við kassauppgerðir, Búskaparskipan landsins v.m. Hava stovnar peningastovnskontur, eru tær stemmaðar av við kontuavrit frá peningastovnum og Búskaparskipan landsins. Eisini hava vit kannað konturnar fyri óvanligar bókingar ávís tíðarskeið. Kassaeftirlitini eru umrødd undir hvørjum stovni sær.

*Gjaldføri*

Landsbankin hevur gjørt innanhýsis reglugerð um, hvussu nógvur tøkur peningur kann standa í føroyskum peningastovnum, í hvørjum peningastovni sær og samanlagt. Ikki allur tøki peningurin sambært landsroknskapinum verður roknaður sum gjaldføri hjá landskassanum.

Landsstýrisfólkið í fíggjarmálum skal, sambært lógini um Landsbanka og váðaráð, fyriskipa, at landsins gjaldføri, vísandi til § 10, stk. 3 og 4, í minsta lagi samsvarar við 15% av bruttotjóðarúrtøkuni undanfarna ár.

Landsbankanevndin skal í august mánað áseta minstagjaldførið. Landsbankin hevur greitt frá, at av tí at bruttotjóðarúrtøkan fyri undanfarið ár ikki altíð er gjørd upp, tá ið landsbankanevndin skal áseta minstagjaldførið, brúkar bankin seinasta uppgjørda talið, eisini um talan er um fyribilstal.

Gongdin í gjaldførinum 2021 til 2023, sambært heimasíðuni hjá Landsbankanum:

*mió.kr.*

| | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|
| Gjaldføri | 3.802 | 3.430 | 4.114 |
| Harav minstagjaldføri | 3.290 | 3.050 | 3.400 |
| **Munur millum gjaldføri og minstagjaldføri** | **512** | **380** | **714** |

Gjaldførið fevnir sambært lógini um alt gjaldførið hjá allari landsumsitingini, øllum landsstovnum v.m., og sum er trygt og lætt tøkt. Eisini fevnir tað um óveðsett virðisbrøv.

### 11.1.7 Skuld

**Innanlandsskuld, langfreistað**

*t.kr.*

| | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|
| Sambært roknskapinum | 4.039.035 | 3.540.842 | 4.024.507 |

Við árslok 2023 var talan um 4 lánsbrævarøðir:

- FO-LB 240602, áljóðandi 1.100 mió.kr., sum fellur til gjaldingar 2. juni 2024.
- FO-LB 250602, áljóðandi 1.645 mió.kr., sum fellur til gjaldingar 2. juni 2025.
- FO-LB 260619, áljóðandi 900 mió.kr. , sum fellur til gjaldingar 19. juni 2026.
- FO-LB 320503, áljóðandi NOK 550 mió.kr. (svarandi til 364,7 mió.kr. við árslok 2023), sum fellur til gjaldingar 3. mai 2032.

Við árslok 2023 var samlaða *áljóðandi* marknaðarvirðið á skuldini 4.010 mió.kr.

7. juni 2023 eru 900 mió.kr. tiknar í nýggjum láni. 550 mió.kr. skuldu nýtast til at rinda aftur lán, sum fall til gjaldingar 27. juni 2023.

14. mai 2024 er 1,1 mia.kr. tikin í nýggjum láni til at endurfíggja lán, sum fall til gjaldingar 2. juni 2024.

1. juli 2024 eru 900 mió.kr. tiknar í nýggjum láni, sum skal nýtast til at endurfíggja lán, sum fellur til gjaldingar 2. juni 2025.

Frá fíggjarárinum 2016 eru lánini gjørd upp eftir marknaðarvirði.

Landsbankin selur meginpartin av brævalánunum uttanlands. Heitið á roknskaparpostinum, "Innanlandsskuld, langfreistað", er tí helst ikki so beinrakið.

*Partur av langfreistaðu skuldini, ið fellur til gjaldingar í komandi ári*

*t.kr.*

| | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|
| Sambært roknskapinum | 1.300.000 | 550.000 | 1.100.000 |

Veruligu afturgjøldini vóru sambært Landsbankanum:

- Í juni 2022 fullu eftir skránni 1.300 mió.kr. av FO-LB 220602 til gjaldingar.
- Í juni 2023 fullu eftir skránni 550 mió.kr. av FO-LB 230627 til gjaldingar.
- Í juni 2024 fullu eftir skránni 1.100 mió.kr. av FO-LB 240602 til gjaldingar.

**Stuttfreistað skuld (onnur skuld)**

*t.kr.*

| | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|
| Sambært roknskapinum | 1.278.690 | 1.624.439 | 2.027.113 |

Talan er í høvuðsheitum um vanligar kreditorar, frítíðargrunnar, millumrokningar við kommunur, tíðaravmarkingar og skuld, sum er greidd til útgjaldingar frá ymiskum skipanum. Frá 2022 til 2023 er stuttfreistaða skuldin hækkað 402,7 mió.kr. Skuldin er útgreinað í notu 9 í landsroknskapinum 2023.

## 11.2 Útjavningarkonta (LG 2023/300-203)

Útjavningarkontan líkist ikki "kontu fyri eginpening" í privatum virki. Ognirnar í landsroknskapinum verða virðismettar øðrvísi, og í roknskapinum eru virði ikki sett á. Materiellu støðisognirnar, so sum bygningar, skip og vegir, eru ikki virðisásett í roknskapinum. Endamálið við útjavningarkontuni er tí so at siga bert tøkniligt.

t.kr.

| | 2022 | 2023 |
|---|---|---|
| Salda 1. januar | 1.682.031 | 1.903.431 |
| RLÚ-úrslit | 30.561 | -426.126 |
| Búskapargrunnur Føroya | 140.703 | 254.779 |
| Ymiskar broytingar | 50.136 | 135.053 |
| **Salda 31. desember** | **1.903.431** | **1.867.137** |

"Ymiskar broytingar" eru broytingar í fíggjarstøðuni, sum ikki verða førdar yvir raksturin. Talan er m.a. um tøkniligar munir, sum standast av broytingum í roknskapar-meginreglum, rættingum av skeivum bókingum, sum viðvíkja undanfarnum árum, avtøkum av grunnum, úrslitum hjá internum grunnum, broytingum í avsetingum, mótbókingum til útlánsroknskap og mótbókingum til kapitalinnskot.

## 11.3 Fyrisiting av gjaldføri og skuld (LG 2023/300-104 og 202)

Landsbanki Føroya fyrisitur gjaldføris- og skuldarviðurskifti landsins. Ll. nr. 116/2016 "um Landsbanka Føroya og Føroya váðaráð" kom í gildi 1. januar 2017.

Í broti 11.1.6 undir fíggjarstøðuni er stutt greitt frá um tøkan pening og skuld landsins.

### 11.3.1 Porteføljuskipanin

Landsbankin brúkar donsku skipanina, PandaConnect, til at fyrisita gjaldføris- og skuldaraviðurskifti. Bankin hevur einans rættindi til at spyrja í skipanini.

Bókingarnar í PandaConnect fara ikki sjálvvirkandi yvir í Búskaparskipan landsins. Tá ið mánaður er liðin, sendir skipanin Landsbankanum eina fílu við broytingum frá mánaðinum frammanundan. Tølini verða bókað í Búskaparskipan landsins umvegis kontubrúgv. Landsbankin stemmar PandaConnect av við Búskaparskipan landsins. Bankin hevur ikki formligt loyvi frá Fíggjarmálaráðnum til PandaConnect-skipanina, men hevur heitt á Gjaldstovuna um at fáa loyvi.

***Landsbankin hevur ikki formligt loyvi til PandaConnect-skipanina.***

### 11.3.2 Gjaldførið hjá landinum

Við árslok 2023 vóru 4.551 mió.kr. í tøkum peningi skrásettar í landsroknskapinum. Við árslok 2022 var tøki peningurin 3.874 mió.kr.

Í talvuni er tøki peningurin sambært Búskaparskipan landsins sundurgreinaður:

t.kr.

| Tøkur peningur | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|
| ***Virðisbrøv*** | | | | | |
| Lánsbrøv | 2.523.675 | 3.637.450 | 2.809.239 | 2.529.743 | 2.808.024 |
| Lánsbrøv, rentuáogn | 8.211 | 11.177 | 8.824 | 12.353 | 21.956 |
| Partabrøv | 644.146 | 727.212 | 727.693 | 656.561 | 713.000 |
| Onnur virðisbrøv | 132.976 | 100.542 | 166.032 | 212.074 | 242.429 |
| ***Virðisbrøv tilsamans*** | ***3.309.008*** | ***4.476.381*** | ***3.711.788*** | ***3.410.731*** | ***3.785.409*** |
| | | | | | |
| ***Innistandandi í Landsbanka Føroya*** | | | | | |
| Búskapargrunnurin | 730.227 | 756.299 | 897.076 | 1.037.779 | 1.292.559 |
| Ogn hjá øðrum | -986.775 | -1.041.600 | -1.160.354 | -1.274.137 | -1.146.845 |
| ***Innist. í Landsb. tilsamans*** | ***-256.548*** | ***-285.301*** | ***-263.278*** | ***-236.358*** | ***145.714*** |
| | | | | | |
| ***Banka- og kassakontur*** | | | | | |
| Bankakontur, landskassin | 274.505 | 160.585 | 35.655 | 99.610 | 158.991 |
| Útlendskar bankakontur | 123.245 | 301.099 | 273.298 | 124.679 | 351.318 |
| Ogn hjá øðrum | 0 | 0 | 0 | 393.296 | 10.397 |
| Aðrar bankakontur og kassar | 27.437 | 76.356 | 91.234 | 81.889 | 99.618 |
| ***Banka- og kassakontur tils.*** | ***425.187*** | ***538.040*** | ***400.187*** | ***699.474*** | ***620.324*** |
| **Tilsamans** | **3.477.647** | **4.729.120** | **3.848.698** | **3.873.848** | **4.551.447** |

Virðisbrøvini eru skrásett í landsroknskapinum við marknaðarvirðinum. Landsbankin hevur greitt frá, at øll virðisbrøvini eru skrásett í PandaConnect. Somuleiðis eru útlendskar peningastovnskontur, sum hava við virðisbrøv at gera, skrásettar í PandaConnect, og svara upphæddirnar á teimum til nærum allan peningin á útlendsku kontunum.

Landsbankin hevur kunnað um, at í 2023 eru 405,5 mió.kr. skrásettar skeivt undir “Innistandandi í Landsbanka Føroya – Ogn hjá øðrum”. Tær áttu í staðin at staðið skrásettar undir “Banka- og kassakontur – Ogn hjá øðrum”.

Aðrar peningastovnskontur eru ikki skrásettar í PandaConnect, hvørki útlendskar ella føroyskar. Talan er um kontur, sum Gjaldstovan og aðrir almennir stovnar umsita.

*Plasering av gjaldførinum*

Reglurnar, um hvussu gjaldførið hjá landinum skal handfarast, standa m.a. í lógini um Landsbankan og í ásetingum frá nevndini fyri bankan.

Landsgrannskoðanin heldur, at transaktiónsslóðin millum porteføljuskipanina og Búskaparskipan landsins er ikki nóg góð, tá ið ikki ber til at finna allar skrásetingar av bókingum í Búskaparskipan landsins, uttan at fara aftur til porteføljuskipanina at finna transaktiónirnar.

Landsbankin hevur víst á, at bankin hevur transaktiónsslóðina, tí at bankin goymir øll skjalprógv. Landsbankin kundi viðheft skjalprógvini í Búskaparskipan landsins, men heldur, at tað er ov nógv og kann ørkymla.

*Úrslitið av plaseringini av gjaldførinum*

Sambært landsroknskapinum 2023 eru rentur av innistandandi 228,6 mió.kr. Ávikavist 69,7 mió.kr. og 74,7 mió.kr. eru fluttar til Búskapargrunnin á § 89 og “Frávik fyri rentuinntøkur” á § 80 undir RLÚ II, soleiðis at roknskapurin fyri 20.50.2.01.01 “Rentur av innistandandi” samsvarar við játtanina, sum er 84,2 mió.kr. í inntøkum. Av teimum 69,7 mió.kr. til Búskapargrunnin, hevur Landsbankin fingið 1.038 t.kr. í ómaksgjaldi.

Rentuinntøkur o.a. sundurgreinað:

*t.kr.*

| Heiti | 2022 | | 2023 | |
|---|---|---|---|---|
| | *Játtan* | *Roknskapur* | *Játtan* | *Roknskapur* |
| Rentur og ógreinað | | -45.455 | | -39.080 |
| Vinningsbýti | | -60.902 | | -29.813 |
| Staðfestir kurs-/gjaldoyramunir | | 142.629 | | -22.447 |
| Ikki staðfestir kurs-/gjaldoyramunir | | 256.453 | | -132.482 |
| Rentur, bankar | | 640 | | -3.468 |
| Kostnaðir | | -564 | | -1.326 |
| Innanh. flyt. millum alm. grunnar | | -77.328 | | 69.739 |
| Innanh. flyt. millum alm. stovnar | | -246.024 | | 74.727 |
| **Tilsamans** | **-30.550** | **-30.550** | **-84.150** | **-84.150** |

Sum sæst í talvuni, eru stórar broytingar í kursmunum, serliga í “ikki staðfestu mununum”.

Í 2023 var avkastið av gjaldføri landskassans 6,7% sambært ársfrágreiðingini hjá Landsbankanum. Í 2022 var tað -8,6%, og frá 2017 til 2023 var miðal avkastið 1,6%.

Landsbankin hevur eftirlitsfund hvønn mánað. Bankin skrivar frágreiðing frá fundinum, og um tað, sum er gjørt fyri at fylgja fundinum upp.

Í ársfrágreiðingini 2023 er avkastið býtt eftir ymisku virðisbrøvunum, sum bankin hevur gjørt íløgur í:

| **Slag** | **Miðal íløga** mió.kr. | **Avkast** mió.kr. | **Avkast** % | **Býtið** % |
|---|---|---|---|---|
| Partabrøv | 659 | 99 | 14,9 | 18,8 |
| Statslánsbrøv | 34 | 2 | 6,9 | 1,0 |
| Realkredittlánsbrøv | 2.084 | 97 | 4,6 | 59,5 |
| Kredittlánsbrøv | 122 | 10 | 8,3 | 3,5 |
| Hárentulánsbrøv | 224 | 21 | 9,4 | 6,4 |
| Alternativar íløgur | 225 | 2 | 1,0 | 6,4 |
| Onnur fíggjaraktiv | 154 | 5 | 3,0 | 4,4 |
| **Tilsamans** | **3.502** | **236** | | **100,0** |

Sum sæst í talvuni, var avkastið 236 mió.kr. í vinningi í 2023.

### 11.3.3 Landskassaskuld - brævalán

*Heimild at læna*

Sambært § 42 í Ll. nr. 103/1994 "um stýrisskipan Føroya" kunnu lán ella borgan, ið skuldbinda Løgting, landsstýri ella stovnar undir landinum, ikki verða tikin ella veitt uttan við heimild í lóg. Sambært § 1 í Ll. nr. 116/1991 “um lántøku til landskassan og umlegging av landskassalánum” verður landsstýrinum heimilað landskassans vegna at taka lán til at rinda avdráttir av lánum, til afturrindan av lánum og til framskundaða afturrindan av lánum í Føroyum og uttan fyri Føroyar.

Landsgrannskoðanin hevur kannað lániheimildirnar fyri árini 2011 til 2023. Einki var at finnast at.

*Lánini í samsvari við prospektini*

Í sambandi við lántøku ger Landsbankin prospekt (kunningartilfar) til íleggjarar o.o. Í prospektinum er m.a. kunning um búskaparviðurskifti, upplýsingar um útgevaran av lánsbrøvunum og upplýsingar um lánsbrøvini, so sum samlað upphædd, renta, kursur, lánitíð og fondskota.

Eitt nýtt brævalán er stovnað í 2023. Landsgrannskoðanin hevur kannað, um lánini, sum vóru virkin við árslok 2023, eru í samsvari við prospektini. Einki var at finnast at.

*Skráseting av brævalánum*

Í fíggjarstøðuni í landsroknskapinum síggjast brævalánini sum langfreistað innanlandsskuld. Í notu 8 eru sundurgreiningar, sum vísa marknaðarvirði og viðhangandi rentu. Notan vísir eisini samanhangin millum navnvirði og marknaðarvirði, eitt yvirlit yvir einstøku brævalánsrøðirnar, umframt hvussu stórur partur av skuldini fellur til gjaldingar í komandi ári, og hvussu stór restskuldin er um 5 ár.

Við árslok 2023 er bókaða virðið á brævalánunum 3.943 mió.kr. Við ársbyrjan var tað 3.508 mió.kr. Lánsupphæddirnar í landsroknskapinum eru grundaðar á marknaðarvirðið umframt tíðargreinaðar rentur sambært roknskaparmeginreglunum.

*t.kr.*

| **Brævalán** | **2022** | | | **2023** | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | *Lán* | *Lánsbýti*[25] | *Tilsamans* | *Lán* | *Lánsbýti* | *Tilsamans* |
| Marknaðarvirði | 3.489.657 | 34.906 | 3.524.563 | 3.910.423 | 82.209 | 3.992.632 |
| Viðhang. renta[26] | 17.853 | -1.574 | 16.279 | 33.019 | -1.145 | 31.875 |
| **Tilsamans** | **3.507.510** | **33.332** | **3.540.842** | **3.943.442** | **81.064** | **4.024.507** |

Síðani 2016 eru brævalánini virðisásett til marknaðarvirði, og kursbroytingar rakstrarførdar.

[25] Lánsbýti: Sonevndur swap, sum t.d. kann fevna um lán, rentu og gjaldoyra.
[26] Viðhangandi renta: Tíðargreinað renta, viðvíkjandi roknskaparárinum, goldin eftir roknskaparlok.

Í talvuni niðanfyri hevur Landsgrannskoðanin greinað restskuldina á brævalánunum, sum vóru virkin, ávikavist við árslok 2022 og við árslok 2023. Við árslok 2023 er samlaði kursmunurin hægri, enn hann var við ársbyrjan. Broytingin er tikin við í raksturin, sum ikki staðfestur kursmunur, undir høvuðskontu 20.50.1.01 “Rentur at gjalda”.

*t.kr.*

| FO-LB | Restskuld við byrjan 2023 | Virði við byrjan 2023 | Munur | Restskuld við árslok 2023 | Virði við árslok 2023 | Munur | Broytt markn. virði |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 320503[27] | | 34.906 | 34.906 | | 82.209 | 82.209 | 47.303 |
| 320503 | 550.000 | 515.884 | -34.117 | 550.000 | 516.186 | -33.814 | 303 |
| 320503 | -161.178 | -151.180 | 9.998 | -185.350 | -173.955 | -12.777 | -22.775 |
| 230627 | 550.000 | 545.380 | | | | | |
| 240602[28] | 1.100.000 | 1.065.680 | -34.320 | 1.100.000 | 1.082.967 | -17.034 | 17.287 |
| 250602 | 1.645.000 | 1.513.894 | -131.107 | 1.645.000 | 1.577.391 | -67.610 | 63.497 |
| 260619 | | | | 900.000 | 907.835 | 8.492 | 8.492 |
| **Tils.** | **3.683.823** | **3.524.563** | **-154.639** | **4.009.650** | **3.992.632** | **-40.533** | **114.106** |

Landsbankin ætlar ikki at rinda lánið, sum er í norskum krónum og swappað aftur til danskar krónur, fyri tíð. Tá ið lánið verður rindað aftur í 2032, verður kursmunurin 0.

Sambært Landsbankanum er Nordea “marketmaker” á landskassans lánsbrøvum, t.v.s. at Nordea regluliga ásetir kursir á lánsbrøvum til besta kursin, tey kunnu koma fram til.

| FO-LB | Restskuld við árslok 2023 (t.kr.) | Tíðargr. Renta (t.kr.) | Rentu-dagur[29] | Dagar | Roknað renta í % | Ásett renta í % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 320503 | 364.650 | 6.482 | 03-05-2023 | 237 | 2,700 | 2,700 |
| 250602 | 1.645.000 | 1.191 | 02-06-2023 | 212 | 0,125 | 0,125 |
| 240602 | 1.100.000 | 7.964 | 02-06-2023 | 212 | 1,250 | 1,250 |
| 260619 | 900.000 | 17.382 | 19-06-2023 | 195 | 3,625 | 3,625 |
| | ***4.009.650*** | ***33.019*** | | | | |
| 320503 - lánsbýti | -364.650 | -6.482 | 03-05-2023 | 237 | -2,700 | -2,700 |
| 320503 - lánsbýti | 447.883 | 5.337 | 03-05-2023 | 237 | 1,810 | 1,810 |
| **Tilsamans** | **4.092.883** | **31.875** | | | | |

*FO-LB 320503*: Lánið í norskum krónum er til kursvirðið í donskum krónum við árslok 2023; lánið er býtt um við danskar krónur.

Í talvuni hevur Landsgrannskoðanin eftirroknað tíðargreinaðu rentuna av hvørjum láni sær samanborið við til restskuldina við árslok 2023. Rentan á norska láninum er 2,7%, men er býtt um til danskar krónur við 1,81% rentu. Rentumunurin verður góðskrivaður landinum.

### *Skráseting av rentuútreiðslum o.ø.*

Sambært landsroknskapinum 2023 eru rentuútreiðslur o.a. 166,2 mió.kr., og 119,6 mió.kr. eru fluttar frá "Frávik fyri rentuútreiðslur" á § 80 undir RLÚ II, soleiðis at roknskapurin fyri 20.50.1.01 "Rentur at gjalda" samsvarar við játtanina, ið er 46.550 t.kr.

[27] FO-LB 320503: Lánið er í norskum krónum, men er býtt um við (swappað til) danskar krónur. Áljóðandi virðið á láninum er NOK 550 mió. við árslok 2023, svarandi til DKK 364,7 mió. Gjaldoyramunurin og virðið á lánsbýtinum eru víst fyri seg.
[28] FO-LB 240602: Kursmunur við upptøku er 657 t.kr.
[29] Í FO-LB 320503 verða nýttir 30/360 dagar í mánaðinum/árinum; í øðrum lánum eitt vanligt ár.

Í talvuni eru rentuútreiðslur o.a. sundurgreinað:

t.kr.

| Heiti | 2022 | | 2023 | |
|---|---|---|---|---|
| | *Játtan* | Roknskapur | *Játtan* | Roknskapur |
| Goldnar rentur[30] | | 12.749 | | 27.727 |
| Broytt tíðaravmarkað renta o.a. | | 8.449 | | 14.813 |
| ***Rentur tilsamans*** | | ***21.198*** | | ***42.540*** |
| Staðfestir kursmunir | | -2.804 | | 5.809 |
| Ikki staðfestir kursmunir | | -302.898 | | 113.323 |
| ***Kursmunir tilsamans*** | | ***-305.702*** | | ***119.132*** |
| Ómaksgjøld o.a. | | 2.200 | | 2.300 |
| Aðrar rentuútreiðslur | | 2.038 | | 2.178 |
| Innanh. flyt. millum alm. stovnar | | 300.416 | | -119.600 |
| **Tilsamans** | ***20.150*** | **20.150** | ***46.550*** | **46.550** |

Í 2023 eru nettoútreiðslurnar av rentum og kursmunum av brævalánunum 161,7 mió.kr.; í 2022 vóru tær -284,5 mió.kr.

Goldnar rentur og tíðargreinaðar rentur í 2023, býttar á brævalánini:

t.kr.

| FO-LB | Miðalsalda í 2023 | Goldin renta | Broytt tíðargr. renta | Renta tilsamans | Ásett renta í % |
|---|---|---|---|---|---|
| 320503 | 376.736 | 9.309 | -430 | 8.880 | 2,700 |
| 230627 | 268.889 | 3.438 | -1.761 | 1.676 | 0,625 |
| 250602 | 1.645.000 | 2.056 | -3 | 2.053 | 0,125 |
| 240602 | 1.100.000 | 13.750 | -22 | 13.728 | 1,250 |
| 260619 | 480.000 | 0 | 17.382 | 17.382 | 3,625 |
| ***Tilsamans*** | ***3.870.625*** | ***28.553*** | ***15.166*** | ***43.720*** | |
| Lánsbýti | -376.736 | -10.069 | 430 | -10.069 | -2,700 |
| Lánsbýti | 447.883 | 8.107 | 0 | 8.107 | 1,810 |
| **Tilsamans** | **3.941.772** | **26.162** | **15.596** | **41.758** | |

Í talvuni er renta tilsamans roknað til 41.758 t.kr. Sambært landsroknskapinum 2023 eru rentuútreiðslurnar til uttanlandsskuld 42.540 t.kr.; munurin er 783 t.kr.

Í landsroknskapinum 2023 er "Ikki staðfest kurstap" 113.323 t.kr. Tað gevur 783 t.kr. minni inntøku, samanborið við útrokningina í talvuni á síðu 168, har munurin á marknaðarvirðinum á brævalánunum við árslok, samanborið við virðið við ársbyrjan, er eftirroknaður.

Samanlagt er eingin munur. Sambært PandaConnect-skipanini er talan um "ikki staðfestan gjaldoyravinning".

Í 2023 eru renturnar av brævalánunum 42.540 t.kr., og í 2022 vóru tær 21.198 t.kr. Høvuðsorsøkin til hækkingina er, at miðalrentan á lánunum er hækkað. Sambært ársfrágreiðingini 2023 frá Landsbankanum, var miðalrentan 0,7% í 2022, meðan hon er hækkað til 1,4% við ársenda 2023. Í 2023 vaks áljóðandi marknaðarvirðið á lánsbrævaskuldini við 326 mió.kr.

[30] Goldnar rentur: Í Búskaparskipan landsins eru renturnar ikki greinaðar í goldnar og tíðargreinaðar rentur – upphæddirnar eru roknaðar sambært yvirliti úr PandaConnect-skipanini.

*Útreiðslur av rentu, kursi og lánsbýti í árinum*

Brævalánini samanhildin við samlaðu rakstrarbroytingarnar av lánunum í árinum:

*t.kr.*

| FO-LB | Restskuld við árslok 2023 | Renta smb. roknskapi | Kursbroyt. o.a. smb. roknskapi | Rakstrar-broytingar tilsamans |
|---|---|---|---|---|
| 320503 | 364.650 | 6.918 | 24.831 | 31.749 |
| 230627 | 0 | 1.676 | 0 | 1.676 |
| 250602 | 1.645.000 | 2.053 | 63.497 | 65.550 |
| 240602 | 1.100.000 | 13.728 | 17.287 | 31.015 |
| 260619 | 900.000 | 17.382 | 8.492 | 25.874 |
| **Tilsamans** | **4.009.650** | **41.758** | **114.106** | **155.863** |

*Aðrar rentuútreiðslur*

Aðrar útreiðslur enn rentur og kursmunir av brævalánunum eru 4.478 t.kr., t.e. gjøld fyri skráseting, eftirlit o.a. Nakað av útreiðslum eru av føroyskum peningastovns-kontum hjá Landsbankanum og Gjaldstovuni.

Játtanin til Landsbankan rindar útreiðslurnar av sjálvari porteføljuskipanini. Útreiðslur í sambandi við plasering av gjaldføri, t.d. kurtaga, fara av høvuðskontu 20.50.2.01 "Rentuinntøkur av innistandandi".

**Játtanir undir § 20 til rentur av brævalánum og plaseringum**

Landsgrannskoðanin hevur í undanfarnum ársfrágreiðingum umrøtt meginreglurnar fyri virðisásetingum av skuld, sum Landsbankin fyrisitur. Í 2016 vóru meginreglurnar broyttar soleiðis, at brævalánini verða tikin við í roknskapin til marknaðarvirði. Í 2015 mælti Fígging landsins til broytingina, soleiðis at somu meginreglur eru galdandi fyri fíggjarliga ogn og skuld. Fígging landsins vísti á, at onnur lond hava tjóðbanka, sum hevur tiltøkupeningin hjá landinum um hendi, og tá síggjast rentur o.a. ikki beinleiðis í landsroknskapinum.

Landsgrannskoðanin hevur víst á, at roknskaparmeginreglurnar eiga á bestan hátt at endurspegla tær avgerðir, sum eru tiknar í fíggjarárinum. Eitt høvuðsendamál við fíggjarlógini og landsroknskapinum er at halda saman tað, sum er brúkt ella rátt yvir við tað, sum er samtykt. Mest rættvísandi myndin av landsroknskapinum er tí tær upphæddir, sum samsvara við tær avgerðir, sum landsstýrisfólk ella stovnsleiðsla tekur.

***Árligu kursbroytingarnar kunnu órógva veruligu myndina av útreiðslunum.***

Er endamálið við at taka lán einans at fíggja almennan rakstur, og lánini ætlandi ikki verða innfríað fyri tíð, hava kursbroytingar í einstøku árunum ikki útreiðslur ella inntøkur við sær í samlaðu lánstíðini. Rentan, sum hevur útreiðslur við sær hvørt ár, endurspeglar veruligu avgerðirnar. Árligu kursbroytingarnar geva tí ikki betri upp-lýsingar, men kunnu hinvegin heldur órógva veruligu myndina av útreiðslunum av skuldini.

Játtanir og roknskapir fyri ávikavist rentur av skuld og rentur av innistandandi síðani 2019:

*t.kr.*

| | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rentur av skuld** | | | | | |
| *Játtan* | *43.500* | *26.100* | *25.900* | *20.150* | *46.550* |
| Roknskapur: | | | | | |
| Rentur | 39.726 | 24.476 | 17.414 | 21.198 | 42.540 |
| Kursbroytingar | 13.380 | 12.418 | -27.421 | -305.702 | 119.132 |
| Ómaksgjøld o.a. | 1.950 | 7.008 | 806 | 4.238 | 4.478 |
| Javning | -11.557 | -17.802 | 35.100 | 300.416 | -119.600 |
| **Rentur av innistandandi** | | | | | |
| *Játtan* | *-40.700* | *-36.500* | *-39.500* | *30.550* | *84.150* |
| Roknskapur: | | | | | |
| Samlaður vinningur | -191.305 | -73.217 | -141.902 | 292.801 | -228.616 |
| Javning | 150.605 | 36.717 | 102.402 | -323.349 | 144.466 |

Í ársfrágreiðingini 2017 vísti Landsgrannskoðanin á, at útreiðslurnar av rentum, kursbroytingum o.ø. vóru 80 mió.kr. Játtanin var 20 mió.kr. Sjálv rentan var 54 mió.kr. Landsgrannskoðanin ivaðist tí í, um broyttu roknskaparmeginreglurnar høvdu við sær, at bókaðu útreiðslurnar á bestan hátt endurspegladu tær avgerðir og tiltøk, sum vóru framd innan játtanarøkið.

Í 2023 er játtanin 46,6 mió.kr. til rentur av skuld. Í talvuni sæst, at rentuútreiðslurnar eru 42,5 mió.kr., og útreiðslurnar av kursbroytingum eru 119,1 mió.kr.

Í 2019 greiddi landsstýrisfólkið frá, at í fíggjarlógini fyri 2019 var játtanin til rentu-útreiðslur á § 20 "Inntøkur" ásett sum effektiva rentan við upptøku av lánsbræva-skuldini, soleiðis at hon endurspeglar miðal rentustig samanborið við støðd á skuldini.

### Javning av rentuútreiðslum og -inntøkum millum § 20 og § 80

Í undanfarnum ársfrágreiðingum hevur Landsgrannskoðanin eisini umrøtt broytingarnar í upplýsingunum um rentu o.a. Nú er viðgerðin av rentuinntøkum og rentu-útreiðslum, kursbroytingum o.ø. soleiðis, at inntøkur og útreiðslur, sum hava verið í árinum, eru tiknar við undir § 20, sum er partur av RLÚ I, meðan tær mánaðarliga eru javnaðar soleiðis, at frávikið samanborið við játtan verður flutt til § 80 "Rentur", sum er partur av RLÚ II. Landsgrannskoðanin helt tað vera ivasamt, um tað var rætt at javna ella flyta millum høvuðskontur, soleiðis at nýtslan samsvarar við játtanina.

Í fíggjarlógini 2020 var greitt frá undir høvuðskontu 20.50.1.01 "Rentur at gjalda", at fyri rentuútreiðslurnar verður effektiva rentan brúkt. Metingin av rentuútreiðslunum er grundarlag undir bæði játtan og roknskapi, og frávik ímillum játtan og nýtslu verða skrásett sum óvanligar útreiðslur og inntøkur.

Landsbankin hevur greitt frá, at frá 2015 brúkti bankin effektivu rentuna á lánsbrævarøðunum, tá ið hann metti um rentuútreiðslurnar. Tað er viðkomandi, um broytingar verða gjørdar í lántøkuni í úrtíð, men av tí at ætlanin ikki er at rinda lánini aftur fyri tíð, hevur Landsbankin, frá og við 2019, brúkt effektivu rentuna á lánunum við upptøku. Tað eigur í framtíðini at endurspegla rættari rentukostnað í fíggjarlógini.

Í landsroknskapinum 2023 eru rentuútreiðslurnar undir § 20 javnaðar við 119,6 mió.kr., og rentuinntøkurnar eru javnaðar við 144,5 mió.kr. Í javningini av rentuinntøkunum eru 69,7 mió.kr. í muni, sum sambært Búskaparskipan landsins er nettoparturin hjá Búskapargrunninum av samlaðu íløgurøktini, frádrigið 1.038 t.kr. í umsitingargjaldi til Landsbankan.

# 12. Orðalisti

**Átekning í fíggjarlóg**: eisini nevnd C. átekning - við átekning kann heimild verða givin til at flyta óbrúktar løgujáttanir til seinni fíggjarár, ella til innanhýsis flytingar millum høvuðskontur sama ár. Eisini kann C. átekning innihalda serstakar ásetingar um ræði ella heimildir til ávísa játtan.

**Átekning frá grannskoðara** - niðurstøða frá góðkendum grannskoðara um útinta grannskoðan av einum roknskapi.

**Búskaparskipan landsins (BSL)** - felagsheiti fyri allar skipanirnar, sum Gjaldstovan umsitur.

**Debitorskipanin** - skipan í Búskaparskipan landsins til at umsita sølu, gjaldsstøðu og rokningar til keyparar av vørum og tænastum frá landsstovnum.

**Eksternir grunnar** - grunnar, sum ikki eru tiknir við í fíggjarstøðu landskassans, og sum hava sjálvstøðugan roknskap.

**Eykajáttanarlóg** - broytingar, sum Løgtingið ger í játtanum, eftir at fíggjarlógin er samtykt.

**Felagskassar** - peningur, sum búfólk á einstøku sambýlunum eiga.

**Ferðaavrokningarskipan** - KT-skipan hjá Gjaldstovuni, sum starvsfólk hjá landinum skulu brúka til at søkja um ferðaloyvi og gera ferðaavrokning.

**Fígging Landsins** - fyrrverandi deild hjá Gjaldstovuni, sum umsat gjaldførið hjá landinum.

**Fíggjargrannskoðan** - grannskoðan av, at roknskapurin er rættur, og at tær avgerðir, sum roknskapurin fevnir um, eru samsvarandi veittum játtanum, galdandi lógum og fyriskipanum, verandi avtalum og vanligum siði.

**Fremmand fígging** - peningur, sum stavar aðrastaðni frá enn beinleiðis av játtanarlóg, og sum verður nýttur til at fíggja partar av virksemi stovnsins.

**Fyrisitingargrannskoðan** - grannskoðan av, at tað er hóskandi atborið fíggjarliga í sambandi við umsiting av ognum og viðvíkjandi rakstri av teimum stovnum og tí virksemi, roknskapurin fevnir um.

**Grannskoðanarlógin** - løgtingslóg nr. 25/1999 “um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.”

**Heildarskipan** - KT-skipan hjá Almannaverkinum til málsviðgerðir og útgjøld.

**Høvuðskonta** - játtanir verða veittar á høvuðskontum, og tað er høvuðskontan, ið er sjálv játtanin, sum Løgtingið atkvøður um.

**Innaneftirlit** - tey tiltøk, sum leiðsla setir í verk fyri at fáa nóg stóra vissu fyri, at roknskapur er rættur og álítandi, at rakstur er effektivur, og at lógir og reglur verða hildnar.

**Inntøkufíggjað virksemi** - virksemi, ið ber handilsligan dám. Landsstýrisfólkið í fíggjamálum kann loyva stovnum at hava inntøkufíggjað virksemi.

**ISAE 3000** - altjóða standardur, sum verður brúktur í sambandi við váttan um, at stovnur lýkur dátuverndarlógina (GDPR).

**Játtanarskipanin** - løgtingslóg nr. 42/2009 “um landsins játtanarskipan.”

**Javngjaldslán** - “Annuitetslån”. Lán, sum verður goldið aftur við eins stórum gjøldum hvørja termin.

**Kervisgrannskoðan** - grannskoðan av KT-skipanum.

**Keypsportalurin** - talgildur portalur har lýst verður alment, tá ið almennir stovnar skulu keypa vørur ella tænastur.

**Kontuskipan landsins** - kontuplanur fyri tað almenna. Reglur fyri, hvussu útreiðslur og inntøkur skulu flokkast í landsroknskapinum.

**Kreditorskipanin** - skipan í Búskaparskipan landsins til at umsita keyp, gjaldsstøður og kontuavrit frá veitarum av vørum og tænastum hjá landinum.

**KT Landsins** - deild hjá Gjaldstovuni, sum veitir almennum stovnum KT-tænastur og samskipar KT á yvirskipaðum stigi.

**Landsnet** - tænasta frá KT Landsins, sum fevnir um hýsing og rakstur av servarum og netverkum, uppseting og atgongd til grundleggjandi forrit á brúkarateldum og KT-support til brúkarar.

**Landsroknskapurin** - samlaði ársroknskapurin hjá landinum, ið eigur at fevna um allar inntøkur, útreiðslur, ogn og skuld landsins. Gjaldstovan setir landsroknskapin upp.

**Løgfrøðiliga-kritisk grannskoðan** - grannskoðan av, at roknskapurin er samsvarandi veittum játtanum, galdandi lógum og fyriskipanum, verandi avtalum og vanligum siði.

**Løgujáttan** - játtanarslag til bygging, ognan ella avhending av bygningum, løgum, skipum o.ø., og til stór viðlíkahaldsarbeiði.

**Nettojáttan** - rakstarjáttan, sum er samansett av bæði útreiðslum og inntøkum.

**PandaConnect** - porteføljuskipan til at fyrisita gjaldføris- og skuldaraviðurskifti.

**Rakstrarjáttan** – játtan til at seta starvsfólk og at halda útreiðslur í hesum sambandi, herímillum at keypa vørur, tænastur o.a.

**RLÚ** - stytting fyri Rakstur, Løga og Útlán.

**RLÚ I** - ársúrslit av vanligum postum í landsroknskapinum.

**RLÚ II** - RLÚ I pluss úrslit av óvanligum postum.

**Roknskaparkunngerðin** - kunngerð nr. 22/2007 “um roknskaparverk landsins”.

**Roknskaparlógin** - løgtingslóg nr. 33/1994 “um landsins almenna roknskaparhald v.m.”

**Roknskaparmeginreglur** - ásetingar um roknskaparhátt fyri landsroknskapin. Meginreglurnar eru í landsroknskapinum undir “Formlig viðurskifti”.

**Roknskaparreglugerð** - reglugerð við ábyrgdar- og heimildarreglum fyri roknskaparhaldið hjá stovni.

**Roknskaparrundskrivið** - roknskaparrundskriv frá Fíggjarmálaráðnum frá 2001 um vegleiðing um roknskaparreglugerðir.

**Setanarpolitikkur landsins** - partur av starvsfólkapolitikkinum hjá landinum. Setanarpolitikkurin hevur til endamáls at tryggja, at stovnar seta umsøkjarar, ið eru best egnaðir til starvið, og, at umsøkjarar, sum ikki fáa starv, kunnu vera vísir í, at avgerðin er farin fram á rættan hátt.

**Standardkonta (St.kt.)** - sundurgreinar inntøkurnar og útreiðslurnar í t.d. sølu, lønir, vørukeyp, tænastuveitingar o.a.

**Standardroknskaparkonta (St.Rk)** - neyvari útgreining av standardkontu.

**Stuðulsfíggjað virksemi** - virksemi undir rakstrarjáttan, sum ikki er av handilsligum slag, og sum er fíggjað við stuðli.

**Stýrisskipanarlógin** - Ll. nr. 103/1994 "um stýrisskipan Føroya".

**Støðla** - er at útreiðsluføra eina upphædd í verandi fíggjarárið, ið fer at verða hildin í seinni fíggjarári.

**Swappa** - býta um skiftandi rentur ella kursir til fasta rentu ella kurs, fyri at minka um váðan í lánitíðarbilinum.

**Tíðaravmarka** - at leggja eina inntøku ella útreiðslu til tíðarskeiðið, har hon hoyrir til, heldur enn tá ið hon verður goldin.

**Totalview** - KT-skipan, sum fleiri almennir stovnar brúka til at skráseta arbeiðstíð, feriu v.m.

**Transaktiónsslóð** - eisini nevnd viðskiftisslóð, er treytin um, at allar skrásetingar skulu kunna finnast í roknskapinum, og at tølini í roknskapinum skulu kunna loysast upp í tær skrásetingar, sum tey eru samansett av.

**Trygdarpolitikkur** - yvirskipaður politikkur, ið tekur atlit at váðum, ið hótta.

**Trygdarrundskriv** - rundskriv nr. 9002 frá 29. apríl 2019 um KT-trygd

**Tænastusáttmáli (SLA)** - Service Level Agreement er heiti á KT-rakstrar- og viðlíkahaldsavtalu ímillum partar.

**Undirkonta** - verður brúkt til at býta játtan sundur í fleiri virkisøki.

**ÚS-skipan** - KT-skipan hjá Studna til at skráseta og gjalda út studning og lán.

**ÚSUN** - stuðulsskipan til lesandi uttan fyri Norðurlond.

**Útjavningarkonta** - minnir um eginpeningskontuna í roknskapum hjá privatum virkjum, men er tó meiri tøknilig, m.a. tí at ogn og skuld vera virðisásett øðrvísi.

**Váðameting** - at eyðmerkja og greina teir vandar, sum mest sannlíkt kunnu raka stovn meint.

**Vaktætlan** - KT-skipan at ráðleggja arbeiðstíð í og at avgreiða lønir við - serliga skiftisvaktir.

**Verklagslóg** - lóg, sum verður løgd fyri Løgtingið, tá ið íløguætlan er 10 mió.kr. ella størri.

**Veiðidagbókaskipan** - KT-skipan hjá VØRN til at móttaka upplýsingar frá elektronisku veiðidagbókaskipanunum á fiskiførum.